GRUNDLÓGARNEVNDIN

# Frágreiðing um grundlógararbeiði

frá formanninum
í grundlógarnevndini
til landsstýrismannin
í sjálvsstýrðismálum



Latin 31. desember 2001
Løgfrøðiliga kannað og rættað 14. mars 2002

GRUNDLÓGARNEVNDIN

# Frágreiðing um grundlógararbeiðið

## frá formanninum í grundlógarnevndini til landsstýrismannin í sjálvstýrismálum

Latin 31. desember 2001
Løgfrøðiliga kannað og rættað 14. mars 2002

YVIRLIT 5

A. INNGANGUR 13

B. FORMAÐURIN 23

C. EVNISFRAMLØGUR 55

D. BÓLKARNIR 89

E. FLOKKARNIR 159

F. NIÐURSTØÐA 167

G. SKJØL 171

# Yvirlit

**A. INNGANGUR** 13

**Frágreiðing um Grundlógarnevndina** 15

**Formáli** 17
Grundleggjandi lóg 17
Floksbýtið 17
Bragdarhugur 18
Førdi pennin 18
Á ferð og á fundi 18
Gjógvin 19
Hvat skal leggjast fram? 19
Vónin er hans alt 20

**Formlig Frásøgn** 21

**B. FORMAÐURIN** 23

**Ávegis formansfrágreiðing um grundlógararbeiðið** 25
Arbeiðsháttur 25
Tíðarætlan 25
Leisturin 25
Bygnaðurin 26
Arbeiðslagið 27
Fólkið og grundlógin 27
Fortreytirnar 27
Niðurstøða 27

**Onnur ávegis formansfrágreiðing um grundlógararbeiðið** 29
Uppgáva og úrslit 29
Leggja árar út. Rógva ella skjóta á. 29
Taka fleiri tøk og reystliga rógva 30
Hvagar skulu vit rógva? 30
Rundkoyringin 30
Frákoyringarnar 30
Mót hæddum høgu 31
At byggja land 32
Hvat er so til ráða at taka? 32
Grundlógarnevndin á einum vegamóti 32
Ætlan og stýring 32
Játtan 33
Samskipan við løgting og landsstýri 33
Umstøðurnar hjá samfelagsfrøðingunum 33
Skrivstovan og hoyringar 33

Kanningarferð 34
Rættarskipan 34
Aftur á parkeringsplássinum 34

**Ávegis Notat um grundlógararbeiðið 35**

**Støðufrágreiðing Oktober 2001 39**
Inngangur 39
Samansetingin av nevndini 40
Broytingar í nevndarsamansetingini. 41
Skrivari, hjálparfólk og fundarstaður 42
Nevndararbeiðið 42
Plenumfundir 42
Fyrilestrar og skeið 43
Tíðindafundir 43
Heimasíðan 44
Samfelagsfrøðingafundir 44
Upprit til grundlóg 44
Skjøl nevndarinnar 44
Ferðin til Islands og USA 44
Evnisbólkarnir 44
Statusfrágreiðing bólkanna 45
Landshøvdingi 45
Rættarskipanarnevndin 46
Fíggjarvaldið 47
Valskipanin 47
Uttanlandsvaldið 48
Eftirlitsvaldið 48
Stjórnarvaldið 48
Vinnulig og sosial mannarættindi: 48
Tilfeingi 59
Effektivitetur 59
Tingskipan 59
Persónligu mannarættindini 50
Politisk mannarættindi: 50
Mentan og ideologi. 50
Fyristing og prosess 51
Kommunur 52
Niðurstøða 52

**C. EVNISFRAMLØGUR 55**

**Kommunur 57**
Tíðindafundur 57
Evnisframløga: Kommunur 57
Vald á staðnum 57
Sviar duga 57
Skatturin og løgurnar 58

At halda saman 58
Sýslur og sóknir 58
Sakir / Dømi 58
Dømi 1. Zbigniew Walesa 59
Dømi 2. Úr kommununi 59
Dømi 3. Hulduvík 59
Dømi 4. Anna Marsanna 60

**Stjórnarvaldið 63**
Tíðindafundur 63
Evnisframløga: Stjórnarvaldið 63
Landsins stýri 63
At umsita 63
Hvør ger hvat? 63
Tingið nemur, stjórnin fremur 63
At lóggeva 64
At ganga saman 64
Sakir / Dømi 64
Dømi 1. Fullgott eftirlit 65
Dømi 2. Hvør leggur fram? 66
Dømi 3. Stjórnarfulltrúin 66
Dømi 4. Rúsurnar í Fjarðalagnum 67
Fólkið við 67

**Fyrisitingar og Prosesrættindi 68**
Tíðindafundur 68
Evnisframløga: Fyrisitingar & Proces Rættindi 68
Alment og á rættan hátt 68
At gera av 68
At royna 68
Hvar stendur tað? 68
Reglur í grundini 69
Fyri rættin 69
Hvat skal við 70
Sakir / Dømi 70

**Persónlig Rættindi 71**
Tíðindafundur 71
Evnisframløga: Persónlig Rættindi 71
Flest merkir barasta flest 71
Bústaður og samskifti, privatlív og familjulív 71
Isolatiónsfongsling 71
Uttan rættarúrskurð 71
EMRS – Europeiski mannarættindarsáttmálin 71
Dynamisk tulking 72
Proportión 72
Horisontalt 72
Homogent fólk 72

| | |
|---|---|
| Sakir / Dømi | 73 |
| Dømi 1. Pápin úr Russlandi | 73 |
| Dømi 2. Debora og Sunneva | 74 |
| Dømi 3. Tvind | 74 |
| Dømi 4. Isolatiónsfongsling | 75 |
| **Politisk Rættindi** | **76** |
| Tíðindafundur | 76 |
| Evnisframløga: Politisk Rættindi | 76 |
| Frælsi at velja | 76 |
| Vald og virði | 76 |
| At føra fram | 76 |
| Fótbóltur og frælsi | 77 |
| Almennar hugsanir | 77 |
| Er tað neyðugt? | 77 |
| Miðlar til frælsi | 77 |
| Alment orðaskifti | 78 |
| Sakir / Dømi | 78 |
| Dømi 1. Atlantic Radio | 78 |
| Dømi 2. Sóljan | 78 |
| Dømi 3. Valsendingar | 79 |
| Dømi 4. Grønjakkarnir | 80 |
| Samanberingar | 81 |
| Uppskot um føroyska orðing | 81 |
| Onnur rættindi | 82 |
| Danmark | 82 |
| USA | 82 |
| Estland | 83 |
| Orðaskifti | 83 |
| **Virkni** | **84** |
| Tíðindafundur | 84 |
| Evnisframløga: Effektivitetur / Virkni | 84 |
| Bara tað virkar | 84 |
| Hvat er meiningin? | 84 |
| Tilvitska um grundlóg | 84 |
| At døma um | 84 |
| ‘Endaligheitsáseting’ | 85 |
| At sita fyri | 85 |
| Tulkingarmøguleiki | 85 |
| Sakir / Dømi | 86 |
| Dømi 1. Ríkislógirnar | 86 |
| Dømi 2. ‘Endaligheit’ | 87 |
| Dømi 3. Arbeiðsskaðar | 87 |
| Dømi 4. Norsku arbeiðskonurnar | 88 |

**D. BÓLKARNIR** 89

**Inngangur** 91

**Persónlig rættindi** 93
Støði 93
Uppskot til lógargreinar: 93
Viðmerkingar 94

**Politisk rættindi** 98
Støði 98
Uppskot til lógargreinar 98
Viðmerkingar 98
Uppskot til lógargreinir 98
Viðmerkingar 99

**Sosial og vinnulig rættindi** 103
Støði 103
Uppskot til lógargreinir 104
Viðmerkingar 105

**Fyrisitingar- og procesrættindi** 108
Uppskot til lógargreinir 108
Almennar viðmerkingar 109
Galdandi fyrisitingar- og procesrættindi 111
Fyrisitingar- og procesreglur í øðrum grundlógum og millumtjóða sáttmálum 115
Hvat skal við í grundlógina ? 116
Serligar viðmerkingar 117

**Tilfeingi** 120
Støði 120
Uppskot til lógargreinir 122
Viðmerkingar 123
Uppískoyti 125

**Kommunur** 126
Støði 126
Uppskot til lógargreinar 127
Viðmerkingar 127

**Tingskipan** 130
Støði 130
Uppskot til lógargreinar 130
Viðmerkingar 132

**Landshøvdingi** 137
Støði 137
Uppskot til lógargreinar: 141
Viðmerkingar. 142
Uppískoyti. Forseti Føroya 143

**Uttanlandsvaldið** **144**
Støði 144
Uppskot til lógargreinir 148
Viðmerkingar 148

**Rættarskipan** **151**

**Fíggjarvaldið** **152**

**Valskipanin** **153**

**Eftirlitsvaldið** **154**

**Stjórnarvaldið** **155**

**Effektivitetur** **156**

**Rættarskipanarnevndin** **157**

**E. FLOKKARNIR** **159**

**Fólkaflokkurin** **161**

**Sambandsflokkurin** **162**

**Javnaðarflokkurin** **163**

**Sjálvstýrisflokkurin** **164**

**Tjóðveldisflokkurin** **165**

**Miðflokkurin** **166**

**F. NIÐURSTØÐA** **167**

**G. SKJØL** **171**

**I. Lógin um grundlógararbeiðið** **173**

**II. Uppskotið, viðgerðin og atkvøðugreiðslan** **174**

**III. Lógbroytingin, viðgerðin og atkvøðugreiðslan** **184**
Atkvøðugreiðsla 188
Atkvøðugreiðsla 189
Atkvøðugreiðsla 190

**Endaligi arbeiðssetningurin** **191**

**Stjórnarskráin úr bókini Føroyum 1946** **201**

**Stýrisskipanarlógin 1948** **208**

**Lóg um umboðsvald 1948** **213**

**Stýrisskipanarlógin 1994** **216**

# A. Inngangur

Í innganginum eru:

- Frágreiðing um Grundlógarnevndina
- Formáli og
- Formlig frásøgn

# Frágreiðing um Grundlógarnevndina

Henda frágreiðing í er gjørd sambært lóg um grundlógararbeiðið, løgtingslóg nr. 10 frá 11. februar 1999 um grundlógarnevnd.

Tað eydnaðist ikki at gera ein lidna grundlóg. Fortreytin fyri lógini um grundlógararbeiðið – føroyskt fullveldi í ár 2000 – gjørdist ikk i veruleiki. Grundlógararbeiðið gjørdist tí í staðin eitt breiðari stjórnmálaarbeiði, har formaðurin royndi at finna semjur millum allar tingflokkar. Málið var tó alla tíðina at finna fram til ásetingar, ið skuldu vera í eini føroyskari stjórnarlóg.

Henda frágreiðing eigur at vera lisin sum ein ferðafrásøgn. Nevndin er farin gjøgnum fleiri áhugaverd øki, mong teirri øki, ið føroyskir politikarar ikki áður hava havt høvi til at viðgjørt. Tilgongdin hevur ført nevndina til størri fatan av viðkomandi evnisøkjum, til betri fatan av stjórnarstøðu Føroya, samveldisskipanum, stjórnarlóg, rættarskipan og ikki minst teimum ymsu fortreytunum fyri føroyskum fullveldi eins væl og útintum føroyskum sjálvræði innan aðrar skipanir.

Frágreiðingin er saman við Hvítubók, Føroyskum Lógar Riti og øðrum tilfari, ið vorðið er til farna valskeiðið, við til at hækka støðið í Føroyum, eins val fakliga sum politiskt. Gøtan fram ímóti eini nýggjari stýrisskipan er tí greiðari, uttan mun til, hvussu langt vit ganga ríkisrættarliga.

Jóan Pauli Joensen
formaður

# Formáli

*Tí starin er so vorðin,*
*at vónin er hans alt;*
*ta stund, hon hvørvur burtur,*
*er lívið stirt og kalt.*

## Grundleggjandi lóg

Tað er ikki hvønn dag, at ein nýggj grundlóg verður skrivað. Tað er heldur ikki hvønn dag, at ein grundlóg verður skrivað í einum landi, har ein stórur partur av teimum, ið skriva skulu grundlógina, ikki eru samd um endamálið við lógini. Summi vilja ikki hava aðra grundlóg enn ta galdandi donsku. Onnur vilja hava eina stjórnarlóg, sum gjarna kann eita grundlóg, men sum er fyri landið Føroyar uttan mun til, um hetta land hevur fullveldi ella ikki.

Ósemjan um orðini og ósemjan um arbeiðslagið var við til at gera okkum lívið stirt og kalt.

Tað eru tey, sum halda, at sjálvt orðið "grundlóg" bert kann nýtast í einum í suverenum stati, í einum fullveldi, og ikki aðrastaðni. Orðið ella hugtakið "fullveldi" ørkymlar eisini summi. Er tað ein stjórnarrættarligur møguleiki, ið vit eiga rættin til og kunnu staðfesta í okkara egnu grundlóg, ella er fullveldi einans tað fullgjørda verkið? Sama er við "sjálvsavgerðarætti". Merkir tað orðið ein rætt til at skifta ímillum ymsar samveldisskipanir, bæði undan og eftir at hava fingið fullveldi? Ella merkir sjálvsavgerðarrættur at taka fullveldi? Best man vera í semja at finna fram til mest hóskandi týdningin av tílíkum orðum.

## Floksbýtið

Politisku flokkarnir umboða Føroya fólk í grundlógararbeiðinum. Tí skal eg stutt nema við støðu teirra.

Tað verður neyvan gingið umboðum Sambandsfloksins ov nær, um eg sigi, at tey halda, at ein føroysk grundlóg ongan skund hevur. Tað sama kann sigast um umboð javnaðarflokksins, sum vilja, at hvør steinur verður vendur væl og virðiliga, bæði eina og tvær ferðir, áðrenn avgerð verður tikin. Grundlógin skal hava ta tíð, sum hon krevur, tí hastverk er lastverk, hevur fleiri ferðir verið borið fram. Hesir báðir flokkar síggja arbeiðið sum eina tilgongd fram ímóti eini bøttari stýrisskipanarlóg.

Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin hava drigið á bæði. Partvís ynskja hesir flokkar at vera við í fullveldistilgongdini, partvís eru teir til reiðar at royna aðrar leiðir. Fyri hesar flokkar tykist grundlógararbeiðið fyrst og fremst at vera knýtt at fullveldistøkuni og ynskjunum hjá Tjóðveldisflokkinum at seta grundlógarnevndina í samgonguskjalið fyri farna valskeiðið. Støða teirra gjørdist enn meiri ivasom, tá tað á vári 2001 gjørdist greitt, at fullveldið fór ikki at vera tikið fyrr enn um ár 2012.

Tjóðveldisflokkurin vildi fegin haft arbeiðið at gingið mikið skjótari. Tjóðveldisflokkurin hevur alsamt ført fram, at endamálið við arbeiðnum var at skriva eina fullveldisgrundlóg, og eina slíka átti nevndin at skriva innan ta ásettu tíðarfreistina.
Grundleggjandi trupulleikin er tí tann, at flokkarnir hava so ymsa hugsan um arbeiðið. Ongin flokkur hevur ynskt grundlógararbeiðið fyri tess egnu skyld. Ongin flokkur hevur kravt eina grundlóg ella eina grundleggjandi stjórnarlóg. Allir síggja grundlógararbeiðið sum part av øðrum ætlanum, antin sum

part av samveldisætlanum innan danska ríki, samveldisætlanum, har Føroyar sum fullveldi eru knýttar at Danmark, ella sum ein part av fullveldistøkuni, tá Føroyar endaliga loysa seg frá øllum formligu samveldi við Danmark.

Hetta er spell. Tí grundlógararbeiðið hevur víst, at meginparturin – fleiri enn 90 prosent av tí viðgjørda tilfarinum – av eini stjórnarlóg hevur onki við nakra samveldisstøðu at gera, hvørki so ella so.

## Bragdarhugur

Tá talan er um dygd og avrik í sjálvum nevndararbeiðinum, ber ikki til at taka nakran flokk fram um annan. Allir nevndarlimirnir vilja hava, at okkurt gott skal koma burtur úr nevndararbeiðinum. Talan er ikki bert um at fáa nakrar lógargreinar frá hondini, men talan er um eina tilgongd, ið fær fólk at hugsa um grundleggjandi stjórnarlig og samfelagslig viðurskifti. At skriva grundlóg er at føra hesa tilgongd til endans, at sameina føroyska fólkið við einum grundleggjandi stjórnarskjali.

Serfrøðingarnir í nevndini hava ofta verið varisligir í framferð síni, og hava hildið seg til tað fakliga í arbeiðinum. Trupulleiki teirra hevur verið, at allir hava havt tíðarkrevjandi størv, og tí einans hava røkt grundlógaruppgávurnar framíhjá, ikki sum part av dagligu uppgávum sínum.

Politisku nevndarumboðini, hvørs arbeiðspláss er Føroya løgting, hava eisini havt trupulleikar við at fáa tímatalvuna at rigga. Løgtingið hevur ikki tíðarætlan meiri enn ein dag fram í tíðina. Løgtingsformaðurin hevur eisini boðað frá, at løgtingið metir grundlógararbeiðið sum arbeiði hjá fyrisitingini, ikki sum tingarbeiði. Tí hevur ikki borið til at samskipa grundlógararbeiðið við tingarbeiðið. Hetta hevur ført við sær, at sera nógv tíð er farin til spillis, at ætlaðir grundlógarfundir eru órógvaðir av tingfundum og nevndarfundum. og at tað millum annað ikki hevur borið til at havt fleiri samanhangandi dagar við grundlógarfundum.

Her átti fyrisitingarliga at verið skipað soleiðis fyri, at tað veruliga bar til hjá fólki at seta av ta tíð, sum skuldi til fyri at gera arbeiðið liðugt ella slept tíðarkarminum í lógini.

## Førdi pennin

Nevndin setti grundlógarskrivara, sum eftir ágrýtið arbeiði í langa tíð misti hugin, Tá hann í heilum eftir at hava lagt fundir nágreiniliga til rættis fleiri ferðir noyddist at avlýsa teir aftur og byrja alt umaftur. Hetta var serliga nervandi, tá fólk aðrastaðini frá vóru komin at halda skeið og fyrilestrar. Av ymsum orsøkum gjørdust umstøðurnar á skrivstovuni ikki tær, ið skrivarin sjálvur hevði mælt til og fingið tilmæli um. Tessvegna tók hann seg at enda aftur sum fastur skrivar, men varveitti tilknýti til arbeiðið.

## Á ferð og á fundi

Nevndin hevði ætlanir um tvær námsferðir. Onnur var ætlað at ganga vestureftir, hin eystureftir. Tíverri gjørdist einans ferðir vestureftir til veruleika. Stórar vónir vórðu settar til hesa ferð. Vit roknaðu við, at nevndin øll kundi vera saman hvønn dag eitt tíðarskeið. Tíverri broyttist leikurin á politiska leikpallinum soleiðis, at andstøðulimir í nevndini settust aftur, tí teir væntaðu orrustu um ætlaðu fólkaatkvøðuna 26. mai. At tað kortini ikki kom at verða so, er ein onnur søga.

Nevndin hevur í sínum arbeiði viðgjørt ymiskar skipanir við stjórnarlógum, sum túrurin til USA eisini er prógv um. Í USA hava teir einstøku statirnir sínar egnu grundlógir (constitutions – stjórnarlógir ella evstulógir). Tá talan um samveldisskipan, má atlit vera at teirri felags amerikansku grundlógini.

Hóast alt hava teir mongu fundirnir – 32 plenumsfundir, eins og bólkafundir og sperrifundir – verið góðir og mennandi. Tað hevur verið ein skúli fyri limirnar. Politikarar og serfrøðingarnir hava arbeitt sera væl saman, og markini millum politikarar og serfrøðingar hvurvu nærum fullkomiliga.
Til tíðir púra gloymdu politikararnir, at teir umboðaðu ymiskar flokkar. Grundlógararbeiðið tók teir til tíðir allar við húð og hár. Kortini var tað so, at teir av og á knappliga ásannaðu, at teir ikki bert voru grundlógarnevndarlimir, men eisini hovdu ein almennan leiklut sum tjóðveldismenn, javnaðarmenn, sambandsmenn, sjálvstýrismenn, fólkaflokksmenn og miðflokkamaður. Hetta kundi tá føra onkur markeringsherðindi við sær, sum heldur ikki er so órímiligt, ta hugsað verður um politiska starvið.

## Gjógvin

Grundlógarnevndin hevur frá byrjan havt sínar innbygdu og samantvinnaðu politisku mótsetningar. Tað hevði verið ólíka lættari at arbeitt út frá eini lóg og einum setningi, sum øll nevndin varð samd um. Nevndin noyddist at vingla nakað ímillum leiðina framímóti eini grundlóg fyri fullveldið Føroyar og so ta millumloysn, sum arbeitt var við, eina við innbygdum møguleikum til bæði at virka undir núverandi umstøðum og eftir fullveldistøkuna uttan broytingar.

Hetta hevur verið eitt skisma í nevndararbeiðinum. Ein slík samanseting av mótsettum sjónarmiðum hevur sett síni stóru krøv til formannin, sum frá byrjan hevur havt eina løgtingslóg og freistir at halda seg til, samtsundis sum hann ongar sanktiónsmøguleikar hevur havt fyri at kunna halda freistirnar. Tað hava verið løtur, har hann veruliga hevur ivast í, um hugskotið og lógin um eina føroyska grundlóg til eina ásetta tíð átti nakran góðan. Spurningurin er tí, um tað ikki hevur verið órealistiskt at seta ein lógarbundnan tíðarkarm á eitt arbeiði av hesum slag, sum ber so nógvar mótsetningar í sær. Ein tvørpolitisk semja um eina nýggja stjórnarskrá frá byrjan hevði verið ynskiligt – men kanska ikki møgulig.

## Hvat skal leggjast fram?

Tað hevur verið gjørt eitt gott og samvitskufult arbeiði í grundlógarnevndini, men ásannast má, at nevndin ikki er komin á mál innan tann tíðarkarm, sum hevur verið ásettur. Nevndin kann ikki leggja fram eitt uppskot til eina føroyska grundlóg áðrenn 31. desember 2001. Sjálvt um nógv arbeiði liggur í øllum teimum uppritum, lógaruppskotum og notatum í skjalagoymslu nevndarinnar, so er arbeiði ikki liðugt, fyrr enn nevndin er samd um, at hon sum nevnd hevur viðgjørt alt og kann siga seg at eiga uppskotið. At lagt fram eitt uppskot frá einum meiriluta í eini nevnd vildi ikki tænt nøkrum endamáli.

Longu í juni 2001 varð stungið út í kortið, hvussu kunningarátakið um føroysku grundlógina skuldi fara fram, men tað kundi ikki setast í verk, fyrr enn uppskotini øll vóru vend og endaliga viðgjørd og samtykt á plenumfundi.

Um tað mundi arbeiddi nevndin í størri bólkum á eini fundarrøð, sum hildin var á Sjómansheiminum í Havn. Henda fundarrøðin bygdi á eitt arbeiðsuppskot, ið Kári á Rógvi hevði skrivað. Uppskotið var nevnt “Føroya Lóg” til tess ikki at ósemja skuldi vera um navnið. Uppskotið hjá Kára á Rógvi er tøkt í savninum, og nevndin brúkti ásetingarnar í tí sum grundarlag undir aðru evnisviðgerðini. Fleiri ítøkiligar broytingar komu fram, og sum nakað sjálvsamt í føroyskum høpi høvdu teir fólkavaldu størri ávirkan á arbeiðið enn serfrøðingarnir. Í einum stjórnarskipanarligum arbeiði er tað umráðandi, at serfrøðingarnir seta fram spurningarnar, men teir fólkavldu svara teimum. Tann broytta “Føroya Lóg” kundi verið løgd fram í hesum høpi, men tað kundi gjørst ein snávingarsteinur fyri framtíðar arbeiðið, tí tær politisku semjurnar – ein concordia ordinum, semja millum fólksins ráðandi – mugu allar vera greiðar at leggja fram samstundis. Tær nógvu at teimum ásetingum, sum eru nevndar í hesi frágreiðing eru tó úr “Føroya Lógini” ella bygdar á hana.

Tað er komið langt fram á leiðini móti eini føroyskari grundlóg, og tað er gjørt eitt stórt lop fram á síðani í summar við arbeiðinum, eitt nú í teimum sokallaðu sperribólkunum, har serfrøðingar hava sett seg saman og gjørt uppskot til plenum at viðgera. Hinvegin tykist fram ímóti løgtingsvali ongin møguleiki at vera fyri at fáa nakað seriøst arbeiði gjørt í sjálvari nevndini.

## Vónin er hans alt

At fegnast um er, at allir flokkar ynskja, at arbeiðið skal halda fram. Løgtingsvalið fer at vísa, um arbeiðssetningurin skal broytast nakað, og valið fer at ráða fyri, hvør gerst limur í nevndini eftir vali. Grundlógarnevndin er sum starin, ið kaldur sat. Tey góðu orðini frá flokkunum merkja helst, at tað bráðliga fer at lýsa í aftur.

*Tá fleyg í loft upp starin*
*og sang eitt fagurt ljóð,*
*tá birtist vónin aftur*
*í barmi, ljós og góð.*

Gamlaárskvøld 2001

Jóan Pauli Joensen,
formaður

# Formlig Frásøgn

Grundlógararbeiðið byrjarði við lógini um grundlógararbeiðið. Hjálagt hesi frágreiðing eru lógin, uppskotið, nevndarviðgerðin, atkvøðugreiðslan, endaligi arbeiðssetningurin og lógarbroytingin.

Lógin um var frá byrjan partur av fullveldismálinum, samtykt við atkvøðum hjá samgonguni – Tjóðveldisflokkinum, Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum – og atkvøðuni hjá Miðflokkinum.

Tá lógin varð broytt, eftir at fyrra frestin var farin, eydnaðist tó at fáa breiðari semju um arbeiðið.

Eftir upprunalógini skuldi arbeiðið vera liðugt 1. juni 2000, men frá fyrsta degi var greitt, at tíðarkarmurin til eitt so stórt og grundleggjandi arbeiði, sum var gjørt á fyrsta sinni her á landi, var alt ov tepur.

Formaðurin gjørdi tí eisini vart við hetta longu tá arbeiðið byrjaði. Landstýrismaðurin legði fyri Løgtingið uppskot um at broyta lógina, og mælti ein samd rættarnevnd tá til at broyta lógina. Løgtingið samtykt samsvarandi, at § 1, stk 3 skuldi ljóða: "fyribils álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. oktober 2001, og endaligt álit 31. desember 2001."

Fleiri samvirkandi orsøkir hava ført við sær, at tað eisini kom at verða trupult at halda henda tíðarkarm. Grundlógararbeiðið hevur frá byrjan skulað kappast við so nógv annað, ið hevur hoyrt uppí dagliga arbeiði hjá nevndarlimunum – ikki minst hjá politisku umboðunum í nevndini. Umleggingar o.a. á skrivstovuni summarið 2001 í sambandi við, at grundlógarskrivarin fór úr starvi, hava eisini havt darvandi ávirkan.

Grundlógarnevndin er úr einum løgfrøðiligum sjónarmiði av sínum egna heilt serliga slag, sum ikki altíð hevur gjørt tað so lætt at arbeiða, hvørki hjá serfrøðingum ella politikarunum. Uppgávan hjá formanninum hevur verið, at lata øll sjónarmið koma fram, og helst at royna at finna fram til eina semju, sum allir nevndarlimirnir kunnu taka undir við. Hesin politiski streymasjógvur hevur sjálvsagt eisini tálrnað róðrinum og longt um leiðina fram á málið.

Broytta politiska gongdin hevur, umframt at hava ávirkað motiveringina hjá fleiri nevndarlimum, eisini ført við sær eina glíðing og broyting í fatanini hjá nevndarlimunum av, hvat tað er fyri ein grundlóg ella stjórnarskrá, sum vit stevna ímóti. Í hesum spurningi varð ruddað upp á fundum í august og september. Leitað varð aftur til upprunaliga lógaruppskotið og til upprunaliga arbeiðssetningin.

Á fundi 3. september varð samtykt, at hvør limur skuldi geva sína egnu persónligu hugsan og fatan til kennar. Hetta førdi við sær, at formaðurin, við støði í avgerð á fundi 7. september 2001, sendi landsstýrismanninum eitt skriv, dagfest sama dag, har tað stendur, at:

"Grundlógarnevndin hevur – í sambandi við tilstundandi evstumørkini fyri nevndararbeiði – gjørt støðuna í grundlógararbeiðinum upp á fundum 3. og 7. september 2001. Skal arbeiðið, vit lata úr hondum, vera fakliga forsvarligt, samstundis sum roynt verður til fulnar at finna breiðar politiskar semjur í grundlógarnevndini, er enn langt eftir á mál.

Arbeiðslagið hevur higartil yvir høvur verið gott, og arbeiðshátturin hevur víst seg at rigga væl, men her kunnu ávísar broytingar gerast. Ávegisavgerðirnar, sum vit hava tikið haldi eg vit kunnu vera væl foreint við, og úrslitið higartil er tí samanumtikið gott.

Tað hevur tó verið ein bági, at gongdin í sjálvstýrismálinum varð ein onnur enn væntað, tá lógin varð gjørd, og hetta hevur gjørt, at nevndin hevur nýtt nógva orku til at kanna, hvørjar fyritreytirnar fyri arbeiðinum eru.

Eisini hava tíðarbil verið, har sjálvt fundarvirksemið av ymsum ávum hevur ligið stilt.

Í almennu viðmerkingunum til lógina stendur m.a., at endamálið við at hava politiska umboðan í nevndini er, at hesi skulu fáa ávirkan á uppskotið til grundlóg. Í endaliga arbeiðssetninginum er tilskilað, at formaðurin skal tryggja øllum nevndarlimum javnbjóðis ávirkan og tryggja at úrslit kemur, og helst í semju, og starvskipanin skal vera so, at hon “kann tryggja eitt gott samspæl millum tey fakligu og politisku/fólkaræðisligu atlitini, og at allir nevndarlimir eru javnsettir at seta fram uppskot og taka støðu”. Um tað skal vera møguligt at gjøgnumføra arbeiðsháttin, ið her verður lagt upp til, er hetta arbeiði, ið eigur at taka sína tíð.

Tilstundandi løgtings- og fólkatingsvalini eru eisini farin at spøkja, og væntandi er, at prosessin, sum lagt er upp til við almennum hoyringum og kunningarfundum, verður órógvað.

Vit fara tí við hesum at boða landsstýrismanninum frá, at grundlógarnevndin ikki klárar at halda tíðarfreistirnar í lógini, tvs.:

- At fyribilsuppskot til grundlóg ikki verður liðugt tann 1.10.2001
- At nevndin ikki hevur stundir at skipa fyri almennum hoyringum
- At endaligt uppskot til grundlóg ikki verður liðugt tann 31.12.2001

Nevndin fer tí heldur at gera statusfrágreiðing tann 1.10.2001, har nevndin eisini kemur við uppskoti um, hvørjir partar av grundlógaruppskotinum kunnu fáa endaliga nevndarviðgerð fyri 31.12.2001.

Vísandi til at nevndin ikki sær seg føra fyri at halda ásetingarnar í lógini um grundlógararbeiðið, verður heitt á landsstýrismannin um at taka neyðugu stigini í hesum sambandi.”

Landstýrissmaðurin hevur ikki síðani lagt nakra lógarbroyting fyri tingið. Tessvegna hevur nevndin ikki havt fundir eftir nýggjár 2002.

Vit hava lagt nakað av orku í at skipa skrivstovuna so væl sum gjørligt eftir, so tað skal bera til hjá tí landstýrismanninum, ið fær málsøkið um hendi eftir valið, og hjá nývalda tinginum at seta arbeiðið í gongd aftur eftir valið.

Gamlaárskvøld 2001

Jóan Pauli Joensen,
formaður

# B. Formaðurin

Í partinum um formannin eru frágreiðingarnar hjá formanninum higartil:

- Fyrsta ávegis formansfrágreiðingin um grundlógararbeiðið 14. juni 2000
- Onnur ávegis formansfrágreiðingin um grundlógararbeiðið 15. desember 2000
- Ávegis notat um grundogararbeiðið. Frásøgn um arbeiðsgongdina hjá grundlógarnevndini 29. mars 2001.
- Støðufrágreiðingin 1. oktober 2001

# Ávegis formansfrágreiðing um grundlógararbeiðið

Høgni Hoydal, landsstýrismaður
Tinganes
100 Tórshavn

14. juni 2000

**Evni: Ávegis formansfrágreiðing um grundlógararbeiðið.**

Sum formaður í grundlógarnevndini sendi eg hervið landsstýrismanninum í sjálvsstýris- og lógarmálum hesa formansfrágreiðing um arbeiðið í grundlógarnevndini higartil.

## Arbeiðsháttur

Grundlógarnevndin byrjaði sítt arbeiði av álvara heystið 1999. Rímiliga skjótt varð funnið fram til ein arbeiðshátt, ið øll nevndin kundi standa saman um.

Tað eru kortini politikarar í nevndini, sum greitt hava gjørt vart við, at teirra motivering fyri at arbeiða í nevndini ikki er fullveldi, men heldur, at arbeiðið kann vera til nyttu á annan hátt.

Nevndin viðger fyrst teir innihaldsligu tættirnar, ið grundlógin skal fevna um, í einum breiðum orðaskifti, heldur enn at byrja við uppskotum til tær einstøku lógargreinirnar. Hetta hevur verið ein arbeiðsháttur sum hevur víst seg at vera mennandi og gevandi, men hann hevur kravt tíð.

Arbeiðið er tó sera víðfevnt. Hetta tí tað er fyrstu ferð, at eitt slíkt arbeiði verður gjørt frá botni í Føroyum. Fleiri av spurningum hava ikki fyrr verið viðgjørdir í slíkum høpi.

## Tíðarætlan

Tað hevur verið trupult at fáa samskipað grundlógararbeiðið við tingarbeiðið og landsstýrisarbeiðið hjá politikarunum í nevndini. Hetta hevur seinkað arbeiðinum, men hinvegin eru hetta tær umstøður, ið parlamentarikararnir hava at arbeiða undir, tað er so nógv sum skal røkjast.

Tað vildi ikki tænt Føroyum at skunda eitt uppskot til eina grundlóg ígjøgnum, sum ikki kom at standa mát, og sum nevndin ikki hevði havt ta neyðugu tíð at viðgera. Ein grundlóg skal halda í nógv ár, tí hon verður sjálvt støðið undir øllum øðrum lógum í Føroyum. Spurningurin er tí, um tíðarkarmurin frá byrjan ikki hevur verið settur alt ov tepur.

## Leisturin

Grundlógarnevndin arbeiðir eftir einum leisti, sum skorin varð eftir arbeiðssetninginum, ið landsstýrismaðurin í sjálvsstýrsmálum lat nevndini

Arbeiðssetningurin nevnir 16 evnisøki, sum nevndin skal viðgera. Við støði í arbeiðssetninginum og bygnaðinum í teimum norðurlendsku grundlógunum hevur nevndin higartil sett 18 arbeiðsbólkar at viðgera ymisk evnisøki.

Í hvørjum bólki eru fimm fastar limir, bæði samfelagsfrøðingar og politikarar. Arbeiðsbólkarnir gera upprit og fyrireika viðgerðina av einstøkum evnum. Arbeiðbólkarnir eru skipaðir kring fýra høvuðsevni:

- stýriskipan úteftir
- stýriskipan inneftir
- mannarættindi
- effektivitetur og ideologi

Bólkarnir eru hesir:

**<u>Stýrisskipan Úteftir</u>**

Danmark / Útlond
Landshøvdingi
Millumtjóða Sáttmálar / Uttanríkismál
Kommunur

**<u>Stýrisskipan Inneftir</u>**

Tingskipanin
Stjórnarvaldið
Fíggjarvaldið
Tilfeingi
Valskipanin
Eftirlitisvaldið
Rættarskipanin
Verja

**<u>Mannarættindi</u>**

Persónlig Rættindi
Vinnulig & Sosial Rættindi
Politisk Rættindi
Fyrisitingar & Procesrættindi

**<u>Effektivitetur & Mentan</u>**

Effektivitetur / Virkni
Mentan & Ideologi

Umframt hesar bólkarnar viðger ein serliga sett undirnevnd rættarskipanina.

Higartil hava 9 av teimum 18 bólkunum lagt fram á plenumfundi fyri allari nevndini. Ætlanin er, at hinir bólkarnir leggja fram í august og september í ár. Síðani er ætlanin, at farið verður ígjøgnum alt einaferð afturat, áðrenn grundlógaruppskotið verður skrivað.

Nevndin hevur eisini skipa fyri skeiðið í mannarættindum og hevur havt fleiri útlendskar serfrøðingar á vitjan.

Nevndin hevur havt ta fatan, at grundlógararbeiðið krevur, at nevndin hevur eina greiða fatan av, hvat støða skal takast til, og hvørjir møguleikar eru. Nevndin hevur tí innan øll evnisøkini viðgjørt hópin av tilfari, umframt at samanbera við aðrar grundlógir og skipanir. Hetta er ein krevjandi arbeiðsháttur, men hann er kravdur av umstøðunum, og semja hevur verið um hann í nevndini.

**<u>Bygnaðurin</u>**

Bygnaðurin í eini føroyskari grundlóg verður ein endurspegling av hesum bólkabýtinum. Grundlógin fer at greiða valdsbýtið, bæði úteftir og inneftir. Úteftir er tað samvirki við onnur lond, har Danmark og møguligur kongsfelagsskapur hava serliga støðu. Inneftir er tað valdsbýtið millum føroysku stjórnarstovnarnar, fyrst ting, stjórn og dómstólar, men eisini aðrar sum fyrisiting, umboðsmann, og landsgrannskoðara. Greinast skal, hvørjar uppgávur hesir stovnar hava. Hesar eru millum aðrar lóggáva, stjórn, fíggjarvald, eftirlit og uttanlandsvald. Valdsbýtið skal harafturat eisini skipast millum landið og borgarar tess, eins og millum landið og kommunurnar.

Serligan týdning hava mannarættindini. Verandi stjórnaskipan okkara verjir bert fá mannarættindi á grundlógarstøði. Grundlógarnevndin hevur viðgjørt fýra bólkar av mannarættindum. Persónlig mannarættindi, politisk mannarættindi, vinnulig og sosial rættindi, og fyrisitingar og prosesrættindi. Sum dømi um tann síðsta bólkin skal nevnast, at rættindini til hoyring, grundgeving, umboðan og innlit í fyrisitingarmálum verða tryggjaði á grundlógastøði. Hesi rættindi eru bæði ein arvur frá okkara gomlu stjórnarskipan við almennum vártingum og løgtingi, og ein tryggjan av teimum rættindum, sum eru á lógarstøði í dag.

## Arbeiðslagið

Semja er í nevndini um, at evnisøkini, sum nevndin fæst við, hava stóran týdning fyri stjórnarskipan Føroya. Samansetingin av nevndini tykist vera væleyndna, bæði samfelagsfrøðingar og politikarar hava sítt at føra fram. Hetta tryggjar bæði fakliga og politiska haldbæri. Henda tilgongd og tann arbeiðsháttur, sum nevndin hevur nýtt, hava skapað fyritreytir fyri einum grundleggjandi og mennandi  arbeiði, ið fer at geva ávøkst í sjálvum sær.

## Fólkið og grundlógin

Í lógini er ásett, at nevndin skal skipa fyri hoyringum um arbeiðið og seinni uppskotið hjá nevndini. Best var bæði at skipa fyri hoyringum um ymsu evnisøkini og at á annan hátt tryggja eina breiða kunning og eitt breitt orðaskifti í øllum landinum. Hetta kann gerast á heimasíðu, í fyrilestrum, á skúlum, politiskum áhugafeløgum og aðrastaðni.

Higartil hevur orka bert verið til smávegis kunning á heimasíðuni, umframt at serfrøðingarnir, ið hava vitjað nevndina, hava hildið almennar fyrilestrar.

Skal orka vera til alt hetta, umframt at geva eitt álit út í bók, má nevndin annaðhvørt fáa betri arbeiðsumstøður ella longri arbeiðstíð.

## Fortreytirnar

Nevndin hevur eisini fingist við aðrar tættir enn bert vanligar ásetingar. Skal grundlógin vera virkin og hava týdning fyri trivnaðin og trygdina hjá fólki í Føroyum, so mugu fortreytir skapast. Í skúlunum eins og innan hægri útbúgving má frálæra vera í okkara egnu stjórnarskipan. Rættarskipanin skal tillagast at vera meiri aktivur partur av rættarfatanini og rættarskapanini. Avgerðir frá dómstólum, umboðsmanni, mynduleikum og kærumynduleikum mugu savnast og vera atkomilig hjá øllum. Sera týðandi er ein føroysk rættarvísind, gransking og útbúgving innan okkara egnu stjórnar og rættarskipan.

Formaðurin hevur tikið stig til at vísa á henda tørvin og týdningin. Tað fellur tó uttanfyri arbeiðsøkið hjá nevndini at gera meira við hesar spurningar.

## Niðurstøða

Arbeiðsøkið hjá nevndini er so víðfevnt, at tað ikki ber til at gera skjótt av. Tað valda arbeiðslagið at viðgera evnisøkini fyrst og skriva ásetingarnar seinni ger, at tað tekur langa tíð. Eisini skal nógv orka setast av til eina møguliga breiða fólksliga viðgerð.

Nevndin kann tí gera av at broyta arbeiðslag – og viðgera eitt lógaruppskot, sum formaðurin leggur fyri nevndina – ella at halda fram sum er. Nevndin má eisini avgera, hvussu hon nýtir og raðfestir orku sína.

Heldur nevndin fast um at gjølla viðgera allar spurningar og at fremja neyðuga almenna kunning, má ætlast, at nevndin fer langt út um tíðarætlanina. Játtan krevst tí til arbeiðið eisini næsta fíggjarár.

Grundlógararbeiðið kann fáa sera stóran týdning fyri Føroya framtíð. Føroya kosnu menn og kvinnur mugu gera av, hvørja framtíð grundlógarnevndin hevur.

Vinarliga

Jóan Pauli Joensen,
formaður.

# Onnur ávegis formansfrágreiðing um grundlógararbeiðið

Høgni Hoydal, landsstýrismaður
Tinganes
100 Tórshavn

15. desember 2000

**Evni: Onnur ávegis formansfrágreiðing um grundlógararbeiðið.**

Sum formaður í grundlógarnevndini sendi eg hervið landsstýrismanninum í sjálvsstýris- og lógarmálum hesa formansfrágreiðing um arbeiðið í grundlógarnevndini higartil.

Fyrstu ávegis frágreiðingina lat eg tann 14. juni 2000. Ta frágreiðingina sendi eg fyri egna rokning, men nevndarlimirnir vóru kunnaðir um frágreiðingina, áðrenn eg lat hana úr hondum.

Henda frágreiðingin er somuleiðis latin nevndarlimunum til viðmerkingar, umframt, at eg havi biðið landsstýrismannin um viðmerkingar. Frágreiðingin er gjørd líðug eftir fundin hjá grundlógarnevndini 11. december.

## Uppgáva og úrslit

Grundlógarnevndin var sett sambært løgtingslóg 1/99. Lógin ásetti, at nevndin skuldi leggja fram uppskot um føroyska grundlóg 1. juni ár 2000. Hetta evstamark var partur av upprunaligu fullveldisætlan samgongunar.

Hetta eydnaðist ikki nevndini. Orsøkirnar eru settur fram áður í fyrru ávegisfrágreiðing míni.

Tingmenn úr øllum flokkum hava í felag arbeitt sera nærlagt og miðvíst við eini framtíðar stjórnarskipan. Arbeiðið hevur borið dám av samstarvshuga og nógv orka er løgd í eitt felags verk í grundlógarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt øll evnisøkini eina ferð og hevur lagt eftir seg eina mongd av tilfari. Millum tilfarið hjá nevndini er eisini í summum førum ítøkilig uppskot til grundlógarásetingar.

## Leggja árar út. Rógva ella skjóta á.

Fáar lógir munnu vera so grundleggjandi viðgjørdar sum henda, áðrenn farið hevur verið undir at orða sjálvar ásetingarnar. Fortreytir og meginreglur hava verið viðgjørdar nágreiniliga. Nevndin er enn kortini ikki komin til tað støðu at taka avgerðir um hvørjar orðingarnar ella ásetingarnar skulu vera, men grundarlagi fyri hesum er fingið til vegað gjøgnum bólkaarbeiðini. Arbeiðið í grundlógarnevndini hevur verið hálvgum parlamentariskt, tí politikarar frá øllum flokkum hava verið umboðaðir. Tá orðingarnar og ásetingarnar eru gjørdar er komið langt. Hetta er mera enn tað á sinni var gjørd í undanarbeiðinum í sambandi við stýrisskipanarálitið. Halda vit okkum til vanligan lóggávusið, kann landsstýrismaðurin gera broytingar í arbeiðsuppskotinum, sum formaðurin hevur lagt fyri nevndina, gera semju í samgonguni og síðan leggja uppskotið fram, tá henda tingsetan fer at halla.

## Taka fleiri tøk og reystliga rógva

Hinvegin, so hava bæði nevndarlimir og landsstýrismaðurin víst áhuga fyri, at nevndin heldur fram við arbeiði sínum. Nevndarumboðini fyri andstøðuna hava yvirhøvur tað sjónarmið, at eingin orsøk er til at skunda arbeiði ígjøgnum, meðan samgongulimirnir vilja hava úrslitini á borðið rættiliga skjótt. Her eru ymisk ynski og ymisk sjónarmið at taka støðu til.

Er málið at nevndin hósamt og uttan skund skal venda hvørjum steini og fara um og arbeiða við øllum evnisøkjunum fleiri ferðir, leita sær fleiri ráð uttanlands, lata Føroya fólk ígjøgnum almennar hoyringar og onnur tiltøk gerast ein partur av tilgongdini móti eini 'Føroya Lóg' og gerast samvirkin í tí sum skal til fyri at gera nýggjar grundleggjandi reglum fyri alt vald og allari politiskari tilgongd í Føroyum, so krevur hetta tíð um so er umstøðurnar ikki verða til at seta størri segl til, so at tingmenn og samfelagsfrøðingar fáa avsett ta tíð sum neyðug er fyri at fremja hetta mál. Hin vegin ber til at taka fleiri tøk og rógva reystligari móti málinum, men hetta krevur at nevndarlimirir fáa høvi at nýta meiri orku til grundlógararbeiði og at tað verður raðfest ovalaga í politiska virkseminum her á landi. Hesum greiddi eg eisini frá í teirri fyrru ávegis frágreiðingini.

## Hvagar skulu vit rógva?

Hóast nevndin eftir mínum tykki hevur gjørt eitt gott arbeiðið og enn hevur fleiri avrik til góðar, má eg sum formaður tó ásanna, at tórført verður at halda fram við arbeiðnum miðvíst fyrrenn ein røð av ivamálum eru loyst.

Fyrst og fremst má nevndin hava greiðu á, hvørja støðu Føroya Løgting hevur, nú nevndin er farið út um tað tíðarmarkið, ið upprunaliga var ásett. Eisini má vera greitt, um nevndin enn arbeiðir við føroyskum fullveldi sum fortreyt eftir teimum grundleggjandi meginreglum sum lógu til grund fyri allari fullveldisverkætlanini, ella um nevndin eisini skal viðgera aðrar ríkisrættarligar møguleikar sum t.d. grundslógarskipanir í føderalum statum. Her eigur at koma ein greið politisk melding til nevndina.

Eg fari tí eftir fundin 11. december at loyva mær at steðga fundunum í nevndini eina tíð, til greiða er fingin á, hvør setningurin og hvat mandatið hjá nevndini er. Skrivarin og formaðurin samanskriva og ítøkiliggera so tað arbeiði sum er gjørt og skitsera tað sum er eftir at gera, so at vit fáa eina ítøkiliga beinagrind til eina føroyska grundlóg.

## Rundkoyringin

Á heimasíðu okkara settu vit yvirskriftina "Í rundkoyringini" omanfyri fyrru ávegisfrágreiðingina. Hetta var ein góð mynd um støðu okkara, og vit mugu staðfesta, at í rundkoyringini eru vit enn, og ikki sørt í ørviti av at koyra runt í ring uttan at vita, nær vit skulu blinka út út rundinginum.

## Frákoyringarnar

Fleiri frákoyringar eru. Vit kunnu steðga nú og koyra til viks. Landsstýrið kann síðani leggja uppskot fyri tingið um føroyska grundlóg, ella lata tilfarið hjá nevndini liggja niðursjóvað til seinni nýtslu. Annaðhvørt tá ein fullveldistøka er framd, ella tá ynski er um ábøtur á stýrisskipanarlógina, kann tilfarið so takast fram aftur.

Síðani eru tað tær farleiðirnar, sum føra fram ímóti hæddunum, har valdsbýtið, rættindi og reglur eru skipaðar samsvarandi eini demokratiskari, semjusøkjandi tilgongd, snikkað til føroysk viðurskifti og ynski føroyinga. Felags fyri hesar leiðir er, at tær krevja – um ikki blóð, sveitta og tár – so hegni, tíð og pengar og ikki minst greiða politiska prioritering og samsvarandi karmar og fígging.

## Mót hæddum høgu

Í niðurstøðuni seinast segði eg:

> "Heldur nevndin fast um at gjølla viðgera allar spurningar og at fremja neyðuga almenna kunning, má ætlast, at nevndin fer langt út um tíðarætlanina. Játtan krevst tí til arbeiðið eisini næsta fíggjarár."

Hesar spurningar: hvørji mál skulu vit seta okkum, hvussu leingi tekur tað, og hvussu nógv fer tað fer at kosta, mugu svarast – politiskt.

Serliga viðvíkjandi fólkinum og grundlógini segði eg:

> "Í lógini er ásett, at nevndin skal skipa fyri hoyringum um arbeiðið og seinni uppskotið hjá nevndini. Best var bæði at skipa fyri hoyringum um ymsu evnisøkini og at á annan hátt tryggja eina breiða kunning og eitt breitt orðaskifti í øllum landinum. Hetta kann gerast á heimasíðu, í fyrilestrum, á skúlum, politiskum áhugafeløgum og aðrastaðni."

Til hetta krevst fólk at samskipa, fólk at taka sær av skrivstovuarbeiði, umframt tíð og kreftir frá nevndarlimunum at vera við.

Viðvíkjandi breiðaru fortreytunum førdi eg fram:

> "Nevndin hevur eisini fingist við aðrar tættir enn bert vanligar ásetingar. Skal grundlógin vera virkin og hava týdning fyri trivnaðin og trygdina hjá fólki í Føroyum, so mugu fortreytir skapast. Í skúlunum eins og innan hægri útbúgving má frálæra vera í okkara egnu stjórnarskipan. Rættarskipanin skal tillagast at vera meiri aktivur partur av rættarfatanini og rættarskapanini. Avgerðir frá dómstólum, umboðsmanni, mynduleikum og kærumynduleikum mugu savnast og vera atkomilig hjá øllum. Sera týðandi er ein føroysk rættarvísind, gransking og útbúgving innan okkara egnu stjórnar og rættarskipan."

Hetta arbeiðið má nevndin hava ítøkiliga heimild til at seta gongd á, um tað er ynskiligt at hon skal virka sum katalysator á hesum øki.

Sáttmálin hjá skrivararanum gongur ut við árskiftið. Um nevndin skal halda fram við sama skrivara, og tað metir ein samd nevnd er alneyðugt, verður sáttmáli hansara at endurnýggjast. Um ikki so missa vit allat tær íløgur, sum eru lagdar í hann. Tann kunnleiki sum er stølaður hjá honum má ikki tapast so tætt við málið. Spurningar um setanarviðurskifti, tíðarnýtslu og samsýningar til samfelagsfrøðingarnar í nevndini, eru spurningar, sum eiga at verða hildnir uttanfyri arbeiði hjá formanni og skrivara og ikki nápa tíð frá sjálvum grundlógararbeiðinum. Her eiga tey stýri og teir landsstýrismenn, sum hava við málið at gera, at samskipa sín vilja og siga hann greitt.

Tað hevur verið rættiliga trupult og tvørligt at skipa og samskipa arbeiði bæði í plenum og í bólkum, tí hvørki landsstýrið ella løgtingið hava – eftir at hava tikið stig til og samtykt at fara undir grundlógararbeiðið – tikið tað við sum ein samstarvspartnara í fundarætlanum sínum, so tað hevur verið sera trupult at leggja eina langtíðarfundarætlan. Næstan hvørju ferð tað er gjørt, hevur verið neyðugt at koma við broytingum og avlýsingum. Um hetta segði eg í fyrru frágreiðingini og tað er alsamt galdandi:

> "Tað hevur verið trupult at fáa samskipað grundlógararbeiðið við tingarbeiðið og landsstýrisarbeiðið hjá politikarunum í nevndini."

## At byggja land
Harafturat kemur, at skulu vit skipa framtíð Føroya í eini felags lóg, sum skal vera landsins evsta í øldir, so skal annað til at geva okkum hugmyndir og lívgandi hugarensl enn at sita undir vaðingini í Tinganesi. Vit mugu bæði fáa føroyingin á tal, og síggja, hvussu aðrir gera tá talan er um arbeiði av sama slag.

Søgnin sigur, at Íslendingar, tá Ísland varð sameint í árinum 930, sendu skilamannin Úlfljót til Norra eftir lógum. Henda søgnin kann siga okkum tvinnandi ráð. Fyri at kunnu sameina hetta landið er neyðugt at øll kenna at teirra partur er við í hesum lógararbeiði. Síðani, vit mugu søkja okkum ráð hjá øðrum fyri at fáa burtur møguligt heimablindni í tí vit gera.

Grundlógarnevndin kann, um viljin er til tað, skriva eina lóg og gera eina semju, sum byggir á fylgjandi. Vit skipa politisku stovnarnar, so valdið er skipa og býtt á tann hátt, sum vit sjálvi velja og ynskja. Vit tryggja fólksins og minnilutans rættindi soleiðis, at tað altíð er neyðugt at vera opin og semjusøkjandi, skal nakað varðandi gott spyrjast burturúr politiskum ætlanum. Síðst og ikki minst kunnu vit í grundlógarnevndini staðfesta, hvussu landið Føroyar fatar sína stjórnarstøðu, og hvussu fram skal farast, um vit avgera at gera nýggjan sáttmála við ríkið, og hvussu vit gera, um vit velja at taka okkum úr verandi ríkisstøðu. Hetta kann alt verði ein partur av teirri lóg, sum vit stevna ímóti.

Soleiðis ber til hjá øllum flokkum at náa semju um politisku spælireglurnar í landinum.
Er politskur vilji at gera sáttmála um ríkisfelag, so eru reglurnar fyri hesum longu í grundlógini. Er politiskur vilji til fullveldi, so eru reglurnarfyri hesum eisini longu í grundlógini. Er ivi um vald ella hægri lóg, so finst svarið í eini grundlóg, har okkara fólk og fólkavaldu hava tannla hvørt orð og tugt hvørt komma.

## Hvat er so til ráða at taka?
Tað, ið á bestan hátt tryggjar framhald og undirtøku, er at fara fram eftir ásetingunum um broyting í stýrisskipanarlógini, umframt at halda tær broytingarreglur sum koma at verða í grundlógini sjálvari.

Hetta merkir, at uppskotið skal leggjast fyri tingið, samtykkjast óbroytt eftir løgtingsval og síðani at fara til fólkaatkvøðu. Allar tríggjar ferðirmar eigur vanligur meiriluti at ráða, men tilgongdin má taka ávíst áramál til tess at tryggja eina støðuga undirtøku.
Uppskotið eigur at fara óbroytt frá grundlógarnevndini í tingið, tó at landsstýrið møguliga leggur hana fram. Undir sjálvari viðgerðini á tingi kunnu so landsstýri og tingmenn skjóta upp sínar broytingar.

## Grundlógarnevndin á einum vegamóti
Hvat viðvíkur sjálvari nevndini, eiga hesi viðurskifti at verða skipað og dagførd:

## Ætlan og stýring
Skal ein løgtingslóg, sum tann um grundlógararbeiðið, verða fylgd, krevst, at ein størri kabala gongur upp. Fyrst og fremst má ein ætlan leggjast, sum er realistisk innanfyri teir karmar og við teimum málum í huga, sum eru politiskt samtykt.

*Ætlanin og stýringin* mugu samskipast við teir stovnar, sum er 'raktir' av grundlógararbeiðnum. Løgmaður og tingformaður og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum mugu kenna á sær at teir veruliga vara av hesum arbeiði og vera við at avgera allar teir ivaspurningar, sum hava darva arbeiðnum higartil, tá talan er um tíðarætlan og samsýningar. Harumframt mugu teir avvarandi stovnsleiðararnir, hvørs fólk hava fingið ein leiklut í grundlógarnevndararbeiðinum, góðtaka, at teirra fólk í nevndini seta tíð og orku av til nevndararbeiðið og at tey kunnu gera hetta av fullum huga.

Henda samskipan eigur at virka eins væl í tí fyrireikandi arbeiðinum og í teirru uppfylging, sum má til fyri at loysa teir trupulleikar, ið koma at stinga seg upp á leiðini fram móti málinum.

## Játtan

Sum er, veit grundlógarnevndin ikki altíð greitt, hvørjum hon arbeiðir fyri. Nevndin er sett av løgtinginum og er ein partur av sjálvsstýrisfyrisitingini og játtan hennara. Spurningurin er um grundlógarnevndin ikki eigur at hava sína egnu konto, undir sama landsstýrismanni. Tá hevði tað verið púra greitt hvørjar uppgávurnar vera sum peningurin er játtaður til.

Játtanartørvurin og politisku viðtøkurnar hanga saman. Ein betri skrivstova við skrivstovufólki, umframt eini størri tillutaðari orku frá samfelagsfrøðingunum, og orku til skipan av hoyringum um alt landið, fara at kosta pengar. Er politiskt ynski er um tað, má játtanin vera samsvarandi.

Verður orka løgd í soleiðis at allir avvarandi partar saman eru um eina neyva ætlan, skuldi borið til at mett um kostnaðin. Sum er, er ongin verðuligur møguleiki hjá formanninum at gera tað.

## Samskipan við løgting og landsstýri

Grundlógarnevndin er – sæð við praktiskum eygum – ein stór tingnevnd. Tilsamans eru nítjan tingmenn – ein meiriluti av Føroya løgtingi – og tveir landsstýrismenn knýttir at nevndini. Men, tað hevur enn ikki borið til at samskipa fundirnar hjá nevndini og hennara bólkum, við teir hjá landsstýri, løgtingi og tess nevndum. Um grundlógararbeiðið veruliga hevur prioritet, má ein beinleiðis samskipan fara fram. At fáa upplýst, nær fundir "kunnu vera hildnir" er ikki nóg mikið, tí tað merkir, at ongin dagur og tími passa hjá øllum. Hetta átti at borið til við einum góðum vilja.

## Umstøðurnar hjá samfelagsfrøðingunum

Samfelagsfrøðingarnir hava sum heild havt ringa tíð til arbeiðið og spurningurin um tað er partur av teirra verandi arbeiði ella um talan er um eyka álagt arbeiði er ógreiður. Hóast grundlógararbeiðið sigst vera ein tann mest týðandi partur av ætlanum samgongurnar so tykist sum áralagið í sambandi við lønir og samsýningar er sera misjavnt.

Grundlógararbeiði er ikki ein partur av vanligari fyrisitingin, men er heilt sítt egið, og eigur tí eisini at verða virðismett sum so. Rigidi lønarpolitikkurin hevur gjørt sítt til at slaka ferðina á nevndararbeiðinum og hevur ikki havt so góða positiva ávirkan á motiveringina hjá samfelagsfrøðingunum og øðrum við. Her eigur ein smidligari mannagongd at finnast. Hinvegin eigur tað at vera greitt, at limaskapurin í grundlógarnevndini merkir eitt ávíst arbeiði, tí eiga teir limir, sum kanska ikki hava stundir ella hug at taka lut í arbeiðinum, at sleppa frá og onnur veljast í staðin.

## Skrivstovan og hoyringar

Higartil hevur skrivarin verið fastur á skrivstovuni umframt formannin part av tíðini. Skal arbeiði fáast skjótt frá hondini er neyðugt við fastari løgfrøðingahjálp og skrivstovuhjálp og einum skipaðum samstarvi við onnur hjálparfólk. Hetta er ein spurningur sum má vera í samsvar við játtanina.
Skal grundlógin gerast partur av føroyskari mentan og fatan, krevst eitt umfatandi kunningararbeiði. Hoyringar mugu vera um øll høvuðsevnini, og í øllum økjum í landinum. Hetta tekur í sjálvum sær tíð og krevur nógva orku, umframt at vera treytað av at dygdargott kunningartilfar er framleitt borið øllum húskjum.

Serliga atgerðir krevjast í skúlum, feløgum, politiskum flokkum, miðlum, osfr. krevst fólk, ið hevur tíð og kunnleika til slíkt. Sum er, hevur skrivarin roynt sum frægast at skipa heimasíðu, tíðindafundir og fyrilestrar við misjøvnum úrsliti. Tað verður tí neyðugt vi einumn samskipara av kunningararbeiðnum.

## Kanningarferð

Skal grundlógin skapa fyritreytir fyri øðrum enn beinleiðis avskrivt og umseting av donskum rætti, má nevndin gera seg kunnuga við viðurskifti aðrastaðni. Bæði í londum við sama stjórnarsøguliga uppruna sum okkara, Isle of Man og Íslandi, og londum við somu avbjóðingum, men øðrum loysnum, Nebraska, Andorra ella Skotlandi, ella hjá týðandi stovnum, Mannarættindarsómstólinum, Europatinginum, kunnu vit finna loysnir og inspiratióni til at lyfta støðið í orðaskiftinum. Ikki soleiðis at skilja, at øll nevndin skal fara alla jørðina runt, men soleiðis, at nevndin gjøgnum ráð ella ferðir skilir, at tað er ein verð uttanfyri ríkisfelagsskapin..

Í Íslandi er søgnin, at Úlfljótur fór til Norra eftir lógum, tá Ísland var sameint. Verða Føroyar sameindar ígjøgnum grundlógararbeiðið, eiga vit at gera somu roynd at kanna møguleikarnar, áðrenn vit skipa okkara egnu stjórnarskipan.

## Rættarskipan

Ætlanin í lógini um, at seta eina breiða nevnd at skipa rættin, gjørdist ikki veruleiki. Óhefta domstolsstyrelsen boðaði skrivliga frá, at hon hon gav eftir fyri politiskum trýsti um ikki at tilnevna ein lim. Skrivstovan hjá løgtingium avgjørdi eftir drúgva viðgerð, at tað var í stríð við valdstríbýtið at velja umboð, Advokatfelag Føroya vildi ikki nevna limir. Tískil valdu vit fimm advokatar ístaðin. Tann prinsippiella ráðgevingin frá advokatunum, umframt ein umseting av ‘Lov om Rettens Pleje’, og tilfar viðvíkjandi eini føroyskari rættarskipan, sum skrivarin hevur gjørt, eru til taks hjá nevndini.

Fyrr enn vit fara víðari er tó neyðugt at dvølja við ein spurning: hvør skal gera lógina, seráhugamálini (advokatarnir) ella tingið? Er svarið tað seinna, eiga vit at nýta advokatarnar sum ráðgevar, og í staðin velja rættarskipanarnevndina av nýggjum. Tá allir limirnir og allir varaliminir uttan erin í rættarnevndini hjá løgtinginum eru knýttir at grundlógararbeiðnum, ber til at skipa rættatskipanarnevndina av nýggjum við limum úr grundlógarnevndini, sum samstundis eru limir í rættarnevndini hjá løgtinginum. Hetta hevði tryggja, at fakkunnleikin ummælir, men tey, ið hava fólkavalt mandat, taka avgerðirnar.

Tá henda umskipan er farin fram, ber til at gera eina føroyska rættarskipan uppá umleið eitt ár, á tann hátt, at nevndin so við og við evnar til uppskot til ‘lóg um rættarskipan’, ‘lóg um advokatar’, ‘lóg um politi’, ‘lóg um brotsmál’, ‘lóg um fyrisitingarmál’, ‘lóg um borgarlig mál’, ‘lóg um løgfremjan’ og møguliga aðrar, sum so hvørt verða lagdar fyri løgtingið.

## Aftur á parkeringsplássinum

Grundlógarbussurin er settur um høgtíðina. Vit bíða øll spent, um hann aftur fer at koyra, og hvagar hann fer.

Vinarliga

Jóan Pauli Joensen,
formaður

## Ávegis Notat um grundlógararbeiðið
Er partur av tingmáli 87/2000 sum nevndarskjal.

GLN Plenum

29.mars 2001

**Evni: Onnur ávegis formansfrágreiðing um grundlógararbeiðið.**

Á fundi í grundlógarnevndini tann 26. mars umrøddu vit tíðarætlanina framyvir umframt tað lógaruppskot, sum landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum hevur lagt fram um broyting í lógini um grundlógararbeiðið.

Formaðurin heldur, at tríggir tættir eru í grundlógararbeiðnum, sum báðir hava ávirkan á, hvørjar ætlanir kunnu fremjast. Vit kunnu nevna hesar tættir:

- tann politiska
- tann fakliga
- tann fíggjarliga

Meðan tann fakligi er at lýsa og greina møguleikarnar, er tann politiski at taka støðu millum møguleikanna, og tann fíggjarligi at gera hinar møguligar.
Formaðurin fleiri ferð spurdur, um arbeiðið kann vera liðugt til ein ávísan dag. Svarið er altíð tað sama, at tann fakligi parturin kann vera liðugur, um ávísar fortreytir verða uppfyltar. Hvussu tað verður við tí politiska er verri hjá formanninum at úttala seg um.

Politisk semja – semja um eitt lógaruppskot og tess viðmerkingar – velst um so nógv. Tá nevndin fór undir arbeiðið, var sagt, at føroysk fullveldi var vunnið tíðliga í ár 2000. Eftir hetta, skuldi nevndin so kunngera sítt uppskot um grundlóg. Greitt er, at ríkisstøðan var ikki nakar trupulleiki fyri nevndina, um fullveldi longu var veruleiki. Í staðin virkar nevndin í eini ivastøðu.

Grundlógararbeiðið kann tí annaðhvørt gerast liðugt við eini breiðari politiskari semju um at definera valmøguleikarnar hjá føroysku tjóðini í eini grundlóg, sum skal galda longu meðan vit enn eru í danska ríkinum, ella kann tað gerast liðugt uttan eina slíka breiða tjóðarsemju. Í seinna førinum má tað fakliga arbeiðið hava støði í hugsaðari støðu, t.d. fullveldi um 12 ár, og politiskt fer nevndin helst at ganga í bólkum.

Ein grundlóg er hugsandi at vera um 100 §§. Hvør teirra hevur fleiri ásetingar og stykki. Skal nevndin geva frá sær eitt endaligt álit, og semja ikki er, kunnu vit vænta at skula atkvøða um mangar ásetingar. Arbeiðið skal tí endast á sama hátt sum ein triða viðgerð í tinginum, tá stór ósemja er – henda viðgerðin verður helst long og strong.

Var formaðurin minni bjartskygdur maður til, hevði hann sikkurt sagt, at arbeiðið ber ikki til at enda uttan eina breiða semju. Í øllum førum er tað tann politiski tátturin, ið telur mest fyri tíðarætlanina.

Formaðurin hevur greitt frá øllum hesum í aðru ávegis frágreiðing síni. Eisini byggja tilmæli hansara á eina felags fatan, sum landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, formaðurin og skrivarin í grundlógarnevndini hava undirritað. Felags Fatanin er hjáløgd.
Hyggja vit at teimum fortreytum, sum eg havi lýst í frágreiðing míni, og nærri greinað í felags fatanini, sæst, hvørt tær eru uppfyltar.

| **Fortreyt** | Ja | IN | Nei |
|---|---|---|---|
| 1. Orðaskifti á tingi at fáa greiðu á mandatinum | | | ✔ |
| 2. Umstøður at møta á fundi | | ✔ | |
| 3(1). Minsta lagi hálvt skrivstovufólk | | | ✔ |
| 3(2). Ungur lógkønur | | ✔ | |
| 3(3). Samskipari av kunningararbeiði | | | ✔ |
| 4. Umstøður hjá samfelagsfrøðingunum | | ✔ | |
| 5. Nýggir samfelagsfrøðingar | | | ✔ |
| 6. Neyðugar námsferðir | | ✔ | |
| 7. Fígging samsvarandi ætlanunum | | | ✔ |
| IN: ikki nøktandi | | | |

Niðanfyri greiði eg nærri frá einstøku punktunum.

Eitt greitt mandat er sera umráðandi sum ávíst omanfyri. Fortreytirnar fyri arbeiðnum eru broyttar, nú fullveldisætlanirnar eru broyttar – arbeiða vit útfrá verandi ríkisstøðu, eini hugsaðari fullveldisstøðu, ella skulu vit lýsa ymsar møguleikar? Lógartekstur, viðmerkingar og arbeiðssetningur mugu vera greið og veruleikakend.

Hvat viðvíkur punkti 2 í nevndu fatan, so er tað hent, at løgmaður hevur flutt landstýrisfundirnar frá mánadegi til týsdag, tískil skuldi tað borið landsstýrisliminum til at møtt mánadag. Men ofta eru nevndarfundir hjá tingnevndum mánadagar, eins og arbeiði í fleiri dagar á rað er treytað av, at nevndin fær 'hol' í tingskránni at vita í góðari tíð.

Eftir punkti 3 í felags fatanini skal eitt hálvt skrivstovufólk verða sett, ein ungur lógkønur verða settur, og ein samskipari av kunningararbeiðinum verða settur.

Tað, sum er hent, er at nevndin hevur fingið ein ungan lógkønan í arbeiði hjá nevndini, men lønarviðurskiftini hennara eru ikki í lagi, eins og hon bert er hálva tíð.

Tað, sum størstur tørvur er á í løtuni, er í eitt tíðarskeið at fáa sett eitt skrivstovufólk. Einki skrivstovufólk er komið, tíverri havi eg onga frágreiðing frá fundinum við landsstýrismannin 9. januar 2001, men eg minnist at talan var um at flyta eitt fólk, sum var í starvi aðrastaðini undir Løgmansskrivstovuni at arbeiða fyri Grundlógarnevndina eitt tíðarskeið. Her er einki hent í málinum.

Formaðurin hevur tosað við fulltrúan í sjálvstýrisfyrisitingini, um hesi viðurskifti. Tað tykist sum um møguleikar eru fyri at flyta eitt fólk eitt tíðarskeið, men hetta skal henda gjøgnum deildarstjóran á Lógardeildini. Hetta er eitt mál sum hastar.

Skotið er upp, at Ingibjørg Berg og Jóannes Hansen sum samfelagsfrøðingar taka sær av at samskipa kunningararbeiðið í summar. Hetta merkir, at tey skulu keypast leys frá arbeiði sínum 2-4 mánaðar í part.

Í hesum viðfangi er punkt 5 um viðurskiftini hjá samfelagsfrøðingunum ikki avgreitt, tí teir skuldu verið keyptir leysir heilt ella partvís, umframt at arbeiðspláss teirra skuldu tikið undir við, at grundlógararbeiðið órógvar fasta starv teirra.

Nevndin hevur sambært punkti 6 í felags fatanini verið á eini sera áhugaverdari námsferð í U.S.A. og Islandi sum hevur givið miklan íblástur, tað var stórst spell at tinglimirnir í nevndini fyri andstøðuna ikki vóru við á ferðini, tí nevndin arbeiddi nógv á hesi ferðini. Skal punkt 6 upfyllast, skal nevndin fara eina Europaferð, ið ætlandi endar á Isle of Man á Gomlu Jóansøku.
Frá byrjan hevur óvissa verið um, hvussu nógvan pening Grundlógarnevndin hevur at ráða yvir til arbeiði sítt, men fulltrúin í sjálvstýrisfyrisitingini hevur givið nevndini eina ábending um hetta á fundi við formannin og skrivaran í Grundlógarnevndini fríggjadagin 30. mars 2001. Út frá tí sum hann segði, so komu yvirtøkurnar í smáum at kosta meira enn, um alt var farið fram í einum. Hetta førdi við sær, at tað ikki var so nógv eftir til grundlógararbeiðið. So skjótt sum uppgerðin yvir ferðina til U.S.A er greið, vita vit hvussu nógv er eftir.

Landsstýrismaðurin hevur sambært undirskrivaða skjalinum um felags fatan lovað at tryggjað fígging sambært teimum løgdu ætlaninum, her undir prenting av áliti og kunningartiltøkunum. Hetta setir formaðurin sítt alit á, men hetta inniber ein tørv, ið er munandi hægri enn tað, ið á fundi er sett fram sum nevndarinnar partur av sjálvstýriskontoini. Talan er um ein mun upp á fleiri hundrað túsund tals krónur, samstundis sum nevndin enn ikki hevur fingið egna konto á fíggjarlógini.

Sum er tykist ógreiða at verða á kommandostrukturinum. Hvør skal taka stig til at fólkini verða sett? Er tað formaðurin fyri Grundlógarnevndini, Løgmansskrivstovan ella deild á Løgmansskrivstovuni, ella er málið dottið millum onkrar stólar. Hesum má fáast greiði á.

Sum er hevur formaðurin sett Gunn Ellefsen, lógkønu, til at arbeiða hjá nevndini fyri tímaløn, men mál hennara skal fyrst inn til Løgmannstjóran áðrenn hon kann fáa løn útgoldna. Hetta kemur vónandi skjótt í rættlag. Hvat skrivstovufólkinum viðvíkur, so skjýtur formaðurin í Grundlógarnevndini upp, at deildarstjórin á Løgdeildini, við ljós og lykt leitar eftir einum skrivstovufólki á Løgmansskrivstovuni, sum í eitt tíðarskeið kann verða flutt til at arbeiða hálva tíð hjá Grundlógarnevndini. Uppgávan hjá skrivstovufólkinum verður umframt vanligt skrivstovuarbeiði at hjálpa til við at fáa skipað skjalargrundarlagið undir øllum grundlógararbeiðnum, so tað verður atgeingiligt hjá øllum. Hetta kann verða gjørt eftir leiðbeining frá Føroya Landsskjalasavni.

Skjalasavnið hjá Grundlógarnevndini er grundarlagið undir sjálvum álitinum, sum skal skipast so, at tað altíð ber til at fara niður í heimildirnar, har tað er neyðugt.

Á fundi í Grundlógarnevndini 26. mars 2001 skeyt formaðurin upp, at fyrsta málið er at fáa prentað og útgivið eina triðju ávegis formannsfrágreiðing har tað tilfar, sum higartil er framlagt í nevndini verður hjálagt ella sjóðað uppí. Henda frágreiðing skal verða skipað soleiðis at hon uttan stórvegis hásták kann verða til eitt álit.

Uppskotið er, at nevndin góðkennir, at formaðurin í summar prentar og útgevur ta triðju ávegis formansfrágreiðingina, og at hjálagt hesari frágreiðing verður tað tilfar, sum higartil er framleitt í nevndini.

Fyrimunurin við eini útgávu er, at uttan mun til um arbeiðið hjá nevndini verður lagt fyri tingið í hesi setuni ella um tólv ár, so er tilfarið alment, og fer at birta undir eitt orðaskifti. Hetta tryggjar okkum, at um onkur fellur frá, tað verið seg av politkarum ella fakfólki, so er tilfarið tøkt í bók, eins og stýrisskipanarálitið og verður grundarlagið undir framtíðar stjórnarrættarligum virksemi her á landi – um ikki ein hvítbók so kanska ein grøn bók, sum hvør kann balla sítt politiska tubbakk inní.

Skal nakað meir gerst enn tað, og skal nøkur tíðarætlan gerast, mugu nevndu tríggir tættir greiðast.

Vinarliga

Jóan Pauli Joensen,
formaður

# Støðufrágreiðing Oktober 2001

1. oktober 2001

## Inngangur

Bakstøðið fyri arbeiðinum er, at 11. mars 1999 lýsti Føroya Løgmaður løgtingslóg um grundlógarnevnd, eftir at uppskotið hevði verið viðgjørt í Løgtinginum1. Lógin um eina føroyska grundlóg hevur frá byrjan verið partur av fullveldismálinum, og varð lógin samtykt við atkvøðum hjá samgonguni - Tjóðveldisflokkinum, Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum - og atkvøðuni hjá Miðflokkinum. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin atkvøddu ímóti.2

Frá byrjan gjørdu umboð Sambandsfloksins í Grundlógarnevndini greitt, at tey vóru ímóti fullveldi og ímóti eini føroyskari grundlóg, og at teirra starv í nevndini fór at verða merkt av hesum. Hinvegin hildu tey, at arbeiðið kundi brúkast at endurskoða stýrisskipanarlógina, og hava tí tikið lut í arbeiðinum við hesum í huga.

Sum sæst av málsviðgerðini, so hevur javnaðarflokkurin frá byrjan ynskt at víðka arbeiðssetningin til eisini at fevna um føroyska grundlóg í aðrari stjórnarskipan enn fullveldi. Nevndin hevur í sínum arbeiði viðgjørt ymiskar skipanir, sum túrurin til USA eisini er prógv um.

Sbrt. lógini skuldi arbeiðið vera liðugt til 1. juni 2000, men frá fyrsta degi var greitt, at tíðarkarmurin til eitt so stórt og grundleggjandi arbeiði, sum var gjørt á fyrsta sinni her á landi, var alt ov tepur, soleiðis sum nevndin var samansett. Formaðurin gjørdi eisini vart við hetta longu tá arbeiðið byrjaði. Málið hevur verið til viðgerðar í Løgtinginum aftur, og mælti ein samd rættarnavnd tá til at broyta løgtingslóg nr. 10 frá 11. februar 1999 um grundlógarnevnd til, at § 1, stk 3 kom at ljóða at »fyribils álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. oktober 2001, og endaligt álit 31. desember 2001.«

Fleiri samvirkandi orsøkir hava ført við sær, at tað eisini kom at verða trupult at halda henda tíðarkarm. Grundlógararbeiðið hevur frá byrjan skulað kappast við so nógv annað, ið hevur hoyrt uppí dagliga arbeiði hjá nevndarlimunum – ikki minst hjá politisku umboðunum í nevndini. Umleggingar o.a. á skrivstovuni í sambandi við, at grundlógarskrivarin fór úr starvi, hava eisini havt darvandi ávirkan.

Nevndin er úr einum løgfrøðiligum sjónarmiði av sínum egna heilt serliga slag, sum ikki altíð hevur gjørt tað so lætt at arbeiða, hvørki hjá serfrøðingum ella politikarunum. Uppgávan hjá formanninum sbrt. arbeiðssetninginum hevur verið, at lata øll sjónarmið koma fram, og helst at royna at finna fram til eina semju, sum allir nevndarlimirnir kunnu taka undir við. Hesin politiski streymasjógvur hevur sjálvsagt eisini tarnað róðrinum og longt um leiðina fram á málið.
Broytta politiska gongdin hevur, umframt at hava ávirkað motiveringina hjá fleiri nevndarlimum, eisini ført við sær eina glíðing og broyting í fatanini hjá nevndarlimunum av, hvat tað er fyri ein grundlóg ella stjórnarskrá, sum vit stevna ímóti. Í hesum spurningi varð ruddað upp á fundum í august og september. Leitað varð aftur til upprunaliga lógaruppskotið og til upprunaliga arbeiðssetningin.

Á fundi 3. september varð samtykt, at hvør limur skuldi geva sína egnu persónligu hugsan og fatan til kennar. Hetta førdi við sær, at formaðurin, við støði í avgerð á fundi 7. september 2001, sendi landsstýrismanninum eitt skriv, dagfest sama dag, har tað stendur, at:

[1] Sí viðgerðina á tingi skjal 1.

[2] Sí skjal 2. Gerðabók Løgtingsins

"Grundlógarnevndin hevur – í sambandi við tilstundandi evstumørkini fyri nevndararbeiði – gjørt støðuna í grundlógararbeiðinum upp á fundum 3. og 7. september 2001. Skal arbeiðið, vit lata úr hondum, vera fakliga forsvarligt, samstundis sum roynt verður til fulnar at finna breiðar politiskar semjur í grundlógarnevndini, er enn langt eftir á mál.

Arbeiðslagið hevur higartil yvir høvur verið gott, og arbeiðshátturin hevur víst seg at rigga væl, men her kunnu ávísar broytingar gerast. Ávegisavgerðirnar, sum vit hava tikið haldi eg vit kunnu vera væl foreint við, og úrslitið higartil er tí samanumtikið gott.

Tað hevur tó verið ein bági, at gongdin í sjálvstýrismálinum varð ein onnur enn væntað, tá lógin varð gjørd, og hetta hevur gjørt, at nevndin hevur nýtt nógva orku til at kanna, hvørjar fyritreytirnar fyri arbeiðinum eru.

Eisini hava tíðarbil verið, har fundarvirksemið av ymsum ávum hevur ligið stilt.

Í almennu viðmerkingunum til lógina stendur m.a., at endamálið við at hava politiska umboðan í nevndini er, at hesi skulu fáa ávirkan á uppskotið til grundlóg. Í endaliga arbeiðssetninginum er tilskilað, at formaðurin skal tryggja øllum nendarlimum javnbjóðis ávirkan og tryggja at úrslit kemur, og helst í semju, og starvskipanin skal vera so, at hon "kann tryggja eitt gott samspæl millum tey fakligu og politisku/fólkaræðisligu atlitini, og at allir nevndarlimir eru javnsettir at seta fram uppskot og taka støðu". Um tað skal vera møguligt at gjøgnumføra arbeiðsháttin, ið her verður lagt upp til, er hetta arbeiði, ið eigur at taka sína tíð.

Tilstundandi løgtings- og fólkatingsvalini eru eisini farin at spøkja, og væntandi er, at prosessin, sum lagt er upp til við almennum hoyringum og kunningarfundum, verður órógvað.

Vit fara tí við hesum at boða landsstýrismanninum frá, at grundlógarnevndin ikki klárar at halda tíðarfreistirnar í lógini, tvs.:

- At fyribilsuppskot til grundlóg ikki verður liðugt tann 1.10.2001
- At nevndin ikki hevur stundir at skipa fyri almennum hoyringum
- At endaligt uppskot til grundlóg ikki verður liðugt tann 31.12.2001

Nevndin fer tí heldur at gera statusfrágreiðing tann 1.10.2001, har nevndin eisini kemur við uppskoti um, hvørjir partar av grundlógaruppskotinum kunnu fáa endaliga nevndarviðgerð fyri 31.12.2001.

Vísandi til at nevndin ikki sær seg føra fyri at halda ásetingarnar í lógini um grundlógararbeiðið, verður heitt á landsstýrismannin um at taka neyðugu stigini í hesum sambandi."

Tað er við støði í teirri avgerð, sum liggur aftanfyri hetta skriv, at henda frágreiðing verður latin landstýrismanninum í sjálvstýrismálum.

## Samansetingin av nevndini

Sbrt. Lógini um grundlógarnevnd skulu flokkarnir millum tinglimir sínar velja tvey umboð fyri teir stóru flokkarnar og eitt fyri teir smærru. Fyri hvønn lim skal eisini veljast ein varalimur, sum eisini skal

vera tingmaður. Løgmaður tilnevnir ein nevndarlim og ein varalim fyri Landsstýrið. Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum velir 5 nevndarlimir við samfelagsligari útbúgving, haruppií eisini formannin, og 4 varalimir fyri hesi. Út frá hesum var nevndarsamansetingin frá byrjan henda:

***Umboð tilnevnd av Løgtinginum:***
Fólkaflokkurin: Limir: Eyðun Viderø og Jógvan á Lakjuni, Varalimir: Jóannes Nielsen og Rúna Sivertsen.
Javnaðarflokkurin: Limir: Jóannes Ejdesgaard og Hans Pauli Strøm Varalimir: Hendrik Old og Katrin Dahl Jacobsen.
Sambandsflokkurin: Limir: Edmund Joensen og Lisbeth L. Petersen. Varalimir: Alfred Olsen og Heðin Mortensen.
Sjálvstýrisflokkurin: Limur: Jákup Sverri Kass. Varalimur: Sámal Petur í Grund.
Tjóðveldisflokkurin: Limir: Hergeir Nielsen og Torbjørn Jacobsen Varalimir Jógvan Durhuus og Anita á Fríðriksmørk.
Miðflokkurin: Limur: Jenis av Rana. Varamaður: Eingin, tí flokkurin er bert umboðaður við einum manni á tingi.

***Umboð tilnevnd av Føroya Løgmanni:***
Limur: Helena Dam á Neystabø. Varalimur: Signar á Brúnni.

***Umboð tilnevnd av landsstýrismanninum:***
Jóan Pauli Joensen við Eyðun Andreassen sum varalimi, Aibritt á Plógv við Gesti Hovgaard sum varalimi, Herálvur Joensen við Gurið A. Joensen sum varalimi, Maria F. Róin við Ingibjørg Berg sum varalimi, Rúni Joensen við Herluf Sigvaldsson sum varalimi.
Landstýrismaðurin tilnevndi Jóan Paula Joensen til formann. Nevndin hevur sjálv á næsta fundi sínum valt Rúna Joensen til næstformann.

## Broytingar í nevndarsamansetingini.

Aibritt á Plógv segði seg av persónligum orsøkum úr nevndini og í hennara stað kom Jóannes Hansen í nevndina frá oktober 1999. Í januar 2000 fór tann broyting fram, at Maria Róin og Ingibjørg Berg skiftu um, soleiðis at Ingibjørg Berg varð limur og Maria Róin varalimur. Í mai 2001 kom Birta Biskipstø fyri Mariu Róin. Birta Biskopsstø var í nevndini til seinast í juli, tá hon tók seg úr. Fyri hana kom Kári á Rógvi í nevndina sum varalimur í september 2001.

Í sambandi við at Signar á Brúnni várið 2000 fór frá sum landsstýrismaður og tók sæti á tingi, fóru bæði hann og Torbjørn Jacobsen úr nevndini. Fyri Torbjørn Jacobsen valdi Tjóðveldisflokkurin í mai 2000 Anitu á Fríðriksmørk sum lim í nevndina og Finn Helmsdal til varalim hennara.

Tá Torbjørn Jacobsen í august gjørdist landsstýrismaður, var hann tilnevndur sum varalimur fyri Helenu Dam á Neystabø. Í sambandi við at Helena Dam á Neystabø í februar 2001 fór frá sum landsstýrismaður og tók sess sín á tingi, fór Jákup Sverri Kass úr nevndini, og hon kom í nevndina í hansara stað sum umboð fyri Sjálvstýrisflokkin, og Kári Højgaard varð valdur til varalim fyri hana. Torbjørn Jacobsen fór frá sum varalimur samstundis sum hann segði landstýrismannasessin frá sær. Landstýrisins umboð hava síðani september 2001 verið Sámal Petur í Grund við Óla Holm sum varamanni.

## Skrivari, hjálparfólk og fundarstaður

Ta fyrstu tíðina virkaði Bergur Berg, fulltrúi í sjálvstýrismálum sum skrivari hjá nevndini, men frá 15. august 1999 tók løgfrøðingurin Kári á Rógvi, við starvinum sum grundlógarnevndarskrivari, eftir at tað hevði verið lýst leyst. Hann hevur verið skrivari til 1. august 2001, tá hann ikki ynskti at endursnýggja sáttmála sín. Hetta førdi við sær eina umskipan á Grundlógarskrivstovuni, soleiðis at Ingibjørg Berg tók við umsitingarliga partinum av skrivarastarvinum hálva tíð fra 1. august 2001, og Rúni Joensen fekk ábyrgdina av løgfrøðiliga partinum av skrivarastarvinum. Ingibjørg Berg og Rúni Joensen halda tó eisini fram sum limir í nevndini.

Síðani 1. februar 2001 hevur Gunn Ellefsen, BA í løgfrøði, arbeitt sum hjálparskrivari í nevndini. Sissal Kampmann var hjálparfólk hjá nevndini nakrar mánaðir í 2000, meðan Óluva Ellingsgaard síðani mai 2001 hevur røkt arbeiðið sum hjálparfólk hjá nevndini. Ung løgfrøðilesandi hava eisini arbeitt sum hjálparfólk um summarið.

Nevndin hevur frá byrjan havt arbeiðshøli í ovastu hædd á Skansapakkhúsinum í Tinganesi, har eisini bólkafundir hava verið hildnir. Flestu plenumfundir hava verið í stóra fundarhølinum í Sjó- og Vektarbúðini í Tinganesi. Nevndin hevur harumframt eisini havt fundir á Hotel Tórshavnar Sjómannsheimi, og á gistingarhúsum í sambandi við kanningarferðina í USA og Íslandi.

## Nevndararbeiðið

Teir fyrstu nevndarfundirnir fóru við at skipa ávís praktisk viðurskifti, og arbeitt varð við einum fyribilsarbeiðssetningi, sum landsstýrismaðurin endaliga gav nevndini 3 .september 1999, eftir at nevndin á fleiri fundum sjálv hevði havt høvi at koma við sínum viðmerkingum til fyribils setningin.

Nevndin byrjaði sítt arbeiði av álvara eftir summarfrítíðina 1999, tá hon hevði fingið fastan skrivara. At lætta um arbeiðið í nevndini varð avgjørt, at skipa arbeiðið í undirbólkar. 16 ymisk evni vórðu gjørd, sum fyrst skuldu viðgerast í bólkunum og síðani viðgerast í plenum. Undirbólkarnir vórðu mannaðir við einum serfrøðingi og nøkrum politiskum umboðum í hvørjum.
Á triðja plenumfundi í september 1999 setti formaðurin fram uppskot um at hava arbeiðsuppskot til eina føroyska grundlóg klárt til jóla í 1999. Undirtøka var tó ikki fyri hesum í nevndini, sum ikki helt tað vera rættan arbeiðshátt. Nevndin vildi heldur arbeiða breitt við evnisøkjunum í arbeiðsbólkum og í plenum, áðrenn farið var undir at skriva og arbeiða við lógargreinum. Hildið varð tí fast um henda arbeiðshátt, sum hevur verið fakliga sera dyggur og mennandi bæði fyri arbeiðið og fyri hvønn einstankan nevndarlim, men tað skerst ikki burtur, at hesin arbeiðsháttur krevur sína tíð.

## Plenumfundir

Nevndin hevur, síðani hon byrjaði, havt 28 plenumfundir, sum eftir uppskoti frá formanninum í høvuðsheitum hava verið skipaðir eftir eini fastari fundarskrá, sum hevur verið henda:

1. Viðmerkingar til skránna
2. Viðmerkingar til frásøgn frá seinasta fundi
3. Kunningarmál
3.1. Kunning frá formanninum
3.2. Møgulig kunning frá nevndarlimunum
4. Nevndararbeiði
4.1. Mál at staðfesta ella taka støðu til.
5. Framløga av bólkaarbeiði
5.1. Orðaskifti
6. Møguligir fyrilestrar
6.1. Orðaskifti

7. Samanumtøka og niðurstøður
8. Næsti fundur

Skrivarin hevur havt ábyrgdina av at skriva fundarfrágreiðingar, sum fyrst hava verið sendar limunum til viðmerkingar, áðrenn tær hava verið endaliga góðkendar á einum seinni fundi. Høvi hevur eisini verið at koma við viðmerkingum á komandi fundum, áðrenn endalig fundarfrágreiðing varð skrivað. Fundarfrágreiðingarnar eru at finna í skjalasavninum hjá Grundlógarnevndini.

Plenumfundirnir hava vanliga verið mánadagar, tí tá hevur ligðið frægast fyri hjá tingmonnum at møta. Inn í millum hevur nevndin havt fleiri samanhangandi fundir, sum hava verið ein samansjóðing av plenumfundum og bólkafundum, t.d. á Sjómannsheiminum í mai 2001. Nevndin hevði eisini dagligar fundir á kunningarferðini í USA og Íslandi

## Fyrilestrar og skeið

Umframt framløgur hevur eisini verið skipað fyri fyrilestrum. Fyrilestrarnir hava verið:

- Rúni Joensen: Fyrilestur um og gjøgnumgongd av donsku grundlógini,
- Kári á Rógvi: Úrvaldar grundlógir – hvussu grundlógir skulu lesast,
- Barry Bartman : Constructing a new constitution in an ancient state – Andorra,
- Isi Foighel: Føroyar og altjóða mannarættindi,
- Kári á Rógvi: Parlamentarisma og Valdstríbýti,
- Sigurdur Lindal: Um íslandska lóggávu,
- Hans Gammeltoft Hansen: Umboðsmannsstovnurin í Danmark

Ætlanin var at hava fleiri fyrilestrar, og einir tveir aðrir vóru settir á skrá, men ein var avlýstur vegna andlát, og hin var avlýstur, tí fyrilesarin ynskti ikki “på nogen måde at kunne tages til indtægt for synspunkter om spørgsmålet om Færøernes retsstilling, hverken på Færøerne, hvor holdningerne åbenbart er ret så forskellige, eller i Danmark”.

Tað vanliga hevur verðið, at fyrilestrahaldarar, umframt at halda fyrilestur fyri Grundlógarnevndini, eisini hava hildið almennan fyrilestur á Fróðskaparsetrinum ella aðrastaðini.

Eisini hevur grundlógarnevnin skipað fyri skeiði í Mannarættindsum, sum J.Fr. Kjølbroe og Nina Holst Christensen skipaðu fyri. Limirnir í Grundlógarnevndini fingu eisini høvi til at taka lut í skeiði um góðan fyrisitingarsið, sum Hans Gammeltoft Hansen og Karsten Loiborg skipaðu fyri á Hotel Hafnia, og á evnisdegi um nýggjaru rákini innan stjórnmálafrøði, sum Løgmansskrivstovan skipaði fyri í Norðurlandahúsinum.

## Tíðindafundir

Skipað varð eitt skifti fyri tíðindafundum hvønn týsdag á loftinum í Sjó- og Vektarbúðini. Ójavnt er, hvussu stórur áhugin var, og hvussu nógv varð skrivað og sagt í fjølmiðlunum. Tíðindafundir vóru um hesi evni:

- Stjórnarvald
- Effektivitetur
- Tingskipan
- Politisk mannarættindi
- Persónlig mannarættindi
- Fyrisiting og prosess

## Heimasíðan

Grundlógarnevndin gjørdi tíðliga í nevndarviðgerðini eina heimasíðu, sum tilfar hevur verið lagt út á við jøvnum millumbilum. Hesin miðil kundi verið nýttur meiri virki, men tíð hevur ikki rættiliga verið til tað.

## Samfelagsfrøðingafundir

Nakrir fundir hava verið millum samfelagsfrøðingarnar í nevndini, har ymiskir fakligir spurningar hava verið viðgjørdir. Ein trupulleiki hevur verið, at dagligu uppgávurnar hjá samfelagsfrøðingunum hava gjørt tað torført at møta á nógvum fundum. Ynski er í nevndinu um at nýta henda arbeiðsháttin meira framyvir, nú evnini skulu orðast til endaliga plenumviðgerð, og tað verður nú roynt aftur - partvíst um alnótina.

## Upprit til grundlóg

Partvíst við støði í tí, sum er farið fram á fundunum og í bólkunum, legði skrivarin fyri jól í 2000 fram eitt upprit til grundlóg, ið var ætlað sum eitt arbeiðsamboð og sum eitt arbeiðsgrundarlag.Hetta uppskot hava allir grundlógarnevndarlimirnir fingið, og tað hevur eisini verið nýtt sum arbeiðsgrundarlag hjá summum av bólkunum, men eingin endalig støða er tikin til uppskotið í síni heild.

So leingi hetta uppskot ikki hevur fingið somikið nágreiniliga viðgerð í Grundlógarnevndini, at nevndin er samd um, at tað kann latast almenningunum til hoyringar, verður bíðað við at leggja tað fram alment. Nevndin má fyrst verða samd um, at tað er hon, sum eigur barnið.

## Skjøl nevndarinnar

Nevndin hevur skipað eitt skjalasavn, so tað ber til at finna fram til tey skjøl, sum hava við grundlógararbeiðið at gera - bæði teldutøkt og á pappíri. Yvirlit yvir innihaldið í savninum verðu prentað í endaliga álitið. Tá nevndararbeiðið endar, verður skjalasavnið hjá Grundlógarnevndini latið Føroya Landsskjalasavni.

## Ferðin til Islands og USA

Í døgunum 16 februar til 2. mars 2001 var Grundlógarnevndin á kanningarferð í USA og Íslandi. Tað var ein samd nevnd sum stóð aftanfyri ferðina, men gongdin í politisku støðuni í Føroyum førdi við sær, at limir Sambandsflokksins og Javnaðarflokksins, eftir at hava ráðført seg við flokkar sínar, tóku ta avgerð at raðfesta politiska arbeiðið í Føroyum uppundir eina væntandi fólkaatkvøðu, heldur enn at fara á kanningarferð. Umboð fyri hesar flokkar, eins og umboðið fyri Miðflokkin, vóru tí ikki við á ferðini. Hetta darvaði nakað, tí roknað varð við, at tað fór at bera til at koma til nógv ítøkilig úrslit á ferðini. Hóast tað fingu luttakararnir væl burtur úr hesi ferð, og fingu m.a. sett grundlógararbeiðið í eitt størri høpi, har okkara viðurskifti vórðu samanborðin við amerikonsk og íslendsk viðuskifti. Serliga nógv fekst burturúr vitjanini í Nebraska, har fleiri høvi vóru at nema, hvussu politikkur og vøld virka í praksis. Skipað varð bæði fyri fyrireikandi og eftirmetandi fundum í nevndini. Víst verður annars til ferðafrágreiðingina, sum liggur í skjalasavninum.

## Evnisbólkarnir

Settir vórðu 16 arbeiðsbólkar. Bólkarnir hava verið skipaðir við 5 føstum limum, soleiðis at allir fastir tinglimir í Grundlógarnevndini hava 6 sessir í arbeiðsbólkunum. Allir samfelagsfrøðingarnir hava havt 1-3 sessir í arbeiðsbólkunum. Fasti landsstýrislimurin í Grundlógarnevndini hevur havt 5 sessir.

Skipanin hevur kortini verið so liðilig, at hvør bólkur sjálvur kundi gera av, um annar limur ella varalimur møtti á bólkafundi.

Av samfelagsfrøðingunum hava bæði fastir limir og varalimir tikið lut í bólkaarbeiðinum, og tað eru samfelagfrøðingarnir, sum hava virkað sum bólkaleiðarar. Tað hevur áligið einum av samfelagsfrøðingunum í hvørjum bólki at gera upprit at leggja fyri plenum. Skrivarin í Grundlógarnevndini hevur verið tøkur hjá bólkunum og hjálpt til at finna fram tilfar, og í fleiri førum eisini verið bólkaleiðaranum til hjálpar í sambandi við skriving av uppriti. Bólkarnir hava vanliga havt minst tveir fundir, áðrenn evnið hevur verið lagt fram á plenumfundi.. Í sambandi við hesa statusfrágreiðing hava allir bólkaleiðararnir latið inn sína statusfrágreiðing fyri einstøku bólkanar. Tað er við støði í hesum, at formaðurin hevur skrivað niðanfyri standandi frágreiðing.

## Statusfrágreiðing bólkanna

Ymiskt er, hvussu neyvt greitt verður frá evnunum. Hetta er fyrst og fremst tí at ymiskt er, hvussu langt evnini eru viðgjørd.

## Landshøvdingi

*Bólkurin landshøvdingi viðger, hvør formliga er hægsta umboð Føroya, og hevur hægstu tign. Um hetta skal vera ein kongur, ella danska drotningin, ella um vit kanska skulu hava forseta ella lata tingformannin hava hægstu tign í landinum. Spurningurin er eisini, hvønn leiklut ein landshøvdingi skal hava í samband við staðfesting av lógum, náðan og í sambandi við at stjórn verður skipað.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upprit um landshøvdinga*

Bólkurin landshøvdingi hevur havt fleiri bólkafundir og gjørt eitt rættiliga rúgvusmikið álit, har kongsvøldini í Norðurlondum eru lýst, eins og leikluturin hjá kongi í Føroyum er søguliga lýstur. Kongsvøldini eru ymisk, og tað er ymist, hvussu leikluturin hjá kongi er í teimum ymisku Norðurlondunum. Eisini verður samanborðið við leiklutin hjá bretska kongsvaldinum. Commonwealth og onnur dømi eru eisini tikin fram.

Høvuðsspurningurin er, hvør skal metast at vera ríkisovasti og hava hægstu tign í Føroyum. Her veldst alt um, hvørja støðu Føroyar sum land koma at hava. Talan kann vera um kong ella forseta. Forsetin hevur t.d. í Íslandi ein leiklut, sum kann samanberast við tann hjá einum kongi, munurin er bert at forsetin er valdur. Forsetin í USA hevur ein heilt ørðvísi leiklut enn t.d. íslendski forsetin. Í bretska samveldinum er tað í fleiri førum bretska drotningin sum er ríkisovasti, men ikki altíð á sama hátt. T.d. er hon ikki Qveen men Lord of Man.

Uppgávurnar hja ríkistovastunum eru eisini eitt sindur ymiskar, alt eftir hvat land talan er um. Uppgávurnar kunnu t.d.vera at loysa upp tingið og skriva út val, at staðfesta lógir, at tilnevna stjórnarleiðaran, at halda ráð saman við stjórnini, at leggja uppskot fyri tingið, at vera á odda fyri heri og fyrisiting, at standa á myntum og seðlum, at náða revsaði, at umboða landið, at ímynda landið og vera landsforeldur.

Kongur er við heimastýrislógini gliðin út úr tí serliga føroyska lógarverkinum og hevur bert sjónligan týdning, har talan er um mál, ið Føroyar hava felags við Danmark. Spurningurin er so, hvør hevur leiklutin hjá kongi í føroysku stýrisskipanini, og hvørjar uppgávur danski kongurin hevur sbrt. donsku grundlógina. Í føroysku stýrisskipanini er nógv av hesum lagt út til ávíkavist løgtingsformann og løgmann.

Spurningurin er, um tað rættasta ikki er at taka støði í hesum, sum longu er veruleiki, og skifta sundur prerogativini hjá kongi/forseta millum løgtingsformann og løgmann og fella hesi niður í eina føroyska grundlóg. Men júst hvussu hetta skal gerast er ikki viðgjørt, hvørki í bólki ella plenum, tí hildið var, at tað úrslit, sum hesin bólkur kom til, fór at verða ávirkað av so nógvum øðrum sum skuldi verða greitt fyrst.

Bólkaleiðarin roknar við at evnið kann verða liðugt lýst og viðgjørt í plenum til 31.12.2001, tað veldst tó um politiska semju í nevndini, um parturin kan roknast sum liðugur.

## Rættarskipanin

*Bólkurin rættarskipan viðger m.a. evni sum ríkisrætt, serdómstólar, rættarskipan, dómsvald, dómarakallið, óhefti og leikfólk.*

*Evnið er fyrr lýst í Fyrisitingarbindinum í Hvítubók.*

Bólkaleiðarin metir ikki, at arbeiðsbólkurin verður liðugur til 31. desember 2001, fyrst og fremst tí arbeiðið hjá bólkinum hongur neyvt saman við arbeiðinum hjá rættarskipanarnevndini undir grundlógarnevndini, sum hevur langt eftir á mál. Í hesum sambandi hevur spurningurin um tíðarfreistina hjá rættarskipanarnevndini verið viðgjørdur – hvørt hon røkkur út yvir tíðarfreistina hjá grundlógarnevndini, sum rættarskipanarnevndin vísir til.

Ein annar spurningur, ið hevur verið reistur er, hvørt arbeiðið hjá rættarskipanarnevndini skal samskipast við arbeiðið hjá embætismannabólkinum, ið danska løgmálaráðið hevur sett at viðgera føroysku rættarskipanina (arbeiðið hjá hesi nevnd liggur stilt í løtuni), ella arbeiðið hjá eini møguligari embætismannanevnd, sett av landsstýrinum og donsku stjórnini í felag at viðgera spurningin um yvirtøku av rættarmálunum (vísandi til umrøðu í fjølmiðlunum seinastu tíðina).

## Rættarskipanarnevndin

Eitt tað fyrsta, sum Grundlógarnevndin viðgjørdi var at seta eina Rættarskipanarnevnd – ein undirnevnd undir Grundlógarnevndini. Um Rættarskipanarnevndina verður sagt í arbeiðssetninginum:

“Hinvegin er greitt, at grundlógarnevndin ikki fær stundir og orku - og er ikki rætta forumið - at gera eitt fullfíggjað tekniskt uppskot til rættarskipan – t.e. øll tey viðurskifti, sum í dag eru nevnd í rættargangslógini fyri Føroyar, umframt tað, sum er ásett í ríkislóg um dómstólastýrið o.s.fr. Tí eigur grundlógarnevndin beinanvegin at seta eina rættarskipanarnevnd at arbeiða burturav við tí tekniska uppskotinum til føroyska rættarskipan. Henda nevndin skal vísa til grundlógarnevndina við tí endamáli, at neyvt samsvar fæst millum yvirskipaðu ásetingarnar um rættarskipan í uppskotinum til grundlóg, og tað stóra tekniska arbeiðið sum má gerast í rættarskipanarnevndini. Rættarskipanarnevndin skal meta um tíðarkarm og arbeiðsorku til at gera fullfíggjað uppskot til føroyska rættarskipan, og skal mæla til, hvat kann gerast í eini skiftistíð, til eitt uppskot er klárt at seta í verk. Grundlógarnevndin og rættarskipanarnevndin kunnu hava felags fundir, tá mett verður, at tørvur er á at samskipa arbeiðið.
Rættarskipanarnevndin verður mannað við 7 (møguliga 6) limum, ið verða valdir soleiðis:
Grundlógarnevndin velur ein av sínum limum í rættarskipanarnevndina
Heitt verður á Domstolsstyrelsen í Keypmannahavn um at tilnevna ein dómara við neyvum innliti í føroysk viðurskifti
Advokatráð Føroya instillar tveir limir
Løgdeild landsstýrisins innstillar ein lim
Løgtingsskrivstovan innstillar ein lim

Hesi 6 (5) velja sjálvi í felag 7. (6.) limin
Nevndin skipar seg sjálv
Rættarskipanarnevndin viðger arbeiðssetning sín saman við grundlógarnevndini og avtalar eina tíðarfreist"

Tíverri vísti tað seg at vera trupult at fáa sett Rættarskipanarnevndina. Grundlógarnevndin samtykti at velja formannin Jóan Paula Joensen í nevndina og Løgdeildin á Løgmansskrivstovuni tilnevndi Rúna Joensen sum sítt umboð í nevndina. Men Domstolstyrelsen vildi ikki tilnevna nakran lim, Løgtingsskrivstovan heldur ikki, og Advokatráð Føroya bað nevndina sjálva velja tvey umboð av limalista teirra. Eftir at málið var viðgjørt fleiri ferðir á fundum í Grundlógarnevndini, varð at enda vikið frá uppskotinum, sum stóð í arbeiðssetningininum. Tikið var ad notam, at Løgtingsskrivstovan og Domstolsstyrelsen ikki vildu koma við uppskoti til lim. Grundlógarnevndin tilnevndi so advokatarnar Kára Dalsgaard Petersen, Turið Debes Hentze, Hans Trúgva Teirin, Fríðu Patursson og Julionnu Klett í Rættarskipanarnevndina afturat deildarstjóranum á Løgdeildini, Rúna Joensen, og formanninum í Grundlógarnevndini, Jóan Pauli Joensen.

Á fyrsta nevndarfundinum 9. desember varð Kári Dalsgaard Petersen, advokatur, valdur til formann, og avgjørt varð, at Kári á Rógvi, skrivari í grundlógarnevndini, eisini skuldi røkja skrivarauppgávuna hjá rættarskipanarnevndini.

Rættarskipanarnevndin hevði bert 2 fundir. Á seinna fundi varð avgjørt, at formaðurin, Kári Dalsgaard Petersen, og Rúni Joensen skuldu gera uppskot til eitt virkisnotat, sum nevndin skuldi arbeiða eftir.

Av tí at nógv arbeiði hjá nevndini í fyrsta umfari var rutinuarbeiði, valdi formaðurin í Grundlógarnevndini at steðga arbeiðinum í rættarskipanarnevndini eina tíð og í staðin seta ung løgfrøðilesandi í summarfrítíðini í 2000 at umseta galdandi rættargangslóg, sum er á donskum, til føroyskt mál at nýta sum grundarlag fyri nevndararbeiðinum. Hetta arbeiði er komið væl á leið.

## Fíggjarvaldið

*Bólkurin fíggjarvaldið viðger m.a. evni sum játtanarheimild, skattaheimild, demokratiskt eftirlit, fíggjareftirlit, búskapargrunn, landsbanka, landsgrannskoða, hagtøl og gjaldoyra*

Fíggjarvaldið hevur verið viðgjørt á nøkrum fundum, men hetta er eitt sera stórt evni, og tað eru nógvir politiskir spurningar, sum ikki er hugsandi at viðgera endaliga í nevndini til ásettu tíðfreist. Arbeiðið við fíggjarvaldinum er stórt og grundleggjandi, og átti kanska at fingið serstaka viðgerð eins og rættarskipanin. Bólkaleiðarin metur ikki, at tað er møguligt at gera Fíggjarvaldið liðugt í ár.

## Valskipanin

*Bólkurin valskipan viðger m.a. evni sum valdømi, uppstilling, flokkar, fólkaatkvøður og veljarin*

Valskipanin hevur verið umrødd á einum bólkafundi, og spurningurin um valskipanir hevur verið viðgjørdur leysliga fleiri ferðir, men talan hevur ongantíð verið um nakra gjølla, skipaða viðgerð, og tí ber illa til at siga nakað ítøkiligt um, hvussu sjónarmiðini eru um henda spurningin. Men í orðaskiftunum, sum hava verið, hevur bólkaleiðarin fingið ta fatan, at hetta er eitt mál, har politisku umboðini – og kanska eisini hini umboðini – hava ymiskar áskoðanir. Bólkaleiðarin metir ikki, at tað fer at bera til at viðgera evnið endaliga til 31. desember 2001.

## Uttanlandsvaldið

Bólkurin uttanlandsvaldið viðger m.a. evni sum samríkjasáttmálar, einstaklingarættindi, fullveldisflytan, mannagongd í millumlandamálum, sáttmálar og fulltrú.

Bólkurin hevur havt nakrar fundir og eitt upprit er um at verða gjørt, men eingin framløga hevur enn verið í plenum. Bólkaleiðarin metir, at eitt upprit kann verða liðugt til plenumviðgerð móti endanum av oktober mánaða, tað veldst tó um politiska semju í nevndini, um parturin kan roknast sum liðugur.

## Eftirlitsvaldið

*Bólkurin eftirlitisvaldið skal viðgera tær eftirlitiskipanir, ið vanliga eru á stjórnarstigi. Fyrst og fremst eftirlitið hjá løgtinginum við landsstýri og fyrisiting, men eisini annað eftirlit sum landsgrannskoðara, umboðsmann og týdningin av almennum innliti.*

Evnið er enn ikki viðgjørt í bólki, men nertir við evni í øðrum bólkum t.d. tingskipan og fyrisiting og prosess, og skal tí samskipast við hesi. Bólkurin hevur júst skift bólkaleiðara, sum ikki metir, at tað fer at bera til at fáa evnið liðugt til 31.12.2001

## Stjórnarvaldið

*Orðini 'stjórn' og 'stjórnarvaldið umfata her fleiri samskipaðar stovnar og funksjónir. Í stjórn okkara í dag eru bæði løgmaður og hinir landsstýrismenninir, sum tilsamans eru landsstýrið. Undir sær hava teir eina fyrisiting, og harumframt eru serligir fyrisitingarstovnar, sum røkja almennar uppgávur, uttan at vera undir beinleiðis almennum ræði. Eisini hava kommunurnar sína egnu fyrisiting, óhefta av landsstýrinum. Uppgávubýtið millum hesa ørgrynnu av stovnum og funksjónum skal í høvuðsheitum greinast í grundlógini.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upprit um stjórnarvaldið*

Stjórnarvaldið hevur verið viðgjørt á bólkafundum og í plenum. Evnið hevur eisini verið fyri á tíðindafundi. Serliga á ferðini í USA og Íslandi vórðu viðurskifti, sum hava við Stjórnarvaldið at gera, havd frammi.

Í viðgerðini hava ikki verið serligar ósemjur, og tað hava heldur ikki verið trupulleikar av fakligum slagi, men prinsipiellar avgerðir skulu takast í sambandi við valdsbýtið, – serstakliga millum ting og stjórn, áðrenn evnið kann viðgerast liðugt. Bólkaleiðarin metir tí ikki, at arbeiðið kann gerast liðugt til 31. desember 2001.

## Vinnulig og sosial mannarættindi:

*Ásetingar av vinnuligum og sosialum slagi fevna vítt. Felags er tó, at rættindini tryggja møguleikan hjá einstaklingum at virka og taka lut í sosialum og vinnuligum lívi í samvirki við onnur.*
*Søguliga hevur tað ikki verið sjálvfylgja, at so er. Bæði sosialur atburður og vinnuligt virksemi hava verðið løgd í fastar karmar í lóg.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upplegg um vinnulig og sosial mannarættindi*

Bólkurin hevur havt plenumframløgu, men neyðugt er at viðgera evnið meira og gjøllari og fáa tað skrivað í lógargreinar við viðmerkingum.

Nakað av politiskari tvístøðu var, tá bólkurin legði fram tilfar sítt – serstakliga í spurninginum um vinnuligi rættindini. Her eru tað ymisk hugsjónarlig grundsjónarmið, sum gera seg galdandi, og sum krevja gjølla viðgerð – bæði fakliga og politiska. Bólkaleiðarin metir tó, at arbeiðið kann fáast liðugt til 31.12.2001

## Tilfeingi

*Bólkurin tilfeingi viðger tilfeingi av ógviliga ymiskum slag. Í summum førum er nýtslan av tilfeinginum knýtt at stórum fíggjarligum og búskaparligum áhugamálum og í øðrum førum er talan um tilfeingi, sum kanska ikki hevur tann stóra búskaparliga týdningin, men sum fyri nógv fólk heldur er at meta sum ein mentanarligur ella rekreativur kapitalur, sum hevur alstóran týdning fyri lívsvirði og trivna hjá tí einstaka og fyri lívførið hjá bygdaumhvørvunum í landi okkara.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upprit um tilfeingi*

Bólkurin hevur kannað eina rúgvu um tilfeingi og lagt fram upprit um tilfeingi í plenum. Eisini eru løgd fram fleri álit um tilfeingi og tilfeingisnýtslu. Bólkaleiðarin er av teirri fatan, at enn eru fleiri spurningar at loysa og viðgera. Skrivað verða uppskot bæði til lógargreinar og viðmerkingar, sum fyrst skulu leggjast fyri plenum. Bólkaleiðarin roknar við, at arbeiðið kann fást liðugt til 31.12.2001

## Effektivitetur

*Bólkurin effektivitetur viðger, hvønn løgfrøðiligan týdning grundlógin skal hava. Løgfrøðiliga er tað ikki orðamongdin ella orðavalið, ið ger grundlógina virkna, men heldur, um stovnar, heimildir og mannagongdir eru at verja grundlógarásetingarnar.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upplegg um effektivitet*

Bólkurin hevur havt bæði plenumframløgu og tíðindafund . Bólkaleiðarin metir at evnið effektivitetur kann gerast liðugur í heyst, við uppskoti til orðing av grein í grundlógini um hesi viðurskifti.

## Tingskipan

*Tingskipanin fevnir sum evnisøki fyrst og fremst um arbeiðslagið hjá tinginum í sambandi við lóggávuvirksemið, men eisini um aðrar tættir, t.d. ymsu eftirlitsamboðini, ið tingið hevur til taks.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upplegg um tingskipan*

Bólkurin hevur havt bæði plenumframløgu og tíðindafund, og evnið er orðað í lógargreinir, men viðmerkingar eru ikki gjørdar. Á ferðini í USA og Íslandi vóru fleiri framløgur og fundir um evnið *tingskipan*, og nevndin fekk høvi at uppliva tingfundir og hoyringar í ymiskum skipanum.

Eftir er at tillaga broytingar í greinunum og gera viðmerkingar. Bólkaleiðarin metir ikki, at tað skuldi verðið neyðugt at fara aftur í arbeiðsbólk við hesum evni, tí tað hevur ikki elvt til politiska ella fakliga tvístøðu. Hin vegin tykist tað sum um, tað kortini eru ymiskar meiningar, sum enn ikki eru bornar nóg væl fram. Mett verður tí, at enn ein neyv plenumgjøgnumgongd er neyðug. Evnið skal eisini tillagast øðrum evnum, t.d. eftirlitsvaldið stjórnarvaldið og landshøvdingin.

Bólkaleiðarin metir, at arbeiði kann fáast liðugt til 31.12.2001.

## Persónligu mannarættindini

*Bólkurin Persónlig Mannarættindi viðger persónligu rættindini hjá einstaklinginum, sum annaðhvørt ikki kunnu avmarkast, ella bert kunnu avmarkast á serligan hátt. Hesi rættindi eru millum tey klassisku rættindini hjá 'rættarstatinum'. Tey hava fingið almenna viðurkenning langt áðrenn demokratiið gjørdist ráðandi fatanin, og áðrenn tey politisku og demokratisku rættindini vórðu vanliga viðurkend.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upprit um mannarættindi*

Persónligu mannarættindini hava verið viðgjørd á bólkafundum, í plenum, og í nevndini hava verið fleiri átøk, sum hava havt við persónlig mannarættindini at gera. Eitt nú hevur Isi Foighel vitjað nevndina, umboðsmenninir úr Danmark, Noregi og Íslandi hava vitjað, og tveir mannarættindaserfrøð ingar úr danska løgmálaráðnum hava havt skeið um mannarættindi. Eisini hevur verið skipað fyri tíðindafundi. Í viðgerðini hava tað ikki verið serligar ósemjur, og tað hava heldur ikki verið serligir trupulleikar av fakligum slagi. Bólkaleiðarin metir, at arbeiðið gerast liðugt til 31. desember 2001.

## Politisk mannarættindi:

*Politisk mannarættindi eru tey rættindini, sum knýta seg at politiskum atburði í breiðari merking, tvs. ikki bert flokspolitikki. Politisku rættindini hava søguliga verið vard eisini undan demokratinum, men stóðu ikki eins sterk í rættarstatsfatanini, sum tey persónligu mannarættindini. Millum tey politisku mannarættindini eru framsøgufrælsi (ytringsfrihed), pressufrælsi, savningarfrælsi, felagsfrælsi og valrættur.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upplegg um politisk mannarættindi*

Bólkurin hevur havt bæði plenumframløgu og tíðindafund, og evnið er orðað í lógargreinir, men viðmerkingar eru ikki gjørdar. Bólkaleiðarin metir ikki, at tað skuldi verðið neyðugt at fara aftur í arbeiðsbólk við hesum evni, tí tað hevur ikki elvt til politiska ella fagliga tvístøðu.
Í arbeiðinum hevur verið hugt eftir grundlógum í londum, vit vanliga seta okkum sjálvi í bólk við, tá ræður um mannarættindaspurningar, nýggjari grundlógum og altjóða sáttmálum. Nevndin hevur eisini havt serstøk skeið og fundir um mannarættindi.

Eftir er at tillaga broytingar í lógargreinunum, gera viðmerkingar og viðgera evnið endaliga í plenum. Bólkaleiðarin metir, at arbeiði kann fáast liðugt til 31.12.2001.

## Mentan og ideologi.

*Bólkurin mentan og ideologi viðger evnini kirkja og trúgv og mentan. Undir mentan eru evni sum mál, siðaarv og mentanarliga ábyrgd, fjølmiðlar og mentanarligt frælsi, útbúgving og gransking/vísindi.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upprit: mentan og ideolog*

Bólkurin hevur havt tveir fundir og framløgu í plenum.

Evnini hjá bólkinum hava verið fólkakirkja og mentan. Bólkurin hevur samanfatað arbeiði sítt í uppskoti til sjey grundlógargreinir við viðmerkingum og grundgevingum. Tær eru ikki handfarnar løgfrøðiliga og eru ikki málsliga tillagaðaðar til endaligt grundlógaruppskot. Full semja er um, at tað framhaldandi skal verða trúarfrælsi í Føroyum. Spurningurin er hvønn rætt fólkakirkjan skal hava mótvegis øðrum samkomum.

Fólkakirkjan
Her verða tríggjar grundlógargreinir skotnar upp. Arbeiðið við hesum evni er fyribils steðgað, tí spurningurin um, hvat slag av kirkju, Føroyar skulu hava er ikki avkláraður. Skulu vit hava eina kirkju, sum fyrisitingarliga hoyrir inn undir landsumsitingina, ella skal kirkjan loysast frá landinum og landsumsitingini. Bólkurin metti ikki, at hesin spurningur var serliga nógv frammi í kjakinum í Føroyum, og á plenumsfundi í grundlógarnevndini var henda sama meting staðfest. Tað er enn ikki nóg nógv, sum talar fyri, at vit ikki skulu hava eina fólkakirkju í Føroyum, men spurningurin er, hvussu hon skal skipast.

Ein trupulleiki kann tað eisini vera, at eingin kirkjulig serfrøði er í bólkinum. Mælt verður tí til, at kirkjuligir mynduleikar fáa høvi at úttala seg, áðrenn endaligt uppskot verður gjørt, og/ella at bólkurin fær høvi at viðgera evnið saman við kirkjuligari serfrøði.

Hartil er landsstýrið við at fara undir samráðingar um yvirtøku av kirkjuni, og bólkaleiðarin metir, at tað arbeiði má gerast liðugt, áðrenn meira kann gerast. Bólkaleiðarin hevur tikið stig til samband við nevndina, ið hevur gjørt álit í samband við samráðingarnar um yvirtøku av kirkjuni, so at bólkurin kann nýta tað álit sum hendan nevndin hevur gjørt, sum part av arbeiðinum. Einki samband hevur annars verið millum hesa nevndina og Grundlógarnevndina.

Grundlógarnevndin hevur fingið skriv frá fólki við teirra fatan av fólkakirkjuni og kristnitrúnni, sum verða viðgjørt sum partur av arbeiðinum.

Mentan
Bólkurin hevur gjørt uppskot til fýra grundlógargreinir um mentan. Tær eru um mál, siðaarv og mentanarliga ábyrgd, fjølmiðlar og mentanarligt frælsi.

Bólkurin hevur ikki havt fund síðan framløguna í plenum, har í hvussu so er eingin mótstøða varð havd á máli um hesi evni. Ein ógjørdur partur, ið er eftir, er at síggja hesi uppskot í mun til aðrar partar av grundlógaruppskotinum, eitt nú fyri at sleppa undan endurtøkum. Tá talan er um mentan og ideologi, so fer nógv av hesum uttan iva eisini at nema við partin um mannarættindi, um fólkaskúlan og aðrar partar í samfelagnum. Her verður ein tillaging at fara fram, eins og ein tillaging má gerast við støði í teimum altjóða samtyktum sum Føroyar hava bundið seg til at halda.

## Fyristing og prosess

*Bólkurin fyrisiting og prosess viðger rættindini hjá borgarum, tá myndugleikar viðgera mál av týdningi fyri borgaran. Hesi mál eru sjálvsagt fyrst og fremst mál, sum borgarin sjálvur er partur av, men eisini onnur kunnu hava týdning, serliga sum fordømi.*

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upplegg um fyrisiting og prosess.*

Bólkurin hevur bæði havt plenumframløgu og tíðindafund, og evnini eru orðaði í lógarformi.
Mett verður, at tað er ikki neyðugt at fara aftur í arbeiðsbólk við hesum evnum, tí tey hava ikki elvt til nakrar politiskar ella fakligar tvístøður.

Eftir er at samanbera greinarnar við tað sum er framkomið í seinni bólkaarbeiði og tillaga broytingarnar og gera viðmerkingar til hesar lógargreinir. Bólkaleiðarin metir at hetta arbeiði kann gerast liðugt til 31.12. 2001.

## Kommunur

Bólkurin kommunur viðger, hvussu heimildir og ábyrgd hjá kommunum (ella líknandi lokalari, fólkaræðisligari eind) kunnu grundlógarfestast. Møguligir spurningar eru prinsippini um býtið millum stat og kommunur, umframt folkaræðisligu grundreglurnar.

Framlagt viðgjørt tilfar: *Upplegg um kommunur*

Evnið kommunur hevur verið viðgjørt í undirbólkinum á tveimum longri fundum, og skrivað er frágreiðing um evnið, herundir eisini uppskot til hvussu ein “kommunuparagraf” í eini grundlóg kundi verið orðað. Eisini hevur evnið verið framlagt á plenumfundi. Metingin hjá bólkaleiðaranum er, at undirtøka er fyri at tryggja kommunala sjálvstýrið í grundlógarhøpi. Á plenumfundinum var nakað av kjaki um sjálvar paragraforðingarnar, men innihaldsligat ósemjur vóru ongar. Mest grundleggjandi kjakið hevur verið um leiklutin hjá kommununum í at tryggja øllum borgaranum javnbjóðis rættindi og tænastur, mótvegis leiklutinum hjá statinum. Bólkaleiðarin metir, at evnið kann fáast liðugt til 31. desember 2001.

## Niðurstøða

Nú stutt er til arbeiðsskeiðið hjá nevndini sambært lógini er úti, mugu vit ásanna, at arbeiðið hevur verið væl truplari enn roknað varð við, tá nevndin byrjaði. Sjálv nevndarsamansetingin – við parlamentariskari umboðan – hevur verið tíðarkrevjandi og mangan trupul, sersakliga tá samstundis er lagt upp til, at nevndin skal finna politiskar semjur, sum ikki hava víst seg at bera til uttanfyri nevndina. Hetta hevur kravt tol og diplomatiskt kynstur, og ikki minst tíð og góða tilrættarlegging. At gongdin í sjálvstýrismálum varð ein onnur enn væntað, tá lógin varð gjørd, hevur havt við sær, at nevndin hevur nýtt nógva orku til at kanna, hvørjar fortreytirnar fyri arbeiðinum eru. Á fundi 7. september 2001 varð ein arbeiðsháttur funnin, ið ger tað gjørligt at halda fram við arbeiðinum hóast tvístøður um fortreytir.

Nøkur evni verða tó eftir, ið nevndin ikki fær gjørt liðug til ásettu freistina 31. desember 2001 – antin tí tey eru sera umfatandi og grundleggjandi og tí kundu kravt sína egnu, serstøku nevndarviðgerð og tíðarfreist, ella tí tey ikki kunnu gerast heilt liðug vegna ógreiða rættarstøðu í mun til tað, sum lagt verður upp til í arbeiðssetninginum.

Talvan niðanfyri tekur samanum støðuna í ymisku evnisbólkunum í mun til tíðarfreistina.

**Samanumtikið fyri evnisbólkarnar í mun til tíðarfreistina 31.12.2001**

| **Evnið verður liðugt viðgjørt – fakliga og í plenum** | **Evnið verður liðugt viðgjørt fakliga, og støðan í plenum lýst** | **Evnið verður ávegis lýst** | **Evnið verður ikki lýst** |
|---|---|---|---|
| Sosial-og vinn.rættindi<br>Effektivitetur<br>Politisk mannarættindi<br>Persónlig mannarætt.<br>Fyrisiting og prosess | Landshøvdingi<br>Uttanlandsvald<br>Stjórnarvald<br>Tilfeingi<br>Tingskipan<br>Mentan- og ideologi<br>Kommunur | Rættarskipan<br>Valskipan<br>Eftirlitsvald | Fíggjarvald |

Frágreiðingin hevur, áðrenn hon er latin landsstýrsismanninum, fyrst verið løgd fyri grundlógarnevndina, sum hevur havt høvi at viðgera hana og koma við viðmerkingum.

Tórshavn tann 1. oktober 2001

Jóan Pauli Joensen
Formaður

# C. Evnisframløgur

Ætlanin var, at allir bólkarnir hjá grundlógarnevndini skuldu leggja fram evnisframløgu á almennum tíðindafundi. Tað eydnaðist tó ikki at halda allar tíðindafundirnar.

Allar evnisframløgurnar byrjaðu við hesum orðum:

> "Arbeiðið hjá grundlógarnevndini er skipað soleiðis, at fyrst verður arbeitt í bólkum. Hesir viðgera hvør sítt evnisøki og leggja síðani fram fyri nevndini. Tá allar evnisframløgurnar eru at enda komnar, fær nevndin eitt arbeiðsuppskot til grundlóg. Bólkarnir gera tá hvør sínar viðmerkingar til hetta uppskotið. Til tess at skapa alment orðaskifti um grundlógararbeiðið skipar nevndin fyri tíðindafundi einaferð um vikuna um tey evnisøki, nevndin hevur viðgjørt. Seinni skipar nevndin almennar hoyringar um arbeiðsuppskotið og álitið hjá nevndini."

Endamálið var sostatt at birta alment kjak á fakligum og upplýstum grundarlagi. Nógv kom eisini fram í bløðum og øðrum miðlum. Tað skrivaða tilfarið er til taks í savninum hjá nevndini.

Bólkarnir, ið høvdu framløgur vóru:

- Kommunur
- Fyrisitingar og Prosesrættindi
- Persónlig rættindi
- Politisk rættindi
- Stjórnarvaldið
- Virkni

# Kommunur

## Tíðindafundur

**Fundartíð:** *Týsdagur 12. september 2000, klokkan 09:00*

**Fundarstaður:** *Sjó og Vektarbúðin úti í Havn*

## Evnisframløga: KOMMUNUR

### Vald á staðnum
Eigur ein føroysk stjórnarskipan at grundfesta lokala fólkaræðið? Henda spurning hevur grundlógarnevndin tikið upp. Vit kunnu nevna hetta tað vatnrætta valdsbýtið, býtið millum land og kommunur.

Tó at Føroyar ikki hava fleiri íbúgvar enn ein miðalstór donsk kommuna, so er lokala fólkaræðið søguliga fest í okkara samfelagsmenning. Eisini eru oyggjar og mentan okkara so háttaðar, at fólk hava eitt sterkt og nátúrligt tilknýti til øki, bygdir og oyggjar. Tað ger, at um enn landið ei er stórt, so er ikki minni neyðugt at hava eina fólkaræðisliga mótvekt móti miðvaldinum.

### At kunna muna
Rætturin til kommunalt sjálvstýri er staðfestur í donsku grundlógini og í stýrisskipanarlógini. Tað serliga við føroysku kommununum, sammett við okkara grannalond, er støddin, vit hava ikki færri enn 50 kommunur, harav tær flestu hava færri enn 200 íbúgvar.

Tvinni stevnumið tykjast at liggja til grundar fyri kommununum. Annað er virkisføri ella funksjón. Hetta er, at kommunurnar mugu hava eitt ávíst íbúgvaratal, fyri at kunnu átaka sær nakrar grundleggjandi uppgávur. Hitt er økisumboðan. Tað at kommunurnar eru ein felagsskapur fyri tey, sum búgva í einum ávísum øki.

Í Føroyum hevur í nógv ár verið hildið fast um tað seinna, har vanligt er at ein bygd eisini er ein kommuna (tó ikki uttan undantøk). Kommunálitini mæla vanliga til tað fyrra, virkisføri. At hava virkisførar kommunur og samstundis lata lokaløkini (bygdirnar) hava umboðaðan á egin viðurskifti kann tó hugsast samantvinna ígjøgnum lokalráð og kommunalt samstarv.

### Sviar duga
Hjá okkum er ikki nógv sagt í stýrisskipanarlógini um kommunurnar og bygdirnar. Í svensku grundlógini fáa kommunurnar ein meiri framskarandi lut. Hetta sæst longu í innganginum og í fyrsta kapitli, har teir siga, at svenska fólkastýrið gerst veruleiki ígjøgnum kommunalt sjálvstýri.

Svenska grundlógin lýsir eisini kommunala uppbýtið og rættin at álíkna kommunuskatt. Rætturin til kommunalt sjálvstýri er ein hornasteinur í fólkaræðnum í øllum norðurlondum, ongin ivi er um tað. Men ymiskt er, hvussu hesin rætturin at stýra egnum viðurskiftum er tryggjaður í grundlógarsamanhangi.

**Bygdirnar**
Bygdirnar eru framvegis sera týdningarmiklar eindir fyri sosiala og mentunarliga trivnaðin í Føroyum. Vit mugu tí spyrja, um ikki bygdirnar og búsetingin eiga at tryggjast í eini grundlóg. Tí meðan kommunurnar helst gerast størri til tess at kunna røkja fleiri uppgávur, so er enn tørvur á, at bygdirnar kunnu koma til orðana.

Í øðrum londum eru royndir gjørdar við ráðum, ið umboða tey smápláss, sum partar eru av størri kommunum. Tórshavnar kommuna hevur roynt hesa skipan fyri bygdirnar Hvítanes og Kaldbak. Ein skylda at hoyra slík bygdarráð í øllum týðandi spurningum kundi tryggja trivnaðin á smáplássunum, sjálvt um tey ikki longur høvdu egna kommunu.

## Skatturin og løgurnar

Uppií valdsbýtinum millum land og kommunur hongur spurningurin um skattaálíkning. Skulu kommunurnar veruliga kunna taka ymiskar avgerðir um, hvat gagnar fólkinum, mugu tær hava ræði á egnum pengaupphæddum at fíggja avgerðir sínar. Men hvussu skal hesin peningur koma til vega? Kommunurnar kundu fingið eina veiting frá landinum, tær kunnu eisini álíkna skatt sjálvar. Vanligast er tó at brúka eina samanrenning av báðum – veiting og lokalari álíkning.

Til tess at samskipa landsbúskapin hevur landið sett kommununum krøv um hámark ella lámark fyri kommunuskatti, kommunalum íløgum og øðrum slíkum. Hetta er helst neyðugt búskaparliga, men skal tað vatnrætta valdsbýtið hava nakað uppá seg, má mark vera fyri, hvussu nógv kommunurnar verða avmarkaðar í skattaálíkning og íløgum.

## At halda saman

Nakrir spurningar taka seg upp viðvíkjandi kommunum og rættindunum hjá borgarum. Nær kunnu kommunur gera mun á egnum og øðrum borgarum og nær kunnu tær ikki gera tað? Í øðrum londum er vanligt, at kommunan bert veitir egnum borgarum sosialar tænastur, men annars skal seta allar borgarar líka. Hetta er áhugavert, tá kemur til kommunalar skúlar, ítrottarvallir, kommunal størv og dagrøktarpláss.

Eisini er neyðugt at fáa greiðu á, hvør hevur valrætt. Eru tað bert løgtingsveljarar búsettir í kommununi ella eru tað eisini aðrir norðurlendingar, ið her búgva, ella kanska allir kommunalir skattgjaldarar, hvaðani teir so koma, og hvønn lit passið hevur?

## Sýslur og sóknir

Føroyar eru frá gamlari tíð býttar í markatalsbygdir, sýslur og sóknir. Hesar eindir eru fánaðar í týdningi so hvørt kommunurnar eru mentar. Men eiga tær tó at halda fram og vera tryggjaðar sín lut í grundlógini?

Bólkurin, ið viðgjørdi spurningin helt ikki, at hesar eindirnar skuldi við á grundlógarstig. Heldur eigur vanlig lóggáva at ráða slíkum eindum.

## Økismenning

Virknar kommunalar eindir eru helst fortreyt fyri trivnaði og búseting um alt landið. Tað vatnrætta valdsbýtið millum land og kommunur eigur tí at setast í grundlógina. Men orðaskifti krevst at finna, eftir hvørjum atlitum hetta skal skipast. Hvørjum vit skulu taka fyrilit fyri, og hvussu skal tað gerast.
Kommunurnar mugu eisini eins og landsfyrisitingin vera undir eftirliti bæði frá landinum,

umboðsmanni, fjølmiðlum og sínum egnu borgarum ígjøgnum innlit og opinleika. Gjøgnum lokalt ræði undir ábyrgd kunnu økini mennast.

## Sakir / Dømi

Grundlógarnevndin hevur gjørt nógv av sonevndum 'case' metoduni. Á summum lógskúlum verður lóg einans lisin á henda hátt. Við veruligum og hugsaðum dømum ber til at kanna ymsar spurningar og harvið lýsa stjórnarskipanina. Á evnisframløgunum verða fleiri slík dømi tikin fram at lýsa stjórnarspurningar. 'Sakirnar' hava ikki altíð eitt – og einans eitt – 'rætt ' svar, men eru ofta ætlaðar at skapa kjak og umhugsan.

Niðanfyri eru lýst nøkur dømi.

## Dømi 1. Zbigniew Walesa

Zbigniew Walesa er ættaður úr Eystureuropa, men hevur fingið loyvi at vera í Føroyum, so leingi honum lystir.

Zbigniew er raskur handverkari, hevur góða inntøku og letur við gleði sín skatt. Hann er virkin innan ítrott og skipar ofta tiltøk í grannalagnum til tess at fríðka um og skapa triva í nærumhvørvinum.

Zbigniew er tí sera spentur, hvussu man fara at vera við kommunuvalinum. Men nú fær hann at vita, at einans danskir ríksiborgarar og norðurlendingar kunnu fáa valrætt í Føroyum.

ER HETTA RÆTT?

Eiga øll, sum lógliga eru búsett í Føroyum og lata kommunum skatt at hava valrætt lokalt?

Er nakað tjóðskaparligt við kommunum, sum ger, at fremmand skulu haldast burturi?

Skal 'no taxation without representation' galda hjá okkum, í øllum førum fyri kommunalval?

## Dømi 2. Úr kommununi

Stórafjarðar kommuna lýsir eftir kommunalum starvsfólki. Ætlanin er, at seta fólk at vaska, væla um bygningar og hava umsjón við svimjihøllini.

Stórvegis treytir vera ikki settar til førleika, men avgjørt krav er í starvslýsingini, at umsøkjarar skulu vera búsettir í kommununi.

ER HETTA RÆTT?

Merkir tað, at øll eru líka fyri lógini, at kommunur ikki kunnu gera mun á egnum og øðrum, tá størv skulu setast?

Ella eiga bert fólk á staðnum at arbeiða hjá kommununi?

## Dømi 3. Hulduvík

ulduvík er gomul bygd við egnari kommunu. Nú halda fólk tó, at so nógvar uppgávur hvíla á kommununi, at best er at kasta saman við Breiðasundi.

Fólkið í bygdini ræðist tó fyri, at tey ikki koma til orðana, tá mál av týdningi fyri Hulduvík verða viðgjørd. At Breiðasund lovar at spyrja seg fyri á staðnum, tá nakað er, halda tey lítið um.

SKAL GRUNDLÓGIN VERJA SMÁPLÁSS Í KOMMUNUNUM?

Ber tað til, at tey í Hulduvík framvegis velja eitt bygdarráð, sum nú bert verður ráðgevandi, men sum tryggjar at ein sterk rødd umboðar bygdina?

Er tað nóg mikið, at kommunan sjálv velur eina lokalnevnd?

## Dømi 4. Anna Marsanna

Anna Marsanna er sera virkin innan felagslívið í bygdini. Hon er limur í hagstýrinum og nevndini fyri bóltfelagið, bygdarsavnið og flakavirkið.

Hon er von við, at aðalfundur skal haldast á hvørjum ári, og at limirnir í teim ymsu feløgunum eiga at fáa roknskapin sendandi.

Anna Marsanna krevur nú, at kommunan heldur almennan árligan aðalfund, har mest týðandi avgerðir skulu takast, at roknskapurin verður sendur hvørjum skattgjaldara, og at alment innlit og haldgóð grannskoðan verða munagott tryggjað.

EIGA SLÍK KRØV AT VERÐA SETT KOMMUNUNUM?

Skal grundlógin seta nøkur krøv í so máta, ella skulu kommunurnar hava egna stýrisskipan?

Er nóg mikið við vanligu krøvunum í fyrisitingarlóg og tilíkum?

## Samanberingar

Flestu bólkarnir gera nógv burturúr samanberingum. Teir hyggja at, hvørjar ásetingar vanliga eru um tey ymsu evnisøkini í grundlógum og øðrum stjórnarskipanum. Samanberingarnar lýsa vanliga ásetingarnar við lyklaorðum, heldur enn at endurgeva heilar §ir. Til ber at lesa ásetingarnar í søvnunum hjá nevndini ella á heimasíðuni hjá nevndini, sum hevur slóðir til allar lógirnar.

Niðanfyri eru nakrar reglur, bólkurin hevur kannað

## Møgulig áseting í grundlóg um lokala sjálvræðið

§ Kommunur

(1) Føroyar eru skipaðar í primerar fólkaræðiligar eindir, kommunur.
(2) Kommunurnar ráða teimum viðurskiftum, ið best liggja nær at fólkinum. Tær hava heimild at skipa viðurskiftini á staðnum eftir egnum fortreytum, herundir í millumkommunalum samstarvi. Kommunurnar hava rætt at krevja inn skatt, til at skipa viðurskifti síni.
(3) Kommunustýrið verður framt við virðing fyri mannarættindunum, landsins lógum og samhaldsfesti.
(4) Kommunurnar tryggja bústað og trivnað á bygd

Í stuttum eru viðmerkingarnar til ásetingarnar hesar.
ad. 1: Lutur kommunurnar verður lýstur sum partur av fólkaræðinum og valdsbýtinum.
ad. 2: Lýst verða nærleikaprinsipp, skattarættur, kommunufulltrúin, interkommunalt samstarv.
ad. 3: Lýst verða mannarættindi, lógarhierarkiið, solidaritetsprinsippið (ikki-diskiriminatións-prinsippið), trivnaður hjá einstaklingum og bólkum (trivnaður, eisini hjá teimum, sum ikki eru við í meirilutanum).
ad. 4: Lýst verða bústaðarmynstrið, trivnaður.
Ein 'Eftirlitisáseting' eigur eisini at vera í partinum um eftirlitisvaldið.

## Norra

Í Norsku grundlógini verður kommunala sjálvstýrið ikki beinleiðis nevnt. Norska kommunalskipanin fekk ístaðin sína egnu "grundlóg" við sonevndu "formannskapslovene" í 1837, sum fastsetti rættin til lokalt sjálvstýri og hvussu hetta skuldi skipast.

## Danmark og Ísland

Í donsku og íslendsku grundlógunum verður kommunala sjálvstýrið nevnt stutt greitt. Danska grundlógin sigur í § 82, at

"Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov".

Íslendska grundlógin sigur í grein 76, at

"Rétti sveitarfélaganna til að ráða sjálf málefnum sínum með umsjón stjórnarinnar skal skipað með lögum."

Hesar paragraffir geva í prinsippinum rúm fyri rættiliga víðum tulkingum av lokala sjálvstýrinum, men her skal minnast til, at tær hava eina langa tradition at byggja á, sum er við til at geva teimum eitt konkret innihald.

## Svøríki

Í svensku grundlógini fáa kommunurnar ein meiri framtraðkandi lut. Hetta sæst við at longu fyrsti kapittul § 1 slær fast, at

"… Den svenska folkstyrelsen bygger på fri åsiktsbildning och på allmän och lika rösträtt. Den förverkligas genom ett representativt och parlamentariskt statsskick och genom kommunal självstyrelse..."

Svenska grundlógin staðfestir eisini uppbýtið millum primerkommunur og landstingskommunur (amt), at tær eru fólkavaldar og hava rætt at krevja upp skatt (1 kapittul § 7). Eisini staðfestir svenska grundlógin, at kommunuuppbýtið, skipan, skattarættur, uppgávur og ábyrgd annars vera fyriskipaðar í lóg (kapittul 8 § 5).

## Kommunalt sjálvstýri

Rætturin til kommunalt sjálvstýri er ein hornasteinur í fólkaræðnum í øllum Norðurlondum, ongin ivi er um tað. Men sum sæst, er ymiskt hvussu hesin rætturin at stýra egnum viðurskiftum er tryggjaður í grundlógarsamanhangi. Í hesum atliti kann nevnast, at í uppskotinum til føroyska stjórnarskipan frá 1946 hevur § 71 eina orðing líknandi tí í donsku grundlógini.

## Søgan

Í donsku grundlógini er søguliga einasta framda broytingin tann, at rættstavingin og kommateringin eru broyttar. Uppruna orðingin fra 1849 var:
"§ 96. Communernes Ret til, under Statens Tilsyn, selvstændig at styre deres Anliggender vil blive ordnet ved lov."

Galdandi stýrisskipanarlóg er næstan eins fáorðað.

"Kommunurnar
§ 56. Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millum kommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m."

Viðmerkingarnar í stýrisskipanarálitinum til §'ina (har seinni liður tó var partur av §42 í uppskotinum) eru her tiknar við í fullum orðaljóði.

"Ad § 56:
Hetta er ein endurtøka av tí rætti, kommunurnar longu frammanundan hava eftir grundlógarinnar § 82."

Europeiska konventiónin um lokalt sjálvstýri sigur m.a.:

"Princippet om lokalt selvstyre skal anerkendes i den nationale lovgivning og, hvor det er praktisk muligt, i forfatningen."

Víst verður eisini til framløguna og notat hjá nevndini, umframt annað tilfar.

Vegna grundlógarnevndina

Gestur Hovgaard

# Stjórnarvaldið

## Tíðindafundur

**Fundartíð:** ***Týsdagur 03. oktober 2000, klokkan 09:00***

**Fundarstaður:** ***Sjó og Vektarbúðin úti í Havn***

## Evnisframløga: Stjórnarvaldið

### Stjórnin

Fyrr var hugtakið 'útinnandi valdið' nýtt um tað, at kongur syrgdi fyri, at øll hildu lógina. Við stavinum og hørðum revsingum var tann bukaður uppá pláss, sum ikki lýddi lóg og landasið. Á okkara døgum eru nógv fleiri stovnar og hópin fleiri uppgávur at røkja hjá landsins stjórn. Hugsanin er, at orðini 'stjórn' og 'stjórnarvaldið umfata fleiri samskipaðar stovnar og funksjónir.

Í stjórn okkara í dag eru bæði løgmaður og hinir landsstýrismenninir, sum tilsamans eru landsstýrið. Undir sær hava teir eina fyrisiting, og harumframt eru serligir fyrisitingarstovnar, sum røkja almennar uppgávur, uttan at vera undir beinleiðis almennum ræði. Eisini hava kommunurnar sína egnu fyrisiting óhefta av landsstýrinum. Uppgávubýtið millum hesa ørgrynnu av stovnum og funksjónum skal í høvuðsheitum greinast í grundlógini.

### Landsins stýri

Løgmaður er stjórnarleiðari okkara. Formelt hevur hann fingið tær heimildir, sum eftir donsku grundlógini liggja hjá kongi. Eftir at parlamentarisma – tingræði – er vorðin siðvenja, er tó ivasamt, hvar heimildirnar í roynd og veru liggja – hjá løgmanni sjálvum, hjá landsstýrinum, hjá einstøku landsstýrismonnunum, hjá politiska viljanum í tinginum, ella kanska hjá samgonguni. Støða má takast til, hvat valdsbýtið millum løgmann og landsstýrismenninar er internt í landsstýrinum, og hvørjar heimildir løgmaður sjálvstøðugt hevur mótvegis løgtinginum, serliga um hann kann nokta at staðfesta lógir og um hann kann skriva út val.

Landsstýrið er í dag stjórn Føroya. Hvørki í donsku grundlógini ella føroysku stýrisskipanarlógini stendur tó stórvegis um landsstýrið sum stovn. Formliga er støðan, at stjórnarvaldið verður framt ígjøgnum landsstýrismenn, men hóast teir rættarliga hava ábyrgd av ávísum málsøkjum, mugu teir *politiskt* hava undirtøku fyri sínum gerðum. Spurningurin er, hvørjar avgerðir skulu góðtakast politiskt í landsstýrinum sum stovni, hvørjar formliga og hvørjar reelt, og hvørjar landsstýrismenn hava mandat til at fremja av sínum eintingum.

Landsstýrismenn eru stjórnarlimir. Teir hava rættarliga ábyrgd av hvør sínum málsøkjum. Men óvist er, hvat valds- og uppgávubýtið er millum stjórn, stjórnarleiðara og stjórnarlimir.

### At umsita

Fyrisitingin eru teir stovnar undir landsstýrinum, sum fyrisita og fremja lóggávu og stjórnarboð. Fyrisitingin kann býtast í fleiri sløg, avgerðar-, faktisk-, eftirlitis- og kærufyrisiting, ið ávíkavist taka avgerðir, framleiða vørur og tænastur, fremja eftirlit ella taka støðu til kærumál. Trupult kann vera hjá fyrisitingini at halda seg til innan lógarkarmar, akta dómar og kæruavgerðir, samstundis, sum boð

koma frá stjórnarvaldinum. Avbjóðinging er í eini skipan við nógvari (oftast neyðugari og hentari) fyrisiting at finna røttu balansuna millum tað at vera fremjari av lógum, amboð hjá stjórnini og tænastustovnur hjá borgarum.

Óheft fyrisiting eru stovnar, sum ikki ella bert partvís standa landsstýrinum til svars. Serliga undan stýrisskipanarlógini var vanligt at skipa nevndir og ráð við sjálvstøðugum heimildum. Stýrisskipanarlógin forðar nú, at tingið velur limir í slík stýri. Spurningurin er tó, um summir stovnar, eitt nú kærunevndir og stovnar við serligum uppgávum (t.d. landsbankin) eiga at vera óheftir á sínum øki. Sama kann møguliga sigast um alla fyrisiting í summum sløgum av avgerðarmálum, serliga persónsmálum.

## Hvør ger hvat?

Eftir skipanini um parlamentarismu – tingræði – er tað tingið, ið velur løgmann. Spurningurin er, hvussu hetta skal fara fram. Fyrr vóru tað flokkarnir eftir stødd, ið boðaðu til samráðingar eftir val, nú er tað løgtingsformaðurin, ið kannar undirtøkuna. Føroyar hava negativa parlamentarismu, tað vil siga, at løgmaður er valdur og verður sitandi um ikki meiriluti er ímóti honum.

Fyrr valdi løgtingið sjálvt landsstýrismenninar, nú er tað løgmaður, ið velur teir. Í veruleikanum er tað tó samgongan ella rættari: samgonguflokkarnir, sum velja landsstýrismenninar. Spurningurin er, hvar tað er best, at heimildin formliga liggur. Var hon hjá tinginum, bar til eitt nú at hava hoyringar, har løgtingsmenn kundu spurt fólkini í uppskoti um ymisk viðurskifti, áðrenn tey blivu góðkend sum landsstýrislimir.

## Tingið nemur, stjórnin fremur

At fremja ella útinna lógir er vanliga uppgávan hjá stjórnini. Tann dagliga útinnanin er tó løgd til fyrisitingina. Stýrisskipanarlógin hevði sum mál at tryggja, at tingið ikki longur fekk lut í at útinna lógir. Hinvegin kunnu vit spyrja, um stjórnin fekk ov stóran lut í at smíða lógir.

Hildið verður, at kommunurnar hava eina ‘kommufulltrú’. Hetta merkir, at í kommunalu skipanini liggur ein heimild at fremja ávís ‘kommunal’ tiltøk uttan nakra ítøkiliga lógarheimild. Hava landsstýrið ella einstøku landsstýrismenninir eina líknandi heimild, og um so er, hvussu langt røkkur hon? Skiljast má í millum tænastuboð, skipan av almenna bygnaðinum, og skyldur, ið vera lagdar á borgarar. Eisini er spurningur, um játtan krevst.

## At lóggeva

Nógv tann mesta lóggávan verður fyrireikað í miðfyrisitingini. Vit mugu gera av, um tað er rætt, at tingið ikki kann blanda seg uppí útinnan, men at stjórnin í verðuleikanum ger næstan alla lóggávu. Eigur fyrisitingin sjálv at kunna skriva sínar egnu reglur, sum so verða samtyktar av samgongumeirilutanum (við smávegis broytingum)?

Kunngerðarlóggáva verður ofta heimilað í lóg. Á enskum nýta tey hugtøk sum ‘secondary legislation’ og ‘statutory instruments’. Danska og føroyska skipanin loyva í altjóða høpi sera víðum heimildum fyri slíkari regluskapan ella lóggávu í kunngerð. Ofta verður bert ásett, at landsstýrismaðurin kann ‘áseta nærri reglur’. Hvussu nógv eigur lógin ítøkiliga at siga um heimildinar at áseta reglur í kunngerð?
Tann fíggjarligi parturin av fyrisitingini byggir á, at allar almennar útreiðslur skulu hava játtan á fíggjarlóg. Eftir stýrisskipanarlógini eru krøvini – og eftirlitið – við hesum styrkt nógv.

Uttanlandsmál og verjumál hava ofta eina serliga støðu. Uttanlandsmál verða vanliga hildin at vera býtt millum stjórn og ting soleiðis, at stjórnin umboðar landið úteftir, meðan tingið skal góðkenna øll týðandi stig. Í verjumálum kann stjórnin eftir umstøðunum seta sera víðfevnd tiltøk í verk, t.d. halda mál loynilig, nýta vald, seta undantøksstøðu í gildi, osfr. 'Svartabók' vísir ábendingar um, hvussu torfør verjumál eru at fyrisitita.

## At ganga saman

Landsstýrið kann bert verða sitandi, so leingi tingið vil. Tí er samgongan sera týðandi stovnur í stjórnarvaldinum. Samgonguskjalið avger politisku málini hjá samgonguni. Samgongan kann við bæði sínum meiriluta á løgtingi og sínum valdi á landsstýrinum fremja allar tær avgerðir, ið liggja hjá løgtingi og landsstýri. Løgmaður leiðir tó saman við umboðum fyri floksleiðslurnar í samgongu samgonguarbeiðið. Til tess at samskipan samgonguna, verður samgongufundur regluliga hildin. Hóast tær heimildir og skyldur sum løgmaður, landsstýrimenn og løgtingið hava, ber ikki til at fremja hesar, um ikki semja fæst í samgonguni.

Vit mugu avgera, hvussu okkara stjórn skal tillagast øllum hesum og fáast at virka á besta hátt.

## Sakir / Dømi

Niðanfyri eru lýst nøkur dømi, fleiri dømi eru lýst í bólkaframløguni, ið løgd varð fyri grundlógarnevndina. Hesi dømi verða eisini lýst á tíðindafundinum.

## Dømi 1. Fullgott eftirlit

Ført hevur verið fram, at ógreitt er, hvørja skyldu – og heimild – løgmaður hevur eftir stýrisskipanarlógini at halda eftirlit við landsstýrismonnum.

> **SL**
> **§33. Stk. 3.** Løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

HVØRJA EFTIRLITISSKYLDU HEVUR LØGMAÐUR?

> Í Danmark hevur ein ríkisrættarsak verið um eftirlitisskylduna hjá stjórnarleiðaranum.
>
> P.A. Alberti var justitsministari í fleiri ár og samstundis vinnulívsmaður, m.a. stjóri í Sjællandske Bondestands Sparekasse. Eftir at tingmenn høvdu fingið frænir av óreglusemi í vinnuvirksemi og embætisførslu hansara, fór hann frá sum ministari í mars 1908. Í september meldaði hann seg sjálvan – fyri svik fyri 15 milliónir (fíggjarlógin var tá uppá 88 milliónir).
>
> Statsministarin, I.C. Christensen, legði eisini frá sær, men var síðani stevndur fyri ein ríkisrætt.
>
> I.C. var dømdur fyri at hava forsømt sína skyldu at seta kanning í verk, tá tað í tinginum vóru framkomnir upplýsingar um óreglusemi hjá ráðharranum.
>
> Ríkisrætturin helt, at eftirlitskyldan hvíldi á statsministaranum, hóast hetta ikki stóð skrivað – hvørki í grundlóg ella aðrastaðni.

## Dømi 2. Hvør leggur fram?

Nú herviligt glopraregn hevur herjað landið, ætlar ein landsstýrismaður at leggja fram uppskot um ein kreppugrunn. Hansara løgfrøðingar smíða honum eitt slík, sum hann leggur fram á tingi.

Løgmaður og hinir landsstýrismenninir ilskast og krevja, at uppskotið verður tikið aftur og bert verður lagt fram eftir góðkenning frá teimum.

Greitt er, at stjórnarvaldið eftir galdandi skipan hevur lóggávuinitiativ – bæði rætt at seta fram uppskot og í praksis høvuðsstigtakari til nærum alla lóggávu.
Ógreitt er tó, hvør í stjórnini hevur heimildina:

§ 15. Løgmanni, landsstýrismonnum og løgtingsmonnum eru heimilað at seta fram uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir.

§ 22. Eingin umsókn verður løgd fyri løgtingið, uttan at tingmaður ella landsstýrið flytur hana fram.

§33. Stk. 2. Løgmaður samskipar starv landsstýrismanna og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfunda, har m.a. øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og eykajáttanir verða framløgd áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið.

Sambært SL §15, stk. 1 kann ein einstakur landsstýrismaður leggja fram uppskot.

Sambært SL §22 er annaðhvørt ein einstakur tingmaður ella landsstýrið samlað, ið leggur fram.

Sambært SL §33, stk. 2 skulu uppskot framleggjast á landsstýrisfundi áðrenn framløgu á tingi.

HVØR KANN LEGGJA FRAM UPPSKOT VEGNA LANDSSTÝRIÐ?

## Dømi 3. Stjórnarfulltrúin

Landsstýrismenninir í vinnumálum og mentamálum avgera at bjarga føroyska neytaslagnum.

Mentamálaráðharrin velur at brúka pening av játtanini '7.24.3.-Mentanararvur' til endamálið at keypa neytini fyri.

Vinnumálaráðharrin velur at geva jarðarráðnum boð um at brúka tann festileysa garðin 'Trøllastovu' til endamálið; landsverkfrøðingurin fær boð um at velta partar av haganum hjá 'Trøllastovu' til endamálið; Strandsferðslan fær boð um at flyta neytini.

Eisini ætla teir í kunngerð at áleggja fólki at boða frá, um tey eiga sjáldsom føroysk alidýr.

ERU HESAR ÆTLANIR Í INNANFYRI TA FULLTRÚ, STJÓNIN HEVUR?

Ber tað til at brúka játtanina sum ætlað?

Hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum ræði á landsjørðini?

Kann landsstýrismðaurin geva almennum stovnum boð – eisini uttan at gjalda?

Kann landsstýrið gera reglur uttan heimild í lóg?

## Dømi 4. Rúsurnar í Fjarðalagnum

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum heldur fiskiveiðieftirlitið hevur kannað fiskiskapin á havleiðunum útfyri 'Flogoy', har hann sjálvur er valdur, í so grammliga.

Hann gevur tí boð um, at fiskiveiðieftirlitið serliga skal leggja seg eftir at kanna hummararúsir á leiðini 'í Fjarðalagnum', har ein av andstøðuleiðarunum er valdur.

Fiskiveiðieftirlitið heldur hinvegin, at landsstýrismaðurin ikki kann geva einum eftirlitisstovni nøkur boð.

HVAR GONGUR MARKIÐ MILLUM STJÓRN OG FYRISITING?

Skal vatntætt skott vera millum landsstýrismannin og fyrisitingina, eins og reglan er tað í Svøríki?

Ella man tað vera betur at finna røttu javnvágina í hvørjum máli sær, og lata løgting og umboðsmann tala at, um tað er neyðugt?

## Fólkið við

Vónandi fara fólk at nýta høvið at siga sítt frælsi at tala og skriva, nú talu og skrivifrælsið er til umrøðu.

Vegna grundlógarnevndinna

Jóannes Hansen

# Fyrisitingar og Prosesrættindi

## Tíðindafundur

**Fundartíð:** ***Týsdagur 31. oktober 2000, klokkan 09:00***

**Fundarstaður:** ***Sjó og Vektarbúðin úti í Havn***

## Evnisframløga: Fyrisitingar & Proces Rættindi

### Alment og á rættan hátt

Á helluni í Tinganesi hoyrdi løgrætturin rættarmál í gomlum døgum. Tann upprunaliga stjórnarskipanin í Føroyum merkti almenna rættarviðgerð. Vanlig skilafólk vóru við at døma málini, og at dómar eins væl og samtyktir á tingi skuldu fyri at hava gildi fremjast alment og vera øllum kunnug.

Seinni í tíðini var siður, at vanlig fólk á ólavssøku, tá løgtingið varð sett, kundu biða løgmann seta handilsforvaltara, fúta og øðrum embætismonnum spurningar. Hetta eru reglur um alment innlit, kunnleika til lógir og avgerðir. Samanumtikið kunnu vit nevna slík rættindi fyrisitingar og procesrættindi. Hugtakið fevnir um tey rættindi, vit eiga, tá mál verða viðgjørd í fyrisiting ella við dómstólarnar.

### At gera av

Almennir stovnar taka avgerð um nógv ymisk viðurskifti. Flestu fólk fáa hvørt ár eina skattauppgerð, tey nógvu hava koyrikort, søkja um byggiloyvi, ella vilja vita, hvussu høg grannahúsini fara at vera. Um øll slík viðurskifti er ásett í lóg, hvussu og hvat. Tað eru teir ymsu almennu stovnarnir, sum í fyrstu atløgu gera av, hvussu nógv vit rinda í skatti, ella um vit kunnu fáa koyrikort.

Vit hava í Føroyum tvær grundleggjandi lógir, sum sita, hvussu hesir stovnar skulu viðgera umsóknir, og hvussu teir skulu taka avgerðir. Hesar lógir eru lógin um fyrisiting og lógin um alment innlit. Umframt hesar lógir eru lógir fyri hvønn stovn ella hvørt evnisøki sær. Vit hava lógir um forsorg og býarskipanir, sum í sínum lagi hava serligar reglur um, hvør stovnur tekur avgerð, og hvussu teir skulu fara fram.

### At royna

Nógvir stovnar eru sostatt, sum taka avgerðir ella útinna tær lógir, sum løgtingið hevur samtykt. Hesir stovnar taka hvønn dag túsundtals avgerðir, umframt at asfaltera vegir og undirvísa børnum og mangt, mangt annað.

Við hvørt eru fólk ikki nøgd við tær avgerðir, sum slíkir stovnar taka. Tey kunnu eisini vera ónøgd við annað virksemi ella krevja innlit í, hvat tað almenna ger. Í teimum førum, tá vanlig fólk eru ónøgd, kunnu tey leggja mál fyri aðrar stovnar at royna.

Teir stovnar, sum royna avgerðir hjá øðrum stovnum eru bæði dómstólar, kærunevndir, aðalstýri og aðrir stovnar. Ovasti stovnur, sum roynir avgerðir og framferð hjá øðrum stovnum er Hægsti Rættur, sum er felags fyri alt danska ríkið.

Flestu mál fara tó ikki fyri hægstarætt, men verða heldur løgd fyri aðrar stovnar at royna. Nógvar kærunevndir eru, sum meta um mál á ymsum lógarøkjum.

Tá mál verða roynd, kann royndin snúgva seg um bæði tær ítøkiligu umstøðurnar – tað sum kann vigast og mátast – og um lóg. Spurningar um lógartulking kunnu fáa týdning fyri onnur enn partarnar í málinum. Tað er tí sera týðandi, um øll skulu vera líka fyri lógini, at vit hava stovnar, sum royna lógarspurningar.

## Hvar stendur tað?

Á nýggjárinum komandi fáa vit í Føroyum ein umboðsmann. Hesin stovnur er kendur í øllum grannalondum okkara. Umboðsmaðurin lurtar vegna løgtingið eftir kærum frá borgarunum og kannar eftir, um almennir myndugleikar hava tulka lógirnar rætt og viðgjørt málini á rættan hátt sambært fyristingarlógini og innlitarlógini.

Umboðsmaðurin almannakunngerð hvørt ár eina frágreiðing, har hann lýsir týðandi mál. Út frá hesum málum ber til at síggja, hvussu eigur at verða framfarið – eisini í øðrum málum.

Okkara lógir um fyrisiting og innlit byggja fyri ein stóran part á túsundtals mál, sum danski umboðsmaðurin hevur viðgerð hesi seinastu hálvthundrað árini.

Men eisini á øðrum økjum er ringt at vita, hvat er rætt. Allar lógir eru at finna í føroysku lógbókini. Men tað kann vera ringt at finna røttu lógina ella røttu ásetingina. Harumframt kunnu – og skulu – allar lógir tulkast, og tí má tað bera til at finna avgerðir hjá kærumyndugleikum, umboðsmanni ella dómstólum, um ein lóg skal skiljast til fulnar. Slíkar royndaravgerðir eiga helst at verða savnaðar og almannakunngjørdar.

## Reglur í grundini

Summar reglur eru ikki at finna í nakrari ávísari lóg, men eru heldur grundreglur, sum galda allastaðni. Millum hesar reglur er heimildarreglan (legalitetsprinsippið). Heimildarregla sigur, at tað almenna kann bert geva fólki boð, um tað er heimild fyri tí. Toll&Skatt kann bert krevja skatt, um løgtingi samtykkir eina skattalóg og eina fíggjarlóg. Bygdarráðið kann bert nokta fólki at byggja eini 15 metrar høg sethús, um lógin sigur, at bygdarráðið kann avgera henda spurning.

Aðrar slíkar meginreglur eru reglur um, at øll eru líka fyri lógini (líkheitsgrundsetningurin). Tann reglan merkir, at tann sama reglan skal galda fyri tær somu umtøðurnar. Hevur onkur fingið eitt byggiloyvi, eigur ein annar eisini at fáa byggiloyvi, um hansara umstøður eru tær somu. Eru umstøður hansarar hinvegin øðrvísi, er tað ikki vist, at hann eigur at fáa loyvi – ella um tað verður við somu treytum.

Reglan um ikki at fara um mark, ella um proportión er eisini ein slík meginregla. Henda reglan sigur, at myndugleikar skulu ikki nýta meir vald enn neyðugt at náa einum máli. Almennir stovnar skulu ikki gera størri inntriv enn tað krevst í hvørjum eistøkum føri.

## Fyri rættin

Álvarsom brot á lóg og rætt kunnu ofta revsast. Um revsing skal áleggjast, er ein avgerð, sum dómstólarnir skulu taka. Men fyrst verður málið kanna, tað ger politiið ella ein fyrisitingarmyndugleiki, ið hevur heimild at umsita viðkomandi lógarøki.

Sambært altjóða mannarættindum, hevur hvør einstakur rættindi, tá slík mál verða kannaði, rætt til ikki at vitan ímóti sær sjálvum, og til ikki atverða ósømiliga viðfarin undir kanningini, rætt til ein verja og rætt til at málið verður roynt við óheftar dómstólar.

## Hvat skal við

Flestu reglur, sum viðkoma hesum evisøkinum, eru longu at finna í lógbókini, annaðhvørt sum føroyskar lógir, sum reglur í donsku grundlógini, ella sum partur av teimum altjóða mannarætindunum.

Spurningurin hjá okkum er, hvørjar av hesum reglum, vit skulu seta í eina føroyska grundlóg til tess at tryggja okkum, at tær veruliga verða virdar og vardar.

## Sakir / Dømi

**Dømi: Dómsmenn í Føroyum**

Danska grundlógin ásetur, at leikfólk – tað eru fólk, ið ikki eru juristar – skulu vera við at avgera revsimál.

Hetta er til tess at skapa trygleika um óhefti hjá dómstólunum, og fyri at dómstólurin skal hava vanligt vit og skil at meta um prógv, frágreiðingar, trúvirði og aðrar spurningar, sum ikki eru lógarspurningar.

Í Føroyum eru leikfólk bert við í heilt fáum revsimálum sum nevningar. í Danmark sita eisini nakrir dómsmenn saman við dómaranum í smærri revsimálum.

Danir hava fleiri ferð spurt føroyingar, um ikki dómsmenn eisini skulu vera í Føroyum. Seinast – í 1964 – tók løgmáláráðið soleiðis samanum:

"...idet det fra de færøske myndigheders side var blevet gjort gældende, at at indførelsen Annita á Fríðriksmørk domsmandsinstitutionen ville medføre uforholdsmæssigt stort besvær for lægdomerne på grund af de vanskelige vejrforhold og den omstændighed, at en stor del af den mandlige befolkning i lange perioder er på havfiskeri."

ER HETTA RÆTT?

Kunnu kvinnur ikki døma?

Eru veðrið og vegirnir enn ein forðing fyri rættartrygdini?

Duga løgfrøðingar best at skina á prógvum og frásagnum?

## Kjak

Vónandi fáa vit eitt miðvíst alment kjak um fyrisitingarrættindi í Føroyum.

Vegna grundlógarnevndinna

Gurið A. Joensen

# Persónlig Rættindi

## Tíðindafundur

**Fundartíð:** *Týsdagur 29. august 2000, klokkan 09:00*

**Fundarstaður:** *Sjó og Vektarbúðin úti í Havn*

## Evnisframløga: Persónlig Rættindi

### Flest merkir barasta flest

Mannarættindi byggja á eina serliga demokratiska fatan. Yrkjarin spyr, um flest merkir best ella barasta flest? Mannarættindarfatanin svarar, at flest merkir barasta flest. Við øðrum orðum, tá avgerðir skulu takast, skal meirilutin ráða, men hetta skal gerast við atliti til teirra, ið hava eina aðra fatan. Minnilutin hevur altíð nøkur ómissandi rættindi.

Nógv mannarættindi hava upprunan í tíðunum undan tí demokratiska stjórnarlagnum, serliga undir einaveldinum, meðan onnur eru løgd afturat seinni, í demokratiskari tíð. Til felags hava mannarættindini, at tey avmarka politiska og fyrisitingarliga valdið og tryggja einstaklingar ella bólkar ímóti ávísari framferð ella inntrivum í teirra frælsi.

### Bústaður og samskifti, privatlív og familjulív

Tey persónligu rættindini byggja á, at felagsskapurin, tað almenna, altíð skal geva tí einstaka ein virðilig viðferð – eisini tá einstaklingurin hevur framt ein atburð, ið kann vera ólógligur ella revsiverdur.

Í fyrsta lagi eru hetta rætturin til lív, til ikki at vera handtikin uttan orsøk, til ikki at vera píndur ella settur í trældóm og til at flyta, búsetast og samskifta frítt. Síðan at vera virðuliga viðfarin í samband við kanningar hjá tí almenna, at dómstólar skulu góðkenna brot á bústaðin og samskifti eins og fongslingar. Umframt hetta rætturin til privatlív og familjulív, til ognarrætt og somu viðferð sum onnur, at mismunur ikki verður gjørdur.

### Isolatiónsfongsling

Ofta halda vit, at mannarættindi eru sera væl vard hjá okkum. Men í danska ríkinum verður isolatiónsfongsling – einsemisfongsling – sera nógv nýtt. Hesa fongsling, har tann skuldsetti verður avbyrgdur frá umverðini, meta summi at vera at javnseta við píning (tortur). Millum annað danski professarin Isi Foighel, ið hevur ráðgivið nevndini, er av hesi fatan.

### Uttan rættarúrskurð

Eitt annað dømi um brot á mannarættindini eru allar tær heimildir, sum almennir stovnar hava at gera kanningar inni hjá privatum uttan rættarúrskurð. Galdandi grundlóg krevur, at ongin húsarannsókn, haldleggjan, brævakanning ella avlurting fer fram uttan rættarúrskurð, ella tá "særegen undtagelse" loyvir tí. Men hóast tað, loyva bæði fólkatingið og løgtingið ferð eftir ferð almennum mynduleikum at fremja slíkar kanningar uttan rættarúrskurð.

Til dømis kann elnevndin senda fólk uttan rættarúrskurð inn á einstaklingsogn at kanna, um ein elinnleggjari hevur útint eitt innleggingararbeiði á nóg góðan hátt. Eitt var, um hetta kundi fara fram, um tað stóð um lív og ognir, men hví tað altíð skal fara fram uttan rættarúrskurð er ilt at skilja.

## EMRS – Europeiski mannarættindarsáttmálin

Tann 1. mai ár 2000 gjørdist Europeiski Mannrættindarsáttmálin (EMRS ella EMRK) partur av føroysku lógbókini. Hesin sáttmáli er ein nógv betur verja av mannarættindunum enn galdandi grundlóg. Í teimum londum, har hann hevur staðið í lógbókini í nøkur ár, millum annað í Danmark og í Íslandi, verður hann sera ofta nýttur í dómum og avgerðum.

Hóast Danmark úteftir hevur bundið seg eisini at halda mannarættindarsáttmálan í Føroyum, er tað ikki fyrr enn nú, at sáttmálan er ein føroysk lóg sum allar aðrar. Væntandi fara myndugleikar og dómstólar at taka sáttmáln fram um aðrar lógir í mannarættindarspurningum – og væntandi fara bæði einstaklingar og umboð teirra at vísa til sáttmálans bæði ofta og títt, eins og vanligt er í grannalondunum.

Tað kann tó undra, at løgtingið uttan alment orðaskifti hevur góðkent, at tað er ein europeiskur sáttmáli, ið ger av rættindi føroyinga – og at tað er mannarættindardómstólurin í Strasbourg, ið avgerð tulkingarspurningarnar.

## Dynamisk tulking

Mannarættindarsáttmálin er ikki eitt støðugt og fastlæst skjal. Heldur er tað so, at dómstólurin mennir mannarættindini í tulking. Sáttmálin broytir tí innihald og týdning alt eftir, hvussu dómstólurin tekur støðu, sohvørt sum viðurskiftini og hugburðir broytast í Europa.

Hetta verður nevnt dynamisk og ekspansiv tulking. Vit kunnu kalla tað mennandi og víðkandi tulking. Til samanberingar verða borgaranna rættindi í donsku grundlógini vanliga tulkað á sama hátt ella enntá trengri, enn tá tey vórðu skrivað. Hóast norðanlond vanliga siga seg halda mannarættindini, eru tey øll dømd fyri brot á europeiska sáttmálan. Danmark er higartil dømt tríggjar ferðir.

## Proportión

Ein tann mest tíðandi grundsetningur, sum dómstólurin hevur tulkað sum part av sáttmálanum er proportionalitetur. Á føroyskum kunnu vit siga, at máti skal vera við, ella at vit skjóta ikki spurvar við kanónum.

Hetta merkir, at skulu londini gera inntriv í vanligu rættindi borgaranna, so skal tað vera ein orsøk til tess, sum dómstólurin góðkennir. Tað skal vera neyðugt vegna hesa orsøk at gera eitt inntriv, og inntrivið má ikki vera óneyðuga harðligt ella fara longur enn neyðugt. Allir myndugleikar – eisini í Føroyum – hava tí eina lógarfesta skyldu at fara fram við góðum, heldur enn illum, at vera so lagaligir sum til ber.

## Horisontalt

Ein spennandi spurningur er, um mannarættindi bert galda loddrætt, millum borgara og tað almenna, ella eisini vatnrætt, millum borgara og borgara.
Hetta er ein áhugaverdur spurningur, tá t.d. ræður um teldupost á arbeiðsplássinum. Um samskifti er vart ímóti almennari sneytan, er tað eisini vart ímóti, at arbeiðsgevarin ger seg inn á tað ?

## Homogent fólk
Hví skulu vit hava mannarættindi í Føroyum? Í Føroyum hava vit eitt homogent fólk, við áleið somu fatan av rangum og røttum, og við einum stýri, sum í flestu førum virðir persónliga frælsið. Men vandin í tí er júst tann, at tá ein meiriluti (á tingi) er fyri at gera seg inn á einstaklingarættindi, so er ongin inerti, ongin bremsa í skipanini, sum forðar at hetta verður sett í verk

## Sakir / Dømi

Niðanfyri eru lýst nøkur dømi, fleiri dømi eru lýst í bólkaframløguni, ið løgd varð fyri grundlógarnevndina. Hesi dømi verða eisini lýst á tíðindafundinum

## Dømi 1. Pápin úr Russlandi
Ein russari, Vladimir, kemur til Føroya at arbeiða. Hann fær arbeiði sum timburmaður og kennir seg væl í Føroyum. Seinni giftist hann føroyskari gentu. Tey fáa saman sonin Ivan Fríðrikk.

Men nøkur ár seinni verða hjúnini sundurlisin og Vladimir missir arbeiðið sum timburmaður.

Ivan fær nú boð um, at hann sum russiskur ríkisborgari ikki kann vera verandi í Føroyum, eftir at hann er vorðin arbeiðsleysur og ikki longur er giftur við føroysku kvinnuni.

ER HETTA RÆTT ?

<u>Mannrættindardómstólurin</u> í Strassbourg hevur avgjørt henda spurning:

*Dómurin frá EMRD í málinum **Berrehab** (EMD 138)*

Addellah Berrehab var marokkanari og giftist eini hollendskari kvinnu í 1977. Hann fekk loyvi at búgva og arbeiða fast í Hollandi, har hann hevði búð í nøkur ár, orsaka av giftarmálinum. Hjúnini fingu eina dóttir. Í 1979 vóru hjúnini sundurlisin; og eftir drúgva málsviðgerð varð Berrehab vístur av landinum í 1983. (Seinni giftust tey tó aftur).

Dómstólurin segði, at verjan av landsins vælferð, sí art. 8 (2) kann grundað útvísing. Hinvegin eiga Berrehab og dóttirin rætt til familjulív, sí art. 8(1). Dómstólurin helt, at farið var út um tað, sum var neyðugt í einum demokratiskum samfelagi, sí art. 8(2), tí var brot framt á art. 8.
Orðinging var: “a disproportion between the means employed and the legitimate aim persued”.

<u>Sakin</u> vísir,
- at mannarættindi ‘trumfa’ lógir, kunngerðir, rundskriv og avgerðir
- at mannarættindini fyri stóran part eru felags í øllum Europa
- at dómstólurin í Strasbourg avger tulkingarnar – eisini í Føroyum
- at mannrættindi eru galdandi fyri øll í Føroyum – ikki bert føroyingar
- at avmarkingar í persónliga frælsinum mugu grundgevast
- at avmarkingar í frælsinum ikki mugu fara longur enn neyðugt

## Dømi 2. Debora og Sunneva

Eini føroysk hjún, ið bæði eru løgfrøðingar, fáa tvíburðar saman, tvær gentur. Tey semjast um, at onnur gentan skal eita eftir Deboru, ið var "dómari í Ísrael... Til hennara komu ísraelsmenn við rættarmálum." (Dómarabókin 4, 4-5). Hin gentan skal eita Sunneva eftir ommuni og mongum øðrum ættmøðrum, so langt aftur, sum kirkjubøkurnar vísa.

Nú sigur føroyska navnalógin, at ongin kann eita nøvn, sum ikki málfrøðingar hava góðkent og sett á navnalista.

ER HETTA RÆTT ?

- Skulu mannarættindini – rætturin til eitt navn, tað persónliga frælsið ella framsøgufrælsið – trumfa føroysku navnalógina og seta hana til viks ?
- Er atlitið til føroyskt mál ein nóg góð grundgeving fyri at hava eina navnalóg ?
- Tó at so er: er tað tá at fara um mark – úttanfyri proportión – ikki at góðtaka
  a) eitt bibilskt navn, sum lættliga bendist á føroyskum ?
  b) eitt gamalt føroyskt navn, hvørs stavseting er brúkt í langa tíð ?
  c) eitt navn, ið verður uppkalla eftir næstrafólki ?

(Spurningarnir tykist ikki at vera avgjørdir)

## Dømi 3. Tvind

Tvind samtakið av fрískúlum og øðrum stovnum hevði sambært donsku stjórnina framt brot á galdandi lóggávu í samband við almennar stuðulsskipanir.

Tann radikali mentamálaráðharrin Ole Vig-Jensen avgjørdi, at nú var nóg mikið. Heldur enn at prógva misbrúk í hvørjum einstøkum føri og nokta stuðli í einstøkum førum vegna manglandi roknskap og uppgerðir, valdi hann at seta fram eitt lógaruppskot, sum í §7 segði:

"Efter den 31. december 1996 ydes der ikke statslige eller kommunale tilskud i henhold til lov om friskoler og private grundskoler m.v. til følgende skoler:
...
[nøvn].."

Hetta varð samtykt á fólkatingi.

Hægstirættur gjørdi skjótt av og setti lógina til viks við orðunum:

"I overensstemmelse med den almindelige opfattelse i den forfatningsretlige litteratur må det antages, at grundlovens § 3, 3. pkt., sætter visse grænser for, i hvilket omfang lovgivningsmagten kan træffe bestemmelser om enkelte personers retsforhold (singulær lovgivning). Denne forståelse er i overenstemmelse med det retssikkerhedshensyn, der er et af de bærende hensyn bag magtadskillelsen i § 3....
Ved [loven] blev Friskolen i Veddinge Bakker og nogle andre konkret angivne skoler med tilknytning til skolesamvirket Tvind helt afskåret fra at modtage offentlige tilskud efter den 31. december 1996...

Et sådant lovindgreb... er reelt en endelig afgørelse af en konkret retstvist. Efter grundlovens § 3 henhører en sådan afgørelse ikke under lovgivningsmagten, men under den dømmende magt med de deri liggende retsgarantier for borgerne. Højesteret finder derfor, at § 7 i [loven] er ugyldig i forhold til Friskolen i Veddinge Bakker som stridende mod grundlovens § 3, 3. pkt."

Dómurin viðgerð partvís valdsbýtið, men sanniliga eisini tann persónliga rættin til 'due proces' ella við orðunum hjá ST yvirlýsingini "Enhver har ret til fyldesgørende oprejsning ved de kompetente nationale domstole for handlinger, der krænker de fundamentale rettigheder, som forfatningen eller loven giver vedkommende". Tvindskúlarnir høvdu rætt at føra fram síni sjónarmið, at fáa uppreisn fyri tær ákærir, fyrisitingin hevði sett fram. Ein lóg, sum noktaði teimum teirra 'day in court' var tí ímóti grundlógini og ógildug

## Dømi 4. Isolatiónsfongsling

Eiga vit at nýta einsemisfongsling?

Hugsa vit, at eitt ræðuligt brotsverk er framt. Politiið mistonkir ein persón, sum verður handtikin og isolatiónsfongslaður. Eftir tríggjar vikur er hann so illa sperdur, at hann viðgongur allar ákærur.

Sæð frá einum fólkaræðissjónarmiði – 'flest merkir best' – er talan um eina neyðuga framferð. Meirilutin hevur andstygd fyri brotsverkinum og samtykkir lógir, ið loyva harðligari framferð til tess at finna tann seka.

Sæð úr einum mannarættindarsjónarhorni sær sakin øðrvísi út:

"Så langt tilbage som i 1764 sagde en af datidens store retsfilosoffer, Cesare Beccaria, i sin bog "On Crimes and Punishment", at "tortur – som led i efterforskningen af en forbrydelse – var et sikkert middel til at lade stærke frbrydere gå fri, mens man dømte uskyldige, men svagere personer."
(úr Isi Foighel: Kend din menneskeret, síðu 22)

Slíkt hendir ikki hjá okkum, kunnu vit so siga. Isi Foighel sigur tó um hetta:

"I Danmark anvender vi ikke tortur. Men til gengæld sætter vi mistænkte i isolationsfængsel i månedsvis. Dette er utvivlsomt en overtrædelse af Verdenserklæringens forbud mod umenneskelig og nedværdigend behandling. Isolationsfængsel er belastende for den enkelte og for det danske samfund som sådan af følgende grunde:

1. Man sætter personer i isolationsfængsel før de er blevet dømt ved en domstol. Der kan altså være tale om uskyldige mennesker, der udsættes for denne nedværdigende behandling.
2. Isolationsfængsel er ikke blot menneskeligt nedværdigende, men kan være skadeligt for helbredet, eller endog ivaliderende.
3. I praksis kan isolationsfængsel strække sig over mange måneder."

(úr Isi Foighel: Kend din menneskeret, síðu 23)
Isi Foighel er fortalari fyri tí, vit kunnu kalla 'tí demokratiska rættarstatinum'. Stýrislagið skal vera demokratiskt, men tó eigur tað demokratiskt valda fólkatingið ikki at kunna samtykkja at avmarka tað persónliga frælsið á ein hátt, sum brýtur við § 5 í ST-yvirlýsingini "Ingen må underkastes tortur eller grusom, umenneskelig eller vanærende behandling eller straf".

Vónandi fáa vit kjak í lag um evnið.

Vegna grundlógarnevndina

Jóannes Hansen

# Politisk Rættindi

## Tíðindafundur

**Fundartíð:** ***Týsdagur 19. september 2000, klokkan 09:00***

**Fundarstaður:** ***Sjó og Vektarbúðin úti í Havn***

## Evnisframløga: Politisk Rættindi

### Frælsi at velja

Í eini skipan, har fólkið skal ráða, má fólkið eisini sleppa til orðana. Tí er vanligt, at grundlógir verja rættin hjá øllum at seta fram tankar og hugsanir sínar í skrift og talu, og hvønn hátt tey annars ynskja.

Tað politiska frælsið hjá tí einstaka og bólkum fevnir um rættin at sleppa á val, rættin at seta fram hugsjónir og taka ímóti hugsjónum, rættin at savnast og skipa seg í feløg, rættin at gera vart við seg mótvegis almennum myndugleikum og at fáa innlit í virksemi hjá almennum stovnum.

Samanumtikið er hetta frælsið at velja, hvat vit skulu halda, siga, hugsa og lurta eftir, og hvør skal sleppa at stýra á tingi og aðrastaðni.

### Vald og virði

Hetta frælsið kunnu vit nevna talufrælsið ella meiri alment framsøgufrælsið. Eigur tað at vera við í eini føroyskari grundlóg? Verja vit ikki í verki hetta frælsið longu nú, og hava vit ikki tikið undir við altjóða sáttmálum?

Svarið er helst, at vit longu nú verja hetta frælsið – men ofta ikki nóg væl. Mong fólk eru rædd fyri at seta fram sínar tankar í Føroyum. Tey eru bangin fyri, at almennir myndugleikar ella leiðslan á arbeiðsplássi teirra skulu taka tað illa upp, at tey seta fram hugsjónir sínar. Tí er helst rættast, at ein føroysk grundlóg ella stýrisskipanarlóg leggur doyðin á framsøgufrælsið fyri at vísa, at tað er partur av okkara felags virðum og altíð er grundarlag undir almennum avgerðum og myndugleikana framferð.

### At føra fram

Fólk hava nógv ymiskt at føra fram. Summi vilja sleppa at stilla upp til val, onnur at berjast fyri fakligum rættindum, uppaftur onnur at vísa fram listarligu gávur sínar. Nøkur hava eina meining um tingini, onnur vilja bert sleppa at mála húsini hjá sær ljósareyð.

Vit mugu avgera, hvat ein grundlóg skal verja. Greitt er, at nakrar avmarkingar altíð eru, bæði av fyriliti fyri tí almenna og til tess at verja onnur móti ágangi. Men hvar skal markið ganga?

Danska grundlógin sigur, at einhvør hevur rætt at seta fram hugsan sína, tó undir ábyrgd. Sensurur er bannaður. Hetta merkir í sjálvum sær, at fólkatingið kann gera mestum alla framsøgn ólógliga, so at hon verður revsa aftaná – bara tað ikki við sensuri verður forað fólki at bera tær fram.

Tann europeiski mannarættindarsáttmálin sigur hinvegin, at bert tær avmarkingar, sum eru neyðugar í einari demokratiskari skipan, kunnu verða ásettar.

## Fótbóltur og frælsi

Danska grundlógin ger tað sum nevnt møguligt hjá tinginum og øðrum myndugleikum at avmarka talufrælsið. Fyrr varð enntá hildið, at tað við lóg var loyvt at banna at útvarpa fótbóltsdystir – bara hetta ikki varð gjørt við sensuri – tvs. einhvør útvarpsstøð kundi verðið revsað fyri at hava sagt frá fótbóltsdystum.

Nú verður lagdur størri dentur á, at tað mugu vera serligar orsøkir til at avmarka framsøgufrælsið, frælsið at seta fram tankar hugsanir og kenslur á ymsan hátt. Nógv halda nú, at dómstólar, umboðsmaður og aðrir stovnar skulu ansa eftir, at hvørki løgtingið ella aðrir myndugleikar avmarka hetta framsøgufrælsið, uttan tá tað er alneyðugt.

## Almennar hugsanir

Nógv fólk starvast innan tað almenna. Tey hava skyldu at akta boð frá leiðsluni á arbeiðsplássinum. Men samstundis eru tey sum øll onnur borgarar í landinum og eiga rætt at siga hugsan sína um allar almennar stovnar – eisini tann tey arbeiða á. Vanliga eru tey somuleiðis millum teirra, sum hava størstan kunnleika til viðkomandi fakøki, og hava kanska eina serliga fakliga skyldu at gera vart við seg.

Ber tað so til hjá almennum starvsfólki at siga sína hugsan alment um egna arbeiðspláss sítt? Danski umboðsmaðurin hevur í síni siðvenju lagt stóran dent á, at so skal vera.

Tó hevur umboðsmaðurin víst á, at nakrar avmarkingar eru neyðugar til tess at almennar stovnar skulu kunna røkja sínar uppgávur. Leiðslurnar kunnu avgera, hvør úttalar seg vegna stovnin, og avmarkingar kunu gerast viðvíkjandi teimum málum, sum fólk sjálvi sita við.

## Er tað neyðugt?

Hvørjar avmarkingar eru so neyðugar í eini demokratiskari skipan? Ja, fyrst av øllum skal frælsið hjá einstaklingum altíð vigast móti tí hjá øðrum. Øll eiga at verða vard ímóti ágangi. Tí ber til at revsa fólk fyri útspilling og mannminkandi álop á onnur. Eisini er neyðugt at taka fyrilit fyri trygd, heilsu og trivnaði. Tað ber til at avmarka frælsið at blása í horn, sparka bólt ella ganga kravgongu, so tað ikki avmarkar trivna og trygd hjá øðrum fólki óneyðuga nógv – men øll mugu tola nakað av.

Til tess at verja landsins trygd, fyrisiting og stovnar kann vera neyðugt at avmarka framsøgufrælsið. Til dømis hevur mannarættindardómstólurin avgjørt, at dómstólar kunnu forbjóða at miðlarnir endurgeva upplýsingar um eitt rættarmál, meðan tað er fyri, um hetta krevst, til tess at málið kann fáa eina rímiliga og óhefta viðgerð.

## Miðlar til frælsi

Fleiri grundlógir, eitt nú tann amerikanska, nevna serstakliga eina frælsa pressu sum grundarlag undir stjórnarskipanini. Mannarættindardómstólurin hevur eisini hildið, at miðlarnir hava serlig rættindi, bæði tá tað snýr seg um framsøgnir og um at savna sær upplýsingar  Miðlarnir eru tey eyguni, sum flestu fólk síggja veruleikan ígjøgnum. Tí eiga ongar forðingar at verða lagdar teimum, sum ikki eru avgerandi neyðugar. Tvørturímóti kann førast fram, at almennir myndugleikar skulu veita miðlunum serligar sømdir at røkja uppgávu sína.

## Alment orðaskifti
Vanliga verður talufrælsið lýst sum ein skylda hjá tí almenna ikki at gera seg inn á ella ikki at leggja forðingar fyri framsettum hugsjónum. Men, serliga í einum so lítlum landi, er spurningur um ikki tað almenna hevur eina skyldu at skunda undir frælsa talu. Hetta gerst við stuðlaðum miðlum, politiskari upplýsing, við at tryggja fakligum kjaki haldgóðar karmar og við altíð at taka mest møgulig atlit til framsøgufrælsið, eisini tá tað kann vera eitt sindur tvørligt og trupult. – Frí tala skal vera tvørlig hjá onkrum, skal hon virka til at broyta og menna.

## Sakir / Dømi

Niðanfyri eru lýst nøkur dømi, fleiri dømi eru lýst í bólkaframløguni, ið løgd varð fyri grundlógarnevndina. Hesi dømi verða eisini lýst á tíðindafundinum.

## Dømi 1. Atlantic Radio
Tá Útvarp Føroya misti einarættin at senda útvarp í Føroyum, fór Atlantic Radio at senda.

Støðin var vælumtókt og bar fram undirhald eins og hugsjónir og tankar av ymsum slag. Serliga tóku tey yngru væl undir við støðini.

At skapa størri áhuga fyri støðin skipaðu tey á Atlantic Radio fyri eini konsert í Sandágerði í Havn.

Tey gjørdu avtalur við Býráðið sum eigara og kommunalan myndugleika, við FøroyaTele um káplar, við grannarnar og annars øll tey kundu koma í tankar um. Tey vistu, at eftir politiviðtøkunum skuldi loyvi til frá politinum at skipa fyri tiltakinum.

Tá fimmdagaforsøgnin mikudag segði frá góðum veðri leygardagin, avgjørdi Atlantic at halda konsertina leygardag og søkti tí politiið um loyvi.

Svarið var, at politiið brúkti altíð 10 dagar um at viðgera tílík mál. Tí slapp Atlantic Radio ikki at halda konsertina.

ER HETTA RÆTT ?

A. Er ein vinnulig útvarpsstøð vard av framsøgufrælsinum?

B. Eigur politiið at taka serlig atlit til framsøgufrælsið og savningarfrælsið hjá Atlantic Radio?

C. Er tað at fara um mark – uttanfyri proportión – prinsippielt at nokta at viðgera eina umsókn, um hon ikki er innkomin 10 dagar áðrenn?

## Dømi 2. Sóljan
Viðgerðarheimið Sóljan er sett á stovn at hjálpa sálarliga sjúkum fólki. Sálarlæknin Hilmar Spital er stjóri á stovninum.

Nú boðar landstýrismaðurin á økinum frá, at partar av viðgerðini skulu flytast á landssjúkrahúsið og at Sóljan má klára seg við lægri játtan fyri hvønn sjúkling næsta ár.

Hilmar skrivar tí eina grein, sum hann almannakunngerð í bløðunum, har hann millum annað vísir á fakligar kanningar, ið mæla frá at flyta viðgerðina á stór sjúkrahús. Eisini heldur hann tað vera dýrari uppá sikt og verri fyri allar partar at skula spara innan viðgerðina.

Landstýrismaðurin heldur, at stjórin hevur handlað illoyalt móti leiðslubygnaðinum innan heilsuverkið og átti at hava fingið góðkenning frá aðalstýrinum, áðrenn hann úttalaði seg um málið.

ER HETTA BROT Á TALUFRÆLSIÐ HJÁ STOVNSLEIÐARANUM ?

Danski umboðsmaðurin viðgjørdi eina líknandi sak. Í tí málinum úttalaði ein læknastjóri seg um ætlanina at flyta eina deild av sjúkrahúsi hansara til eitt annað sjúkrahús.

Umboðsmaðurin vísti á, at almenn starvsfólk hava júst sama frasmsøgufrælsi sum øll onnur. Tó eru nakrar avmarkingar neyðugar til tess at almennir stovnar skulu kunna virka. Hesar avmarkingar kunnu vanliga bert gerast í málum, viðkomandi situr við innan arbeiðsøkið sítt. Tá ræður um raðfestingar á teirra øki, hava almenn starvsfólk vanliga serligan rætt at koma til orðana.

Umboðsmaðurin helt, at leiðslan á reiðiliga sjálvstøðugum almennum stovnum – sum sjúkrahúsum – hevur rættiliga frítt fyri at úttala seg bæði egna og stovnsins vegna. Tó kann ovasta leiðslan innan heilsuverkið geva honum boð um, at hann bert skal úttala seg vegna stovnin eftir nærri góðkenning. Slík boð hevði læknastjórin ikki fingið.

Umboðsmaðurin mælti tó til, at slíkir leiðslupersónar nýta talufrælsið sítt vandaliga og við umhugsni. Eisini er best, at teir kunna ovastu leiðsluna beinleiðis um tann kritikkin, teir ætla at leggja alment fram.

## Dømi 3. Valsendingar

Nú er komið undir land við samráðingunum millum Føroya og Danmarkar. Samgongutinglimirnir samtykkja sáttmálan og fólkaatkvøða skal vera.

Sjónvarp Føroya velur at bjóða øllum flokkum á tingi við til stóra beinleiðis valsending beint fyri fólkaatkvøðuna.

Fólkafylkingin ‘Nei til Fullveldi’ og ‘18. September Bólkurin’ mótmæla harðliga, at tey ikki fáa innivist í sendingini. ‘Nei til Fullveldi’ hevur savnað nóg mikið av atkvøðum at stilla upp til løgtingsval, og ‘18. September Bólkurin’ hevur vunnið rætt at stilla upp til fólkatingsval.

Báðar fylkingarnar mæla fólki til at atkvøða ‘Nei’ á fólkaatkvøðuni.

EIGA FYLKINGARNAR AT SLEPPA VIÐ Í VALSENDINGINA ?

Danski Hægstrættur hevur viðgjørt eitt mál, ið líkist hesum.

Tá danir skuldu atkvøða um 'EF-pakkan' 27. februar 1986, ynsktu Danmarks Retsforbund, Danmarks Kommunistiske Parti, De Grønne, Marxister-Lenister, Socialistisk Arbejderparti og Det Humanistiske Parti at vera við í valsendingini undan fólkaatkvøðuni.

Flokkarnir høvdu allir rætt at stilla upp til fólkatingsval, men høvdu ikki fingið umboð vald á ting.

Hægstirættur legði dent á, at Danmarks Radio í sendingum sínum fyri valið hevði upplýst um allar áskoðanir um 'EF-pakkan' og at tað tí var í lagi, at bert flokkarnir á tingi, sum høvdu tikið støðu til 'pakkan' sluppu framat í seinastu valsendingini.

## Dømi 4. Grønjakkarnir

Danski blaðmaðurin Jens Olaf Jersild gjørdi í donsku sendingini 'Søndagsavisen' eitt innslag um grønjakkarnar á Østerbro í Kjøbinhavn.

Hetta brotið var um nýnazistar, sum nevdu seg grønjakkar. Hesir ungu greiddu í sera niðursetandi og vanvirðisligum orðum frá síni rasistisku fatan av fremmandafólki í Danmark.

Grønjakkarnir blivu seinni dømdir fyri hesar rasistiksu útsøgnir.

Men eisini blaðmaðurin, Jersild, varð dømdur fyri at hava latið slíka hatska fatan víðari, so at túsundtals fólk hoyrdu og sóu.

HAVA MIÐLARNIR SERLIGAN RÆTT AT BERA FRAM TÍÐINDI ?

Mannarættindardómstólurin helt, at miðlarnir hava rætt at bera fólki tíðindi, eisini tíðindi um, at onnur fólk hava borið fram mannminkandi ella æðrumeiðandi útsagnir.

Dómstólurin vísti á, at talan var um eitt brot í eini longri sending, at sendingin ikki tók undir við tí framførda, heldur tvørturímóti, at sjónvarpssendingar viðhvørt eru skakandi, men at miðlarnir hava til uppgávu at upplýsa um alt, sum fer fram – eisini tað sum annars í sjálvum sær er revsivert.

Tað var tí ikki neyðugt í eini demokratiskari skipan at forða Jersild at gera sendingina um grønjakkarnar.

Dómstólurin setti harvið til viks dómin, Jersild var dømdur í Danmark og avgjørdi, at 'rasimuparagraffin' ikki skuldi galda fyri blaðmannin í hesum førinum.

## Samanberingar

## Uppskot um føroyska orðing

(Uppskotið er lagt fyri nevndina, sum tó onga støðu tók)

*Politisk mannarættindi*

§pm1
Øll hava, uttan íblanding frá almennum myndugleika, rætt til:

1. Hugsanar-, sannførings- og trúarfrælsi. Hesin rættur fatar eisini um frælsi at skifta átrúnað ella sannføring, og frælsi til alment ella einskilt at inna trúgv sína í frálæru, tilbiðing, gudstænastu og halgihaldi.
2. Framsøgufrælsi, sum er rætturin at hava og bera fram upplýsingar, hugmyndir, áskoðanir og kenslur í munnligum, skrivligum og listasniði, í prentaðum líki ella um aðrar miðlar eftir egnum vali.
3. At ogna sær upplýsingar frá hinum almenna, og rætt til at fáa innlit í øll mál hjá almennum myndugleikum, eins og frælsi til frítt at taka ímóti upplýsingum frá, og njóta framsøgufrælsi hjá, øðrum.
4. Frælsi til frítt og friðaliga at savnast, uttan at hava boðað frá hesum frammanundan.
5. Frælsi til at taka seg saman í felagsskapir, uttan at hava boðað frá hesum frammanundan, og hervið eisini frælsi til at stovna politiskar flokkar og ganga saman í yrkisfeløg, áhugamálum sínum til verndar.

§pm2
Hitt almenna hevur skyldu til at verja einstaka borgaran móti at verða noyddur at taka lut í fundum ella øðrum áskoðanarmyndandi tiltøkum ella at verða limur í politiskum flokki, trúðarsamfelagi ella øðrum felagsskapi. Somuleiðis kann eingin borgari verða noyddur at kunngera politisku áskoðan sína, trúgv sína ella meining sína.

§pm3
Løgtingið kann við lóg banna øllum, ið elvir til hatur vegna tjóðskap, ættaraslag ella átrúnað og sum øsir til mismun, fíggindaskap ella harðskap.

*Avmarkingar í mannarættindum*
§pm4

1. Serstakar skyldur og serstøk ábyrgd fylgja við tí at nýta tey rættindi, ið eru ásett í §§??, og tí kann løgtingið í ávísan mun avmarka hesi rættindi í lóg. Avmarkingin kann tó bert verða gjørd við tí í hyggju
   a) at tryggja viðurkenning av og virðing fyri frælsi og rættindum annra manna og til tess at lúka rættvís krøv um siðalag, alment skil, samhaldsfesti og vælferð almenningsins í einum fólkaræðissamfelag.
   b) at verja tjóðartrygd, fólkatrygd, lóg og landaskil, almennings heilsu ella siðalag og at verja lógarásetta tagnarskyldu ella rættindi og frælsi hjá øðrum.
2. Løgtingið kann í serligum føri treyta rættindi av heimarætti ella bústaði.
3. Løgtingið kann veita kristnitrúnni serligar sømdir, uttan tó at gera seg inn á aðrar fatanir.

§pm5
Avmarkingin kann ikki verða meira víðgongd, enn tað sum skal til at røkka endamálinum við henni, og heldur ikki so víðgongd, at hon er ein hóttan móti fríari áskoðanarmyndan, sum er grundarlagið undir fólkaræðinum. Avmarkingar kunnu ikki gerast av politiskum, átrúnaðarligum, mentannarligum ella líknandi orsøkum.

***Onnur rættindi***
§pm6
1. Ásetingaranar í hesi grundlóg forða ikki, at onnur rættindi, ið nattúrliga eru í samsvar við andan í grundlógini, samhaldsfesti og lógarræði, verðar vird og vard.

2. Lógir ella aðrar forskriftir skulu ikki stríða ímóti teim rættindum, ið einstaki borgarin hevur sambært europeiska mannarættindasáttmálanum ella í heimsyvirlýsing sameindu tjóða um mannarættindi.

## Danmark

**§ 29** …Det bestemmes ved lov, i hvilket omfang straf og understøttelse, der i lovgivningen betragtes som fattighjælp, medfører tab af valgret.

**§ 77** Enhver er berettiget til på tryk, i skrift og tale at offentliggøre sine tanker, dog under ansvar for domstolene. Censur og andre forebyggende forholdsregler kan ingen sinde på ny indføres.

**§ 78 Stk. 1.** Borgerne har ret til uden forudgående tilladelse at danne foreninger i ethvert lovligt øjemed.
**Stk. 2.** Foreninger, der virker ved eller søger at nå deres mål ved vold, anstiftelse af vold eller lignende strafbar påvirkning af anderledes tænkende, bliver at opløse ved dom.
**Stk. 3.** Ingen forening kan opløses ved en regeringsforanstaltning. Dog kan en forening foreløbig forbydes, men der skal da straks anlægges sag imod den til dens opløsning.
**Stk. 4.** Sager om opløsning af politiske foreninger skal uden særlig tilladelse kunne indbringes for rigets øverste domstol.
**Stk. 5.** Opløsningens retsvirkninger fastsættes nærmere ved lov.

**§ 79** Borgerne har ret til uden forudgående tilladelse at samle sig ubevæbnede. Offentlige forsamlinger har politiet ret til at overvære. Forsamlinger under åben himmel kan forbydes, når der af dem kan befrygtes fare for den offentlige fred.

**§ 80** Ved opløb må den væbnede magt, når den ikke angribes, kun skride ind, efter at mængden tre gange i kongens og lovens navn forgæves er opfordret til at skilles.

## USA

### First Amendment

Congress shall make no law respecting an establishment of religion, or prohibiting the free exercise thereof; or abridging the freedom of speech, or of the press; or the right of the people peaceably to assemble, and to petition the Government for a redress of grievances.

## Estland

### Article 45 [Framsøgufrælsi, svarar til donsku grundlógina §77]

(1) Everyone shall have the right to freely circulate ideas, opinions, persuasions, and other information by word, print, picture and other means. This right may be restricted by law for the purpose of protecting public order or morals, or the rights and liberties, health, honor and reputation of others. The law may likewise restrict this right for state and local government officials, for the purpose of protecting state or business secrets or confidential communication, which due to their service the officials have access to, as well as of protecting the family life and privacy of other persons, and in the interests of justice.
(2) There shall be no censorship.

## Orðaskifti

Vónandi fara fólk at nýta sítt frælsi at tala og skriva, nú talu og skrivifrælsið er til umrøðu.

Vegna grundlógarnevndar

Ingibjørg Berg

# Virkni

## Tíðindafundur

**Fundartíð:** ***Týsdagur 05. september 2000, klokkan 09:00***

**Fundarstaður:** ***Sjó og Vektarbúðin úti í Havn***

## Evnisframløga: Effektivitetur / Virkni

### Bara tað virkar

Stjórnarviðurskiftini í einum landi kunnu skipast uppá nógvar ymsar mátar. Tað avgerðandi er, hvussu skipanin virkar, og hvussu hon er ætlað at virka. Tað nyttar lítið at hava mannarættindi staðfest í eini grundlóg, um ikki óheftir stovnar eru at verja tann lítla mannin. Valdsbýtið hevur ongan týdning, um tað bert er til á pappírinum. Um ongin veit um teir, er onki virði í prinsippiellum dómum. Ongin kann kenna seg at vera líka fyri lógini, um hann hvørki kennir lógina, ella hvussu onnur verða viðfarin.

### Hvat er meiningin?

Skal grundlógin hava beinleiðis týdning fyri borgaran, ella skal hon heldur vera leiðbeinandi fyri lóggevara? Skulu dómstólar og umboðsmaður og aðrir stovnar hava myndugleika at verja grundlógina, ella skal tað fólkavalda tingið sjálvt gera av, hvussu grundlógin skal tulkast?

Hetta er ein sera týðandi spurningur, sum er svaraður sera ymiskt í ymsum londum. Summastaðni verður sagt, at grundlógin hongur best á vegginum. Aðrastaðni er grundlógin ein týðandi partur av bæði fólksligari og politiskari mentan.

### Tilvitska um grundlóg

Á ymsan hátt ber til at gera grundlógina meiri sjónliga. Vit kunnu seta í grundlógina rættargrundsetningar, sum fólk longu kenna.

'Øll eru líka fyri lógini' hoyrist ofta sagt millum manna. Danska grundlógin hevur ikki nakra almenna áseting um líkheit, men einans eina serliga áseting um, at munur skal ikki gerast á fólki vegna trúgv ella ættarbond. Staðfestu vit í grundlógini eina almenna grundreglu um, at øll eiga somu viðferð eftir lógini, so kundu fólk sagt: 'tað stendur í grundlógini'.

Til samanberingar ber til at hyggja at amerikanskum og donskum filmum. Tað eru ótaldir filmar, har víst verður til 'the constitution', ella sagt: 'I know my rights', ella: 'I plead the fifth'. Meðan tað er knapt so ofta, at víst verður til 'grundloven' ella 'mine grundlovssikrede rettigheder'.

Við hesum er ikki sagt, at amerikanska grundlógin er betri enn tann danska. Men hon er tykist vera meiri týðilig í tilvitskuni hjá fólki.

### At døma um

Flestu virknar grundlógir verða vardar av einum óheftum og sterkum dómsvaldi. Í ES er dómstólurin sera virkin at tryggja effektivitetin hjá ES-sáttmálanum. Sama ger seg galdandi í londum sum USA,

Týsklandi og Norra. Í Danska ríkinum hevur hinvegin valdað fatanin hjá tí radikala politikaranum Viggo Hørup: 'Ingen over, ingen ved siden af (folke)tinget'.

Dómstólarnir hava verið varnir at verja grundlógina og harvið borgaran ímóti tinginum og fyrisitingini. Donsku dómstólarnir hava søguliga verið sera nær knýttir at fyrisitingini, og tí hvørki havt hugin til ella fólksliga undirtøku fyri at vera virknir. Men nú tykist ein onnur tíð vera komin við Tvind-dóminum. Hægstirættur er nú vorðin meiri 'aktivistiskur' helst við ES-dómstólinum og Mannarættardómstólinum sum fyrimynd.

Ætlandi eru teir dómar, sum Danmark og onnur lond hava tapt við mannarættindardómstólin, við til at gera hægstarætt meiri virknan at kanna eftir, um lógir, kunngerðir og avgerðir samsvara við grundlógina og mannarættindini. Men eisini broytta samansetingin av hægstarætti hevur havt týdning. Dómararnir eru ikki allir longur fyrrverandi embætismenn úr løgmálaráðnum.

## 'Endaligheitsáseting'

Bólkurin viðgjørdi spurningin um ásetingar í lóg, sum avmarka møguleikanum hjá dómstólunum at royna avgerðir hjá fyrisitingini.

Vanliga kunnu fyrisitingarmál kærast fyri hægri myndugleikar. Ofta er kærumyndugleikin hjá serligum kærustovni. Við hvørt verður eisini ásett, at hesin kærustovnur endaliga roynir avgerðina, so málið ikki kann leggjast fyri dómstólarnar.

Hetta er m.a. ásett í friðingarlóggávuni. Ikki so lítið orðaskifti stóðst av hesi áseting í samband við ætlaðu útbyggingina hjá SEV. Spurningurin er, um henda ásetingin stríður ímóti grundlógini og stýrisskipanarlógini, ið báðar siga dómsvaldið at liggja hjá dómstólunum og ikki hjá fyrisitingarmyndu gleikum. Støða má takast til spurningin, hvussu vit fata valdsbýtið. Ber til hjá tinginum við lóg at undantaka ávís málsøki frá dómsviðgerð?

## At sita fyri

Allir teir stovnar í Føroyum, sum fyrisita almenna lóggávu og almennar pengar, hava skyldu at fylgja lógunum um fyrisiting og alment innlit. Lógirnar kunnu nevnast 'grundlógirnar' hjá fyrisitingini. Hesar báðar lógir vórðu samtyktar við danskari fyrimynd. Trupulleikin var bert tann, at donsku lógirnar bygdu á fleiri ártíggir av siðvenju hjá umboðsmanninum. Ígjøgnum fleiri túsund avgerðir hevur umboðstovnurin skapt eina siðvenju, sum síðani er fest á blað í hesum báðum lógunum.

Í Føroyum vórðu hinvegin lógirnar samtyktar uttan stórvegis orðaskifti, hvørt vit nú ynsktu somu reglur sum í Danmark. Ymiskt er, hvat stovnar og persónar í fyrisitingini eru kunnaði um lógirnar. Vanlig fólk vita lítið og onki um tær, og ongin umboðsmaður hevur verið at farið til við málunum. Til rættin nyttar vanliga bert at fara, um málið snýr seg um nóg stórar uphæddir, og fólk fáa goldið fyri ein advokat.

Alt hetta merkir, at sera misjavnt er, hvussu ymsir stovnar fylgja lógunum um fyrisiting og innlit. Ójavnt er, um fólk fáa ta vegleiðing, grundgeving, innlit og onnur rættindi, tey av røttum eiga. Ikki tí at vit júst í Føroyum hava verri fólk í fyrisitingini enn aðrastaðni, ella tí stovnarnir ikki vilja fylgja lógini, men heldur tí at virkni hjá lógunum ikki varð tryggjað ígjøgnum undirvísing, upplýsing, almannakunngjørdar avgerðir og ein umboðsmannastovn.

## Tulkingarmøguleiki

Í nógvum førum eru borgararnir als ikki partar av rættarósemjum. Tulkingarspurningar av stjórnarrættarligum slagi verða tí ongantíð lagdir fyri hægsta dómstólin til tulkingar.

Í ES-traktatini (grundlógini hjá ES) er, at ES-dómstólurin kann avgerða trætumál millum stovnarnar. Eitt nú kann ES-tingið stevna ES-kommissiónini (stjórnini). Spurningar um tulkan av valdsbýtinum millum teir ymsu stovnarnar í stjórnarskipanini kunnu sostatt leggjast fyri hægsta dómstólin til tulkingar.

Hjá okkum hevði ein slíkur møguleiki merkt, at tingið heldur enn misálitisváttan ella ákæru um brot á lóg um ábyrgd landsstýrismanna kundi lagt mál fyri ein dómstól. Málini um kirkjulógirnar og fíggjan av rakstrinum hjá SVF eru dømi um tulkingarspurningar, ið løgfrøðingar tykjast rúkandi ósamdir um, men sum eftir hesi reglu kundi verði avgjørdir, heldur enn at tingið og fyrisitingin framhaldandi hava hvør sína fatan av tulkingarspurningunum.

## Sakir / Dømi

### Dømi 1. Ríkislógirnar

Løgtingið samtykkir ríkislógartilmæli um broytingar í hjúnarbandslóggávuni, sum er danskt málsøki. Breið semja er um, at talan er um neyðugar dagføringar, og uppskotini verða samtykt við stórum meiriluta.

Eftir galdandi stjórnarskipan koma broytingarnar tó ikki í gildi í Føroyum fyrr enn tær eru lýstar í kunngerðarblaðnum. Ætlanin var, at landsstýrismaðurin, ið varar av málinum í Føroyum, skuldi syrgja fyri hesum.

Nú heldur landsstýrismaðurin, at ongin orsøk er at seta í gildi fleiri danskar lógir í Føroyum, tí fullveldið er í nánd.

Tingið er á gosi um hetta. Men hvørki andstøða ella samgonga vilja hava landsstýrismannin frá. Heldur vil tingið hava sligið fast, at landsstýrið ikki sjálvt kann gera av, um tað vil kunngerða lógir, ið tingið hevur samtykt.

Tingmenn semjast tí um at stevna landsstýrið inn fyri landsrættin til tess at avgera spurningin endaliga.

EIGUR HETTA AT BERA TIL ?

- Í ES-traktatini (grundlógini hjá ES) er ásett í art. 230, stk. 3, at

Domstolen har... kompetence til at uddtale sig om klager, der indbringes af Europa-Parlamentet, af Revisionsretten og af ECB med henblik på bevarelse af disses prærogativer.

- Í Norsku grundlógini er ásett, at

Norska Grundlógin § 83.
Storthinget kan indhente Høiesterets Betænkning over juridiske Gjenstande.

Hjá okkum er – sum er – ongin siðvenja fyri at leggja slíkar tulkingarspurningar fyri dómstólarnar.

## Dømi 2. 'Endaligheit'

Ikki so lítið orðaskifti stóðst í samband við ætlaðu útbyggingina hjá SEV. Millum annað vóru fleiri ónøgd við, at yvirfriðingarnevndin er ovasti myndugleiki, ið kann royna spurningin um samsvarið millum rættindini hjá SEV og so friðingarlóggávuna.

Í løgtingslóg um náttúrufriðing stendur, at teir úrskurðir, sum yvirfriðingarnevndin ger, eru endaligir og kunnu ikki skjótast inn fyri dómstólarnar.

Lógin um náttúrufriðing er samtykt í 1970 við uppaftur eldri lóggávu sum fyrimynd. Lógin tekur tí ikki fyrilit fyri umhvørvisspurningum í samsvar við nýggjari fatan. Yvirfriðingarnevndin velur ikki at tulka lógina dynamiskt og leggja størri dent á umhvørvi.

ER HETTA Í STRÍÐ VIÐ GRUNDLÓG OG STÝRISSKIPANARLÓG?

Stýrisskipanarlógin § 40.
Dómsvaldið er hjá óheftum dómstólum, sum virka sambært rættargangslógini fyri Føroyar.

Grundlógin § 3.
Den lovgivende magt er hos kongen og folketinget i forening. Den udøvende magt er hos kongen. Den dømmende magt er hos domstolene.

Grundlógin § 63. Stk. 1.
Domstolene er berettigede til at påkende ethvert spørgsmål om øvrighedsmyndighedens grænser.

Danski hægstirættur hevur – sera treyðugt – góðtikið at dómstólarnir ikki hava dømandi valdið á øllum økjum. Skal valdsbýtið gerast ein veruleiki í Føroyum, eiga lógarspurningar altíð at kunna leggjast fyri dómstólarnar, at enda fyri tann ovasta dómstólin.

## Dømi 3. Arbeiðsskaðar

Í donskum – og føroyskum – rætti eru reglurnar um skaðabøtur (erstatning) fyri mesta partin dómararættur. Hetta merkir, at tað er í dómum at tær almennu reglurnar finnast. Sama ger seg galdandi, tá dómstólarnir avgerða tulkingariva ella fylla út glopp í lóggávu.

Nú dettur ein maður í Nakskov, tá ið hann vaskar bil á einum bilverstaði, har hann starvast. Orsøkin er, at hann er í ov hálum skóm. Danski hægstirættur avgerð, at arbeiðsgevarar hava ábyrgdina av, at arbeiðsfólkið er í fótgóðum skóm.

Sama hendur stutt eftir fyri ein mann, sum vaskar bil á einum verkstaði í Klaksvík. Føroya Rættur dømir nú arbeiðsgevaran eftir teirri reglu, sum hægstirættur hevur gjørt á, tí dómarin metir seg bundnan av hægstarætti.

ER HETTA RÆTT ?
A. Tá lógir skulu kunngerðast fyri at fáa gildi, eiga prinsippiellir dómar ikki eisini at verða almannakunngjørdir?
B. Tá danskar ríkislógir skulu kunngerðast í føroyska kunngerðarblanum fyri at fáa gildi, eiga so ikki eisini dómar, sum leggja skyldur á føroyskar arbeiðsgevarar, at verða kunngjørdir?

C. Tá danskar lógir bert fáa gildi í Føroyum, um løgtingið samtykkir ríkislógartilmæli, eiga danskir dómar ikki eisini bert at fáa gildi, um føroysku dómstólarnir meta, at reglan er hóskandi til føroysk viðurskifti?

## Dømi 4. Norsku arbeiðskonurnar

Nógvar vælmeinandi reglur eru gjørdar millum ár og dag. So er eisini í Norra. Har varð fyrst í fimtiárunum gjørd kanning av eini lóg, ið ætlað var at verja hjálparfólk, ið tæntu ella hjálptu til í húsarhaldum.

Fakfeløg teirra høvdu kravt lóggávuna. Millum annað at arbeiðsdagurin í mesta lagið skuldi vera 10 tímar, at báðir partar skuldu kunna krevja skrivliga avtalu, at gjaldast skuldi fyri yvirtíð, og at hjálparfólkið fekk frí sunnudagar.

Kanningin vísti, at hesar reglur vórðu illa hildnar. Flestu hjálparfólk vistu ikki av, hvørja ásetingar vóru í lógini. Nøkur kendu til lógina, men fá høvdu nakrantíð sæð hana. Tær reglurnar, ið blivu hildnar, vóru fyri tað mesta slíkar, ið longu vóru siðvenja á økinum.

Nøkur ár seinni var kanningin endurtikin, og var tá heldur frægari samsvar millum teori og praksis

ER TAÐ NÓG MIKIÐ AT KUNNGERÐA LÓGIRNAR?

A. Eiga vita at nýta faldarar og aðra upplýsing, serliga tá talan er um veikar samfelagsbólkar?

B. Skulu serligir stovnar til at tryggja, at slík lóggávu verður yvirhildin, ella skulu dómstólarnir hava til uppgávu at verja rættindi hjá teimum, sum ikki vanliga lesa kunngerðarblaðið?

C. Áttu fólka- og miðnámsskúlar at undirvíst fólki viðvíkjandi rættindum teirra, og upplýst tey um lógir og reglur?

Vegna grundlógarnevndina

Rúni Joensen

# D. Bólkarnir

Í hesum partinum greiða bólkaleiðararnir frá, hvussu statt er við viðgerðini av evnisøkjunum, ið teir hava ábyrgdina av.

## INNGANGUR

Niðanfyri er greitt frá støðuni hjá ymsu bólkunum. Flestu evnini eru viðgjørd í upprunabólkunum, á størri bólkafundum á teimum fundunum, ið hildnir vóru á Sjómansheiminum, í sperribólkum og í plenum.

Byrjað verður við at lýsa spurningarnar einum gráum kassa, har tað i stuttum verður orðað, hvat evnið snýr seg um, og hvussu langt er komið við arbeiðinum. Síðani verður greitt frá tí, ið liggur til grund fyri teimum lógargreinunum í uppskoti.

Tað eru ymisk fólk, sum hava orðað teir ymisku partarnar. Stílurin kann tí vera eitt sindur ymiskur. Formaður og skrivstovan hava kortini roynt at fingið hesa framløgu so eins sum gjørligt.

Hetta er ein frágreiðing frá formanninum. Formaðurin hevur ikki sett nakrar ásetingar til atkvøðugreiðslu. Tí er sera umráðandi ikki at fata – ella umrøða – ásetingar ella tilmæli í hesi lóg sum tað, ið grundlógarnevndin mælir til, uttan heldur er talan um frágreiðingar um evni, nevndin hevur viðgjørt og boð frá samfelagsfrøðingunum uppá hugsandi loysnir.

Fyri allar bólkar er tað galdandi, at rúgvusmikið tilfar er tøkt í savninum hjá nevndini.

Ætlanin var, at tá eitt endaligt uppskot til grundlóg var skrivað, so skuldi tað leggjast fyri plenum og endaliga samtykkjast lógargrein fyri lógargrein sum uppskot til grundlóg fyri Føroyar. So langt komu vit ikki innanfyri tilmáldu tíðarfreistina.

Í seinni frágreiðingina, tá arbeiðið er tikið uppaftur, fara væntandi eisini at standa breiðari søguligar og samfelagsfrøðiligar lýsingar. Her uppi hoyrdi eisini ein meting av møguleikanum at hava eina grundlóg í landi, sum ikki er eitt fullveldi ella er eitt fullveldi í samveldi.

Formaðurin hevur umrátt hendan spurning við lógkønar serfrøðingar í útlondum. Niðurstøðan av hesum er at hetta fyrst og fremst er ein spurningur, sum føroyingar sjálvir eiga og svara. Tað sigur seg sjálvt, at meðan Føroyar eru partar av danska ríkinum, er tann danska ríkisgrundlógin onkursvegna omanfyri teirri donsku. Velja vit at gera ein lidna stjórnarlóg longu nú, má hon hava greiðar ávísingar til, at Føroyar eru og kunnu vera í samveldi við onnur lond ella ríki, og greiðar mannagongdir fyri, hvussu støðan kann broytast. Er ein slík stjórnarlóg væl úr hondum greidd, er tað ikki neyðugt at broyta hana eftir at vit hava tikið fullveldi – og heldur ikki, um Fullveldið Føroyar velur at knýta seg at onkrum samveldi millum fullveldisríki.

Tað arbeiðið, sum nú er komið í stropa, kundi verið eitt egg av slíkum slag. Í hesum eggi eigur ein so nýtilig grundlóg at liggja, at tað tá tað brestur fyri nev politiskt, kann hon bæði verða til ein fullveldisunga, sum staks breiðir veingirnar út og fer á flog ella ein sjálvstýrisunga, ið meir varðisliga venjir sínar veingir. Politiski meirilutin eftir valið ger hetta av. Í øllum førum kann ein føroysk stjórnarlóg fáa týdning fyri eitt sjálvstøðugt politiskt lív í Føroyum. Tað er fatan formansins, at allir politiskir flokkar eru áhugaðir í eini grundlóg ella stjórnarskrá, ið skal loysa stýrisskipanarlógina av – og at hendan skal fáa ein hægri status og meiri týðandi støðu uttan mun ríkisstøðu Føroya.

Lat meg at enda endurtaka – hetta er ikki tilfar, ið nevndin hevur tikið støðu til. Heldur er hetta tilfar, ið nevndin hevur kunnleika til, og sum kann gerast støði undir eini føroyskari evstulóg.

Jóan Pauli Joensen,
formaður

# Persónlig rættindi

**Bólkurin Persónlig Rættindi** er partur av høvuðsbólkinum Rættindi – ella mannarættindi.

Bólkurin hevur viðgjørt persónligu rættindini hjá einstaklinginum, sum annaðhvørt ikki kunnu avmarkast, ella bert kunnu avmarkast á serligan hátt. Hesi rættindi eru millum tey klassisku rættindini hjá 'rættarstatinum'. Tey hava fingið almenna viðurkenning langt áðrenn demokratiið gjørdist ráðandi fatanin, og áðrenn tey politisku og demokratisku rættindini vórðu vanliga viðurkend. Millum teirra eru rætturin til lív og trygd, persónliga frælsið, ognarrættin, bústaðarfrælsið og samskiftisfrælsið.

Evnið er viðgjørt í bólki, og bólkurin hevur lagt fram upprit um Persónlig Rættindi, har evnið verður viðgjørt í einum breiðum samanberandi høpi. Hetta upprit er tøkt í skjalasavninum hjá Grundlógarnevndini.

Evnið er viðgjørt á fundi, har øll nevndin var savnað, tað er lagt fram á tíðindafundi, gjøgnumgingið grein fyri grein og stykki fyri stykki á fundum, har øll nevndin var savnað, tað er viðgjørt í sperribólki og lagt fram á 29. Grundlógarfundinum, sum varð hildin 30. november 2001, har tað var viðgjørt.

## Støði

Tey persónligu rættindini eru slík, sum annaðhvørt ikki kunnu avmarkast ella bert kunnu avmarkast á serligan hátt.

Persónligu rættindini avmarka politiska valdið og miðlarnar hjá fyrisitingini.

Mannarættindi byggja á eina serliga demokratiska fatan. Tá avgerðir skulu takast, skal meirilutin ráða, men hetta skal gerast við atliti til teirra, ið hava eina aðra fatan. Minnilutin hevur altíð nøkur ómissandi rættindi, tað vil siga rættindi, sum undir ongum umstøðum kunnu takast frá teimum.

Til felags hava mannarættindini, at tey avmarka politiska og fyrisitingarliga valdið og tryggja einstaklingar ella bólkar imóti ávísari framferð ella inntrivum í teirra frælsi.

Persónligu rættindini siga bæði, hvat rúm einstaklingurin eigur stjórnarrættarliga, har valdið ikki kann fara innar, og harumframt, hvussu hin einstaki skal viðfarast á teimum økjum, har fólk kenna seg serliga viðbrekin.

## Uppskot til lógargreinar:

### § 1. Lív og trygd

(1) Øll eiga rætt til lív og trygd.
(2) Deyðarevsing kann ikki ásetast.

## § 2. Persónliga frælsið

(1) Ein og hvør er frælsur og fríur.
(2) Nú samtykkir løgtingið lógir um frælsistøku ella aðrar skerjingar av frælsinum. Tá skulu allar avgerðir eftir teimum lógum kunna leggjast fyri dómara.
(3) Nú verður einhvør handtikin fyri brotsverk. Hann skal tá sjálvur, í seinasta lagi innan 24 tímar, fáa høvi at leggja málið fyri dómara.
(4) Dómarin kann áleggja longri varðhald, tó í mesta lagi fýra mánaðar.
(5) Dómarin kann í heilt serligum førum áleggja varðhald í einingi ella partvísari avbyrging, tó bert í tveir mánaðar.

## § 3. Bústaður og Samskifti

(1) Bústaðurin, før og alt privat samskifti eru vard móti anramanna og almennum inntrivum.
(2) Nú eru rannsókn, kanning og hald neyðug sambært lóg og landsins tørvi. Tá skal rættari í úrskurði avgera, um tað er loyviligt.
(3) Har tað er alneyðugt kann tingið í lóg loyva kanning uttan úrskurð frammanundan. Er tað ógjørligt at fáa úrskurð undan atgerð, skal úrskurður tó gerast aftaná.
(4) Tá atgerð fer fram, skal hon greiðliga fráboðast og avmarkast.
(5) Tá atgerð fer fram, skal hon greiðliga fráboðast og avmarkast.

## § 4. Ognarrættur

(1) Allar ognir og øll rættindi eru vard ímóti ágangi.
(2) Nú skal almennur myndugleiki fremja atgerð sambært lóg, og tørvar honum sambært neyðugum og átroðkandi tørvi at ráða privatari ogn ella rætti. Tá kann myndugleikin eftir mannagongd í lóg krevja at keypa rættin.
(3) Fyri slík kravd keyp skal myndugleikin lata fullan prís umframt at gjalda fyri órógv.
(4) Øll mál um ognartøku og kravt keyp kunnu viðgerðast sum rættarmál.

## Viðmerkingar

**Lív og trygd**

***§ 1.***
*Øll* merkir øll tey fólk, ið koma undir føroyskt løgdømi antin sum borgarar í landinum ella á annan hátt.

*Lív* er rætturin at liva; ikki bert vera á lívi, men eisini at liva sømiliga eftir egnum fortreytum og virðum.

*Trygd* er verjan móti at verða órógvaður tilvildarliga og óvirðiliga, antin uttanífra ella av almenna valdinum.

(2) *Deyðarevsing* er revsing, ið merkir at tann dømdi missur lív sítt. At deyðarevsing ikki kann ásetast merkir, at tingið kann ikki viðgera uppskot um deyðarevsing, at tað harvið ikki er møguligt at samtykkja lóg um deyðarevsing, og at tað hjá dómara ikki er møguleiki at døma deyðarevsing.

**Persónliga frælsi**

*§ 2.*
*Frælsur og fríur* merkja, at útgangsstøðið er frælsi. Tað almenna skal í lóg hava greiða heimild at avmarka og skerja frælsið.

(2) Tey persónligu rættindini byggja á, at felagsskapurin, tað almenna, altíð skal geva tí einstaka eina virðiliga viðferð – eisini tá einstaklingurin hevur framt atburð, ið kann vera ólógligur ella revsiverdur.

*Frælsistøka* merkir ikki bert fongsling í brotsmálum, men eisini aðrar skerjingar, eitt nú innan sálarliga viðgerð og barnaforsorg. Frælsistøka er ikki í sjálvum sær forboðin, men krevur greiða heimild og skal altíð kunna roynast.

*Aðrar skerjingar* kunnu vera at nýta ella halda aftur persónligar upplýsingar ella persónin sjálvan á annan hátt enn frælsistøku. Hetta kann vera at gera kanningar av ílegum ella at nýta mannagøgn í viðgerð.

(3) Hin einstaki eigur at vera virðiliga viðfarin í samband við kanningar hjá tí almenna.

*Skal fáa høvi.* Tað er skyldan hjá løgregluvaldinum at leggja málið fyri dómaran. Tann handtikni hevur ikki nakra skyldu at upplýsa málið ella at leggja tað fram.

*Sjálvur.* Tann handtikni skal altíð persónliga fáa høvi at tala sína søk, um hann ynskir tað, men um hann ynskir tað, so kann hann verða umboðaður av øðrum.

*Innan 24 tímar.* Freistin merkir ikki, at tað er frítt fyri at handtaka fólk í minni enn 24 tímar. Eisini styttri handtøkur kunnu roynast og skulu leggjast fyri dómara, um handtikni ynskir tað. Handtøkan skal ikki varða longur enn dómarin metur neyðugt í einstaka førinum.

*Brotsverk.* Reglan er bert galdandi fyri brotsverk, men krav má vera til líka skipan á øðrum økjum, har frælsistøka fer fram, sum stykkið frammanfyri sigur.

(4) Tá handtøkan er løgd fyri dómara skal hann eftir umbøn frá løgregluni taka støðu til, um neyðugt er at leingja varðhaldið.

*Dómarin áleggja.* Einans dómarin kann áleggja longri varðhald.

*Í mesta lagi fýra mánaðar.* Varðhald kann ikki varða longri enn fýra mánaðar. Eftir hetta má annaðhvørt dómur vera fallin og revsing byrjað, ella skal hin handtikni latast leysur. Til ber tó hjá dómara at leggja aðrar treytir á, tað verið seg veðfæð ella skyldu at halda seg innanlands.

(5) Í serligum førum kann hugsast, at handtikin kann órógva kanningararbeiðið so nógv, at hann má avbyrgjast. Avbyrgingin skal vera so avmarkað sum gjørligt, og bert í heilt serligum førum vera avbyrging í einingi.

*Í Einingi* er fullkomin avbyrging frá øllum øðrum fangum og øllum samskifti.

*Partvís avbyrging* kann vera ikki at fáa vitjan, ikki at vera saman við ávísum øðrum fangum ella á annan hátt vera avmarkaður í vanliga samskiftinum, uttan tó at missa alla samveru.

## Bústaður og samskifti

*§ 3.*
Bústaðurin er vardur og er tí ikki alment atkomiligur. Almennir myndugleikar kunnu tí ikki kanna gruna sín í privata bústaðnum. Landið skal eisini verja bústaðin móti øðrum atgerðum.

*Bústaður og før* eru allar íbúðir, skrivstovur, vinnustovur, skip, bátar, floteindir og onnur høli ella ferðslufør, ið privatpersónar, feløg ella virki nýta sum sín heimstað, vinnustað ella ferðslumiðil.

*Samskifti* fevnir um allar samskiftishættir, bæði kendar og higartil ókendar.

(2) Tá neyðugt er at fremja kanningar inni á privatum rúmi kann hetta verða loyvt.

*Neyðugt.* Eins og aðrastaðni í hesi lóg merkir neyðugt tað, ið óheftur dómari metir vera neyðugt í einstaka førinum. Tað er ikki nóg mikið, at ávís sløg av kanningum verða sagdar neyðugar í lóg, eitt nú allar kanningar hjá einum ávísum almennum stovni. Heldur ikki er nóg mikið, at almennur stovnur heldur tær vera neyðugar.

*Landsins tørvur* kann vera at tað stendur um lív og ognir, at upplýsingar ella vitan kunnu fara fyri skeytið.

(3) Í summum førum ber ikki til at fáa úrskurð frammanundan. Í slíkum málum kann tingið veita heimild til kanning uttan rættarúrskurð, um henda er alneyðug í einstaka førinum. Hetta kann vera galdandi fyri kanningar á sjónum ella kanningar av brotsverkum, meðan tey henda.

*Ógjørligt undan.* Stovnur, sum hevur heimild at gera kanning uttan úrskurð frammanundan, má meta í hvørjum føri sær, um neyðugt er at bíða við úrskurðinum.

*Aftaná.* Eins og tá talan er um handtøku, skal dómari royna atgerðina, aftaná hon er framd.

(4) Tá ræður um avmarkingar av frælsinum er týðandi at halda seg til markregluna. Tað merkir, at skulu myndugleikar gera inntriv í vanligu rættindi borgaranna, so skal tað vera ein orsøk til tess, sum dómari góðkennir. Inntrivið skal ikki vera óneyðuga harðligt ella fara longur enn neyðugt. Allir myndugleikar hava tí skyldu at fara fram við góðum, heldur enn illum og vera so lagaligir sum til ber.

*Fráboða.* Til tess at tað skal vera gjørligt hjá borgara at vita, hví og hvussu nógv, hann verður kannaður, skal kanningin greiðliga fráboðast honum. Dómarin kannar, um inntrivið er hildið innan teir karmar, ið fráboðaðir eru.

## Ognarrættur

*§ 4.*
Tey virði, sum eru vorðin privatar ognir, eru vard móti ágangi.

*Ognir og rættindi* kunnu fevna um fastar ognir, leysafæð, upphav og avmarkaði rættindi sum brúksræt ella leigurætt.

*Ágangur* eru inntriv móti einstøkum ognum ella eigarum. Almennar lógir sum byggireglur ella kappingarreglur eru ikki ágangur

(2) Hóast vandaliga og virðiliga framferð kann tað gerast neyðugt at gera seg inn á privat rættindi. Hetta kann hugsast, tá einstakar ognir krevjast til tess at gera eina neyðuga almenna verkætlan til veruleika.

*Myndugleiki* merkir, at einans veruligir almennir stovnar kunnu fyriskipa at privatar ognir ella rættindi verða tikin frá teimum móti teirra fulla vilja.

*Fremja atgerð sambært lóg.* Tvangskeyp má vera ætlað at fremja lóg ella byggisamtyktir hjá kommunum, ikki bert ætlanir hjá almennum stovnum.

*Tørvar.* Kravt keyp krevur, at júst viðkomandi ogn er neyðug júst nú, og onnur ogn ella onnur loysn ikki er møgulig eftir vanligum og rímiligum fyriliti.

*Mannagongd.* Heimildarlóg, ið skipar rætt at kravkeypa, skal áseta greiða mannagongd. Henda mannagongd skal, meira enn fyrisitingarlógirnar annars, tryggja, at ognartøkumál verður lýst til fulnar, so almenningurin og dómarar kunnu meta um tað neyðuga og átroðkandi í málinum.

*Rætturin at keypa.* Rætturin hjá myndugleikanum er at krevja keypið framt, ikki at krevja at fáa privatu virðini fyri onki ella fyri lægri prís enn vanligt.

(3) *Fullan prís.* Rættindi og ognir kunna hava sera ymiskt virði í fríum keypi. Myndugleikar mugu lata tann fulla prísin, ávøkst ella nýtslu, ið eigarin ella rættindahavin kundi fingið. Fullur prísur kann vera marknaðarvirði, brúksvirði ella endurreisingarvirði.

*Umframt órógv.* Myndugleikin eigur at keypa neyðug rættindi og ognir í fríum handli. Tí má kravkeyp vera eins ódýrt fyri myndugleikan, í vanligum keypi noyðist keyparin at gjalda fyri, at seljarin ikki ætlaði at selja ella ikki ætlaði at selja á tann hátt, sum keyparin ynskir at keypa.

(4) *Kunnu viðgerast sum rættamál* merkir, at tinglóg ikki kann áseta, at kærunevndir ella aðrir myndugleikar skulu viðgera hesi mál móti borgrarans vilja, uttan heldur kann borgarin krevja, at málið verður lagt fyri dómara.

# Politisk rættindi

**Bólkurin Politisk Rættindi** er partur av høvuðsbólkinum Rættindi – ella mannarættindi.

Bólkurin hevur viðgjørt tey rættindini, sum knýta seg at politiskum atburði í breiðari merking, tvs. ikki bert flokspolitikki. Politisku rættindini hava søguliga verið vard eisini undan demokratinum, men stóðu ikki eins sterk í rættarstatsfatanini, sum tey persónligu mannarættindini. Millum tey politisku mannarættindini eru framsøgufræls, pressufrælsi, savningarfrælsi, felagsfrælsi, valrættur og javnstøða.

Evnið er viðgjørt í bólki, og bólkurin hevur lagt fram upprit um Politisk Rættindi, sum er tøkt í skjalasavninum hjá Grundlógarnevndini.

Evnið er viðgjørt á fundi, har øll nevndin var savnað, tað er lagt fram á tíðindafundi, gjøgnumgingið grein fyri grein á fundum, har øll nevndin var savnað, tað er viðgjørt í sperribólki, men ikki viðgjørt endaliga á plenumfundi.

## Støði

Í eini skipan, har fólkið skal ráða, má fólkið eisini sleppa til orðanna. Tí er vanligt, at grundlógir verja rættin hjá øllum at seta fram tankar og hugsanir sínar í skrift og talu, og á hvønn hátt tey annars vilja.

Politiska frælsið hjá hinum einstaka og bólkum fevnir um líka rætt at seta fram og taka ímóti áskoðanum og hugsjónum, at savnast og skipa felagskapir uttanum tann felagskap, ið landið er, rætt at gera vart við seg mótvegis almennum myndugleikum og at fáa innlit í skjøl hjá almennum stovnum.

Nevndin hevði drúgt orðaskifti um, hvørt hesi viðurskiftini skulu fylla nógv ella ikki í eini føroyskari grundlóg. Ein møguleki hevði verið at havt eina áseting, ið sigur, at Føroyar binda seg til at halda altjóða sáttmálar um mannarættindi, og so ikki hava drúgvar greinar um hetta í grundlógini. Hesum var tó ikki meiriluti fyri í nevndini av fleiri orsøkum. M.a. varð mett, at tað hevði verið at flutt avgerðarheimildina um hesi viðurskiftini úr løgtinginum. Afturat tí varð hildið, at ein grundlóg eigur at avmynda, hvat slag av samfelagsskipan vit ynskja at hava í Føroyum, og her hava ikki minst politisku mannarættindini eitt stórt signalvirði.

## Uppskot til lógargreinar

### *§ 1.* Javnstøða

(1) Øll fólk eru javnsett uttan mun til eyðkenni ella frábregði.
(2) Tingið kann samtykkja at rætta mun, ið hevur verið gjørdur á fólki vegna eyðkenni ella frábregði.
(3) Ongi forrættindi kunnu vera uttan tíðarkarm.

### *§ 2.* Valrættindi

(1) Íbúgvar landsins, ið hava tann aldur, sum løgtingið ásetir sambært hesi lóg, eiga rætt til at velja umboð ella lata seg velja á ting og í stýri.

### § 3 Framsøgufrælsi.

(1) Øll eiga rætt at hava og seta fram politiska áskoðan, trúgv ella hugsan sína á einhvønn hátt.
(2) Øll eiga rætt at taka ímóti upplýsing frá øðrum, samskifta við onnur á einhvønn hátt og njóta framsøgufrælsið hjá øðrum.
(3) Øll eiga rætt at fáa innlit í tað, sum er skrásett um tey í almennum skjølum.
(4) Fjølmiðlarnir eiga serstakan rætt at kanna, lýsa og bera fram.

### § 4. Felagsfrælsi

(1) Øll hava rætt at taka seg saman í feløg og fylkingar til hvat endamál tað skal vera.
(2) Feløg og fylkingar kunnu bert avtakast við dómi. Løgtingið ásetir reglur fyri rættarvirknað í sambandi við avtøkur.

### § 5. Savningarfrælsi

(1) Øll eiga rætt at savnast á almennum staði.

## Viðmerkingar

**Javnstøða**

***§ 1.***

Henda reglan er serliga tikin við vegna teir mismunir, ið gjørdir eru á kvinnu og manni frá gamlari tíð, men onnur eyðkenni og frábrigdi kunnu eisini verða nevnd, sum t.d. uppruni, húðalitur, kynslív, brek, trúgv ella politisk áskoðan.

**Framumreglan**

(2) Henda reglan loyvir undantaki frá líkaregluni nevnt ”positiv diskrimination” (framumregla).

Orsøkin til at nýta eina slíka reglu kann vera mannminkandi atburður, ið fyrr er framdur og hevur havt við sær týðandi skeivleikar. Dømi, sum longu eru nevnd, eru mismunir gjørdir vegna kyn. Í slíkum førum kann vera neyðugt til tess at fáa javnvág í, at áseta kvotur ella onnur tiltøk, sum annars verða mett at gera mun á fólki.

Hugsast kann, at kynskvotan fyri almennar nevndarlimir hevur havt við sær, at fleiri kvinnur hava fingið royndir av nevndararbeiði og eru slopnar at vísa, hvussu tær roynast. Men framumreglan kann gera, at best skikkaði persónurin ikki verður valdur, men einans best skikkaði av kyninum, ið ikki hevur fingið sítt. Slíkt er annars at rokna sum mismunur, men kann í serstøkum førum verða gjørt at rætta skeivleikar.

Av tí at endamálið í slíkum føri er at rætta ein gamlan mismun, er umráðandi at hava umsjón við, um ásetingin virkar eftir ætlan.

(3) Framumreglan skal bert verða nýtt í avmarkaða tíð at rætta ein skeivleika. Tá javnvág má haldast at vera komin í, mugu øll aftur verða javnsett fyri lógini.

**Politisk rættindi: Valrættindi**

***§ 2.***

Landsins stýri byggir á viðurkenning og umboðan. ”Eingin skattur, eingin lóg uttan umboðan”.
Politisku rættindini eru eisini rætturin at vera við í landsins stýri, at velja tey, ið skulu manna umboðandi størv, at atkvøða á fólkaatkvøðu, gera seg galdandi í almenna kjakinum ella lata seg velja í umboðandi størv og beinleiðis útinna landsins stýri.

**Framsøgufrælsi**
***§ 3.***
Øll merkir, at tað sum útgangsstøði ikki ber til at avmarka bólkin, ið eigur framsøgufrælsi. Øll merkir eisini, at tað ikki bert eru íbúgvar landsins, ið eru vard av hesi áseting, men eisini útlendingar, sum eru staddir í landinum.

**Framsøgn**
Fólk hava nógv ymiskt at føra fram. Summi vilja sleppa at kunngera politisku áskoðan sína, onnur at berjast fyri fakligum rættindum, uppaftur onnur at boða trúgv sína ella at vísa fram listarligu gávur sínar. Nøkur hava eina hugsan um almennu myndugleikarnar, onnur vilja bert sleppa at mála húsini hjá sær ljósareyð.

**Avmarkingar**
Avmarkingar eru tó altíð, bæði av fyriliti fyri tí almenna og til tess at verja onnur móti ágangi, sum tað er nevnt í partinum um frælsisrættindi alment.

**Alment sett starvsfólk og framsøgukfrælsi**
Alment sett starvsfólk hava skyldu at akta boðum frá leiðsluni á arbeiðsplássinum. Men samstundis eru tey, sum øll onnur, borgarar í landinum og eiga rætt at siga hugsan sína – eisini um viðuskifti innan hitt almenna og – við ávísum avmarkingum – eisini um egið arbeiðsøki. Vanliga eru tey somuleiðis teirra millum, sum hava størstan kunnleika um arbeiðsøkið, og hava tí kanska eina serliga fakliga skyldu at gera vart við seg og geva almenninginum burturav síni vitan.

Eitt nú danski umboðsmaðurin hevur í síni siðvenju lagt stóran dent á, at almenn starvsfólk eiga at kunna siga sína hugsan um viðurskifti á egnum arbeiðsøki alment. Tó hevur umboðsmaðurin víst á, at nakrar avmarkingar eru neyðugar til tess, at almennir stovnar skulu kunna røkja sínar uppgávur.

Alment sett eru hinvegin undirløgd avmarkingum í framsøgnarfrælsinum sambært reglum um tagnarskyldu, sum avmarka møguleikan at lata frá sær roynveruligar upplýsingar um mál tey hava kunnleika til vegna arbeiði sítt.

Alment sett eru eisin skerd í møguleikanum alment at seta fram atfinningar móti viðurskiftum, ið fella innanfyri arbeiðsøki, tey sjálvi sita við. Ið hvussu so er hava tey tá skyldu greitt at boða frá, at tey gera tað sum privatpersónar. Abeiðsgevari hevur rætt at nokta starvsfólki at tosa vegna arbeiðsplássið.

Mangan verður ført fram, at trúskapsskyldan mótvegis arbeiðsgevaranum avmarkar framsøgufrælsið hjá alment settum. Tað er ikki rætt at knýta rættarvirknað at hugtøkum sum trúskapur og loyalitetur. Royndir hava víst okkum, at politiska frælsið verður hótt, tá vit fara at uppfata leys hugtøk sum trúskap sum løgfrøðiligar skyldur.

**Taka ímóti**
(2) At kunna taka ímóti er ikki so sjálvsagt. Móttøka krevur vanliga eitt ávíst kervi ella umstøður, ið tað almenna skipar fyri ella regluskipar. Postverk, telenet, bókasøvn, fjølmiðlar og almennir stovnar eru ofta fortreytir fyri, at fólk kunnu taka ímóti tí, onnur hava ført fram.

Landið má ikki misnýta sína støðu við reglum og fyriskipanum at forða ávísum fatanum ella tiltøkum, men heldur skapa fortreytir fyri fría flutningi framsagna.

**Ásetingin fevnir um**
At verða vardur av rættinum at seta fram framsøgn krevur at viðkomandi er staddur í landinum. Soleiðis er ikki við rættinum at taka ímóti, hann umfatar eisini framsagnir, ið er framdar í øðrum londum, tvs. útlendskt tilfar, ið verður ført inn í landið.

**Innlit**
(3) Økið er neyvt reglusett í fyrisitingarlógini, lógini um innlit og persónsdatalógini; men fyrisitingin er í allar mátar ein so stórur partur av samfelagslívinum, at tað er tikið við her at tryggja hesi rættindi.

**Fjølmiðlar**
(4) Fleiri grundlógir, eitt nú tann amerikanska, nevna serstakliga eina frælsa pressu sum grundarlag undir eini fólkaræðisligari stjórnarskipan.

Europeiski mannarættindardómstólurin hevur eisini mett, at miðlarnir hava serlig rættindi, tá um at savna sær upplýsingar ræður, sí t.d. avgerðina hjá dómstólinum 23. september 1994 í málinum Jersild móti Danmark.

Miðlarnir eru eyguni, sum fólk flest síggja veruleikan ígjøgnum. Tí eiga ongar forðingar at verða lagdar teimum, sum ikki eru avgerandi neyðugar. Tvørturímóti hevur tað almenna, serliga í einum so lítlum landi, skyldu at skunda undir frælsa talu og altíð at taka mest møgulig atlit til framsøgufrælsið, eisini tá tað kann vera eitt sindur tvørligt og trupult.

At fjølmiðlarnir hava slík forrættindi áleggur teimum eisini nakrar náttúrligar skyldur eitt nú at verja tey atlit, ið eru givin í partinum um mentan og ideologi.

**Felagsfrælsi**
***§ 4.***
Ásetingin tryggjar rættin at taka seg saman í felagskapir, og annars at skipa seg á ymsan hátt, óheft av landsins myndugleikum, áhugamálum sínum at frama.

Felagsfrælsið hevur stóran týdning fyri samfelagsskipanir av okkara slagi, har hetta at skipa seg í feløg er tíðandi partur av grundarlagnum undir bæði vinnulívi og samfelagslívi yvir høvur.

Ásetingin umfatar allar felgsskapir uttan mun til, um endamálið er breitt alment ella smalt fíggjarligt. Høvuðsendamálið við ásetingini er tó at verja rættindini til at ganga saman at viðgera og ávirka almenn viðurskifti, og tí eigur munur at vera á møguleikanum at avmarka rættindini, alt eftir um talan er um feløg ella samtøk við almennum ella vinnuligum endamáli.

Í Europeiska mannarættindasáttmálanum grein 11, stk. 1 er rætturin at taka seg saman í fakfeløg serliga vardur, eins og hann eisini er tað í ILO sáttmálunum frá 1987 og 1998 um fakfelagsfrælsi og um rættin til felags lønarsamráðingar.

Ásetingin forðar ikki fyri krøvum um, at feløg skulu lata seg skráseta. T.d. vinnufeløg fyri at fáa ávís rættindi og skyldur. Hon forðar heldur ikki fyri krøvum um skipanarligar karmar, t.d. krøv um rokniskaparskyldu ella at viðtøkur skulu vera, og vera almennar.

Í felagsfrælsinum liggur, at tað almenna ikki kann banna nøkrum at vera limur í felagi, t.d. at tænastumenn eru limir í fakfelag ella dómarar í losjum.

Hinvegin er rætturin at gerast limur í felagsskapi ikki grundlógarvardur. Í summum førum kann tó hugsast, at feløg ikki eiga at kunna nokta onkrum limaskap, t.d. um talan er um vinnulig ella búskaparlig atlit fyri einstaka limin, t.d. í serligum førum tá talan er um limaskap í fakfelag ella arbeiðsgevara felag.

**Avtøka**
Hetta merkir at hvørki løgtingið ella landsstýrið kunnu banna fólki at taka seg saman í feløg, ella kunnu avtaka feløg. Ásetingin forðar tó ikki feløgum at avtaka seg sjálvi. Feløg kunnu tó verða bannað, um endamálið er beinleiðis ólógligt.

**Savningarfrælsi**
***§ 4.***
At savnast er rættur sera líkur rættinum at skipa feløg, og hongur mangan neyvt saman við hesum.

At savnast merkir bæði at savnast á einum staði ella í felag at flyta seg frá einum staði í annað.

Søkjast skal ikki frammanundan um loyvi at savnast, men krav kann verða sett um fráboðan í somikið góðari tíð, at tryggjast kann at frælsi og rættindi annra manna ikki verða hótt, og tiltøkini skulu lúka rættvís krøv um alment skil, almenings heilsu, siðalag, samhaldsfesti og vælferð almenningsins til tess at verja tjóðartrygd, fólkatrygd, lóg og landaskil.

# Sosial og vinnulig rættindi

**Bólkurin Sosial og vinnulig rættindi** er partur av høvuðsbólkinum Rættindi – ella mannarættindi.

Ásetingar av vinnuligum- og sosialrættarligum slagi fevna víða. Felags er tó, at rættindini tryggja møguleikan hjá einstaklingum at virka og taka lut í sosialum og vinnuligum lívi í samvirki við onnur, og tryggja øllum rímilig lívskor. Søguliga hevur tað ikki verið sjálvfylgja, at so er. Bæði sosialur atburður og vinnuligt virksemi hava verðið løgd í fastar karmar í lóg.

Evnið er viðgjørt í bólki, og bólkurin hevur lagt fram upprit um Vinnulig og sosial rættindi, har evnið verður viðgjørt í einum breiðum samanberandi høpi. Hetta upprit er tøkt í skjalasavninum hjá Grundlógarnevndini.

Evnið er viðgjørt á fundi, har øll nevndin var savnað. Greinirnar, ið her eru skrivaðar, hava tó ikki verið viðgjørdar aftur í bólkinum ella av nevndini, men eru í ávísan mun úrslit av teirri umrøðu, ið hevur verið í bæði bólkinum vinnulig- og sosial rættindi og í nevndini.

## Støði

Fáar ásetingar eru um hesi rættindi í eldru grundlógunum, men tær eru í teimum flestu nýggjaru, so sum teirri svensku, estisku og suðurafrikansku.

*Familjurætturin* er tó gamal og umfatandi. Ásetingar eru frá gamlari tíð um viðurskifti millum mann og kvinnu, um uppihaldsskyldu, um ognarrætt, og serstakliga við frælslynta borgarliga rættinum úr 19. øld um javnstøðu millum hjún. Familjan er eisini serliga vard í heilt eldri løgskipanum, jbr. eitt nú at nýgiftur maður eftir Fimtu Mósebók 24,5 skal vera frítikin frá herskyldu og øllum øðrum samfelagsskyldum fyrsta árið.

*Børn* hava eisini frá gamlari tíð havt eina serliga støðu í rættarskipanini við tað, at tey ein vegin eru sjálvstøðugir persónar, men hin vegin ikki hava rættarligt virkisføri sum slíkir. Tey skulu tí hava ein verja, og tað vil so siga, at tey koma at standa mótvegis einum verja á ein hátt sum minnur um støðuna øll vanlig fólk vóru í undir lensstjórnan, tá øll stóðu undir verjuni hjá onkrum lensharra og skuldu vera lýðin og vísa honum virðing. Í borgarligum fólkaræðissamfelag sum okkara verður slík støða mett at vera ófræls og óverdug, og tí er mark sett á, tá fólk gerast myndug.

Børn hava í rættarsiði og lóggávu í dag fingið serliga verju og rættindi, t.d. samtykti ST í 1989 eina sáttmála um barnarættindi, sum Danmark háveldisfesti í 1991, og sum løgtingið í 1993 samtykti at galda í Føroyum.

Barnavernd er grundregluliga hetta í verki at tryggja teimum minstu samfelagsborgarunum – sum enn ikki duga á at skyna, ella sum ikki duga ella ikki kunnu sær at gera vart við tørv sín– nógv av teimum grundleggjandi mannarættindunum. Hon er í dag ein stórur og týðandi partur av virkseminum hjá almannaverkum her og í londunum kring okkum, sum væl tolir samanbering við forsorg annars, ella pensjónir.

Annað sum talar fyri at hava ásetingar um barnavernd í grundlógini, er at her er talan um virksemi, sum er soleiðis háttað, at tað kann vera tulkað sum víðgongd fyrisitingarlig inntriv í grundleggjandi mannarættindini hjá serliga foreldrum.

*Eisini arbeiðsrætturin* hevur sína heilt egnu søgu gjøgnum tíðina, har serliga skiftið frá ”status” til ”sáttmála” hevur havt stóran týdning – hetta, at skift varð frá eini støðu, har fólk vóru bundin av eini viðføddari sosialari støðu til eina støðu, har tey sum (í grundregluni, ið hvussu so er) javnsettir og fríir borgarar kunnu flyta seg runt á arbeiðsmarknaðinum og gera sáttmálar við arbeiðsgevarar, sum tey sjálvi ynskja.

Tað at kunna arbeiða ella verða forsyrgdur á annan hátt er ein so týðandi partur av samfelagsskipan okkara, at grundlógarnevndin hevur mett at eisini hesi viðurskifti eiga at fylla væl meira, enn tey gera í dag, í eini føroyskari grundlóg.

*Ein orðing* sum gongur aftur í uppskotnu ásetingunum í hesum partinum, er ”landið skal tryggja….”. við hesi orðing er ætlanin at staðfesta, at landið hevur ábyrgdina av, at uppgávan verður loyst, men at tað (alt eftir umstøðum og tíðaranda), í staðin fyri sjálvt at loysa uppgávuna, kann lata øðrum hana. Her kann bæði vera talan um, at landið leggur kommununum ávísar uppgávur, ella at tað letur privatar (arbeiðsmarknaðarpartar, feløg ella privatar persónar) loysa uppgávurnar.

Hóast landið letur øðrum uppgávurnar, ber ásetingin við sær at tað framhaldandi hevur skyldu til – við lóggávu og umsjón – at tryggja karmarnar um hesar uppgávur, og at tær verða loystar nøktandi.

## Uppskot til lógargreinir

### *Vinnulig rættindi*

### § 1. Arbeiði

(1) Landið skal virka fyri, at arbeiði ella onnur vinna stendur øllum í boði, alt eftir teirra tørvi og evnum

### § 2. Barnsferð

(1) Landið skal tryggja møðrum í vinnu farloyvi við løn ella rímiligari samsýning í sambandi við barnsburð.

### § 3. Vinna

(1) Hvør eigur rætt til vinnu og frían handil

### *Sosial rættindi*

### § 4. Familjan

(1) Familjan er grundeindin í samfelagnum, tí hon tryggjar tjóðini framhaldandi lív og vøkstur.
(2) Landið skal tryggja familjuni serlig rættindi, serliga tá gingið verður saman í familju, og meðan børnini eru smá.
(3) Landið skal verja rættindi barna og foreldra við lóg.
(4) Hjúnafelagar hava somu rættindi.
(5) Foreldur hava bæði rætt og skyldu til at ala børnini upp, og hava uppihaldsskyldu fyri teimum.
(6) Þør hava uppihaldsskyldu hvør fyri øðrum.

## § 5 Børn

(1) Landið skal tryggja rætt barnsins til at annað foreldrið kann vera um tað, ið hvussu so er fyrstahálva árið eftir at tað er borið.
(2) Børn eiga rætt til ávirkan á egin kor alt eftir sum tey duga á at skyna.
(3) Børn hava ábyrgd alt eftir sum tey duga á at skyna.
(4) Landið skal hava serliga umsjón við rættindum barnanna.

***Heilsa***

## § 6 Heilsuvernd,

(1) Landið skal tryggja íbúgvium landsins rætt til heilsutænastur og fyribyrgjandi heilsurøkt á høgum støði.

***Almannahjálp***

## § 7. Barnavernd

(1) Landið skal tryggja rættindini hjá øllum børnum til at vaksa upp í tryggum korum, saman við foreldrum ella øðrum uppalarum, sum geva tí kærleika og umsorgan.
(2) Nú megnar foreldur ella annar uppalari ikki sín lut. Tá skal landið skal tryggja teimum rætt til hjálp.
(3) Nú misnýtir foreldur ella annar uppalari vald sítt yvir barninum ella bundni barnsins at sær. Tá skal landið gera tað sum skal til fyri at verja barnið.

## § 8 Hjálp til fólk í vinnuførum aldri

(1) Nú berst einum frá at vera í vinnu av sjúku ella aðrari almannahending. Tá skal landið tryggja at hann fær til uppihalds, og hann skal ganga undir hóskandi treytir, sum landið setir við lóg.
(2) Nú kann vinnuførur ikki verða ella koma í vinnu vegna brek, sjúku ella aðra almannahending. Tá skal landið tryggja, at hann fær hjálp og tilelving til at koma í aðra vinnu, so hann aftur kann uppihalda sær og sínum, og hann skal ganga undir hóskandi treytir, sum landið setir við lóg.

## § 9. Hjálp til fólk í  ikki vinnuførum aldri

(1) Landið skal tryggja øllum íbúgvum landsins, sum eru komnir til pensjónsár, ella tilkomnum sum av sjúku ella breki ikki kunnu gerast før fyri at vinna sær og sínum til uppihalds, pensjón.
(2) Pensjónin skal vera so fræg, at hon tryggjar teimum rímilig fíggjarlig kor.

## § 10. Hjálp til ikki fullfør

(1) Landið skal tryggja øllum íbúgvum landsins, sum bera brek, ellisbrek ella hava varandi sjúku, hjálp sum bøtir munandi um, ella lættir um hjá teimum.
(2) Landið skal tryggja at atkomuviðurskiftini til allar almennar bygningar og aðrar tænastur eru lagað eftir tørvi teirra rørðslutarnaðu.
(3) Landið skal tryggja øllum nøktandi umstøður at taka lut í samfelagslívinum yvir høvur.

## Viðmerkingar

***Vinnulig rættindi***
***§ 1.***
Ásetingin áleggur ikki landinum at tryggja øllum vinnumøguleika, men at landið í politikki sínum skal hava atlit fyri, at arbeiði skal vera til allar hendur. Í seinasta liðinum liggur tó ein meira ítøkilig skylda til eisini at tryggja teimum rúmd, sum ikki eru fult vinnufør.

***§ 2.***
Ætlanin við ásetingini er at tryggja møðrum í vinnu rætt til ta hvíld, sum til eina og hvørja tíð verður mett rímilig í sambandi við barnsburð.

***Sosial rættindi***

## Familjan
***§ 4.***
Ásetingin er sum so innihaldstóm, men er ætlað at vísa á, hví familjan skal hava serlig framíhjá-rættindi.
(2) Ásetingin miðar móti serligum forrættindum, eitt nú í skattalóggávuni.
(3) Her verður skyldan at verja familjuna við familjurættarlóggávu staðfest.
(6) Sum ásetingin her er orðað, ger hon ikki mun á, um fólk eru gift ella sambúgvandi. Tað sum um ræður er, at tey eru gingin saman í paralag, og tað er ein broyting í mun til verandi lóggávu, sum einans áleggur giftum sínámillum uppihaldsskyldu. Hetta er ein áseting sum kann vera ring at seta í verk, men hinvegin virkar hetta at einans samgift hava uppihaldsskyldu sínámillum, í verki sum at ógift hava jalig framíhjárættindi til flestu sløg av almannahjálp.

***§ 5.***
Ætlanin við ásetingini er at tryggja barninum rætt til umsorgan heima í friði og náðum, ið hvussu so er fyrsta hálva árið, soleiðis at vinnuluttøka og uppihaldsskylda foreldranna ikki kann seta heilt grundleggjandi rættindi tess til viks.
(2) Ætlanin við ásetingini er at tryggja at foreldur, skúli, dómsvald og aðrir myndugleikar og uppalarar lata børnini koma til orða og hava ávirkan á egin kor, so at tey kunnu mennast til góðar samfelagsborgarar.
(3) Ætlanin við ásetingini er hin sama sum við (2), men samstundis at verja barnið móti, at størri byrðar verða lagdar á tað, enn andaliga menning tess er til, og at verja tað móti at verða sett til svars fyri tær av gerðum sínum, sum tað ikki kann ætlast at hava havt skil fyri.
(4) Her kann vera talan um ein barnaumboðsmann, men fyrst og fremst skal ásetingin tryggja, at landið við barnavernd og øðrum tiltøkum, so sum stuðli til felagsskapir, ið virka fyri korum barnanna, tryggjar at rættindi barnanna verða vird.

***Heilsa***
***§ 6.***
Illa ber til at áseta nágreiniliga, hvørjar heilsutænastur rættindini fevna um, tí at hetta er eitt øki, sum støðugt broytist, eins og fatanin av tí er fyri grundleggjandi broytingum.
At tænasturnar skulu vera á høgum støði, áleggur landinum skyldu til at tryggja, at tær støðugt menna seg og fylgja við í menningini aðrastaðni.

***Almannahjálp***

***§ 8.***

Her er bæði talan um at tryggja, at arbeiðsmarknaðarfíggjaðar sjúku- og arbeiðsloysisdagpeningaskip anir eru, og at tryggja rættin til forsorgarhjálp, í tann mun uppihaldsskyldan ikki liggur á øðrum.
Landið kann seta serligar treytir fyri eitt nú at fáa forsorgarhjálp, men av tí at tær kunnu verða tulkaðar sum inntriv í persónliga frælsið, mugu tær hava heimild í lóg.
(2) Her er serliga talan um endurbúgving, vard størv og tílíkt.

***§ 9.***

Ásetingin áleggur landinum at tryggja at øllum pensjónsrætt, men tryggjar ikki hinum einstaka rætt til almenna pensjón, um hann fær nøktandi privata pensjón.
(2) Hvat rímilig fíggjarlig kor eru, kemur altíð at laga seg eftir støðuni í samfelagnum, men at korini skulu vera rímilig, merkir eisini at munur er á, um talan er um pensjón til gomul, ella um pensjón til fólk í bestu árum, sum skulu kunna vera før at átaka sær somu skyldur sum vinnuførr.

***§ 10.***

Her er talan um øll sløg av hjálp: heimahjálp, hjálpartól, heilivág og annað.
Tað fylgir ikki av ásetingini, at hjálpin altíð skal vera ókeypis, men at landið skal tryggja teimum hjálpina, merkir, at møguligt gjald ið hvussu so er skal laga seg eftir fíggjarorku hins einstaka.

(3) Her kann talan t.d. vera um at veita teknmálsnýtarum tulk

# Fyrisitingar- og procesrættindi

**Bólkurin fyrisitingar og prosesrættindi** er partur av høvuðsbólkinum Rættindi – ella mannarættindi.

Bólkurin hevur viðgjørt rættindini hjá borgarum, tá myndugleikar viðgera mál av týdningi fyri borgaran. Hesi mál eru sjálvsagt fyrst og fremst mál, sum borgarin sjálvur er partur av, men eisini onnur kunnu hava týdning, serliga sum fordømi.

Evnið er viðgjørt í bólki, og bólkurin hevur lagt fram upprit um fyrisiting og prosess, sum er tøkt í skjalasavninum hjá Grundlógarnevndini. Bólkurin hevur bæði havt plenumframløgu og tíðindafund.

Evnið er eisini viðgjørt í sperribólki og lagt fram á plenumfundi 7. desember 2001, har tað var viðgjørt endaliga.

## Uppskot til lógargreinir

### *Fyristingarlig rættindi*

### § 1. Alment innlit

(1) Øll eiga rætt til innlit í almenn viðurskifti.
(2) Innlit fevnir um egin viðurskifti, avgerðarmál, eins og útinnandi fyrisiting.
(3) Í lóg kunnu ásetast neyðugar avmarkingar og aðrar treytir fyri innliti

### § 2. Hoyring

(1) Nú skal almennur stovnur ella myndugleiki taka avgerð. Tá skal hvør, avgerðin viðkemur, hoyrast.
(2) Fer almennur stovnur ella myndugleiki undir tilgongd ella fyriskipan skal bera til hjá viðkomandi áhugaðum at koma til orðanna.

### § 3. Umboðan

(1) Øll eiga rætt at lata onnur umboða seg í almennum málum.

### § 4. Mannagongdir

(1) Fyrisitingarligu rættindini og mannagongdirnar skulu skipast við lóg, har ið neyðugar avmarkingar kunnu ásetast. Eisini skulu gerast ásetingar um í hvønn mun avgerðir hjá myndugleikum skulu kunnast, og nær tað almenna skal rinda rímuligan kostna fyri viðgerð av málum.

### § 5. Líkareglan

(1) Øll eru líka fyri lógini.
(2) Nú ger einhvør mun á monnum. Tá skal munurin vera heimilaður í lóg. Ongin munur má vera tilvildarligur, órættvísur ella mannminkandi.
(3) Nú skal meting gerast, tá skal tað líka vera líka og tað ólika vera ólíka viðfarið.

## § 6. Valdsreglan

(1) Hvør stovnur og myndugleiki skal halda seg innanfyri vald sítt og heimildir.

## § 7. Heimildarreglan

(1) Allar lógir, dómar, avgerðir og ásetingar hjá landsins stovnum og myndugleikum mugu vera í samsvar við hesa lóg og hava uppruna í henni.
(2) Allar ágerðir, avgerðir og virksemi hjá landsins stovnum og myndugleikum mugu hava heimild.
(3) Nú er ósamsvar millum lógir ella ógreiða. Tá fellur lægri áseting fyri hægri.

## § 8. Markreglan

(1) Ongin lóg, kunngerð ella avgerð, onki boð ella krav kann fara um mark. Miðlarnir skulu ikki vera miklari enn málið krevur.

***Rættarlig rættindi***

## § 9. Revsing

(1) Ongin kann revsast uttan dóm.
(2) Ongin kann dømast uttan heimildarlóg var undan brotinum

## § 10. Leikfólk

(1) Í øllum rættarmálum skulu vera dómarar.
(2) Í revsimálum skulu leikfólk eisini vera við.

## § 11. Rættarmál

(1) Hvør eigur rætt at vera umboðaður eftir egnum vilja.
(2) Allir lógarspurningar kunnu skjótast inn fyri dómstólarnar.
(3) Ílóg verður ásett nær og í hvønn mun tað almenna skal gjalda kostnað, tá rættarmál verða viðgjørd, sum eru av stórum týdningi fyri tann einstaka, ella tá rættarmál kann væntast at gerast fordømi.

## §12. Fyrisitingardómstólar

(1) Dómstólarnir royna øll mál um revsing, trætur millum manna og fyrisitingarmál. Løgtingið kann tó við lóg lata aðrar myndugleikar taka sær av trætu og fyrisitingarmálum. Hesi mál kunnu síðani altíð leggjast fyri Rættin.

## Almennar viðmerkingar

Tá myndugleikar viðgera mál hjá borgarum, skulu teir halda ávisar spælireglur. Hesar reglur nevna vit tey fyrisitingarligu rættindini.

Í farnum døgum hoyrdi løgrætturin rættarmál á helluni í Tinganesi. Tann upprunaliga stjórnarskipanin í Føroyum merkti almenna rættarviðgerð. Vanlig skilafólk vóru við at døma málini, og dómar eins væl og samtyktir á tingi skuldu fyri at hava gildi fremjast alment og vera øllum kunnugir.

Seinni í tíðini var siður, at vanlig fólk á ólavssøku, tá løgtingið varð sett, kundu biðja løgmann seta handilsforvaltara, fúta og øðrum embætismonnum spurningar. Nevndu viðurskifti eru dømi um gamlar reglur um alment innlit, kunnleika til lógir og avgerðir.

Nógvar og ymiskar eru tær reglur, sum síðani eru settar almennum myndugleikum at virka eftir, og sum allar hava til endamáls at geva borgaranum eina so trygga og rætta viðgerð sum gjørligt, tá

almennir myndugleikar - tað verið seg fyrisitingarmyndugleikar ella dómstólar - skulu viðgera og taka avgerð um viðurskifti borgaranna.

Samanumtikið kunnu vit nevna slík rættindi fyrisitingar- og procesrættindi. Hugtakið fevnir um tey rættindi, vit eiga, tá mál verða viðgjørd í fyrisiting ella við dómstólarnar.

Almennir stovnar taka avgerð um nógv ymisk viðurskifti. Eitt nú fáa flestu fólk hvørt ár eina skattauppgerð, tey nógvu hava koyrikort, søkja um byggiloyvi, ella vilja vita, hvussu høg grannahúsini fara at verða. Um øll slík viðurskifti er ásett í lóg, hvussu og hvat. Tað eru teir ymsu almennu stovnarnir, sum í fyrstu atløgu gera av, hvussu nógv vit rinda í skatti, ella um vit kunnu fáa koyrikort.

Vit hava í Føroyum tvær grundleggjandi lógir, sum siga, hvussu hesir stovnar skulu viðgera umsóknir, og hvussu teir skulu taka avgerðir. Hesar lógir eru lógin um fyrisiting og lógin um alment innlit. Umframt hesar lógir eru lógir fyri hvønn stovn ella hvørt evnisøki sær. Vit hava lógir um forsorg og býarskipanir, sum í sínum lagi hava serligar reglur um, hvør stovnur tekur avgerð, og hvussu teir skulu fara fram.

Nógvir eru stovnarnir, sum taka avgerðir ella útinna tær lógir, sum løgtingið hevur samtykt. Hesir stovnar taka hvønn dag í rúgvuvís av avgerðum, umframt at asfaltera vegir og undirvísa børnum og mangt, mangt annað.

Við hvørt eru fólk ikki nøgd við tær avgerðir, sum slíkir stovnar taka. Tey kunnu eisini vera ónøgd við annað virksemi hjá tí almenna ella krevja innlit í, hvat tað almenna ger. Í teimum førum, tá borgarar eru ónøgdir við ta avgerð ella viðferð teir hava fingið, kunnu tey leggja mál fyri aðrar stovnar at royna.

Teir stovnar, sum royna avgerðir hjá øðrum stovnum eru bæði dómstólar, kærunevndir, aðalstýri og aðrir stovnar. Ovasti stovnur, sum roynir avgerðir og framferð hjá øðrum stovnum er Hægsti Rættur, sum er felags fyri alt danska ríkið.

Tá mál verða roynd, kann royndin snúgva seg um bæði tær ítøkiligu umstøðurnar – tað sum kann vigast og mátast – og um lóg. Spurningar um lógartulking kunnu fáa týdning fyri onnur enn partarnar í málinum. Tað er tí sera týðandi, um øll skulu vera líka fyri lógini, at vit hava stovnar, sum royna lógarspurningar.

Í fjør fingu vit í Føroyum ein Løgtingsins Umboðsmann. Slíkur stovnur er kendur í øllum grannalondum okkara. Umboðsmaðurin lurtar vegna løgtingið eftir kærum frá borgarunum og kannar eftir, um almennir myndugleikar hava tulkað lógirnar rætt og viðgjørt málini á rættan hátt sambært fyrisitingarlógini og innlitarlógini.

Umboðsmaðurin fer á hvørjum ári, at lata frágreiðing, har hann lýsir týðandi mál. Út frá hesum málum ber til at síggja, hvussu eigur at vera farið fram – eisini í øðrum málum.

Okkara lógir um fyrisiting og innlit byggja fyri ein stóran part á túsundtals mál, sum danski umboðsmaðurin hevur viðgjørt hesi seinastu hálvthundrað árini. Men á mongum økjum er ringt at vita, hvat er rætt. Allar galdandi lógir eru nú at finna í føroysku lógbókini. Men tað kann vera ringt at finna røttu lógina ella røttu ásetingina. Harumframt kunnu – og skulu – allar lógir tulkast, og tí má tað bera til lættliga at finna avgerðir hjá kærumyndugleikum, umboðsmanni ella dómstólum, um ein lóg skal skiljast til fulnar. Slíkar royndaravgerðir eiga tí helst at verða savnaðar og almannakunngjørdar.

Summar reglur eru ikki at finna í nakrari ávísari lóg, men eru heldur grundreglur, sum galda allastaðni. Millum hesar reglur eru nakrar av okkara grundleggjandi fyrisitingarreglum, eitt nú heimildarreglan (legalitetsprinsippið). Heimildarreglan sigur, at tað almenna kann bert geva fólki boð, um tað er heimild fyri tí. Toll & Skatt kann bert krevja skatt, um løgtingið samtykkir eina skattalóg og eina fíggjarlóg. Bygdarráðið kann bert nokta fólki at byggja eini 15 metrar høg sethús, um lógin sigur, at bygdarráðið kann avgera henda spurning.

Aðrar slíkar meginreglur eru reglur um, at øll eru líka fyri lógini (líkheitsgrundsetningurin). Tann reglan merkir, at tann sama reglan skal galda fyri tær somu umtøðurnar. Hevur onkur fingið eitt byggiloyvi, eigur ein annar eisini at fáa byggiloyvi, um hansara umstøður eru tær somu. Eru umstøður hansarar hinvegin øðrvísi, er tað ikki vist, at hann eigur at fáa loyvi – ella um tað verður við somu treytum.

Reglan um ikki at fara um mark, ella um proportión er eisini ein slík meginregla. Henda reglan sigur, at myndugleikar skulu ikki nýta meir vald enn neyðugt at náa einum máli. Almennir stovnar skulu ikki gera størri inntriv, enn tað krevst í hvørjum einstøkum føri.

Álvarsom brot á lóg og rætt kunnu ofta revsast. Um revsing skal áleggjast, er tað ein avgerð, sum dómstólarnir skulu taka. Men fyrst verður málið kannað. Tað ger politiið ella ein fyrisitingarmyndugleiki, ið hevur heimild at umsita viðkomandi lógarøki. Sambært altjóða mannarættindum hevur hvør einstakur rættindi, tá slík mál verða kannað. Eitt nú rætt til ikki at vitna ímóti sær sjálvum, og til ikki at verða ósømiliga viðfarin undir kanningini, rætt til ein verja og rætt til at málið verður roynt við óheftar dómstólar.

Flestu fyrisitingar- og procesreglur, sum í dag mugu metast at vera partur av galdandi rætti okkara, eru longu at finna í lógbókini, sum føroyskar lógir, sum reglur í donsku grundlógini, ella sum partur av teimum altjóða mannarætindunum. Men sum víst er á omanfyri eru nakrar av meginreglunum í fyrisitungarrættinum enn ikki skrivaðar í lóg.

Spurningurin, ið arbeiðsbólkurin hevur sett, er, um nakrar av fyrisitingar- og precesreglunum, tað verið seg skrivaðar ella óskrivaðar, áttu at verið skrivaðar í eina føroyska grundlóg til tess at tryggja, at tær veruliga verða virdar og vardar, og um so er hvørjar av reglunum mugu metast so mikið týðandi fyri rættindi borgaranna, at tær mugu metast sum grundleggjandi rættindi.

Tey fyrisitingar- og procesrættindi, sum arbeiðsbólkurin hevur mett eiga at fáa pláss í grundlógini sum grundleggjandi rættindi, eru :

- innlit
- hoyring í samband við málsviðgerð
- umboðan
- líkareglan - líkheitsgrundsetningurin
- heimildarreglan ( og valdsreglan ) - legalitetsprincippið
- markreglan - proportionalitetsgrundsetningurin
- revsing
- leikmenn í revsimálum

## Galdandi fyrisitingar- og procesrættindi

Meginreglurnar, sum í dag eru galdandi fyri nevndu fyrisitingar- og procesrættindi, eru einamest ásettar í fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit og rættargangslógini, meðan nakrar av reglunum als ikki eru lógarásettar, hóast tær eru partur av okkara galdandi fyrisitingarrætti og í ávísan mun eisini í stjórnarrættinum.

Vert er at hava í huga, at fyrisitingarlógin og lógin um alment innlit eru minstamarkslógir. Tað merkir, at ein myndugleiki eftir egnari meting altíð kann geva betri rættindi, enn lógin gevur, um bert neyðug atlit verða tikin fyri møguligum seravmarkingum ásettar í lóg t.d. reglunum um tagnarskyldu. Fyrisitingar- og procesreglurnar, sum nevndin hevur mett eiga pláss í eini nútíðar grundlóg, hava í dag niðanfyrinevnda lógarstatus. Á hesum stað verður bert í stuttum greitt frá galdandi reglum, men skal til nærri útgreinan og tulking av teim reglum, sum eru ásettar í Fyrisitingarlógini og Lógini um alment innlit vera víst til Vegleiðing landsstýrisins frá 1993 um innlit í fyristingina og til viðmerkingarnar í tingmálunum nr.183 og 184 frá 1992

## Innlit.

*§ 4 lógin um alment innlit:* Í lógini um alment innlit er ásett, at sum meginregla kann ein og hvør krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari málssviðgerð í sambandi við virksemi myndugleikans. Sambært § 5 í lógini um innlit í fyrisitingina fevnir rætturin til skjalainnlit um øll skjøl, sum eru farin frá myndugleikanum, tá mett verður, at skrivini munnu vera komin fram til móttakaran. Rætturin til skjalainnlit fevnir eisini um innføringar í journalir, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi skjølunum í viðkomandi máli, í ávísum førum tó avmarkað av lógini um skráir hjá almennum myndugleikum.

Mong eru tó undantøkini frá hesi meginreglu, og í §§ 7 – 14 eru ásettar reglur um undantøk. Nevnast kunnu §§ 7 – 9, sum áseta undantøku fyri innanhýsis arbeiðsskjøl, t.e. skjøl, ið ein myndugleiki ger til egna nýtslu, brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika v.m.. § 10 sum viðger undantøku av øðrum skjølum, gerðabøkur landsstýrisins, brævaskifti millum landsstýrismenn um lóggávu, sekretariatsskjøl, brævaskifti við serkøn til nýtslu í rættarmálum, grundtilfar til gerð av almennum hagtølum / vísindaligum kanningum. § 11 ásetir, at hóast talan er um innanhýsis skjøl, kann tað í ávísum førum vera skylda at kunna úr innanhýsis skjølunum. § 12 ásetir, at ávísir upplýsingar kunnu verða undantiknir frá tí vanliga høvinum til skjalainnlit, tá hetta er grundað í fyrilitinum at vara um privat áhugamál, og § 13 ásetir, at upplýsingar og skjøl kunnu verða undantikin skjalainnliti, tá hetta er neyðugt fyri at vísa serstakt fyrilit fyri almennum áhugamálum ella privatum áhugamálum annars.

*§ 9 í fyrisitingarlógini:* § 9 í fyrisitingarlógini ásetir, at sum meginregla kann hann, sum er partur í einum mál, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð, krevja at verða gjørdur kunnugur við skjølini í málinum. Í § 10 eru neyvari ásetingar um, hvat rætturin til skjalainnlit fevndir um, meðan reglurnar í § 12-15 áseta hvørji skjøl og upplýsingar, sum undantak ikki eru fevndir av rættinum til skjalainnlit t.d. innanhýsis arbeiðsskjøl hjá einum myndugleika, gerðabøkur hjá landsstýrinum og frásagnir frá fundum millum landsstýrismenn.

## Hoyring

*§ 18 í fyrisitingarlógini / partshoyring :* Í § 18 í fyrisitingarlógini er ásett, at má tað haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnugur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar, og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli. Hetta er tó bert galdandi, um upplýsingarnir ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part og hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum, Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið skal verða givið. Hoyringsskyldan er tó ikki galdandi, eitt nú tá so er, at upplýsingarnir og málið er soleiðis háttað, at tað ikki kann metast at vera ivingarsamt at taka avgerð í málinum á verandi grundarlagi, ella tá ætlaða avgerðin fer at nema ein víðari óvissan skara av persónum, fyritøkum v.m.

## Umboðan

*§ 8 í fyrisitingarlógini og § 131 í rættargangslógini:* § 8 í fyrisitingarlógini ásetir, at sum meginregla kann tann, sum er partur í einum máli, til eina og hvørja tíð, tá málið verður viðgjørt, lata seg umboða av øðrum. Undantak kann gerast frá hesi meginreglu, m.a tá myndugleikin metir tað hava avgerandi týðning fyri málið, at parturin persónliga er við í viðgerðini. Tá talan er um rættarmál, er vanligt at lata seg umboða av advokati. Men sambært §131 í rættargangslógini er hetta ikki nakað krav, tí í Føroyum kann ein og hvør myndugur persónur, sum hevur ræðið á egnum búgvi føra rættarmál fyri onnur. Í ávísum førum verður tó kravt, at borgari letur seg umboða av advokati.

## Líkareglan

Reglan um, at øll eru líka fyri lógini, er ein av okkara óskrivaðu grundreglum, ið er galdandi í fyrisitingarrættinum og í stjórnarrættinum ( serligur líkheitsgrundsetningur í § 70 í grl.- sí tilfari frá bólkinum effektivitetur ). Hendan regla viðførir, at myndugleiki ikki kann geva borgara verri / betri støðu, enn hann hevur givið øðrum borgara í júst somu støðu.

## Valdsreglan

Hetta er eisini óskrivað regla, sum áleggur hvørjum myndugleika sær at halda seg til tær heimildir, sum eru fyri virksemi stovnins, tá hann fyrisitur sítt vald, t.v.s. fyrst og fremst innan sína myndugleikaheimild og harnæst at fylgja teim reglum, sum fyrisettar eru fyri virksemið.

## Heimildarreglur – legalitetsprincippið

Ein av óskrivaðu meginreglunum, sum er galdandi í fyrisitingarrættinum og stjórnarrættinum, er sonevnda heimildarreglan (legalitetsprincippið). Hendan regla setir sum krav, at alt fyrisitingarvirksemi – herundir serliga avgerðir, ið eru bindandi fyri borgaran – skal vera heimilað í lóg. Valdsreglan og heimildarreglan hoyra saman.

## Markreglan – ( Proportionalitetsgrundsetningurin )

Markreglan er reglan um, at myndugleikar ikki mugu nýta miklari miðlar, enn málið krevur, t.v.s. enn neyðugt er í tí ítøkuliga førinum.

Eitt nú viðførir reglan, at í revsiprocessini mugu t.d. varðhaldsfongsling og onnur prosessuell tvangsmiðul ikki vera í misforhold til væntaðu revsingina.

Í fyrisitingarrættinum førir grundreglan við sær, at sakligt grundaðar avgerðir hjá fyrisitingini um atgerðir móti einum borgara, ikki mugu standa í andsøgn til endamálið, og at meira tyngjandi atgerðir ikki mugu nýtast, um tú við eini minni tyngjandi atgerð kanst náa sama endamáli.

Markreglan er ein óskrivaður grundregla, sum er galdandi bæði fyrisitingarliga og stjórnarrættarliga.

## Revsing

§ 1 í revsilógini er soljóðandi: "Straf kan kun pålægges for et forhold, hvis strafbarhed er hjemlet ved lov, eller som ganske må ligestilles med et sådant. Med hensyn til de i kapitel 9 nævnte retsregler gælder en tilsvarende regel."

Av nevndu lógargrein framgongur, at revsing bert kann áleggjast sambært lóg. Tó er eingin beinleiðis áseting um, at revsing við lóg ikki kann gerast afturvirkandi, t.v.s. at ein gerð, sum ikki var revsiverd, tá gerðin var framd, seinni kann verða gjørd revsiverd.

## Leikfólk

*§ 65 í grundlógini og rættargangslógin:* Í donsku grundlógini er í § 65 ásett soleiðis um leikfólk (leikfólk er í hesum føri fólk, sum ikki eru løgfrøðingar ) :
" I retsplejen gennemføres offentlighed og mundtlighed i videst muligt omfang.
Stk. 2 I strafferetsplejen skal lægmænd medvirke. Det fastsættes ved lov, i hvilke sager og under hvilke former denne medvirken skal finde sted, herunder i hvilke sager nævninger skal medvirke."
Tær reglur, sum eftir § 65 í grundlógini eru ásettar at galda um leiklutin hjá leikfólki í revsimálum, eru ikki tær somu í Danmark og í Føroyum.
Meðan tað í § 687 í rættargangslógini, sum er galdandi fyri Føroyar, er ásett, at leikfólk (nevningar ) bert taka lut í teim mest álvarsomu revsimálum, er í rættargangslógini, sum er galdandi í Danmark ásett, at í revsimálum luttaka tvey sløg av leikfólkum, sonevndir nevningar og dómsmenn.
Nevningar avgera skuldarspurningar ( § 902 og § 903 ) og luttaka í teim mesta álvarsomu revsimálunum ( við landsrættirnar, tá hesir eru fyrsti instansur ). Við fallandi dóm hevur tann juridiski dómarin tó rætt til at ógilda úrskurðin og krevja nýggja dómsviðgerð við nýggjum nevningum og dómara – í praksis fráfellur ríkisadvokaturin ákæruna eftir § 905 stk. 1, tí próvgrundarlagið hevur ikki kunnað borið fellandi prógv. § 904 er ein dupult trygd móti skeivum fellandi dómum. Um dómsviðgerðin gongur umaftur, kann rætturin endaliga fríkenna ákærda, hóast nevningarnir endurtaka skuldarniðurstøðuna.

Dómararnir, t.v.s. bæði tann juridiski dómarin og dómsmenninir avgera revsilongdina. Í §§ 687 – 692 í donsku rættargangslógini er ásett, at hesir virka í revsimálum við undirrættirnar í stórt sæð øllum revsimálum, har talan kann gerast um revsing hægri enn bót, og við landsrættirnar, tá hesir virka sum kærurættir.

Sum nevnt hava vit í rættargangslógini, sum er galdandi fyri Føroyar, bert áseting um nevningar og onga áseting um dómsmenn.

Ásetingin í grundlógini um leikfólk er ætlað at skapa tryggleika um óhefti hjá dómstólunum, og fyri at dómstólurin skal hava vanligt vit og skil at meta um prógv, frágreiðingar, trúvirði og aðrar spurningar, sum ikki eru lógarspurningar. Danir hava fleiri ferðir spurt føroyingar, um ikki dómsmenn eisini skulu vera í Føroyum. Seinast – í 1964 – tók løgmálaráðið, eftir at hava fingið svar frá føroyskum myndugleikum, soleiðis samanum um hesi viðurskifti : "...idet det fra de færøske myndigheders side var blevet gjort gældende, at indførelsen af domsmandsinstitutionen ville medføre uforholdsmæssigt stort besvær for lægdommerne på grund af de vanskelige vejrforhold og den omstændighed, at en stor del af den mandlige befolkning i lange perioder er på havfiskeri " so varð ikki mett neyðugt ella gjørligt at hava dómsmenn í Føroyum.

## Fyrisitingardómstólar

Í samband við viðgerðina av fyrisitingar- og procesrættindunum er arbeiðsbólkruin komin inn á spurningin, um borgarin í rættarmálum um fyrisitingarligar avgerðir kemur nóg væl til orðanna í rættarskipanini, sum vit hava í dag, og sum førir við sær, at viðgerðin er tengd at, hvussu partarnir hvør í sínum lagi klára at lýsa og prógva síni krøv.

Sum er, er heimild í § 63 í grundlógini at seta á stovn fyrisitingardómstólar. Hóast fyristingardómstólar eru kendir í mongum Evropeiskum londum, so hevur tað enn ikki verið aktuelt, at sett fyrisitingardómstólar á stovn í danska ríkinum. § 63 í grundlógini er soljóðandi : " Domstolene er berettigede til at påkende ethvert spørgsmål om øvrighedsmyndighedens grænse. Den, der vil rejse sådant spørgsmål, kan dog ikke ved at bringe sagen for domstolene unddrage sig fra foreløbig at efterkomme øvrighedens befaling.

Stk. 2. Påkendelse af spørgsmål om øvrighedsmyndighedens grænser kan ved lov henlægges til en eller flere forvaltningsdomstole, hvis afgørelser dog skal kunne prøves ved rigets øverste domstol. De nærmere regler herom fastsættes ved lov."

Ein fyrisitingardómstólur er ætlaður at taka sær av málum, sum borgarin setir móti almennum myndugleikum, t.v.s. í høvuðsheitinum um fyrisitingarligar avgerðir. Í dag verða slík mál viðgjørd við vanligan rætt og eftir somu prosesreglum, sum eitt nú eru galdandi millum tveir privatar partar. Hetta kann mangan tykjast sera tyngjandi fyri borgaran. Hann kemur undir reglurnar um » forhandlingsprincippið » t.v.s. málið verður dømt eftir, hvat partarnir føra fram og kunnu prógva, og rætturin tekur ikki lut í at fáa málið lýst á rættan og nøktandi hátt. Ein fyrisitingardómstólur kann roknast við at skulu nýta » officialmaksimuna » sum inniber, at rætturin hevur skyldu til at fáa málið nøktandi upplýst, áðrenn avgerð verður tikin. Á hendan hátt verður borgarin meira javntstillaður í spurninginum um rætt og rangt í mun til avgerðir hjá fyrisitingarvaldinum. Hugsast kann eisini, at kostnaðarreglurnar í samband við at leggja mál fyri ein fyrisitingarsómstól høvdu verið nakað øðrvísi enn kostnaðarreglurnar, sum í dag eru galdandi í rættarskipanini.

Spurningurin um fyrisitingardómstólar ella ikki verður aloftast settur í mun til spurningin um virksemi hjá umboðsmanninum og tær kæruskipanir, vit hava, tí givið er, at ansast má eftir, at ikki fleiri myndugleikar sita við somu uppgávum, og at vit ikki fáa ov nógv " løg " inni í eini kæru- og rættarskipan.

Arbeiðsbólkurin kom til, at rættast er, at verandi møguleiki við fyrisitingardómstólum verður varðveittur, og at nærri áseting um fyrisitingardómstól skal ásetast við lóg, um skipanin skal nýtast, og at ein avgerð  hjá einum fyrisitingardómstóli skal kunna leggjast fyri ein dómstól.

Arbeiðsbólkurin metir, at verður fyrisitingardómstólur settur á stovn, eigur dómstólurin at verða mannaður við fakfólki, sum lúka tey krøv, sum í dag verða sett til dómarar. Tá fakligi førleikin hjá teimum dømandi við ein fyrisitingardómstól er tann sami, sum hjá einum vanligum dómara, metir bólkurin, at avgerðir hjá fyrisitingardómstólinum eiga at kunna kærast beinleiðis til Løgrættin (viðvíkjandi dómstólabygnaðinum sí evni um dómstólarnar ).

## Fyrisitingar- og procesreglur í øðrum grundlógum og millumtjóða sáttmálum

Arbeiðsbólkurin hevur, fyri at fáa greiðu á, hvussu fyrisitingar- og procesrættindi eru viðgjørd í grundlógum í øðrum londum, hugt eftir svensku grundlógini og Amerikanska Bill of Rights. Eisini

eru okkara verandi reglur samanbornar við EMRS – sí  yvirlit niðanfyri. Nevndu grundlógir hava víst seg ikki at innihalda stórvegis fleiri ásetingar um fyrisitingar- og procesrættindi enn galdandi danska grundlógin.

EMRS hevur tó í art. 6, 7 og 13 ásetingar, sum verða mettar at vera ein breiðari vernd fyri fyrisitingar- og procesrættindunum sum fylgja av kravinum um dómstólsvirkni ( sí evni effektivitetur ), óheftar dómstólar, rættvísa, almenna, skjóta og skipaða rættarviðgerð og reglan um onga revsing uttan lóg.

| **Rættindi / land Sátttmáli** | **Danmark Gl** | **Føroyar lóg / siðvenja** | **EMRS** | **USA** |
|---|---|---|---|---|
| Umboðan (fyrisit) | | Fyrisitingarlógin § 8 | | |
| Innlit í egin mál | §§ 3 og 63 rætt til dómsroynd | Fyrsitingarlógin § 9 | | |
| Innlit (alment ) | | Lóg um innlit § 4 | | |
| Hoyring | | Fyrisitingarlógin § 18 | | |
| Fyrisitingar dómstólar | § 63 stk. 2, kunnu setast á stovn | | | |
| Umboðs-Mann | §55, rætt til umboðsmann | Stýris-Skipanar-lógin § 39 | | |
| Legalitets Principp | | Siðvenja | | |
| Líka fyri lógini | §70, trúgv og uppruni | Siðvenja, vanlig líkheits-regla | | Amend-ment XIV equel protection |
| Markregla | | Siðvenja | | Amendment VIII |
| Umboðan (dómstólar) | | Rættargangslóg, skikkaður verji | Art 6, verja | Amend-ment VI, assistance of counsil |
| Leikmenn ákæra | | | | Amend-ment V, Grand Jury |
| Leikmenn revsa | § 65 stk. 2 leikmenn | | | Amend-ment VI, by Jury |
| Ákærast umaftur | | Ber til | | Amend-ment V, double jeopardy |
| Ongin revsing uttan lóg | | Revsilógin § 1 | Art 7, ongin revsing uttan lóg | |

## Hvat skal við í grundlógina ?

Fyrisitingin er í dag ógvuliga umfatandi. Tað verið seg stats-, lands-, mið-, kommunalfyrisiting v.m. At fyrisitingin ber seg bæði virðiliga t.v.s. formelt rætt at og er før fyri at taka rættar avgerðir, er tí rættiliga avgerandi fyri rættarstøðuna og trygdina hjá borgarunum.

Arbeiðsbólkurin hevur mett tað vera nakað ørkymlandi og ótíðarhóskandi, at rættarstøðan í Føroyum í dag, tá talan er um fyrisitingar- og procesrættindi, í nøkrum førum er meira vard av einum altjóða sáttmála enn av grundlógini, og at stórir partar av teim rættindum, sum skulu tryggja borgara ávirkan og kunnleika um viðgerð og upplýsing um hansara viðurskifti, ikki eru tryggjað sum grundlógarrættindi. Tí slík støða kann føra við sær, at lóggevandi valdið altíð í serlóg kann gera frávik frá teim reglum, sum vit í dag meta vera góð rættartrygd hjá borgaranaum í mun til fyrisitingarliga valdið.

Tað hevur víst seg, at sera fáar ásetingar eru í øðrum grundlógum og altjóða sáttmálum um fyrisitingar- og procesrættindi, men at hesi aloftast eisini í øðrum londum eru leidd av siðvenju ella av vanligari lóg. Men grundlógarnevndin er tó komin eftir, at nýggjari grundlógir sum t.d. Estiska grundlógin, sum er frá 1992 og Suðurafrikanska grundlógin, sum er frá 1997, innihalda munandi fleiri ásetingar um fyrisitingar- og prosesrættindi, enn higartil hevur verið vanligt í grundlógum. M.a. inniheldur § 32 í Suðurafrikansku grundlógini høvuðsásetingar um alment og privat innlit og § 33 ásetingar um rættvísa ( lawfull – legalitetsprincippið ) fyrisiting, grundgeving og dómstólaroynd og Estiska grundlógin inniheldur ásetingar um fyrisitingarliga vegleiðingarskyldu, umboðsmann, lógarvernd, pr oportionalitetsprincippið o.s.v. Hetta kann metast sum tekin um, at tíðarinnar rák er, at fyrisitingar- og procesrættindi í framtíðini koma at vera ásetingar á grundlógarstøði. Við hesum dømum frá Estlandi og Suðurafrika er tó einki sagt um, hvussu fyristingar- og procesrrættindi verða vard í dagligdegnum, t.d. um grundlógarásetingar av hesum slag yvirhøvur verða aktaðar – hetta fer bert tíðin at vísa okkum.

Mett verður, at ein nýggj grundlóg í minsta lagi eigur at innihalda yvirornaðar ásetingar um tey mest grundleggjandi fyrisitingar- og procesrættindi, ið vit kenna í dag so sum heimildarreglan, markreglan og líkareglan, tí hesar óskrivaðu reglur kunnu hóast alt í dag metast at vera av nærum stjórnarrættarligum slagi. Tær eiga tí at verða lyftar upp á grundlógarstøði.

Hvat viðvíkur vanligu fyrisitingarrættindunum so sum alment innlit, hoyring, umboðan, kærumøguleikar, grundgeving osfr. so metir bólkurin, at tað verður at fara í so nógv í smálutareguleringar at taka allar tær reglur við í grundlógina, sum vit í dag kenna frá fyrisitingarlógini og lógini um alment innlit. Bólkurin metir tó, at grundlógin, fyri at tryggja at fyrisitingarrættindi ikki versna, eigur at hava eina áseting, sum kann leggja krav á útinnandi valdið um, at mál, sum kunnu føra til tyngjandi avgerðir fyri ein borgara, altíð skulu hava eina hóskandi upplýsing og viðgerð og at tann, sum málið viðvíkur, skal hava møguleika at fylgja málinum t.v.s at hann skal hava rætt til innlit í málið, áðrenn avgerð verður tikin, eins og hann skal hava rætt at lata annan umboða seg. Mælt verður tí til, at høvuðsásetingar um reglur fyri innlit, hoyring og umboðan verða settar í grundlógina, meðan neyvari ásetingar um hesi viðurskifti skulu gerast við lóg.

Við umboðsmanna- og dómstólapraksis fer altíð at bera til at fylla út og menna grundlógarásetingar um rættindi og teirra undantøk av fyrisitingarligum slagi. Men avgerandi er, at løgtingið ikki ov lættliga kann samtykkja lóggávu, ið avmarkar tey grundleggjandi fyrisitingarligu rættindini.

Eisini fyri at bøta um kunningina til tað breiðu fjøldina, og fyri at hava eina grundlóg, sum er á altjóða støði, og greitt í samsvar við inngingnar sáttmálar um m.a. mannarættindi, verður sum nevnt mett, at tað er av stórum praktiskum týdningi, at tey mest grundleggjandi fyristingarrættindini verða sett í grundlógina.

## Serligar viðmerkingar

Alment innlit: Í hesi grein eru meginreglurnar frá lógini um innlit í fyrisitingina og fyrisitingarlógini settar í grundlógina, soleiðis at tað stendur greitt, at almenn viðurskifti í høvuðsheitinum eru almenn, t.v.s. at ein og hvør kann gera seg kunnugan við, hvat tað almenna ger, bæði tá tað snýr seg um avgerðarmál og útinnandi fyrisiting. Alt eftir hvat øki og hvørji mál talan er um, kann vera neyðugt at gera avmarkingar júst soleiðis, sum tað longu í dag framgongur av lógunum um innlit og fyrisiting. Løgtingið kann tí við lóg seta avmarkingar fyri innlitinum, og hvussu hetta kann fremjast. Avmarkingar-nar, sum vera ásettar, skulu altíð vera sakliga grundaðar, og hava til endmáls at verja tað, sum er neyðugt at verja, tað verið seg fyri tann einstaka ella landið og ikki bert vera ásett sum forðing fyri innlitinum.

**Hoyring:** Fyrisitingarlógin hevur longu í mong ár sett krav um, at myndugleiki, áðrenn hann tekur avgerð í einum máli, skal hoyra teir partar, sum avgerðin viðvíðkur. Hendan regla er ein garantiforskrift, sum skal tryggja pørtunum, at mál eru nøktandi og rætt upplýst, áðrenn avgerð verður tikin. Rættindini hjá borgarum at verða hoyrdir eru her flutt yvir í grundlógina, tí mett verður, at hesi rættindi eins og mong onnur fyrstingarrættindi eiga at hava grundlógarvernd. At vera hoyrdur er ikki bert týðandi, tá mál snýr seg um viðurskiftini hjá einum einkultum, men kann vera líka so týðandi, tá tað almenna fer undir t.d. størri arbeiðir, sum vilja hava árin á umstøðurnar hjá bólki av fólkum. Er tað gjørligt, so eigur tað almenna tá eisini at kunna og hoyra tann viðkomandi skaran av fólki, áðrenn endalig støða verður tikin í málinum.

**Umboðan:** Eisini rættindini at lata seg umboða av øðrum eru í dag longu tryggjað í fyrisitingarlógini, og verða hesi rættindi við hesum lógaruppskoti hevjað til grundlógarstøði.

**Mannagongdir:** Fyri øll fyrisitingarrættindi er galdandi, at tað bert eru meginreglurnar, sum verða settar í grundlógina. Tað er tí neyðugt, at Løgtingið fyri hvørt fyristingarøki ger nágreiningar og, orðar praktiskar mannagongdir fyri umsiting av hesum rættindum. Í greinini verður givin heimild at gera nærri útgreiningar við lóg. Slík lóg má tá sum minstamark geva somu rættindi, sum grundlógin ásetir, men kann slík lóg tó fara hinvegin og geva betri og onnur fyrisitingarlig rættindi, enn grundlógin krevur, eitt nú aðrar ásetingar, sum vit longu hava í lógini um innlit í fyristingina og í fyristingarlógini.

Fyri at borgarin skal kunna fáa fullan kunnleika um reglur, og hvussu hesar verða nýttar, er neyðugt, at borgarin hevur møguleika at søkja sær kunning um ta siðvenju, sum er á einum øki. Fyri at tryggja hendan rætt hjá borgarum at kenna sín rætt og sínar skyldur, skal tað almenna syrgja fyri at siðvenjan er atkomilig fyri borgaran. Hetta kann eitt nú gerast við at tað almenna letur kunning um avgerðir, sum vera tiknar av dómstólunum, fyrisitingarmyndugleikum, kærumyndugleikum og av Umboðsmanninum. Eisini verður mett týðandi fyri vernd av rættindunum hjá borgarunum, at tað verða gjørdar ásetingar um, at tað almenna í ávísum førum kann hava skyldu at rinda kostnaðin av einum máli. Hesa skipan kenna vit í dag frá reglunum um fría rættarførslu, men eisini á fyrisitingarliga økinum kann ein málsviðgerð gerast dýr hjá einum borgara, eitt nú um hann letur seg umboðað av serkønum. Dømi kann nevnast, har borgari í fleiri ár bæði mótvegis myndugleika og kærumyndugleika hevur mótmælt avgerð hjá einum myndugleika og hevur latið seg umboða av fólki, sum hevði serkunnleika til økið. Uttan mun til, hvussu málið fellur út endaliga fyri borgaran, vil hann, sum er, altíð standa eftir við rokningini fyri at hava havt onnur at føra fram sína áskoðan. Mangan og serliga í teimum førum, tá borgarin eftir tógvið stríð fær viðhald í máli sínum, kann tað fyri borgaran kennast tyngjandi og órættvíst at skulu gjalda kostnað fyri at hava fingið rætt í sínum mótælum mótvegisi tí almenna. Skotið verður tí upp, at áleggja Løgtinginum at gera lógarásetingar, sum í høvuðsheitinum tryggja borgaranum somu rættindi til frían kostna í fyrisitingarligum málum eins og tey, sum vit kenna frá virkandi skipan við fríari rættarførslu.

**Líkareglan:** Her verður skotið upp, at óskrivaða reglan um, at øll eru líka fyri lógini, skal skrivast inn í grundlógina. Hetta merkir, at fyrisitingin altíð skal taka atlit til at veita borgarum í somu støðu, somu rættindi, sjálvsagt við atliti til ta lógarheimild, sum er fyri økið. Hetta merkir eisini, at tað ikki við lóg kann ásetast mismunur fyri borgarar í somu støðu, og at tað tí altíð skal vera lóggivið generelt og ikki uppá einstakan persón .
Skal munur gerast skal hann vera grundaður í lóg. Hetta merkir, at hóast útgangsstøði er, at øll eru líka fyri lógini, so eru umstøður har ein sakligur munur kann gerast, men krevst tá, at hesi viðurskifti hava lógarheimild. Sum dømi kann nevnast, at skal ein leingi framdur munur rættast upp, kann hetta í nøkrum førum bert gerast við postivari lóggávu fyri teir borgarar, sum munur er gjørdur ímóti.
Í stk. 3 er áseting, sum viðførir, at tá mál skal avgerðast eftir meting, so skal eisini hetta gerast við útgangsstøði í, at tað sum er líka skal vera líka og umvent. Neyðugt er tó at hava fyri eyga, at í serligum

førum, kann tað hjá einum mynduleika hóast alt sýnist líka, verða neyðug at taka ólíka avgerð. Nevnast kann, at hevur myndugleiki av "óvart" ella sambært siðvenju givið einum borgara rættindi, sum tað við nærri eftirkanning ella við broyttari siðvenju vísur seg ikki at vera heimild fyri, so hevur ein borgari, sum seinni kemur og krevur somu rættindi, ikki altíð krav uppá at vera líkastillaður. Ásetingin í §……er ikki ætlað at broyta uppá hesi viðurskifti, sum eru rótfest í okkara fyristingarrætti, og sum eru ein spurningur um tulking av umstøðunum. ( Nakað av iva hevur verið um lógarteskturin eigur at vera styttur soleiðis, at stk. 2 og 3 vera strikað og bert meginreglan um at øll eru líka fyri lógini verður settur í grundlógini. Sum er ikki nøkur endalig avklári ng av hesum spurningi )

**Heimildarreglan og Valdsreglan:** Ásett verður, at almennir myndugleikar altíð, uttan mun til hvat slag av virksemi talan er um, skulu halda seg innan sítt vald, t.v.s. til tær heimildir, teir við lóg hava fingið at umsita ( sí áseting í § ….um at hvørt myndugleikaøki skal útgreinast við lóg ), og at teir í virkseminum halda seg til tær lógir, sum eru galdandi fyri útinnan av valdinum. Við hesum reglum er ætlanin at fáa skrivað niður óskrivaðu grundreglurnar, sum longu finnast í fyristingarrætti okkara um hesi viðurskifti.

Ásetingin um at lægri áseting fellur fyri hægri áseting merkir t.d. at lóg gongur fram um kunngerð. Men hetta merkir ikki, at tað ikki í serføri kann leggjast størri dentur á eini lægri áseting, tí givið er, at hevur borgari út frá t.d. eini kunngerð fingið rættindi, sum eru betri, enn tey sum heimildarlógini gevur honum, og hevur mynguleikin handla í mun til kunngerðina, so stendur avgerðin sambært kunngerðini við tí borgarin kann krevja rætt sambært kunngerðina. Reglan í § …er ikki ætlað at broyta um hesi sertilfeldi og ei heldur at broyta ella gera upp við tær tulkingar um lógarrang, sum eru galdandi í dag, men er bert ætlað sum ein høvuðsáseting.

**Markreglan:** Skotið verður upp, at óskrivaða reglan um, at myndugleiki altíð skal fara so varliga fram sum gjørligt t.v.s. ikki at nýta harðari vald / miðul enn neyðugt fyri at náa einum endamáli, verður sett í grundlógina, so eisini hendan gundleggjandi regla gerst partur av skrivaða rættinum og harvið eisini ein av okkara grundlógartryggjaðu reglum.

**Revsing:** Skotið verður upp, at tað verður staðfest í grundlógini, at revsing bert kann áleggjast við dómi og bert við heimild í lóg, sum var galdandi, tá brotið varð framt.
Við hesi grein verður sostatt tryggjað, at eingin kann verða revsaður fyri nakað, sum ikki var revsivert, tá gerðin varð framd.

**Leikfólk:** Við hesi grein verður mælt til at varðveita ásetingina um, at leikfólk skulu virka við í rættinum, tá talan er um revsimál. Við at hava leikfólk í rættarviðgerðini, bæði tá tað snýr seg um skuldarspurning og revsilongd kemur døming og revsilongd at liggja so nær gjørligt at tí vanligu áskoðanini, sum flest borgarar hava um tey ymisku lógarbrotini. Harvið skuldu dómararnir eisini betri kunna avspegla okkara samfelagsnorm. Eisini fyri at geva góða rættartrygd verður tað mett umráðandi, at tað eru fleiri dómarar ( juridiskir + leikfólk ) sum saman meta um prógv og frágreiðingar, heldur enn at tað sum nú er meginreglan í hesum málum, at ein einsamallur dómari avger alt málið í Føroya Rætti.

Í greinini verður ikki gjørd nærri áseting um, í hvønn mun leikmansskipanin skal virka, men verður heimilað Løgtinginum at gera nærri ásetingar hesum viðvíkjandi.

**Fyrisitingardómstólur:** Við hesi grein mælir nevndin til at varðveita tann møguleika, ið verandi grundlóg gevur okkum at skipa fyrisitingardómstól. Í greinini verður skotið upp, at avgerðir hjá einum fyrisitingardómstóli altíð skulu kunna leggjast fyri ein dómstól.

**Rættarmál:** Sí viðmerkingar undir umboðan.

# Tilfeingi

**Bólkurin Tilfeingi** er partur av høvuðsbólkinum Stýrisskipan inneftir.

Bólkurin hevur viðgjørt tilfeingi av ógvuliga ymiskum slag. Í summum førum er nýtslan av tilfeinginum knýtt at stórum fíggjarligum og búskaparligum áhugamálum og í øðrum førum er talan um tilfeingi, sum kanska ikki hevur tann stóra búskaparliga týdningin, men sum fyri nógv fólk heldur er at meta sum ein rekreativur kapitalur, sum hevur alstóran týdning fyri lívsvirði og trivna hjá tí einstaka og fyri lívføri hjá bygda umhvørvinum í landi okkara.

Evnið er viðgjørt í bólki, og bólkurin hevur lagt fram upprit um tilfeingi, har evnið verður viðgjørt í einum breiðum samanberandi høpi. Hetta upprit er tøkt í skjalasavninum hjá Grundlógarnevndini.

Evnið er eisini viðgjørt í sperribólki og lagt fram á Grundlógarfundi 14. desember 2001, har tað var viðgjørt.

## Støði

Spurningurin um tilfeingi fevnir rættiliga víða og spennir frá stórum fíggarligum áhugamálum til tað sum vit kunnu nevna mentanarligan ella rekreativan kapital. Hvat er so tilfeingi? Tilfeingið liggur í undirgrundini, omaná jørðini, í luftini og í tí náttúrugivna og í summum førum eisini í einum mentanarskaptum umhvørvi. Tilfeingi er eisini at meta sum sjóøki, sum kann nýtast til aling. Streymur og vindur sum kann nýtast til orkuskapan. Sumt av tilfeinginum endurnýggjast, meðan annað ikki letur seg endurnýggja.

At tilfeingi ikki kann endurnýggjast førir ikki við sær, at tey, sum í løtuni útvinna tað, eiga allan ágóðan av tí. Her er neyðugt at gera reglur fyri, hvat skal nýtast nú og hvat skal goymast til onnur ættarlið. Eftir sjey góð ár kunnu koma sjey ring ár. Tað er tí neyðugt at hava brunnar og grunnar at taka av. Tey sum liva í løtuni eiga ein part av tilfeinginum, men ikki alt, spurningurin er bert hvussu langt inn í framtíðina vit skulu goyma tilfeingi ella tilfeingisrentu. Talan er ikki bert um tað tilfeingi sum er peningaskapandi, men eisini tað sum er lívsskapandi. Í fleiri førum hoyrir spurningurin um umhvørvi saman við tilfeingisspurninginum.

Tilfeingi í gamla føroyska samfelagnum varð knýtt at markatalsjørðini við sínum lutum og lunnindum. Tað var jørðin sum var tað strukturerandi grundarlagið undir øllum samfelagnum. Jørðiun í sjálvum sær átti alt, og gav rætt til tilfeingisnýtslu, antin talan var um óðalsjørð ella kongsjørð. Óðalsjørðin hevur frá gamlari tíð verið einskild og ogn hins einstaka, meðan kongsjørðin fyri at brúka eitt felags heiti, um alla ta jørð, sum ikki var ogn, var ogn kongs ella landsins, sum varð leigað út til leigulendingar sum vóru róptir kongsbøndur. Festini kundi vera sera ymisk til støddar. Tann ognarleysi hevði ikki stóran rætt í tí gamla føroyska samfelagnum, hann hevði bert sína arbeiðsmegi og dugnaskap at lata. Kortini var tað so, at fekkst tú bústað, so fylgdi í flestu bygdum eisini rætturin til torv við. Annars átti seyðurin hagan alt árið og um veturin eisini bøin. Tað var ikki loyvt at ganga í haganum uttan í lógligum ørðindum. Reglur eru enn fyri hesum í hagalógini. Til jørðina hoyrdi eisini annar rættur so sum strandrættur, sum hevði týdning fyri landpart og jarðahval. Fyrr fekka óðalsbóndin jarðarhval, men kongsbóndin átti ikki jarðarhvalin, men kongur, sum átti kongsjørðina, eftir 1832 kundi kongsbóndin kortini keypa jarðarhvalin fyri rímiligan pening. Festarar lótu kongi pening fyri

tilfeingisrentuna. Tá teir kastaðu nót var landpartur latin, men eingin hevur nakrantíð hoyrt um at landpartur hevur verðið latin av tí sum fekst á seiðabergi.
Seinni er so spurningurin um nýtslu av øðrum tilfeingi sum gróti, koli, royðu, vatni og øðrum sum finnst í jørðini. Hetta eru alt spurningar sum hoyra nýggjari tið til, men mugu viðgerast við støði í gamlari siðvenju.

Niðurstøðan er tann at óðalsjørðin við sínum lutum og lunnindum er at meta sum vanlig einskild ogn. Hin vegin er kongsjørðin ella landsjørðin sum hon nú eitur almen ogn og sum slík ogn Føroya Fólks umsitin av Føroya Løgtingi við deligering latin Føroya Jarðarráð at umsita eftir teilum lógum, sum løgtingi ásetir. Siðvenja hevur verið at tað eru latnar traðir til onnur av bæði óðalsjørð og landsjørð at nýta og av landsjørðini er eisini latið byggilendi, sum fólk hava kunnað keypt og síðan eiga sum einskilda ogn. Spurningurin er so um tað er Føroya Løgting sum hevur rætt til at einskilja alla landsjørðina, ella um tað er Føroya Fólk sum skal geva Løgtinginum rætt til hetta við fólkaatkvøðu, um spurningurin skuldi komi upp á tal. Nógv bendir á tað seinasta, tí talan er um helvtina av allari jørð í Føroyum, sum fólkið eigur. Tá talan er um landsjørð so er eingin ivi um at fólkið í síðsta enda eigur allan rættin, men spurningurin er so hvussu langt ognarrætturin hjá óðalsjørðini gongu. Eftir gamlari siðvenju hevur jørðin verið grundarlag undir landbúnaðarfremleiðslu, fiskiveiði og aðrari veiði.

Spurningurin er hvør eigur náttúrutilfeingi sum grót, vatn, gass, og møguliga olja á óðalsjørð. Tilfeingi sum áður ikki hevur kunna verið brúkt. Spurningurin er hvar markið gongur millum einskilda ogn og landsogn úr einum vertikalum sjónarmiði. Eitt grundleggjandi sjónarmið kundi verið, at tað sum ikki hevur verið einskild ogn er ogn landsins ella Føroya Fólks.

Tað tilfeingi sum í dag hevur stórstan týdning er fiskurin í havinum og oljan i undirgrundini.
Í lógini um vinnuligan fiskiskap stendur, at “Livandi tilfeingi á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýri við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða fatan eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya Fólks.” T.v.s. at tað er fólkið sjálvt sum hevur evsta vald á hesum tilfeingi, og í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap er greitt frá hvussu hetta tilfeingi skal nýtast á besta hátt við at sjóða saman lívfrøðilig, vistfrøðilig og búskaparlig attlitum. Har talan er um ferðandi stovnar verður hetta gjørt í millumlandasamstarvi við atliti at havrættinum og annars somu lívfrøðiligrtu og búskaparligu atlitunum.

Í grundlógararbeiðinum hevur tað eisini verið ført fram, at tað er ábyrgdin hjá stýrisvøldunum í Føroyum at varðveita og styrkja vunnin rættindi uttanfyri føroyskt landamark, so hesi rættindi ikki verða mist.

Undirgrundin er føroysk. Tey ivamál sum hava verið í hesum sambandi millum Danmark og Føroyar vóru loyst í 1992, tá danska stjórnin við Poul Schlüter á odda avgreiddi hetta mál eftir at Føroyar og Danmark høvdu samráðst eitt langt tíðarskeið.

Føroya fólk er eisini komandi ættarlið. Tí eigur tilfeingið at verða troytt á ein slíkan hátt, at tað fær høvi til at endurnýggja seg. Tað vil siga at ansa eftir at fiskastovnarnir ikki verða niðurfiskaðir, at umhvørvið ikki verður dálkað so at lívsgrundarlagið hjá øllum livandi í havinum ikki verður hótt. Tá talan er um nýtslu av tilfeingi, sum ikki letur seg endurnýggja, so eigur tað at verða skipað so fyri við lóg, at hesin vunni kapitalur endurnýggjar seg á besta hátt og annars verður nýttur so skilagott sum gjørligt bæði við atliti at nútíðini og framtíðini. Her er ein tilfeingusgrunnur ein møgulig loysn.

Onnur lond hava slíkar grunnar, men teir eru skipaðir á ymiskan hátt. Ì Noreg er talan um ein roknskapartekniskan grunn, ið ikki er ein sjálvstøðugur stovnur. Samtykkir stórtingið eina fíggjarlóg við undirskoti, verður tikið úr grunninum samsvarandi. Grunnurin kann tí minka, um Stórtingið vil

tað. Í Alaska er til grunnur tryggjaður í grundlógini, soleiðis at bert partar av yvirskotinum kunnu takast úr grunninum. Eisini verður ein partur av yvirskotinum latin borgararunum í Alaska beinleiðis uttanum fíggjarlógina. Spurningurin er kortini um hesin grunnur ikki heldur hoyrir undir evnið fíggjarmál enn evnið tilfeingi.

Tað er eisini tilfeingi, sum ikki hevur nakran beinleiðis búskaparligan týdning, men hendur ein rekreativen ella mentanarligan týdning. Hetta er ein rekrerativur kapitalur, sum hevur týdning fyri lívsvirði, lívsdygd og trivna hjá tí einstaka og fyri lívføri hjá bygdaumhvørvunum í landi okkara. Her er talan um mentannarliga unhvørvið eins væl og náttúruumhvørvi. Umhvørvið eigur at haldast reint og so óspilt sum gjørligt. Nýtsla, íløgur bygging o.a. bæði av almennum og einskildum slag eigur at hava fyrilit fyri umhvørvinum og lívsvirðunum hjá fólki í síni heild. Føroya fólk og tey sum koma higar eiga at hava rætt til at fáa gleði av einum so fjølbroyttum náttururíkidømi og nátturuvakurleika sum gjørligt. Fyrilit eigur eisini at verða tikið fyri føroyskum mentanararvi í lívi og verki.

Í Svøríki er hugtakið allemannsrätten at finna í svensku grundlógini. Hesin rættur gevur øllum rætt til at ganga í skóg, fjøllum, strond og aðrastaðini fyri at gleðast um nátturuna. Spurningurin er tí um vit ikki eiga at geva fólki okkara sama rætt. Ein rættur ið sum er ikki er at finna í hagalógunum. Heldur er talan um strangar avmarkingar.

Gamalt var at tað sum tú veiddi á báti, átti báturin og teir sum við bátinum róðu. Her var eingin landpartur latin. Veiddi tú fugl so langt frá landi, at stong ikki rakk á land, so nýttist tær ikki at lata landpart. Eingin hevur nakrantíð hoyrt um at landpartur er latin av tí sum tú fekkst á seiðabergi. Tað hevur verið vanligt hjá føroyingum at kunna fara á seiðaberg ella á flot fyri at fáa sær eitt kók uttan at nakað forðaði teimum í hesum. Føroyingar eiga rætt til innløgu á sjónum og úr sjónum. Hesin innløgurættur hevur helst eisini verið havdur í huga í lógini um vinnuligan fiskiskap frá 1994 við seinni broytingum. Tað stendur í § 6, at "tann ið ætlar sær at avreiða, skal søkja um fiskiloyvi. Um bert verður veitt til húsbrúks, krevst ikki fiskiloyvi". Hesin rættur er ikki til alla staðini, t.d. er rætturin hjá tí einstaka at fara á flot í Nýfundnalandi uttan fiskiloyvi, sera avmarkaður. Spurningurin er tí um vit ikki sum nakað nýtt, eiga at tryggja inniløgurættin hjá føroyingum í grundlógini, so teir kunnu fara á flot ella á seiðaberg uttan mun til um teir hava fiskiloyvi ella ikki, men tá bert til egna nýtslu. Vit kunnu í grundlógarhøpi nevna hetta innløgurættin.

## Uppskot til lógargreinir

### *§ 1.* Innløgurættindi

(1) Hvør eigur rætt til egna innløgu.
(2) Í øllum førum, tá maður leggur til húsið úr sjónum, uttan at gjald er uppií, skal innløgan vera frí og fingin.

### *§ 2.* Hvørsmansrættur

(1) Hvør eigur rætt at ferðast og fara á sjógvi og landi, tá tað er uttan ampa fyri fólk, fæ, vøkstur og náttúru, og ikki er avmarkað av lóg.

### *§ 3.* Óðalsjørð og landsjørð

(1) Hvør eigur rætt til óðalsjørð sína sum til aðra einskilda ogn, kortini so at løgtingið kann við lóg áseta reglur um minstustødd.
(2) Landsjørðin er ogn Føroys Fólks. Viðurskiftini hjá landsjrøðini verða skipað við lóg.

### *§ 4.* Tilfeingi

(1) Lívfrøðiliga margfaldið á havøki landsins, undirgrundin og tað har er, loftrúmið og veður fyribrigdi, vindur, væta og sjógvur, streymurin í sundunum og kring Føroyar og alt

annað sum einskild ikki eiga og sum nytta í komandi tíðum kann fáast búrtur er tilfeingi landsins og Føroya Fólks.
(2) Landsins stovnar og myndugleikar allir hava umsorgan fyri tilfeingi landsins.
(3) Nú er ætlan at fáa nyttu og vinnu burtur úr tilfeingi landsins, tá skal landið tryggja annaðhvørt øllum vinnurætt ella krevja gjøld.

## Viðmerkingar

### Innløgurættindi

***§ 1.***

Tað sum her verður hugsað um er at øll í Føroyum skulu hava rætt til at fara á flot ella á seiðaberg og veiða til egið brúk, eins og tað higartil hevur verið vanligt í Føroyum. Til egið brúk eigur í hesum føri eisini at verða roknaður tann gamli føroyski siðurin, at bera vinum og skyldfólki eitt kók. Grindaveiði kemur eisini undir hesa reglu, so leingi grindabýtið fer fram eftir fornum siði. Innløga kemur ikki undir kvotur ella aðrar avmarkingar, tí hon er í veiðinøgd avmarkað í sjálvari sær. Verður tað sum veitt verður selt ella á annan hátt latið øðrum við vinningi fyri eyga, so er ikki longur talan um skal innløgan skal vera frí og fingin. Tá kemur hon undir vanligar skattingar- og avgjaldsreglur. Tað sama er um grind verður seld, uttan fyri grindaskaða ella aðrar útreiðslur í sambandi við drápið, her uppi í eisini flutningur. Verður veiða avreidd ella seld á uppboðsølu, so er ikki longur talan um innløgu, men um vinnu.

### Hvørsmansrættur

***§ 2.***

Her hava vit lænt hugtakið um allemansretten frá svensku grundlógini, sum í meginreglunum gevur hvørjum menniskja rætt til at ferðast og fara allastaðini í landinum, har tað ikki beinleiðis er avmarkað við lóg. Hetta er beint tvørturímóti ti, sum er galdandi.

At hvør skal hava sín lógliga rætt at ferðast á landi og sjógvi brýtur við galdandi hagalóggávu. Hagalógirnar síggja hagan bert sum eitt tilfeingið undir framleiðslu t.v.s. seyði og øðrum fenaði. Ì hagalógini verður farið so langt, at seyðurin eisini eigur rætt til bøin um veturin heilt inn at húsunum, um so er at økið ikki er vetrarfriðað. Sbrt. Lóg nr. 171 af 18.05.1937 for Færøerne om Hegn og Markfred broytt við Ll nr. 30 af 17.03. 1951 eru settar rættiliga stórar avmarkingar í rættindinum hjá fólki at ganga í haganum. Fólk kunnu fáa bót um tey "gaar uden for ret Bygdevei i Hauge" (grein 41) og grein 42 eru greitt frá hvat er loyvt.

Tað er, sum er, als ikki loyvt at ganga í haganum til stuttleika. Fyri nógv fólk er hagi og fjøll í dag rekreativ øki. Tað skal tí verða loyvt hjá fólki at ganga í haganum bert fyri at njóta náttúruna og fyri at styrkja seg til likams og sálar. Hetta skal ikki verða náttúruni, fenað, fuglameingi, gróðri, gróti og øðrum til ampa, og ikki slíta óneyðugt á náttúruna. Tað skulu aðrar lógir og reglugerðir syrgja fyri, t.d.kunnu ávís støð verða friða ávísar tíðir av árinum.

### Óðalsjørð og landsjørð

***§ 3.***

Føroyar hava frá gamlari tíð havt óðalsjørð og landsjørð, tað sum fyrr var nevnt kongsjørð. Munurin er tann at at óðalsjørðin er einskild og kann arvast og seljast eins og onnur ogn. Fyri at jørðin ikki skal syndrast í alt ov smáar lutur, kann løgtingið við lóg áseta reglur fyri minstustødd av óðalseindum og um frámatrikulering. Spurningurin er so hvør eigur tilfeingi. Her eigur tann meginregla at galda, at tað sum ikki frammanundan er einskild ogn er ogn landsins og Føroya Fólks.
Landsjørðina eigur Føroya Fólk og Løgtingið ásetir lóg um landsjørðina. Landsjørðin kann eins og higartil verður latin sum festi, har tað verður kravt gjald ella leiga . Løgtingi hevur ábyrgdina av

landsjørðin verður umsitin fíggjarliga og búskaparliga á besta hátt sum annað tilfeingi landsins. Landsjørðin kann eins og higartil verða latin til byggiøki og seld einstaklingum. Hugsast kann at ynski koma fram um einskiljing av allari landsjørðini, ið er ogn Føroya Fólks. Spurningurin er, um tað ikki er ein so álvarsligur spurningur at hann eigur at fara til fólkaatkvøðu.

## Tilfeingi

*§ 4.*

Tilfeingið er ymist til ymiskar tíðir. Fyri at talan skal verða um tilfeingi, so má nytta kunna fást burtur úr tí. Tað er tí lýst rættiliga breitt hvat tilfeingi er, tí okkurt sum í dag ikki kann nýtast, kann koma at hava stóran tídning i framtíðini.

Aðaltankin er at alt tilfeingið grundleggjandi er ogn Føroya Fólks og skal umsitast á besta hátt í løtuni og við atliti at komandi tíðum.. Myndugleikarnir skulu við atliti at vistfrøðiligu heildini saman við atliti at bestu úrtøkumøguleikum skapa karmar at virka undir. Eisini skulu myndugleikarnir síggja til at rættur til nýtslu av tilfeingi og vunnin tilfeingisrættindi aðrastaðini ikki gleppa Føroya Fólki av hondum. Har tilfeingi er einskild ongn eigur við lóg at verða skipað so fyri at hetta tilfeingi verður nýtt á besta hátt og flest møguligum at gagni, uttan kortini at gera seg inn á ognarrættin.

Fyri at øll skulu hava sama rætt til at vinna burtur úr felags tilfeingi skal hetta verða gjørt eftir lóg og reglum. Ber tað av praktiskum ella øðrum grundum ikki til at lata øllum vinnurætt so skulu tey ið fáa vinnurætt  fram um onnur, gjalda fyri hann ella fáa hann undir slíkum treytum at tað verður heildini at gagni. Her verður t.d. hugsa um royndarfiskiskap ella nýgg kapitalkrevjandi átøk. Allur nýtslurættur eigur at verða tíðaravmarkaður. Um gjaldið fer beinleiðis í landskassan sum partur av fíggjarlógini, ella tað fer í ein í Búskapar- ella útjavningargrunn, verður ásett við lóg.

## Uppískoyti

Ein møguligur búskapargrunnur ella útjavningargrunnur hevur eisini verið viðgjørdur, men hildið verður at hann hoyrir undir evnið fíggjarmál.

**Búskapargrunnur ella útjavningargrunnur**

***§ 1.*** Tilfeingisrenta, tilfeingisinntøkur og avlop á fíggjarætlan landsins og vinningur av øllum størri almennum sølum fara í ein Búskapargrunn.
(2) Fæ og rentur grunsins skulu verða føroyska fólkinum, bæði tí núlivandi og tí komandi, at gagni.
(3) Løgtingið setur stýri at umsita grunnin hvørs virksemi verður ásett við lóg.

Tað sum er ætlanin við hesi grein er at grundlógarfesta áhaldið í føroyska búskapinum, so at tað altíð verður settur peningur til viks til tíðarligar útjavningar at standa ímóti við. Føroyski búskapurin byggir fyrst og fremst á fiskuvinnu, sum kann verða svikalig og ójøvn. Oljuframleiðslan, um hon kemur er eisini avmarkað. Eisini kann annað fara í grunnin t.d. søluinntøkur av stórum almennum virkjum og stovnum sum landið velur at einskilja.

Lok skal ikki leggjast á grunnin og tær rentur sum hann gevur, men avkastið skal nýtast tað við almennum og búskaparligum skili øllum at gagni. Hetta eins og stýri grunsins verður skipað við lóg.

Aðalmálið er at grunnurin skal kunna virka sum ein partur av fíggjargrundarlagnum undir føroyska samfelagnum, men skal verða hildin uttanfyri í góðum tíðum, men skal kunna verða útjavnandi í ringum tíðum.

# Kommunur

**Bólkurin Kommunur** hevur havt til uppgávu at gera av, "hvussu heimildir og ábyrgd hjá kommunum (ella líknandi lokalari, fólkarøðisligari umsiting) kunnu grundlógarfestast". Her tala vit sostatt um fólkaræðisligari grundreglur og virki í politiska stjórnarkervinum, herundir hvørjum prinsippum býtið millum stat og kommunur eigur at byggja á.
Undirbólkurin um kommunur/lokalt fólkaræði hevur havt tveir fundir, ávíkavist tann 13 januar og tann 10 mars 2000, og við grundarlagi í hesum báðum fundum varð eitt upprit gjørt. Uppritið er tøkt í skjalasavninum hjá grundlógarnevndini, eins og annað tilfar, ið hevur verið nýtt.
Uppritið og eitt fyrsta uppskot til grundlógarorðingar varð lagt fram á plenumfundi í grundlógarnevndini. Uppritið er munnliga kommenterað av Hilmari Høgenni, deildarleiðara á kommunudeildini á Løgmansskrivstovuni í samrøðu við Gestur Hovgaard 20. novembur 2001, og síðani "sperra" á fundi í Grundlógarnevndini tann 14 desember 2001.

Fyriliggjandi uppskot byggir á nevndu gongd í málinum, men av tí at tingfundur var tann 14 desember, og nevndin nærum bert varð mannað við samfelagsfrøðingum, er *evnið ikki endaliga viðgjørt og góðkent.*

## Støði

Grundleggjandi spurningurin um kommunur/lokalt fólkaræði, er rættuliga einfaldur. Skal lokala fólkaræðið ásetast í eini føroyskari grundlóg ella ikki? Svarið hevur eisini verið lætt, tí ongin hevur talað móti at ein tílík staðfesting verður gjørd í føroysku grundlógini.

Í Svøríki verður týdningurin av kommununum staðfestur í præamblinum til svensku grundlógina. Um so skuldi vera í eini føroyskari grundlóg, varð diskuterað í undirbólkinum, men varð ongin niðurstøða gjørd tá, og hevur hetta ikki verðið viðgjørt nærri í plenum.

Torførari er at greina, hvat konkret innihald liggur í einum grundlógarfestum rætti til lokalt fólkaræði. Ein partur av hesum er, hvør eind er tann sum umboðar lokala fólkaræðið. Týdningurin av sýslum, sóknum og markatalsbygdum hevur søguliga sæð verið stórur. Ongin ivi er tó um, at tá talan er um lokala fólkaræðið, so er tað kommunan, ið er tann avgerandi eindin. Ein grundlógaráseting um lokala fólkaræðið er tí ein áseting um kommunur, meðan týdningurin av øðrum lokalum institusjónum má greinast í øðrum pørtum av grundlógini.

Hin parturin av sama spurningi er, hvat staðfestingin av at Føroyar hava eina skipan við kommunum inniber. Fyrst og fremst er talan um tað prinsipiella innihaldið í hesi skipan. Hetta merkir eitt nú, at ein tílík áseting ikki skal blanda seg í spurningin um støðd og tal av kommunum, ella hvussu uppgávu- og ábyrgdarbýti skal vera millum land og kommunur. Hesi viðurskifti vera at skipa í serstøkum lógum, soleiðis sum longu nú er siðvenja.

Innihaldið í eini grundlógaráseting um kommunur handlar fyrst av øllum um, at kommunurnar hava ein rætt til ”veruligt lokalt sjálvræði/sjálvstýri”, soleiðis sum tað er kjølfest í teirri norðurlendsku tradisjónini fyri kommunustýri. Í hesum samanhangi merkir veruligt lokalt sjálvræði, at umboðanin í kommununi er fólkavald, av teimum borgarum sum búgva á staðnum. Veruligt lokalt sjálvræði merkir

eisini, at hesin rættur kann útinnast gjøgnum egnar politiskar avgerðir og fyriskipanir uttan íblanding frá statsins síðu. Veruligt lokalt sjálvræði merkir tó ikki, at kommunurnar eru ein ”statur” í statinum, men at sjálvræðið verður útinnt innan karmarnar av politiska stýriskervinum.

Tað er við omanfyrinevnda sum grundarlagi, at orðingarnar um kommunala sjálvræðið í grundlógini eru gjørdar. Nærri grundgevingar eru útgreinaðar í viðmerkingum til orðingarnar.

## Uppskot til lógargreinar

***§ 1.***
Føroyar eru skipaðar í kommunur.
(2) Kommunurnar verða stýrdar av fólkavaldum umboðum.

***§ 2.***
Kommunurnar hava heimild at skipa síni viðurskifti eftir egnum fortreytum. Tær ráða teimum viðurskiftum, ið best liggja nær at fólkinum. Kommunurnar hava rætt at áseta skatt, til at skipa viðurskifti síni.

***§ 3.***
Kommunustýrið verður framt við virðing fyri landsins lógum.

***§ 4.***
Kommunurnar eru við til at tryggja bústað og trivnað á bygd

## Viðmerkingar

***§ 1.***
Hendan greinin staðfestir, at Føroyar hava eina skipan við kommunum. Týdningurin av hesi staðfesting skal síggjast í atliti til, at kommunan hevur søguliga sæð havt ein alstóran týdning fyri menningina av fólkaræði, vælferð og trivnaði, og at hesin týdningur er eins stórur – ella størri - í dag.

Serligi týdningurin av kommununum er eisini tann, at tær eru mentar í einum spenningshvarvi millum at vera ”statsins umsiting”, har tær seta í verk og umsita statsligar uppgávur, og so at vera ”lokalt sjálvstýri” har tær ráða egnum viðurskiftum og íbirtanina av hesum.

Við at staðfesta kommunalu skipanina í grundlógini, viðurkenna vit hesar týdningarmiklu lutir kommunurnar í okkara samfelagsmenning.

Petti 2 staðfestir, at skipanin við kommunum er partur av politiska stjórnarkervinum.
Sum partur av politiska stjórnarkervinum, eru kommunurnar at meta sum tann primera fólkaræðisliga eindin.

Kommunustýrið verður tí valt av borgarunum í kommununi, og útinnar á hesum grundarlagi sín myndugleika.

Val til kommunstýrið og fyriskipan av kommunustýrinum vera nærri útgreinaði í landsins lógum.

***§ 2.***

Hendan ásetingin staðfestir, at kommunurnar, sum primeru fólkaræðisligu eindirnar, hava eina fríheit at avgerða og fyriskipa egin viðurskifti.

Talan er um ein rætt til avgerðir og fyriskipan uttan íblanding frá yvirskipaðum myndugleikum, men hevur eisini sínar avmarkingar.

Sum partur av politiska stjórnarkervinum, er hesin rættur kommunurnar ein rættur at handla frítt innan ávísar lógarkarmar. Kommunala sjálvstýrið er sostatt ein kompetansa, ið frá statinum er givin kommununum. Samstundis liggur í hesum, at kommunurnar innan hesar kompetansukarmar mugu kunna mynda eitt egið politiskt sjálvræði.

Til at tryggja hetta sjálvræði, áleggur grundlógin, at kommunan hevur rættin til sjálvstøðuga kompetansu. Hetta merkir, at lógarinnar rammur eiga at vera evnaðar soleiðis, at tær geva kommununum ein veruligan møguleika at útinna rættin til lokalt sjálvræði. Til dømis kann lógarverkið tí ikki eintýðugt fastleggja treytir og innihald í eini avgerð, sum so kommunurnar skulu íverkseta.

Ein annar táttur av lokala sjálvræðinum, er rætturin at seta í verk egnar fyriskipanir, til at loysa sínar uppgávur. Kommunurnar hava tí rættin til eitt nú frítt at skipa millumkommunalt samstarv, sum jú hevur verið vanligt í Føroyum. Aðrir møguleikar liggja í ymiskum samanseitingum av almennum, privatum og sivilsamfelagsligum samansetingum, soleiðis sum langt síðani er vorðið alt meiri vanligt í okkara grannalondum. Rætturin til egna fyriskipan hevur sínar lógarbundnu avmarkingar, men skal innan hesar karmar eisini vera ein veruligur møguleiki.

Í hesum stykki liggur ein viðurkenning av, at ávísar samfelagsligar uppgávur eru best egnaðar at liggja nær at borgarunum, tvs. í kommununi. Hesar uppgávur kunnu eitt nú vera nakrar av teimum tænastu- og menningaruppgávum, sum eitt nútímans samfelag veitir.
Tá kommunala fólkaræðið ræður viðurskiftum, sum best liggja nær at borgarinum, merkir hetta eisini, at kommunurnar eiga at taka eitt nú "brúkaraávirkan" og "stovnsávirkan" við sum ein lið í útinnani av sínari kompetansu. Kommunustýrið hevur greitt rættin at stýra og taka avgerðirnar, men stutt sagt, so er kommunustýrið ikki stýrið hjá teimum, sum vald eru, men stýrið hjá tí einkulta borgaranum búsitandi í kommununi. Herí liggur tí ein greið plikt hjá kommunustýrinum at taka atlit til sjónarmið hjá tí einkulta borgaranum og bólkum í kommununi. Hendan pliktin er eitt nú pliktin at halda fyriskriftir um upplýsing, hoyringar, lokalar fólkaatkvøður, eins og pliktin til fyrisitingarliga at stilla øll líka, soleiðis sum fyriskrivað er í landsins lógum. Men herí liggur eisini ein plikt at taka atlit útyvir vanligar lógarforskriftir, um umstøðurnar annars tala fyri tí (sí eisini stykki 3).

Tað ber ikki til at greina og raðfesta eintýðugt, hvørjar lógir og hvørjar uppgávur tryggja kommunala sjálvræðið best. Heldur ikki ber til at siga, hvørjir bólkar/áhugamál kommunan eigur at taka serligt atlit fyri. Hetta eru viðurskifti sum skifta yvir tíð og mangan eisini frá kommunu til kommunu.

Rætturin at krevja inn skatt er tó grundleggjandi hjá øllum kommunum, og tí verður hesin grundlógarfestur. Hesin rættur er søguliga festur í norðurlendsku politisku skipanunum, eins og hann má metast at vera ein fyritreyt fyri eitt veruligt lokalt sjálvræði, soleiðis sum tað her verður tulkað.

***§ 3.***

Hetta stykkið staðfestir, at kommunurnar í sínum virksemi skulu halda seg innan lógarinnar rammur og virða samfelagsliga lógarhierarkiið. Kommunala sjálvræðið kann tí ikki forða fyri, at eitt nú

kommulógin, ella aðrar lógir, sum beinleiðis bróta inn í teirra viðurskifti, broytast við nýggjari lóg (javnmet tó við viðmerkingarnar undir stk. 2).

Kommunala sjálvræðið skal vera framt við virðing fyri altjóða reglum, herundir mannarættindunum og øðrum fyriskipanum, sum staturin hevur bundið seg til at yvirhalda.
Kommunala sjálvsræðið er ongantíð bara galdandi fyri ein meiriluta í kommununi.

Kommunan skal tryggja, at minnilutar koma til orðanna, hava ávirkan og fáa somu tilboð sum onnur. Á hendan hátt eru kommunurar við at tryggja, at einstaklingar og serligir áhugabólkar ikki fáa ov stórt vald. Hetta er sostatt við til at tryggja tað samhaldsfesti, okkara samfelag byggir á (javnmet eisini við stykki 2).

***§ 4.***
Í Føroyum hava vit framvegis ein geografiskan og sosialan struktur, har fólk hava eitt sterkt og náturligt tilknýti til ávísar bygdir og øki, og sum kommunala sjálvræðið er ein týdningarmikil partur av.

Nógvar kommunur eru samansettar av einans einari ella tveimum bygdum, men í framtíðini kann roknast við, at kommunalu eindirnar gerast alsamt størri. Hendan gongdin, umframt eitt sera umskiftiligt samfelag, ger at ótryggleiki ræður um framtíðina hjá nógvum bygdum.
Hetta lokala ”territorialprinsipp”, sum eisini er ein viðurkenning av tí sosiala og menntunnarliga týdningi eitt spjatt búsetingarmynstur hevur, áleggur kommununum at vera við til at tryggja, at allar bygdir hava ein rætt til virðilig viðurskifti.

Heldur ikki í hesum føri ber til eintýðugt at staðfesta, nær talan er um virðilig viðurskifti. Virðilig viðurskifti broytast yvir tíð og kunnu vera rættuliga ymisk frá kommunu til kommunu, ella bygd til bygd.

At kommunan er við til at tryggja bústað og trivnað á bygd merkir, at kommunan ikki er einsamøll um hesa uppgávuna. Hendan er sjálvsagt tengd at býtinum í politiska stjórnarkervinum, eins og galdandi er fyri onnur samfelagsviðurskifti.

# Tingskipan

**Bólkurin Tingskipan** er partur av høvuðsbólkinum Stýrisskipan inneftir.

Evnið fevnir sum evnisøki fyrst og fremst um arbeiðslagið hjá tinginum í sambandi við lóggávuvirksemið. Í upprunaliga uppgávubýtinum er høvuðsbólkurin ”Stýrisskipan inneftir” býtt sundur í evnini: Tingskipan, valskipan, stjórnarvald, eftirlitisvald, fíggjarvald og tilfeingi. Hetta upprit um tingskipan er gjørt við atliti at upprunaliga uppgávubýtinum, og partarnir um lóggávuvaldið, ið náttúrliga koma undir valskipan, eftirlit ella stjórnarvald, eru tí ikki tiknir við her.

Evnið er viðgjørt í bólki, og bólkurin hevur lagt fram upprit um Tingskipan, sum er tøkt í skjalasavninum hjá Grundlógarnevndini.

Evnið er viðgjørt á fundi, har øll nevndin var savnað, tað er lagt fram á tíðindafundi, gjøgnumgingið grein fyri grein á fundum, har øll nevndin var savnað, tað er viðgjørt í sperribólki og lagt fram á 30. og 32. Grundlógarfundunum, sum vórðu hildinir 10. og 17. november 2001, har tað var viðgjørt.

## Støði

Á teimum mongu fundunum, ið hava verið um hetta evnið, hevur høvuðsboðskapurin frá politisku umboðunum í nevndini verið, at løgtingið við nýggju stýrisskipanarlógini hevur mist ov nógv av veruliga valdi sínum.

Ynskið hevur verið at finna eina betri javnvág, serliga í lógarfyrireikandi arbeiðinum, eitt nú við at geva tingnevndunum fleiri amboð, betri stundir og umstøður at arbeiða undir. Møguleikarnir hjá anstøðuni at gera lógarfyrireikandi arbeiði hava eisini verið umrøddir, og ynski hevur verið frammi um at fáa eina lógarskrivstovu í løgtinginum, serliga at vera tøk hjá anstøðuni, sum ikki í sama mun sum samgongan hevur atgongd til embætisverkið í landsfyrisitingini.

Spurningurin er, hvørt forðingar liggja í stýrisskipanarlógini ella í galdandi tingskipan. Flestu ásetingarnar um t.d. tíðarfreistir og arbeiðshátt hjá tinginum eru ásettar í tingskipanini. Greinirnar, ið her eru skrivaðar, broyta í flestu førum ikki verandi støðu avgerandi, men í viðmerkingunum er í summum førum greitt frá, hvat nevndin metir eigur at verða ásett í tingsskipanini.

## Uppskot til lógargreinar

### Tingstarvið

***§ 1.*.** Tingmenn røkja sæti sum álitisstarv eftir egnari sannføring.
(2) Løn tingmanna verður ásett í lóg.
(3) Eitt sitandi ting kann bert áseta lønir hjá einum einum komandi tingi.
(4) Tá ið góðkent er, at løgtingsmaður er valdur, skal hann siga frá sær øll álitisstørv í ráðum og nevndum undir landsstýrinum, ella sum landsstýrið hevur skipað hann í.

**Tingið kemur saman**

***§ 2.*** Nývalda løgtingið kemur saman til fundar kl. 10.00 tólvta yrkadag eftir valdagin, uttan so, at løgmaður longu hevur boðað til fundar.

**Samkomustaður**

***§ 3.*** Samkomustaður løgtingsins er Tórshavn. Um umstøður staðiliga krevja tað, kann tingið tó koma saman til fundar á øðrum staði.

**Tingformaðurin**

***§4.*** Tá ið valbrøvini eru góðkend verður løgtingið sett og velur tingið formann og næstformenn.

(2) Løgtingtingsformaður og næstformenn sita alt valskeiðið, uttan so er, at teir sjálvbodnir leggja frá sær, ella fýra fimtingar av øllum tingmonnum skrivliga krevja nýval av formansskapi.

(3) Varalimur tekur sæti á løgtingi fyri formannin.

(4) Formaðurin hevur ikki atkvøðurætt so leingi sum hann er formaður.

**Tingsetan**

***§ 5.*** Tingsetan byrjar Ólavsøkudag og heldur fram til Ólavsøkudag árið eftir.

(2) Ólavsøkudag ganga tinglimir, landsstýrið og embætismenn skrúgongu úr tinginum í dómkirkjuna, har gudstænasta verður hildin, og síðani aftur í tingið, alt eftir gomlum siði. Løgtingsformaðurin ger av, hvørjir embætismenn eru við í skrúgonguni, og hvussu gongan er skipað.

(3) Uppií tinghaldinum skal vera lógsøgn. Tingformaðurin skal á Ólavsøku leggja fram heiti á teim tinglógum, ið samtyktar eru farnu tingsetuna. Á sama hátt skal løgmaður gera vart við kunngerðir landsstýrismanna.

**Ólavsøkurøðan**

***§ 6.*** Løgmaður skal á Ólavsøku greiða frá støðu landsins, og tí ið landsstýrið ætlar at fremja.

(2) Við støði í røðu løgmans tekur tingið innan 6 yrkadagar støðu landsins til umrøðu.

**Tingarbeiðið**

***§ 7.*** Løgtingið ásetir sjálvt tingskipan sína, sum inniheldur nærri reglur um málsgongd og skilhald.

(2) Løgtingsformaðurin boðar til løgtingsfundar og kunnger samstundis dagsskrá. Formaðurin hevur skyldu til at boða til fundar uttan óneyðugt dvøl, um so er, at í minsta lagi tveir fimtingar av tingmonnum ella løgmaður skrivliga biðja um tingfund við dagsskrá.

(3) Umframt tingmenn sjálvar kunnu bert løgmaður, landsstýrismenn og ríkisumboðið møta og taka orðið á løgtingi. Bert tingmenn hava atkvøðurætt.

(4) Nú er uppskot lagt fyri tingið. Tá skulu fleiri vera møttir enn ikki, um nøkur samtykt skal vera. Eru fleiri fyri enn ímóti, eru uppskot samtykt, um ikki annað er ásett.

(5) Løgtingið velur umboð í nevndir og størv við lutfalli.

(6) Tá tingið hevur umrøtt alment mál, kann tingið gera sínar niðurstøður í stuttari samtykt.

**Innlit**

***§ 8.*** Tingfundir eru almennir. Frítt er at endurgeva og varpa út tingfundir.

(2) Eisini nevndarfundir, hoyringar og aðrar viðgerðir eru almenn. Viðgjørt tilfar skal vera til skajls ella til taks á annan hátt.

(3) Bæði tingfundir og aðrar viðgerðir kunnu tó lokast, um serlig viðurskifti ella áhugamál landsins gera tað neyðugt.

**Sømdir tingmanna**

***§ 9.*** Tingmaður má ikki verða ákærdur ella fongslaður uttan samtykki tingsins. Tó kann tingmaður takast á búri.

(2) Tingmaður kann ikki, uttan tingsins samtykt, standa til svars uttantings fyri tað, hann sigur innantings.

**Lóggávuvald**

***§ 10.*** Løgtingið hevur lóggávuvaldið.

(2) Tingmenn, løgmaður og landstýrismenn kunnu leggja fram uppskot fyri løgtingið.

**Lóggávumannagongd**

***§ 11.*** Tingið ásetir sjálvt eina framløgufreist.

(2) Uppskot kunnu bert leggjast fram eftir ásettu framløgufreistina, um tríggir tingmenn av fýra viðmæla.

(3) Uppskot til løgtingslóg skulu hava tríggjar viðgerðir á tingi fyri at kunna verða samtykt endaliga.

(4) Nú er nýval útskrivað. Tá falla øll framløgd uppskot, sum ikki eru samtykt, burtur.

(5) Nú er nýval útskrivað. Tá kunnu uppskot bert leggjast fram um fýra tingmenn av fimm viðmæla, og tilmæli er um hetta frá løgmanni og løgtingsformanninum.

(6) Nú er tinglóg samtykt. Tá kunnger tingformaðurin hana seinast 30 dagar eftir, sambært kunngerðarreglum ásettum í lóg, fyri at hon skal fáa gildi.

(7) Nú er tinglóg samtykt og hevur skund. Tá kunnu tríggir av fýra tingmonnum atkvøða fyri at hon verður kunngjørd og fær gildi beinanvegin ella fyrr.

**Millumlandalógir**

***§ 12.*** Um løgtingið sambært ríkissáttmála kann mæla til lógir, ella sáttmáli millum landa merkir lóggávu í Føroyum, skal framferðin vera tann sama sum við øðrum tinglógum.

**Kunngerðarlóggáva**

***§ 13.*** Løgtingið kann veita løgmanni, landstýrismonnum, øðrum av landsins stovnum ella serligum myndugleikum heimild at gera ásetingar í kunngerð.

(2) Kunngerðir mugu ikki stríða móti heimildini, taka hana uppaftur ella fara út um hana.

(3) Nú er kunngerð, hvørs innihald vegna hesa lóg ella kós sína berst tinginum ímóti. Tá kann tingið samtykkja, at kunngerðin fer úr gildi.

## Viðmerkingar

**Tingstarvið**

***§ 1.***

Málslig broyting í mun til § 23 í stýrisskipannarlógini

(2) Málslig broyting í mun til § 25 í stýrisskipanarlógini
Her eigur at verða havt í huga, at løn løgtingsformansins eigur at vera á sama støði sum løn løgmans, og hesir eiga sum útgangsstøði at fáa hægstu almennu lønir landsins.

(3) Sambært hesum kunnu tingmenn ikki áseta sínar egnu lønir, men bert lønirnar fyri eitt komandi ting.

(4) Málslig broyting í mun til § 8 í stýrisskipanarlógini.

**Tingið kemur saman**
***§ 2.***
Eingin broyting í mun til § 9 stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

**Samkomustaður**
***§ 3.***
Í mun til § 11 í stýrisskipanarlógini stendur nú øðrum staði í staðin fyri øðrum staði í landinum. Ásetingin skal tryggja tinginum eisini at virka sum útlagið. Ein herðing í mun til verandi stýrisskipan er, at umstøðurnar staðiliga skulu krevja tað, um fundur skal vera aðra staðni. Tað er upp til tingið sjálvt at greina nær slíkar umstøður eru til staðar.

**Tingformaðurin**
***§ 4.***
Málslig broyting í mun til § 9 stk. 2 í stýrisskipanarlógini.

(2) Eingin broyting í mun til § 9, stk. 3 í stýrisskipanarlógini.

(3) Hetta er ein broyting í mun til verandi skipan, sum onga slíka áseting hevur. Ætlanin er at tryggja formanninum náðir at røkja formansstarvið við tign og partloysi, og at viga upp fyri missinum hjá tingbólkinum, sum formaðurin kemur úr. Tað fylgir náttúrliga av ásetingini, at formaðurin við hesum tekur seg úr dagliga virkinum hjá tí tingbólki, hann er í.
*Viðmerkjast skal at nevndin var ógvuliga ivasom um hesa áseting. Fyrimunir við henni vórðu mettir at vera fyri tingbólkin, ið ikki verður eins lutskerdur og um ein limur fer burturav at røkja formanssessin uttan at nakar kemur í hansara stað, eins og fyrimunir eru við, at tingformaðurin ikki tekur lut sum politiskur partur í tjakinum. Vansar eru t.d,. at tað at velja formann kann verða nýtt politiskt, um ynski eitt nú er um at "parkera" ávísan persón, eins og vandi er fyri, at formaðurin missir møguleikan at gera seg galdandi politiskt og at halda sambandði við veljarar sínar.*

(4) Ásetingin er nýggj, og ein fylgja av ásetingini í (3). Hon skal tryggja, at meirilutin aftanfyri tingformannin ikki við valinum fær eina eyka atkvøðutyngd, og samstundis lætta um hjá tingformanninum, so tingið betur kann líta á, at hann virkar við tign, og sum partleysur.

**Tingsetan**
***§ 5.***
Eingin broyting í mun til § 10, stk. 1 í stýrisskipanarlógini

(2) Málsligar broytingar í mun til § 10, 2 í stýrisskipanarlógini

(3) Ásetingin er nýggj. Ætlanin er, at ásetingin – saman við ásetingini um løgmansrøðuna – skal tryggja, at tingið tekur samanum og eftirmetir virksemið farna árið. Náttúrligt verður eitt nú, at tingmenn halda lógsøgnina saman við afturlítandi partinum av løgmansrøðuni. Lagt verður upp til, at heitini ikki nýtast at verða lisin upp, men kunnu verða latin tingmonnum sum skjøl.

**Ólavsøkurøðan**
*§ 6.*
Málslig broyting í mun til § 12, stk. 1 í stýrisskipanarlógini

(2) Eingin broyting í mun til § 12, stk. 2 í stýrisskipanarlógini

**Tingarbeiðið**
*§ 7.*
Málslig broyting í mun til § 16 í stýrisskipanarlógini

(2) Eingin broyting í mun til § 13 í stýrisskipanarlógini

(3) Eingin innihaldslig broyting í mun til §§ 14 og 15 í verandi stýrisskipanarlóg.
Formansskapurin ella tingið eiga at kunna gera av, um tingsalurin skal kunna nýtast til fundir við onnur tignarlig umboð. Her verður serliga hugsað um, at ríkisstjórar úr øðrum londum skulu kunna verða bodnir í tingið at røða. Til dømis kann verða nevnt, at verandi siðvenja, har drotningin heldur røðu fyri tinginum, ikki ber til sambært stýrisskipannarlógini. Tingið eigur í tingskipan síni at gera nærri ásetingar um hetta.

(4) Málslig broyting í mun til § 18 í stýrisskipanarlógini

(5) Eingin broyting í mun til § 20 í stýrisskipanarlógini

Tilskilast skal í tingskipanini, hvørjar nevndir, ið tingið í minsta lagi skal velja.

Nevndirnar skipa seg og arbeiði sítt sjálvar. Høvuðsuppgávan hjá tingnevndunum er at viðgera tingmál. Í tingskipanini eigur at verða tilskilað undir hvørjum karmum nevndirnar skipa arbeiði sítt. Eitt nú eiga nevndirnar at kunna avgera at samstarva um ávís mál. Hendan møguleika hava tær ikki í verandi skipan, har fíggjarnevndin er hin einasta, ið kann leggja øðrum nevndum partar av málum at viðgera. Í mun til heimildina hjá fíggjarnevndini verður her lagt upp til, at nevndirnar semjast um at arbeiða saman, og hervið at tær eisini semjast um, hvussu, og um hvørjar partar av máli tær skulu samstarva. Her er serliga hugsað um størri mál, sum náttúrliga og eyðsýniliga fevna fleiri høvuðsøki. T.d. hava tingmenn fleiri ferðir seinastu tingseturnar gjørt vart við, at tað er óheppið, at eitt nú trivnaðar- og mentamálanevndin ella trivnaðar og vinnunevndin ikki hava høvi at viðgera mál í felag.

Í tingskipanini eigur eisini at verða tilskilað, hvørji amboð nevndirnar hava til arbeiði sítt, eitt nú at tær kunnu fara undir hoyringar og kanningar og annars viðgera øll mál. Nevndirnar eiga í hesum sambandi at kunna biðja um allar viðkomandi upplýsingar frá einstaklingum eins og landsstýrismonnum. Við hesum verður bøtt um møguleikan hjá nevndunum at leita sær upplýsingar, greina og kanna mál – eitt nú at taka upp til viðgerðar avleiddar spurningar í sambandi við mál, sum nevndirnar hava fingið at viðgera. Ásetingin leggur upp til, at nevndirnar fáa betur stundir og umstøður at arbeiða, og hon brýtur við § 24, skt. 4 í tingskipanini, ið sigur, at løgtingsnevndirnar bert kunnu taka til viðgerðar tey mál, sum løgtingsformaðurin eftir ávísum reglum beinir nevndini til viðgerðar.

Ásetingin leggur eisini upp til, at nevndirnar kunnu kalla landsstýrismann inn til samráð til eina og hvørja tíð og um eitt og hvørt viðkomandi evni.

(6) Nýggj áseting. Her fær tingið høvi til at kunna rættiliga nágreiniliga um støðu sína í ávísum máli, at leiðbeina landsstýrið og í størri ella minni mun binda tað til at halda eina ávísa kós. Sum hetta amboð hevur víst seg at virka í Danmark, hevur tað í serligum førum (eitt nu trygdarpolitisku

"dagsordanirnar" í 80'árunum) virkað sum koyril tingsins yvir eini minnilutastjórn, men oftast verið eitt hent amboð, sum bæði stjórn og andstøða hava kunnað nýtt til at skapa breiðar semjur við - ella til at lætta um samráðingarstøðuna tjá stjórnini, við at binda hana, har hon fegin vil verða bundin (dømi: samráðingar við ES, og samráðingar við landsstýrið um bankabjarging og sjálvstýri)

**Innlit**
***§ 8.***
Málslig broyting í mun til § 17 í stýrisskipanarlógini.

(2) Nevndarfundir eru ikki almennir í dag.

(3) Málslig broyting í mun til § 17 í stýrisskipanarlógini. Eisini broytt sum fylgja av petti 2.
Serlig viðurskifti kunnu eitt nú vera, tá talan er um viðbrekin persónlig viðurskifti, ið eru løtt at kenna aftur ella føra aftur til ávísan persón ella bólk av persónum – átøk viðurskiftum ið annars kundu verið fevnd av trúnaðarásetingunum, eitt nú í fyrisitingarlógini.

**Sømdir tingmanna**
***§ 9.***
Málslig broyting í mun til § 24, stk. 1 í stýrisskipanarlógini

(2) Málslig broyting í mun til § 24, stk. 2 í stýrisskipanarlógini

**Lóggávuvald**
***§ 10.***
Verandi støða sambært § 15, stk. 1 í stýrisskipanarlógini. Saman við broytingini í § 11 petti 6, har lagt verður upp til, at tað er løgtingsformaðurin sum, í staðin fyri sum nú løgmaður, kunnger løgtingslógir, verður tað løgtingið einasmalt, ið hevur lóggávuvaldið.

(2) Verandi støða sambært § 15, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

(7) Nýggj áseting, ið gevur tinginum høvi til at avgera styttri freist enn teirri, sum er givin í petti 6.
Lóggávumannagongd

***§ 11.***
Framløgufreistin, sum verður ásett í tingskipanini, skal verða soleiðis, at tingið fær stundir at arbeiða til fulnar við øllum málum.

(2) Er okkurt heilt álvarsligt áfatt, skal kortini bera til at geva lóg í bráskundi, men meirilutin, sum krevst at vera fyri hesum, er settur somikið høgt, at nærum full vissa er fyri, at aðrir enn landsstýrisberandi flokkarnir skulu taka undir við málinum, fyri at tað kann verða tikið til viðgerðar. Ásetingin er somikið trong fyri at varða móti at undantaksreglan í verki verður høvuðsreglan.

(3) Málslig broyting í mun til § 15, stk. 2 í stýrisskipanarlógini.

Eftir fyrstu viðgerð kann tingformaðurin beina uppskot í nevnd.
Beinir tingformaðurin ikki uppskot í nevnd, kunnu í minsta lagi 6 tinglimir avgera at málið skal í nevnd eftir fyrstu vigerð, ella ein nevnd kann sjálv biðja um at fáa málið til viðgerðar. Skipanin virkar tá somuleiðis sum um tingformaðurin hevði beint uppskotið í nevnd.

Nevndirnar kunnu gera broytingar innan karmarnar á lógaruppskotinum ella evnisøkinum, sum til viðgerðar er.

(4) Hetta er ein broyting í mun til § 15, stk. 3 í stýrisskipanarlógini, har framløgd uppskot eisini falla burtur av sær sjálvum, tá tingsetan endar.
Ætlanin við broytingini er, at tingið fær náðir at viðgera torgreidd mál, uttan at koma í tíðarneyð í seinasta enda (jbr uppskotið um lóg um almannapensjónir, sum varð lagt fram 3 ferðir).

(5) Hetta er nýtt í mun til verandi skipan. Endamálið er, at tingið altíð eigur at kunna virka undir heilt serligum umstøðum, t.d. um talan er um at verja munandi virði, ella trygd landsins er hótt.

(6) Í mun til § 26 í stýrisskipanarlógini er her lagt upp til, at tingformaðurin eisini kunnger løgtingslógir í staðin fyri sum nú løgmaður. Ásetingin fylgir kósini sum longu er løgd, har tingformaðurin hevur fingið uppgávur, ið annars sbrt. donsku grundlógini hoyra kongi til, t.d. í Meirilutin, sum krevst at vera fyri hesum, er settur somikið høgt, at nærum full vissa er fyri, at aðrir enn landsstýrisberandi flokkarnir skulu taka undir veð málinum. Ásetingin er somikið trong fyri at vara móti at undantaksreglan í verki verður høvuðsreglan.
Lóg kann bert fáa gildi fyrr enn hon er sett fram, um innihaldið hevur við sær batar fyri borgaran.

**Millumlandalógir**

***§ 12.***

Ásetingar í verandi stýrisskipanarlóg v.v. ríkislógartilmælum v.m. eru her savnaðar undir einari grein.

**Kunngerðarlóggáva**

***§ 13.***

Henda greinin er ætlað sum ein staðfesting av heimildarregluni, sum er lýst aðrastaðni í hesi lóg.

# Landshøvdingi

**Bólkurin Landshøvdingi** er partur av høvuðsbólkinum Stýrisskipan úteftir.

Bólkurin hevur viðgjørt spurningin, hvør er ovasta umboð Føroya. Bólkurin hevur lagt fram upprit, sum hevur verið viðgjørt í plenum. Farið hevur verið rættiliga víða. Kongsvøldini í teimum ymisku norðurlondunum hava verið kannað. Eisini hevur spurningurin um Føroyar skulu hava felags kong ella drotning saman við Danmark verið umrøddur. Somuleiðis um Føroyar skulu hava forseta. Hugsast kundi at Føroyar høvdu sama kong ella drotning sum Danmark, og at kongur ella drotningin verða umboðað við einum kongsins umboðsmanni í Føroyum eins og tað er vanligt t.d. i Canada. Tað sum tykist at hava verið tann best gongda leiðin er at lata antin løgtingsformannin ella løgmann verða hægsta umboð Føroya og sleppa spurninginum um kong og forseta. Hesir spurningar hava eisini verið viðgjørdir í sperribólkinum, og lógargreinir eru eisini settar fram um ein møguligan forseta. Tað úrslit sum sperribólkurin kom til var at í einum so lítlum landi sum Føroyar, er best at finna fram til eina einfalda loysn. Henda loysn er, at lata løgmann verða hægsta umboð Føroya.

Á fundi 10. 12. 2001 legði sperribólkunrin fram uppskot til viðgerðar, men av tí at fíggjarnevndarfundur var sama dag kundu bert einstakir politikarar møta á fundi.

Niðurstøðan um henda spurning er sostatt tann, at skift er orð um evnið bæði í bólkum og í plenum.

## Støði

Hvør er formliga hægsta umboð Føroya og hvør hevur hevur hægstu tign. Skal hetta vera ein føroyskur kongur, ella danski regenturin, ella skulu vit kanska hava forseta ella lata tingformannin hava hægstu tign í landinum ella skullu vit sameina tigninga í løgmanni Spurningurin er so eisini, hvønn leiklut, hvørjar heimildir og uppgávur, hesin landshøvdingi skal hava í samband við t.d. staðfesting av lógum, náðan av brotsverkum og í sambandi við skipan av stjórn. Í bólkinum sum hevur viðgjørt hetta hava spurningar sum Hvørja støðu hevur kongur søguliga havt í føroysku stjórnarskipanini? Hvørja støðu hevði kongur í Íslandi (áðrenn og eftir 1918)?. Hvussu vórðu Føroyar stjórnaðar undir krígnum? Hvørja støðu hevur bretska drottningin í 'næru atlondunum' (t.d. Man) og Commonwealth? Verið viðgjørdir eins og spurningurin um kongsfelagsskap hevur verið viðgjørdur. Spurningurin hevur tá verið:Hvønn tittul skal drottningin hava í Føroyum? Hvør skal umboða drottningina í Føroyum? Hvørjar heimildir skal drottningin hava í Føroyum? Hvat fer at standa í sáttmálanum við Danmark? Hvørja støðu hevur drottningin í føroysku stjórnarskipanini í dag? I uppriti sum áður er sent út eru kongavøldini í Norðurlondum viðgjørd nágreiniliga. Her skal tí bert niðurstøðan verða tikin við:

Tað sum er felags fyri kongshúsini í Norðurlondum er, at tey øll eru arvalig, í Danmark og Norra er tað elsti sonur, ið tekur yvir eftir tann sum er frammanundan, í Svøríki er tað elsta barn t.v.s. genta um hon er tann fyrst fødda. Meðan kongur í  dag bert er ein kransakøkufigurur í Svøríki so hevur kongur sbrt. grundlógina størri vald í Danmark og Norra, har hann í felag við parlamenti hevur tað lóggevandi valdi, tað er av somu orsøk at hann hevur ein virknan leiklut tá stjórn skal skipast og at tað er hann ið undirskrivar lógir. Eisini verður "starsråd" hildið undir hansara leiðslu. Eisini kann kongur vera vera lóggevandi í eini kreppustøðu og hann hevur heimild til at náa. Sjálvt um kongur sbrt. gundlógina hevur

vald, so er tað i praksis mestsum alt latið upp í hendirnar á stjórnini. Ì endurminningum sínum sigur Isi Foighel at hansara løgfrøði lesandi spurdu hann, hvat fór at henda um drotningin ikki vildi undirskriva eina lóg sum Fólkatingið hevði samtykt: ”Jeg svarede dem, som sandt var, at en sådan situation ikke ville tænkes at kunne forekomme. Jamen, hvis det nu skete alligevel, hvad ville jeg som jurist da gøre? Jeg gentog, at det var en utænkelig situation, men benyttede så samtidig lejligheden til at holde en lille forelæsning om, at nok er juridiske regler vigtige, men ikke alt i vort samfund er reguleret udelukkende af jura. Der findes andre faktorer som tradition, loyalitet mv., der bestemmer, hvorledes vort samfund er indrettet. Og der er situationer, der ikke har en juridisk løsning. Jura er ikke altid nok”. So leingi kongur er eitt hampiligt fólk er eingin vandi á ferð. Hugsast kundi at Drotningin ikki vildi undirskriva t.d. Tvind-lógina, tí hon helt at hon var í stríð við grundlógina. Hvat hevði tá hent?

Hyggja vit eftir kongsvaldinum søguliga so vóru atlondini upprunaliga skipað sum lond við egnari tingskipan. Hetta var eisini galdandi fyri Føroyar, sum vóru skipaðar við vártingum og løgtingi (altingi) sum politiskum stovnum. Føroyska rættarskipanin bygdi á gulatingsógirnar. Seinni komu indir norskt ræði. Í Íslandi vita vit, at talan var um ein veruligan sáttmála, ‘Gamla Sáttmála’, og sama kann hava verið galdandi fyri øll londini. Kongsræðið bar í sær, at kongur fekk ein ávísan mynduleika at lóggeva og áleggja skatt í hesum londunum, men tey hildu tó fram sum sjálvstøðug løgdømi.

Áhugavert er, at Seyðabrævið frá 1298 sigur seg vera ein lóg frá norska konginum, men er merkt av føroyskari ávirkan. Kendu orðini ‘sum lógbók teirra sjálvs váttar áður’ siga okkum, at í Føroyum vóru ásetingarnar í gulatingslógunum broyttar at hóska betur til føroysk viðurskifti. Fyri ein part er Seyðabrævið tí helst ikki annað enn ein staðfesting av tí, sum longu var hent ella sum føroyingar sjálvir ynsktu. Kongur hevur helst við seyðabrævinum vilja staðfest, at tað var hann sum setti lógirnar í gildi. Men brævið vísur eisini, at neyðugt var við serligari kunngerð í Føroyum, og at Føroyar áttu ummælisrætt. Áhugavert er eisini, at norski kongurin ongantíð fekk nakran varðandi titul yvir londunum í vestri. Heldur var talan um at norska “kongsættin” ella “kongsembætið” hevði heimildir í oyggjunum

Eftir at Danmark og Norra fingu sama kong, var ‘drotturin’ regentur í eini ørgrynnu av ymsum stjórnarrættarligum eindum. Hetta sæst til dømis í forordningini um indfødsret frá 1776. Hetta var fyrstu ferð ríkisborgararættur var skipaður av danakongi, og var hesin rættu felags fyri øll lond og ríki hansara.

Áhugavert er, at danski kongurin, Christian VII, í hesi forordningini frá 1776 nevndi seg “af Guds Naade Konge til Danmark og Norge, de Venders og Gothers, Hertug udi Slesvig, Holsteen, Stormarn og Dithmarsken, Greve udi Oldenborg og Delmenhorst.”

Danski kongurin sameinti sostatt eina røð av ymsum ríkjum og londum. Tað var drotturin, regenturin, ið bant saman. Men vert er t.d. at leggja til merkis, at drotturin var kongur av Norra, kongur av Danmark, men hertogi av Holstein. Holstein var samstundis partur av týska ríkinum.

Eftir 1814 segði danski kongurin Norra frá sær, men fekk afturfyri hertugadømi Lauenborg. Eftir 1864 hevði hann ikki longur ræði á hertugadømunum, men kallaði seg líka til 1972 hertuga í hesum hertugadømum. Tittulin ‘konge til Island’ fekk kongur ikki fyrrenn í 1918.

Eftir 1814 og serliga eftir 1864 var eftir fatanini um, at ‘hvad udad tabes skal indad vindes’ farið at skipa Danmark sum ein eindarstat. Roynt var at gera eina ‘fællesforfatning’ fyri Danmark og Slesvig (1850’unum), Altingi og løgtingið vórðu avtikin. Hetta var ein roynd at skapa nakað, sum ikki grundarlag var fyri, hvørki juridiskt, politiskt ella søguligt.
Í hertugadømunum førdi hetta til uppreistur og kríggj í 1848 og 1864. Í Íslandi var danska grundlógin ikki var viðurkend, ‘vér mótmælum allir’, og Ísland fekk tí sína egnu ‘forfatnigslov’ í 1874.

Siga vit, at Føroyar upprunaliga vóru eitt land, tvs. ein sjálvstøðug stjórnarrættarlig eind eftir tátíðarmeti, er spurningurin, um ikki fyri alla tíðina hava havt egnan stjórnarrætt – statsrætt. Í Føroyum má støðan metast at vera henda: Kongur hevði ræði í Føroyum, men var ikki 'Kongur av Føroyum', heldur var tað embæti ella dynastiið, sum hevði vald í Føroyum. Danska grundlógin var av kongi sett í gildi í Føroyum og má metast at galda her, men tann avgerðandi fortreytin í føroyskum stjórnarrætti er, at Føroyar framvegis eru eitt land við sjálvsavgerðarrætti og eru eitt egið løgdømi. Hetta hevur Danmark eisini virt í praksis, við tað, at lógir altíð eru serstakt lýstar í Føroyum, føroyingar hava fingið alsamt meiri rætt at ummæla og seinni avgera, hvørja lóg kongur og seinni ríkisstýrið kundu seta í gildið í Føroyum.

Í lógini um løgtingið frá 1923 er hesin ummælisrættur staðfestur, og kongsins 'prerogativ' at upploysa tingið er somuleiðis staðfest.

Tað, at Føroyar vóru atland hjá Norra merkti, at tað var norska kongalógin, ið verður sett í gildi fyri Føroyar. Somuleiðis Christians V Norska lóg, ið verður at galda frá 1687 (og er galdandi í pørtum enn).

Eftir at Norra er latið Svøríki halda Føroyar fram sum egið løgdømi. Lógir verða tá framvegis tinglisnar í sýslunum, skulu tær hava gildi, eftir 1897 verður lýst í Dimmalætting, eftir 1990 í Kunngerðarblaðnum

Kongur tekur sær ongantíð tittul av Føroyum ella hinum norsku atlondunum (da:bilande), men tekur Føroyska veðrin, og íslenska krínda klippfiskin (seinni falkin) og grønlensku ísbjørnina við í vápnaprógv sítt. Talan er sostatt bæði í relatión til danska ríkið og danska regentin um eina sjálvstøðuga juridiska eind.

Serliga í tíðarskeiðinum 1814 til 1852, tá Føroyar á pappírinum vóru eitt amt uttan nakað løgting, er spurningurin, um danskur statsrættur metti Føroyar sum eina kommunala eind í landinum Danmark. Sæð úr føroyskum og íslenskum sjónarhorni er framvegis talan um ein kongsfelagsskap, har tað er kongaættin, ið ræður í Danmark, sum hevur kongsvald í Føroyum og Íslandi. Í eina tíð er sostatt møguliga eitt ósamsvar millum danskan og føroyskan (og íslenskan) statsrætt.

Danska grundlógin sigist galda fyri "Danmarks Rige" Hon forútsetur í §1 »dele«, tvs. Føroyar eru ein »del af Danmarks rige«. Hesin ríkipartur kan fatast sum eitt land, ið er eitt egið løgdømi, og hevur egnan statsrætt.

Er hetta rætt, eru Føroyar eru fólkarættarliga partur av Danmark, men við rætti at taka seg úr ríkinum. Ríkisstovnarnir útinna tær heimildir, sum fyrr vóru kongsins, tvs. løggeva á teimum økjum, har valdið enn ikki er latið landinum Føroyum aftur.

Tilknýtið til danska regentin og danska dynastiið tað, at danski kongurin framvegis hevur kongstign í Føroyum og hevur veðrin í sínum vápnaskjøldri, hinvegin hevur danski kongurin frásagt sær øll tey vanligu kongaligu prerogativini (at staðfesta lógir, útnevna stjórnarleiðara, skriva út nýval).

Orsøkin til, at drotturin ongar heimildir hevur longur, kann vera, at føroyingar vóru ónøgdir við, at kongur skrivaði út nýval eftir fólkaatkvøðuna í 1946, ella at danir út frá eindarstatsfataninin hjá Ross ikki vildu virða føroysku rættarskipanina við regalari ceremoni. Henda fatanin hjá Ross er merkt av hansara vísindaligu støðu, hann metti alt 'ideologiskt' prát at vera óvísindaligt. Men, sum tað sæst av eldri danskari fatan, eins væl og atburðinum hjá donskum ríkisstovnum bæði undan og eftir heimastýrið, so vóru Føroyar ongantíð ein integreraður partur av landinum Danmark, men heldur eitt land tilknýtt ríkinum Danmark við eini serligari støðu.

1 § í donsku grundlógini sigur ”Denne grundlov gælder for alle dele af Danmarks Rige”. Danska ríkið er sostatt samansett av ‘dele’, harav Føroyar mugu metast at vera ein. Í Lov om Færøernes Lagting frá 28. mars 1923 er kongur beinleiðis nevndur í § 20 : ”Dersom Amtmanden finder, at den af Lagtinget taget Beslutning ikke er lovmedholdig, er han berettiget til at stille Udførslen af den i Bero, indtil han har erhvervet højere Afgørelse af Spørgsmålet. De til Erhvervelsen af en saadan fornødne Skridt skal ufortøvet foretages.Kongen kan udsætte Tingets Forhandlinger.Kongen kan opløse Lagtinget.”

Til heimastýrisskipanin kom í gildi vóru allar lógir í Føroyum danskar. Hugtakið løgtingslóg var ikki til tá, men løgtingið hevði heimild og rætt at gera ríkislógartilmæli.

Undir seinna heimsbardaga tykist tað sum um  C.A. Hilbert amtmaður sbrt. dagbókum hansara hevði grein 25 í grundlógini sum heimild  at umboða kong í Føroyum, ella sum Ólavur Christiansen sigur kom Hilbert til at gerast ”virkandi kongur í Føroyum”. Spurningurin er kortini um føroyngar um tað tíð høvdu somu fatan, og um hvat hevði hent um føroyingar ikki høvdu góðtikið hetta, men ynskt okkurt annað. Danski  sendiharrin í U.S.A. átók sær eisini at umboða Danmark av tí at danskir myndugleikar vóru óvirknir.

Tað sum hendi eftir fólkaatkvøðuna í 1946 var at kongur nýtti § 20 í Lov om Færøernes Lagting til at senda tingið heim. Úrslitið var at vit fingu heimastýrislógina, har kongur ikki er nevndur, uttan so at hann onkunsvegna er umboðaður av ríkisumboðsmanninum  (§ 15). Í lóg frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum, broytt við løgtingslóg nr, 2 frá 3. januar 1985 er heldur einki nevnt um leiklutin hjá kongi. Tað sama er galdandi fyri løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya. Kongur er við hesum gliðin út úr tí serliga føroyska lógarverkinum og hevur bert sjónligan týdning har talan er um mál í Føroyar hava felags við Danmark.

Spurningurin er so hvør hevur leiklutin hjá kongi í føroysku stjórnarskipanini og hvørjar uppgávur sum danski kongurin hevur sbrt donsku grundlógina eru í føroysku stjórnarskipanini lagdar út til ávíkavist løgtingsformann og løgmann. Frægasta metingin er helst, at kongur hevur mist tey flestu prerogativini í Føroyum. Hetta ger støðuna meiri líka teirri í Svøríki.

Frá danskari síðu hevur tó helst búð tað undir, at menn sum Alf Ross hildu øgiliga fast um eindarstatin, at talan ikki á nakran hátt kundi vera um annað enn eitt lóggávuvald, sum tó hevði møguleikan at útdelegera sítt lóggávuvald. Hetta kommunala sjálvstýrið skuldi ikki hevjast upp til nakað annað við at geva regentinum eina støðu  - eins og tað verður gjørt í teimum bretsku atlondunum.

Vit meta tó, at útsøgnin hjá Alf Ross er skeiv juridiskt eins væl og politiskt og søguliga. Føroyar hava eina aðra statsrættarliga støðu enn Amager og Tåsinge. Skuldi danskur statsrættur hevda nakað annað, so er ósamsvar millum føroyskan og danskan statsrætt.

Spurningurin er so hvønn leiklutur kongur skal hava einum føroyskum fullveldi. Teir tankar sum eru settir fram higartil eru at kongsvald framvegis skal vera í  Føroyum og at danski kongurin (drotningin) skal vera tað. Her eru kortini fleiri spurningar at loysa, tí tað er ikki greitt hvussu hetta kongsvald skal skipast og hvørjar uppgávar kongur skal hava í einum komandi føroyskum fullveldi. Skal leiklutur hansara líkjast tí hjá danska konginum, tí svenska ella verða eitt heilt triðja. Í samráðingar uppskotinum er ikki greitt um:

- Talan er um eina serliga tign til júst *Margretu Drottning*
- Um talan er um at stovna *kongaríkið Føroyar*
- Um danski regenturin altíð skal vera føroyskur ríkisovasti.

Tann mest prinsippielli spurningurin er helst:

1. Skulu Føroyar vera eitt kongaríkið og drottningin ‘af Guds Nåde Dronning af Danmark og Færøerne
2. Ella skal tann til hvørja tíð sitandi danski regenturin embætis vegna røkja starvið sum landshøvdingi í Føroyum

Tað er møguligt at tað ber til at fáa eina skipan, har danski drotturin verður landshøvdingi Føroya við einum serligum kongsumboði. Hetta hevur eisini verið umrøtt. Ein annar møguleiki, sum higartil bert er umrøddur so hissini er spurnningurin um lýveldi og ein fólkavaldan forseta og hvørjar heilildir forsetin skal hava í Føroyum. Her kemur nógv at falla saman við heimildunum hjá einum kongi ella drotti: At loysa upp tingið og skriva út val. At staðfesta lógir. At tilnevna stjórnarleiðaran. At halda ráð saman við stjórnini. At leggja uppskot fyri tingið. At vera á odda fyri heri og fyrisiting. At standa á mynt og seðlum. At náa revsaði. At umboða landið. At ímynsa landið og vera “landsforeldur”.

Hin vegin eru tað eisini aðrir møguleikar, tí ‘ongin kongur er í sermálum’, tey prerogativini, sum lýst eru omanfyri eru í fleiri førum fallin heimastýriinum í lut. Løgtingsformaðurin skipar fyri formansumfari, og løgmaður staðfestir lógir, heldur stjórnarfund og hevur sambært stýrisskipanarlógini part í lóggávuvaldinum.Til ber at lata hetta halda fram eftir fullveldið. Løgtingsformaðurin ella løgmaður kunnu tá hava hægstu tign og virka sum ríkisovasti, td. við altjóða høvi. Ein spurningur sum eisini hevur verið dúgliga tjakast um, er um tað er løgmaður ella løgtingsformaður sum skal undirskriva landsins lógir.

## Uppskot til lógargreinar:

### § 1. Vøld landsins

(1) Vøld landsins eru ting, stjórn og dómsvald. Ting landsins er Løgtingið, stjórn landsins er Landsstýrið og dómsvald landsins er Løgrætturin.

(2) Formaður Løgtingsins er Løgtingsformaðurin, stjórnarleiðari og landsovasti er Løgmaður og formaður Løgrættsins er rættarin

### §2 Løgmaður. Møguleiki 1

(1) Løgmaður er landsovasti og stjórnarleiðari landsins.

(2) Løgmaður verður valdur á fólkaatkvøðu fyri 4 ár senn.

(3) Løgmaður skipar Landstýri og velur afturat sær ráðharrar.

(4) Løgmaður skiftir málsøkini og samskipar starv ráðharrana og hevur eftirlit við, at hvør einstakur ráðharri situr fyri sínum málsøkjum á lógligan og fullgóðan hátt. Løgmaður kann skifta út ráðharra, um hann heldur seg hava orsøk til tað.

(5) Atkvøður meira enn helmingurin av øllum tingmonnum móti uppskoti Løgmanns til landstýri, er tað falli. Annars er tað samtykt.

(6) Løgmaður kann skriva út val, um hann heldur at umstøðurnar í landinum krevja tað.

(7) (Løgmaður undirskrivar lógir landsins).

(8) Tá starv sum rættari skal setast áliggur tað løgmanni at koma við uppskoti at leggja fyri Føroya Løgtingi til endaliga góðkenning.

(9) Doyr løgmaður ella verður hann ikki førur fyri at røkja starv sítt verður nýggjur løgmaður valdur á fólkaatkvøðu innan 3 vikur. Í millumbilinum røkir elsti maður á tingi løgmannsstarvið.

### *§ 2. Løgmaður. Møguleiki 2*

(1) Løgmaður er landsovasti og stjórnarleiðari landsins.

(2) Løgmaður verður valdur á Løgtingi millum løgtingsmenn fyri 4 ár í senn.

(3) Løgmaður skipar Landstýri og velur afturat sær ráðharrar.

(4) Løgmaður skiftir málsøkini og samskipar starv ráðharrana og hevur eftirlit við, at hvør einstakur ráðharri situr fyri sínum málsøkjum á lógligan og fullgóðan hátt. Løgmaður kann skifta út ráðharra, um hann heldur seg hava orsøk til tað.
(5) Atkvøður meira enn helmingurin av øllum tingmonnum móti uppskoti Løgmanns til landstýri, er tað falli. Annars er tað samtykt.
(6) Løgmaður kann skriva út val, um hann heldur at umstøðurnar í landinum krevja tað.
(7) (Løgmaður undirskrivar lógir landsins).
(8) Tá starv sum rættari skal setast áliggur tað løgmanni at koma við uppskoti at leggja fyri Føroya Løgtingi til endaliga góðkenning.
(9) Doyr løgmaður ella verður hann ikki førur fyri at røkja starv sítt verður nýggjur løgmaður valdur á løgtingi innan 3 vikur. Í millumbilinum røkir elsti maður á tingi løgmannsstarvið.

## Viðmerkingar.

### Vøld landsins

Øll trý vøldini eru her nevnd, løgtingi sum samtykkir lógirnar. Landstýrið sum umsitit lógirnar, og Løgrætturin, sum er dómsvaldið í Føroyum. Tað hevur við jøvnum millumbili stungi seg upp spurningurin, um tað ikki hevði verði rættast, at tað verður núverandi løgtingsformaðurin, sum frameftir fær heiti løgmaður, og tann sum nú ber heitið løgmaður ikki av røttum átti at borið heitið forsætisráðharri. Sum er er heitið løgmaður, eins og heitið landstýrismenn, heiti sum ikki eru eldri enn heimastýrislógin í Føroyum. Hetta eru spurningar, sum tað eigur at verða tikin støða til.

Her er dómsvaldið nevnt Løgrætturin og formaður l Løgrættsins rættarin. Tað sum her er talan um er hægsta dómara í landinum. Hetta er ein spurningur sum verður viðgjørdur nærri undir rættarskipanini.

### Løgmaður

Tveir møguleikar eru at velja løgmann. Ein er at velja løgmann við beinleiðis fólkaatkvøðu og hin er at tingið velur løgmann. Fyrimunir og vansar eru í báðum førum, men báðir eiga at fungera. Við fólkaatkvøðu fáa fólk tann løgmann tey helst vilja hava og ein samgonga verður noydd at liva við tí valda løgmanninum. Við at velja løgmann millum løgtingsmennirnar verður skipanin á leið tann sama sum hon er í løtuni. Sperribólkurin er komin til ta niðurstøðu, at tað var hóast alt er best at løgmaður varð valdur av løgtinginum. Eisini er sperribólkurin samdur um at bíða við at leggja fram lógargrein um forseta til seinni, tí tað ber til at fáa landi at virka við løgmanni sum landshøvdinga og stjórnarleiðara.

Við hesum uppskotum eigur løgmaður í arbeiði sínum at leggja dent á samskipan av politiska arbeiðinum, at hava eftirlit við tí, so tað hongur saman og annars at umboða landið. Løgmanni skal ikki nýtast sjálvur at standa fyri málsøki, hinvegin eigur hann heldur ikki at verða forðaður í hesum um tað er tað skilabesta.

Spurningurin um tað eigur at verða løgmaður ella løgtingsformaðurin sum undirskrivar lógirnar eigur at vera endaliga stafestur í eini komandi grundlóg. Í evninum Tingskipan er skotið upp at tað verður tingformaðurin sum undirskrivar lógirnar. Tað mest logiska, tá ein hugsar um býtið av vøldunum, er at tað er løgtingsformaðurin, sum undirskrivar lógirnar.

## Uppískoyti. Forseti Føroya

**§ xx. Vøld landsins**

(1) Vøld landsins eru forsetin, ting, stjórn og dómsvald. Ting landsins er Løgtingið, stjórn landsins er Landsstýrið og dómsvald landsins er Løgrætturin.
(2) Formaður Løgtingsins er Løgtingsformaðurin, stjórnarleiðari og landsovasti er Løgmaður og formaður Løgrættsins er rættarin

**§ XX FORSETI FØROYA**

(1) Forsetin, er hægsta umboð landsins, men stýrið landsins annars er litið upp í hendurnar á Løgtingi og Landstýri.
(2) Forsetin verður valdur beinleiðis av fólkinum við fólkaatkvøðu fyri 4 ár í senn. Minnst 1000 stillarar skulu standa aftanfyri uppskot til forseta.
(3) Forsetin kann verða afturvaldur.
(4) Tað áliggur forsetanum at seta fram uppskot til løgmann, so landstýri kann skipast eftir val ella tá eitt landstýri fær meiriluta ímóti sær.
(5) Tá starv sum rættari skal setast áliggur tað forsetanum at koma við uppskoti at leggja fyri Føroya Løgtingi til endaliga góðkenning.
(6) Forsetin undirskrivar lógir landsins saman við løgmanni.
(7) Minst tvær ferðir um árið hevur forsetin fund saman við løgmanni og landstýrismonnum um støðu landsins.
(8) Forsetin hevur sæti á tingi, men ikki atkvøðurætt.
(9) Forsetin kann skriva út val ella fólkaatkvøðu sbrt. lóg.
(10) Doyr forsetin, sigur seg frá, ella verður hann ikki førur fyri at røkja starv sítt verður nýggjur forseti valdur innan 8 vikur. Í millumbilinum røkir elsti maður á tingi forsetastarvið og varamaðurin tekur tingsessin fyri hann.

**Viðmerkingar:**
Tað hevur verið ført fram, at tað ikki er neyðugt við forseta í einum so lítlum landi sum Føroyar, tí uppgávur hansara eins og uppgávurnar hjá kongsvaldinum kunnu skiftast sunir millum tingformannin og løgmann, eins og tað er gjørt í stýrisskipanarlógini. Kortini er sett fram eitt uppskot til møguligan forseta, at taka støðu til, um tað kemur at verða neyðugt. Tað kemur at føra við sær ymiskar broytingar í leiklutinum hjá løgmanni og tingformanni.

# UTTANLANDSVALDIÐ

**Bólkurin uttanlandsvaldið** hevur m.a. viðgjørt evni sum samríkjasáttmálar, mannagongd í millumlandamálum, sáttmálar og fulltrú, sjálvsavgerðarrætt og trygd lsndsins.

Bólkurin hevur havt tveir fundir, og eitt upprit er gjørt, sum tó ikki er vorðið viðgjørt hvørki endaliga í bólkinum ella í plenum.

Niðurstøðan um henda spurning er sostatt tann, at bólkaleiðarin hevur orðað eitt upprit, sum ***nevndin ikki hevur tikið støðu til.***

## Støði

Sannlíkt er, at síðan 1271 hava føroyingar havt sáttmála við Noregs kong. Rættarkønir eru tó ivasamir um innihaldið og týdningin av sáttmálanum. Í øllum førum er greitt, at Føroyar hava verið egið løgdømi tað, ið vitað er um. Við øðrum orðum, Føroyar hava verið serstakt land við egnum lógum, egnari skipan á flestu økjum, samstundis sum landið hevur verið undir útlendskum yvirvaldi sum umveldi. Í altjóðarætti eru ásetingar um rættindi hjá umveldum, sum liggja undir yvirræði hjá øðrum ríkjum (non-self-governing territories).

Ein gamal spurningur er sostatt, um okkara viðurskifti við Danmark eru grundað á sáttmála ella danska valdstøku. Heftur at hesum spurningi er nýggjari spurningurin, um vit hava sáttmála við Danmark (ástøðið um sáttmála) ella bert tillutaðar heimildir (ástøðið um myndugleikaflyting).

Hetta verður nevnt til tess, at møguligar ásetingar um samríki, samveldi, frælsan felagsskap, fullveldisríki ella líknandi kunnu verða sæddar í røttum høpi. Tengdur at hesum er spurningurin, hvørt sambandið eigur at vera stjórnarrættarligt ella altjóðarættarligt.

Tá ið avgerð verður tikin um slíkt samband, er vert at gera sær greitt, hvar heimildirnar eiga at vera, um felagsmyndugleikar eiga at vera, og hvørt mannagongdir fyri einvísum broytingum eiga at vera.

## Uttanríkisheimildirnar

Sum kunnugt var John Locke upprunin til nútíðar tríbýtið av ríkisvaldinum, hóast eftirtíðin hevur roknað Montesquieu sum upprunan, aftaná at hann hevði endurgivið John Locke í sínum ritum.

Locke skilti millum lóggevandi vald, dømandi vald, útinnandi vald og samveldisvald. Montesquieu lýsti útinnandi valdið, ið Locke hevði lýst samveldisvaldið, men gloymdi tá samveldisvaldið.

Tann amerikanska stjórnarskipanin var tann fyrsta nútíðar stjórnarskipanin, ið veruliga fekk framt valdsbýtið, hóast trupulleikar vóru.

Í Constitutional Law verður umrøtt, hvussu George Washington bar seg at í mun til lóggevandi valdið, tá ið ráddi um hjá USA at tingast við onnur lond.
*sought to keep Congress apprised of the diplomatic situation...and acted in conformity with legislative consensus. Over Senate objections, Washington even included the House of Representatives in his consultations about the possibility of a treaty, again for the practical reason that any treaty would involve monetary payments...requiring House initiation and approval.*

Sostatt er amerikanska uttanríkisvaldið býtt millum forsetan, ið umboðar USA í altjóða høpi bæði politiskt og rættarliga, og tingið, sum skal ráðgeva forsetanum politiskt og samtykkja sáttmálar, til tess at forsetin kann staðfesta teir, soleiðis at teir fáa rættargildi. Í førum, har USA bindir seg í altjóðarætti, verður enntá serskildur meiriluti á tingi kravdur, nevnliga tveir triðingar av tingmonnunum í yvirhúsinum - senatinum.

Tískil tryggjar forsetin sær breiða undirtøku í sínum uttanríkispolitikki. Washington hevði somuleiðis greiða fatan av, at fíggjarvaldið lá hjá tinginum, og at útreiðslur í sambandi við uttanríkispolitisk átøk vóru treytaðar av undirtøku í tinginum. Átøkar eru mannagongdirnar viðvíkjandi ES málum, ið verða viðgjørd í Evropanevndini hjá danska fólkatinginum.

Sigast kann, at meðan uttanríkisvaldið í USA í stóran mun liggur hjá stjórn og tingi í felag, so at stjórnin útinnir sín uttanríkispolitikk við støði í breiðum semjum í tinginum, er støðan beint hin øvugta í Bretlandi, har drotningin formliga ger allar sáttmálar. Við øðrum orðum, uttanríkisvaldið í Bretlandi liggur hjá stjórnini, og verða sáttmálar tí bert lagdir tinginum til kunningar, áðrenn teir verða staðfestir. Biður tingið um orðaskifti um sáttmála, ið er lagdur tinginum til kunningar, verður tað eftirlíkað. Tó liggur avgerðarrætturin framvegis einans hjá stjórnini.

Meðan USA og Bretland í hvør sínum lagi umboða skipanir, ið eru mótsetningar til hvør aðra, liggja Norðurlond onkustaðni í miðjuni. Sostatt liggur uttanríkisvaldið í Føroyum hvørki hjá stjórn eina ella hjá stjórn og tingi í felag. Stýrisskipan Føroya ásetir nevnliga, at uttanríkisvaldið liggur hjá stjórnini (landsstýrinum), men at sáttmálar, ið krevja luttøku tingsins (løgtingsins) til tess at verða útintir, ella sum annars eru týdningarmiklir fyri landið, verða at leggja fyri tingið at góðkenna. Harumframt skal løgmaður ráðføra seg við ávísa tingnevnd (uttanlandsnevndina), áðrenn uttanríkispolitiskar avgerðir verða tiknar, ið hava stóran týdning. Hinvegin kann verða sagt, at føroyska skipanin liggur nærri tí amerikonsku enn tí bretsku.

## Heimildin at umboða landið

Sum seinni verður greitt frá, er mest vanliga siðvenjan í heimshøpi, at ríkishøvdingar, stjórnarleiðarar, uttanríkisráðharrar og sendiharrar hava íbornan rætt til at umboða land sítt alment í øðrum londum. Sostatt eiga øll onnur, heruppií aðrir ráðharrar at hava fingið tillutaða heimild frá uttanríkisráðharra, áðrenn tey kunnu skjóta seg undir at umboða land sítt alment í øðrum londum.

Í Føroyum hevur løgmaður havt uttanríkismál um hendur síðan í forðum. Í hvønn mun tað hevur verið reglubundin skipan, at nevnda siðvenja er uppihildin í Føroyum, man vera ymiskt frá einum stýri til annað.

## Heimildin at gera sáttmálar

Sambært Sáttmála Sameindu Tjóða um Sáttmálarætt, undirritaður í 1969, (United Nations Convention on the Law of Treaties) hava ríkishøvdingar (Head of States), stjórnarleiðarar (Head of Governments), uttanríkisráðharrar (Ministers for Foreign Affairs) og sendiharrar (Head of Missions) íbornan rætt til at undirrita sáttmálar vegna land teirra. Við øðrum orðum, fólk í hesum størvum nýtast ikki heimild, tá ið tey undirrita sáttmálar. Hinvegin er reglan, at ráðharrar annars og onnur leggja undirritingarheimild frá uttanríkisráðharra teirra hjá sáttmála, tá ið undirritað verður.

Hóast løgmaður kann sigast at vera bæði ríkishøvdingur, stjórnarleiðari og uttanríkisráðharri Føroya við tað, at hann staðfestir løgtingslógir, at hann er leiðari landsstýrisins, og at hann situr fyri uttanríkismálum, er ivasamt um nevnda altjóða regla verður nýtt regluliga í Føroyum.

## Heimildin at samtykkja sáttmálar

Sum áður umrøtt eru tvær meginskipanir at taka til, tá ið sáttmálar verða samtyktir. Tann bretska gevur útinnandi valdinum nærum alt vald, og tann amerikanska fremur eitt heldur javnt valdsbýti millum útinnandi vald og løggevandi vald. Sum áður sagt liggur føroyska skipanin sambært grein 52 og 54 í stýrisskipan Føroya onkustaðni millum hesar báðar meginskipanir.

Royndirnar av føroysku skipanini eru heldur misjavnar. Tykjast kann, at uppskotini til samtyktar, ið verða løgd fyri Løgtingið, í sambandi við at sáttmálar verða samtyktir, bera brá av at verða sokallað take it or leave it proposals. Við øðrum orðum, antin tekur Løgtingið undir við einum sáttmála, ella verður eingin sáttmáli. Sostatt kann ivi verða sáddur um, í hvønn mun Løgtingið hevur nakran veruligan leiklut viðvíkjandi sáttmálagerð.

Spurningurin er so, í hvønn mun mannagongdin kann verða broytt til tess, at Løgtingið fær ein meira avgerandi leiklut, tá ið sáttmálar verða gjørdir. Verður hugt aftur eftir amerikonsku stjórnarskipanini, kundi ein ábót verið, at allir sáttmálar eiga at verða lagdir fyri Løgtingið sum lógaruppskot, áðrenn løgmaður staðfestir teir.

Til tess at tryggja at føroyskur uttanríkispolitikkur verður meira støðufastur um skiftandi landsstýri, kundi ein onnur ábót verið, at meir skuldi til enn vanligur meiriluti á Løgtingi, tá ið sáttmálar verða samtyktir sum lóg.

Sum ein triðja ábót kundi eisini verið talan um at styrkja leiklutin hjá uttanlandsnevndini, so at løgmaður, sum leikur fer í samráðingum, viðger gongdina í sáttmálagerðini saman við nevndini. Eingin ivi er um, at hetta verður neyðugt, skal meira enn vanligur meiriluti til at góðkenna sáttmála á Løgtingi.

Nú hetta er sagt, kann spurningurin verða settur, hvørt tílíkar broytingar kunnu verða við til at ovbyrja Løgting og Landsstýri við eykaarbeiði. Sostatt er ein annar spurningur, um javnvág kann verða funnin millum løggevandi vald og útinnandi vald, so at virkni og fólkaræði verða skilabest samstundis. Við øðrum orðum, tað ræður um at áseta eina javnvág, ið hevur við sær, at stjórnarvaldið kann bæði taka skjótar og tryggar avgerðir. Í hesum sambandi kundi verið umhugsað at seta saman eina loysn, ið fevnir um hesar meginreglur undan endaligu samtykt løgmans:

- Uttanlandsnevndin fær størri ávirkan á samráðingartilgongdina, tá ið sáttmálar verða gjørdir.
- Allir sáttmálar verða lagdir fram á Løgtingi sum lógaruppskot sambært mannagongdini, at eru fleiri atkvøður fyri enn ímóti, eru teir samtyktir sum tinglóg.
- Tá ið sáttmáli flytur myndugleika til aðra tjóð ella millumtjóða felagsskap, verður tingsamtyktin at leggja fyri Føroya fólk á atkvøðu sambært mannagongdini, at eru fleiri atkvøður fyri enn ímóti, er sáttmálin eisini samtyktur av fólkinum.

Nevndu ábøtur kundu í stóran mun økt um leiklut Løgtingsins í samstarvi Føroya í altjóða høpi, samstundis sum stjórnarvald landsins hevði havt greiðar mannagongdir fyri altjóðarættarligum avgerðum. Harumframt høvdu ábøturnar løgfest rættindini Føroya fólks at taka beinleiðis lut, tá ið sera týdningarmiklar uttanríkispolitiskar avgerðir verða tiknar.

## Heimildin at flyta myndugleika

Vanligt er á okkara døgum at gera av í stjórnarskipan um heimild er at flyta myndugleika frá landinum til onnur lond ella millumlanda felagsskapir. Slík stig krevja vanliga mannagongd, ið er meiri krevjandi enn løggáva og vanligir millumlanda sáttmálar, men ikki eins krevjandi og broyting í stjórnarskipan.

Til tess at tryggja at avgerðir av hesum slagi hava breiðan meiriluta, soleiðis at tær verða støðufastar um skiftandi landsstýri, eigur meira enn vanligur meiriluti á Løgtingi at taka undir við sáttmála, ið flytur myndugleika frá landinum til onnur lond ella millumlanda felagsskapir. Í hesum sambandi kundi verið tikið til regluna um, at í minsta lagi tveir triðingar av tingmanningini verða at samtykkja sáttmálan sum lóg. Ein onnur leið at fara er at lata fólkið á atkvøðu taka støðu til sáttmálan og í tí førinum átti vanligur meiriluti á tingi at verið fullgóður.

## Trygd landsins

Hóast londini í vesturheiminum sjáldan munnu hava kent seg tryggari enn nú á døgum tá ið ræður um kríggj, eru lond, ið hava ásetingar um egna trygd í stjórnarskipan. Í hesum sambandi kann verða tikið til umrøðu, hvørt serligar reglur eiga at verða ásettar í stjórnarskipan viðvíkjandi trygdarpolitiskum virksemi hjá stjórnini.

Við øðrum orðum, støða eigur at verða tikin til, um serligar skipanir kunnu verða settar í verk, er landsins trygd hótt, og hvør hevur heimildina at taka tílíka avgerð. Tengdur at hesum er eisini spurningurin, hvørt herskylda eigur at verða.

Er kreppan slík, at sjálvsavgerðarrætturin er hóttur, og landið hersett av fremmandum valdi, kundi verið hóskandi, at ásetingar eru um løgbornu stjórn landsins. Dømi um slík viðurskifti eru til í roynd og veru. Eitt nú eru lond, ið hava havt bráðfeingisstjórn uttanlands, meðan tey hava verið hersett. Eins og danski sendiharrin í Washington varð viðurkendur av amerikansku stjórnini sum umboðandi løgbornu stjórn Danmarkar, hóast danska stjórnin í Keypmannahavn vísti hesum aftur, sat Noregs kongur í London undir seinna heimsbardaga viðurkendur av bretsku stjórnini, sjálvt um norska stjórnin í Oslo við Quisling á odda mótmælti.

## Altjóðarættur og tjóðarrættur

Í stuttum skal verða sagt um hesi tvey løgfrøðiligu hugtøk, at altjóðarættur skipar løgfrøðiligu viðurskiftini millum lond, og tjóðarrættur skipar løgfrøðiligu viðurskiftini innanlands. Altjóðarættur fevnir í høvuðsheitum um sáttmálarætt og siðvenjurætt, men tjóðarrættur fevnir í høvuðsheitum um løgini stjórnarrætt, lógir og kunngerðir.

Hóast bæði altjóðarættur og tjóðarrættur eru bindandi fyri tær eindir, teir fevna um, er vanliga reglan, at tjóðarrættur verður uppihildin av myndugleikum landsins, og eingin felags altjóðamyndugleiki er at halda uppi altjóðarætti. Í heilt fáum førum hevur tó Trygdarráð Sameindu Tjóða tikið avgerð um at leggja uppí innlendisviðurskiftini hjá landi, ið fremur álvarsligt brot á mannarættindini.

Tá ið lond binda seg í altjóðarætti eru tvinnar skipanir at taka til. Tey kunnu antin nýta eindarrættarskipanina (monism) ella tvírættarskipanina (dualism).

Sostatt nýta lond eindarrættarskipanina, tá ið tey binda seg í altjóðarætti, og altjóðarættarligu ásetingarnar samstundis verða partar av tjóðarrættinum, eitt nú USA og Týskland. Hinvegin nýta lond tvírættarskipanina, tá ið altjóðarættarligu ásetingarnar bert binda sjálvt landið, og neyðugt er at smíða nýggja innlendis lóggávu til tess at altjóðarættarligu ásetingarnar skulu fáa gildi innanlands, eitt nú Danmark og Føroyar.

## Uppskot til lógargreinir

### Málsræði

***§ 1.*** Løgmaður umboðar Føroyar mótvegis øðrum londum og felagsskapum landa millum.
(2) Heimildin at gera sáttmálar við onnur lond og felagsskapir landa millum er hjá Løgmanni.

### Uttanlandsnevndin

***§ 2.*** Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við formanni og fimm limum.
(2) Nú ætlar Løgmaður at gera sáttmála við onnur lond ella felagsskapir landa millum ella at tingast um felags viðurskifti. Tá skal Løgmaður leita ráð hjá Uttanlandsnevndini.
(3) Formaðurin samskipar starv nevndarinnar og boðar í hesum sambandi uttan dvøl til nevndarfunda, tá ið áneyðir eru fyri tí.
(4) Uttanlandsnevndin røkir heimildir og eftirlit Løgtingsins, tá ið tingingar fara fram.
(5) Formaðurin leggur nevndarinnar vegna fyri Løgtingið álit um sáttmálar at samtykkja sum tinglóg.
(6) Nevndarlimir hava tagnarskyldu.

### Samtykki

***§ 3.*** Nú er sáttmáli millum landa gjørdur ella við felagsskap landa millum. Tá skal Løgmaður leggja fram sáttmálan í Løgtinginum, til tess at hann kann verða samtyktur sum tinglóg, áðrenn Løgmaður samtykkir, at Føroyar eru bundnar at sáttmálanum.
(2) Í førum, har myndugleiki verður fluttur til annað land ella felagsskap landa millum, skal Fólkið á atkvøðu eftir samtykt Løgtingsins, men undan samtykt Løgmans, eisini samtykkja sáttmálan, og meirilutin á atkvøðuni skal ráða.
(3) Nú vil Løgmaður taka sáttmála av. Tá skulu somu mannagongdir galda í Landinum, eins og á sinni sáttmálin varð samtyktur.

### Trygd landsins

***§ 4.*** Sjálvsavgerðarrættur Føroya fólks er ómissandi og framhaldandi.
(2) Ein og hvør føroyingur eigur í øllum lutum at verja henda rætt.
(3) Løgmaður hevur umsjón við trygd landsins, og verður hann tær skipanir at gera, ið verja sjálvsavgerðarrættin.

## Viðmerkingar

### Málsræði

***§ 1.***

Í greinini verður ásett, at Løgmaður situr fyri uttanríkismálum Føroya, og at Løgmaður sostatt myndar Føroyar í altjóða høpi. Somuleiðis hevur Løgmaður einsamallur íbornu heimildina at gera sáttmálar við aðrar tjóðir ella millumtjóða felagsskapir.
Greinin forðar tó ikki fyri, at Løgmaður kann loyva øðrum ráðharrum at gera sáttmála við aðra tjóð ella millumtjóða felagsskap eftir heimild. Í hesum sambandi geldur tó meginreglan, at ríkishøvdingar, stjórnarleiðarar, uttanríkisráðharrar og sendiharrar hava íbornan rætt til at umboða land sítt alment í øðrum londum, heruppií at gera sáttmálar.

## Uttanlandsnevndin
*§ 2.*
Sambært hesi grein verður seksmannanevnd við serligum heimildum skipað, ið Løgtingsins vegna fer at virka í tøttum samstarvi við Løgmann í sambandi við sáttmálagerð.

Aðalendamálið við uttanlandsnevndini er at veita vissu fyri, at Løgtingið kann luttaka óbeinleiðis í samráðingum við aðrar tjóðir ella millumtjóða felagsskapir í sambandi við at sáttmálar verða gjørdir, til tess at Løgmaður kann tryggja sær, at breiður meiriluti tekur undir við sáttmála, ið hann leggur fram á Løgtingi at samtykkja sum tinglóg. Á henda hátt fær Løgtingið munandi størri ávirkan á altjóðarættarlig bond, ið fara at verða løgd á Føroyar.

Formaðurin stjórnar Uttanlandsnevndini og hevur í starvi sínum heimild til at boða til nevndarfunda, so hvørt sum tørvur er á tí.

Fara samráðingar fram hevur Uttanlandsnevndin serligar heimildir at viðgera samráðingarnar og á annan hátt at luttaka óbeinleiðis í samráðingartilgongdini.

Uttanlandsnevndin evnar til álit viðvíkjandi millumtjóða sáttmálum, ið Løgmaður hevur lagt fram á Løgtingi at samtykja sum tinglóg.

Í mongum førum verður neyðugt hjá Løgmanni og Uttanlandsnevndini at samskifta í trúnaði við atliti at øðrum tjóðum ella millumtjóða felagsskapum. Vegna tess at tað er Løgmaður, ið hevur málsræði í uttanríkismálum verður mett, at mál eiga at verða viðgjørd í trúnaði. Slík mannagongd kann harumframt tryggja eitt munandi opnari samskifti millum Løgmann og Uttanlandsnevnd.

## Samtykki
*§ 3.*
Henda grein ásetir meginreglur viðvíkjandi tí at samtykkja sáttmálar. Hóast Løgmaður sambært grein 95 hevur íbornu heimildina at gera sáttmálar við aðrar tjóðir ella millumtjóða felagsskapir, kann hann ikki einvíst samtykkja, at Føroyar eru bundnar at millumtjóða sáttmálum uttan so, at Løgtingið frammanundan hevur samtykt sáttmálan sum tinglóg. Í hesum sambandi geldur meginreglan, at eru fleiri atkvøður fyri enn ímóti, er sáttmálin samtyktur sum tinglóg.

Ásetingin er íkomin til tess at byrgja fyri, at lóggávuvaldið hjá Løgtinginum verður skert, tá ið ræður um altjóðarættarligar bindingar. Harumframt eigur at verða havt í huga, at Løgtingið fær eisini ávirkan á altjóðarættarligar bindingar, ið ikki krevja at verða uppihildnar í landinum sambært lóg.

At sáttmálar sambært greinini verða samtyktir sum tinglóg hevur eisini við sær, at eindarrættarskipanin verður sett í gildi í Føroyum.

Í greinini verður mannagongdin viðvíkjandi samtykt herd, tá ið ræður um at flyta myndugleika til aðra tjóð ella millumtjóða felagsskap. Sostatt verður ásett, at tingsamtyktin verður løgd fyri Føroya fólk á atkvøðu, har meirilutin á atkvøðuni ræður. Samtykkir fólkið, kann Løgmaður í kjalaravørrinum av fólksins avgerð samtykkja, at Føroyar eru bundnar at sáttmálanum.

Tá ið talan er um at seta sáttmála úr gildi verður ásett, at somu mannagongdir eru í gildi, eins og tá ið sáttmálin varð settur í gildi.

**Trygd landsins**
***§ 4.***
Greinin ásetur greitt, at Føroya fólk hevur ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætt. Í teimum førum, har ætlanir eru um at lima Føroyar í aðra tjóð, og avgerðin samstundis hevur við sær, at sjálvsavgerðarrætturin fer fyri bakka, kann avgerðin ikki verða framd samsvarandi grein 97, uttan so at stjórnarskipanin frammanundan verður broytt. Meginreglan geldur eisini millumtjóða felagsskapir.

Í greinini verður eisini ásett, at føroyingar eiga at verja sjálvsavgerðarrættin, og í hesum liggur almenna reglan um at verða tjóðini trúgvur, tá ið tilvera landsins er hótt.

Samanumtikið er tað sambært greinini Løgmaður, ið hevur umsjón við trygd landsins, og í tí sambandinum skipar hann í starvi sínum fyri, at sjálvsavgerðarrætturin fer ikki fyri bakka.

Sambært somu áseting hevur Løgmaður harumframt yvirskipaða umsjón við, at lív og heilsa hjá íbúgvum landsins verða vard ímóti ágangi.

# Rættarskipan

**Bólkurin Rættarskipan** er partur av høvuðsbólkinum Stýrisskipan inneftir.

Bólkurin skal viðgera evni sum ríkisrætt, serdómstólar, rættarskipan, dómsvald, dómarakallið, óhefti og leikfólk.

# Fíggjarvaldið

**Bólkurin Fíggjarvaldið** er partur av høvuðsbólkinum Stýrisskipan inneftir.

Bólkurin hevur m.a. viðgjørt evni sum játtanarheimild, skattaheimild, demokratiskt eftirlit, fíggjareftirlit, búskapargrunn, landsbanka, landsgrannskoða, hagtøl og gjaldoyra.

Fíggjarvaldið hevur verið viðgjørt á nøkrum fundum, men hetta er eitt sera stórt evni, og tað eru nógvir politiskir spurningar, sum ikki er hugsandi at viðgera endaliga í nevndini til ásettu tíðfreist. Arbeiðið við fíggjarvaldinum er stórt og grundleggjandi, og átti kanska at fingið serstaka viðgerð eins og rættarskipanin.

# VALSKIPANIN

**Bólkurin Valskipan** er partur av høvuðsbólkinum Stýrisskipan inneftir.

Bólkurin hevur m.a. viðgjørt evni sum valdømi, uppstilling, flokkar, fólkaatkvøður og veljarin

Valskipanin hevur verið umrødd á einum bólkafundi, og spurningurin um valskipanir hevur verið viðgjørdur leysliga fleiri ferðir, men talan hevur ongantíð verið um nakra gjølla, skipaða viðgerð, og tí ber illa til at siga nakað ítøkiligt um, hvussu sjónarmiðini eru um henda spurningin. Men í orðaskiftunum, sum hava verið, hevur bólkaleiðarin fingið ta fatan, at hetta er eitt mál, har politisku umboðini – og kanska eisini hini umboðini – hava ymiskar áskoðanir.

# Eftirlitsvaldið

**Bólkurin Eftirlitisvaldið** er partur av høvuðsbólkinum Stýrisskipan inneftir.

Bólkurin skal viðgera tær eftirlitiskipanir, ið vanliga eru á stjórnarstigi. Fyrst og fremst eftirlitið hjá løgtinginum við landsstýri og fyrisiting, men eisini annað eftirlit sum landsgrannskoðara, umboðsmann og týdningin av almennum innliti.

Evnið er enn ikki viðgjørt í bólki, men nertir við evni í øðrum bólkum t.d. tingskipan og fyrisiting og prosess, og skal tí samskipast við hesi.

# Stjórnarvaldið

**Bólkurin Stjórnarvaldið** er partur av høvuðsbólkinum Stýrisskipan inneftir.

Bólkurin viðgerð teir stovnar og tær skipanir, sum ofta í dag verða undir einum nevnd útinnandi valdið. Í stjórn okkara í dag eru bæði løgmaður og hinir landsstýrismenninir, sum tilsamans eru landsstýrið. Undir sær hava teir eina fyrisiting, og harumframt eru serligir fyrisitingarstovnar, sum røkja almennar uppgávur, uttan at vera undir beinleiðis almennum ræði. Uppgávubýtið millum hesa ørgrynnu av stovnum og funksjónum skal í høvuðsheitum greinast í grundlógini.

Bólkurin hevur gjørt upprit um stjórnarvaldið, sum er tøkt í skjalasavninum hjá grundlógarnevndini. Stjórnarvaldið hevur verið viðgjørt á bólkafundum og í plenum. Evnið hevur eisini verið fyri á tíðindafundi.

Í viðgerðini hava ikki verið serligar ósemjur, og tað hava heldur ikki verið trupulleikar av fakligum slagi, men prinsipiellar avgerðir skulu takast í sambandi við valdsbýtið, – serstakliga millum ting og stjórn, áðrenn evnið kann viðgerast liðugt.

# Effektivitetur

**Bólkurin effektivitetur** hevur viðgjørt, hvønn løgfrøðiligan týdning grundlógin skal hava. Løgfrøðiliga er tað ikki orðamongdin ella orðavalið, ið ger grundlógina virkna, men heldur, um stovnar, heimildir og mannagongdir eru at verja grundlógarásetingarnar.

Bólkurin hevur gjørt upprit um Effektivitet, sum er tøkt í skjalasavninum hjá grundlógarnevndini.

Bólkurin hevur havt bæði plenumframløgu og tíðindafund.

# Rættarskipanarnevndin

**Rættarskipanarnevndin** er serlig nevnd undir grundlógarnevndini.

Nevndin hevur nærum ongar fundir haft. Skrivstovan hevur í staðin fyrireika eina komandi viðgerð av evninum.

Eitt tað fyrsta, sum Grundlógarnevndin viðgjørdi var at seta eina Rættarskipanarnevnd – ein undirnevnd undir Grundlógarnevndini. Um Rættarskipanarnevndina verður sagt í arbeiðssetninginum:

"Hinvegin er greitt, at grundlógarnevndin ikki fær stundir og orku - og er ikki rætta forumið - at gera eitt fullfíggjað tekniskt uppskot til rættarskipan – t.e. øll tey viðurskifti, sum í dag eru nevnd í rættargangslógini fyri Føroyar, umframt tað, sum er ásett í ríkislóg um dómstólastýrið o.s.fr. Tí eigur grundlógarnevndin beinanvegin at seta eina rættarskipanarnevnd at arbeiða burturav við tí tekniska uppskotinum til føroyska rættarskipan. Henda nevndin skal vísa til grundlógarnevndina við tí endamáli, at neyvt samsvar fæst millum yvirskipaðu ásetingarnar um rættarskipan í uppskotinum til grundlóg, og tað stóra tekniska arbeiðið sum má gerast í rættarskipanarnevndini. Rættarskipanarnevndin skal meta um tíðarkarm og arbeiðsorku til at gera fullfíggjað uppskot til føroyska rættarskipan, og skal mæla til, hvat kann gerast í eini skiftistíð, til eitt uppskot er klárt at seta í verk. Grundlógarnevndin og rættarskipanarnevndin kunnu hava felags fundir, tá mett verður, at tørvur er á at samskipa arbeiðið.
Rættarskipanarnevndin verður mannað við 7 (møguliga 6) limum, ið verða valdir soleiðis:
Grundlógarnevndin velur ein av sínum limum í rættarskipanarnevndina
Heitt verður á Domstolsstyrelsen í Keypmannahavn um at tilnevna ein dómara við neyvum innliti í føroysk viðurskifti
Advokatráð Føroya instillar tveir limir
Løgdeild landsstýrisins innstillar ein lim
Løgtingsskrivstovan innstillar ein lim
Hesi 6 (5) velja sjálvi í felag 7. (6.) limin
Nevndin skipar seg sjálv
Rættarskipanarnevndin viðger arbeiðssetning sín saman við grundlógarnevndini og avtalar eina tíðarfreist"

Tíverri vísti tað seg at vera trupult at fáa sett Rættarskipanarnevndina. Grundlógarnevndin samtykti at velja formannin Jóan Paula Joensen í nevndina og Løgdeildin á Løgmansskrivstovuni tilnevndi Rúna Joensen sum sítt umboð í nevndina. Men Domstolstyrelsen vildi ikki tilnevna nakran lim, Løgtingsskrivstovan heldur ikki, og Advokatráð Føroya bað nevndina sjálva velja tvey umboð av limalista teirra. Eftir at málið var viðgjørt fleiri ferðir á fundum í Grundlógarnevndini, varð at enda vikið frá uppskotinum, sum stóð í arbeiðssetningininum. Tikið var ad notam, at Løgtingsskrivstovan og Domstolsstyrelsen ikki vildu koma við uppskoti til lim. Grundlógarnevndin tilnevndi so advokatarnar Kára Dalsgaard Petersen, Turið Debes Hentze, Hans Trúgva Teirin, Fríðu Patursson og Julionnu Klett í Rættarskipanarnevndina afturat deildarstjóranum á Løgdeildini, Rúna Joensen, og formanninum í Grundlógarnevndini, Jóan Pauli Joensen.
Á fyrsta nevndarfundinum 9. desember varð Kári Dalsgaard Petersen, advokatur, valdur til formann, og avgjørt varð, at Kári á Rógvi, skrivari í grundlógarnevndini, eisini skuldi røkja skrivarauppgávuna hjá rættarskipanarnevndini.

Rættarskipanarnevndin hevði bert 2 fundir. Á seinna fundi varð avgjørt, at formaðurin, Kári Dalsgaard Petersen, og Rúni Joensen skuldu gera uppskot til eitt virkisnotat, sum nevndin skuldi arbeiða eftir. Av tí at nógv arbeiði hjá nevndini í fyrsta umfari var rutinuarbeiði, valdi formaðurin í Grundlógarnevndini at steðga arbeiðinum í rættarskipanarnevndini eina tíð og í staðin seta ung løgfrøðilesandi í summarfrítíðini í 2000 at umseta galdandi rættargangslóg, sum er á donskum, til føroyskt mál at nýta sum grundarlag fyri nevndararbeiðinum. Hetta arbeiði er komið væl á leið.

# E. Flokkarnir

Í hesum partinum verður støðan hjá flokkunum til arbeiðið frameftir endurgivin ella lýst.

Flokkarnir koma fyri í hesi røð
- Fólkaflokkurin
- Sambandsflokkurin
- Javnaðarflokkurin
- Sjálvstýrisflokkurin
- Tjóðveldisflokkurin
- Miðflokkurin

**FÓLKAFLOKKURIN**

15. januar 2002

**Viðmerkingar í sambandi við grundlógararbeiðið.**

Sum limir Fólkafloksins í Grundlógarnevndini hava vit hesar viðmerkingar:

Síðan Grundlógarnevndin fór til verka á vári 1999, hava vit luttikið í arbeiðinum, og hevur hetta verið ein sera spennandi og gevandi uppgáva. Okkara meting er, at arbeiðið sum heild hevur gingið væl, og nógv er fingið á skaftið.

Upprunaliga ætlanin var, at arbeiðið skuldi fáast frá hondini longu í 2000. Hetta var kanska í so optimistiskt, tá ið hugsað verður um, hvussu umfatandi ein grundlóg í veruleikanum er. Eisini er alneyðugt, at breið semja fæst um eina so týdningarmikla lóg, sum jú skal vera grundarlagið undir okkara samfelag.

Hóast teir politisku flokkarnir eru ósamdir á mongum økjum, má sigast, at arbeiðið í Grundlógarnevndini hevur verið merkt av góðum samstarvsanda, og sum skilst, er rættiliga breið semja um, at arbeiðið eigur at halda fram aftan á valið, sum verður nú til várs.

Vit fara eisini staðiliga at mæla til, at arbeiðið heldur fram, tí uttan mun til, hvussu tann politiska støðan verður eftir valið, so kann eingin ivi vera um, at vit sum tjóð hava brúk fyri at hava eina grundlóg ella stjórnarskrá, sum er sprottin úr okkara egna jørðildi.

Til seinast vilja vit leggja dent á, at tað tilfarið, sum nú verður handað landsstýrismanninum, ikki er endaliga viðgjørt, og í mongum førum er politisk viðgerð als ikki farin fram.

Virðingarmest,

limir Fólkafloksins í Grundlógarnevndini,

Jógvan á Lakjuni
tingmaður

Eyðun Viderø
tingmaður

**SAMBANDSFLOKKURIN**

**Sambandsflokkurin**

8. januar 2002

Grundlógarnevndin
Jóan Pauli Joensen
formaður

Vísandi til bræv títt frá 18.12.2001, skal verða sagt frá, at Sambandsflokkurin hevur gjørt eina meting av arbeiðinum í grundlógarnevndini higartil, og um hvat eigur at henda við grundlógararbeiðinum framyvir.

Sum vit áður hava boðað frá, hevur Sambandsflokkurin ta áskoðan, at bert ein og sama grundlóg eigur at galda fyri alt ríkið, men at flokkurin metir, at arbeiðið hjá grundlógarnevndini hevur týdning í sambandi við eina møguliga nýggja stýrisskipanarlóg.

Tað er komið fram frá bæði embætisfólkum og politikarum í nevndini, at arbeiðið við so stuttari tíðarfreist gevur ikki grundarlag fyri einum nøktandi úrsliti. Hesum sjónarmiði taka vit undir við. Tí er neyðugt at løgtingið leingir tíðarfreistina og at landsstýrismaðurin broytir arbeiðssetningin hjá nevndini.

Fakliga arbeiðið í nevndini hevur verið nøktandi, men tíðarfreistin fyri at røkka einum nøktandi úrsliti er eftir okkara tykki alt ov stutt.

Vinarliga

Edmund Joensen
Heðin Mortensen

**JAVNAÐARFLOKKURIN**

Føroya Javnaðarflokkur
Postrúm 208
Áarvegur 2
FO 110 Tórshavn

telefon: 31 24 93 og 22 53 44
telefax: 31 93 97
teldupostur: javnadarflokkurin@logting.fo

Grundlógarnevndin
v/ Jóan Paula Joensen, formanni
boks 64
FO-110 Tórshavn

Vísandi til samtyktina á fundinum í grundlógarnevndini mánadagin 17. des. 2001 og vísandi til bræv frá formanninum dagin eftir hava umboð Javnaðarfloksins í nevndini hesar viðmerkingar:

Sjálvt um grundlógin upprunaliga var ein neyðugur liður í fullveldisætlanini hjá sitandi samgongu, og sjálvt um Javnaðarflokkurin atkvøddi ímóti uppskotinum til lógina á sinni, so fóru umboð Javnaðarfloksins til verka við opnum sinni og hava í øllum lutum átikið sær ein konstuktivan leiklut. Sjálvandi tí at lógin álegði okkum hetta, men sanniliga fyrst og fremst tí, at vit í slíkum arbeiði høvdu møguleika í einum kvalifiseraðum forum at viðgera allar týðandi tættir av okkara samfelagsskipan umframt rættindi og skyldur hins einstaka.

Men tað er eingin loyna, at júst spurningurin um endaliga valdsbýtið, ella hvussu okkara ríkisrættarligu viðurskifti fóru at laga seg, hevur skapað ein ávísan ótryggleika í sjálvum arbeiðinum. Sum hundur um heitan greyt hevur av góðum grundum verið malið rundan um henda spurning, eisini tí, at vit vóru vitandi um, at júst hesin spurningur kundi seta ein kíla í eitt annars ótrúliga áhugavert arbeiði. Eisini hava røddir verið frammi um, at nevndin kundi býta seg í meirilutar og minnilutar ella bara minnilutar, og hetta hevði avgjørt ikki verið hóskandi fyri eitt so týðandi arbeiði.

Tí er tað framvegis okkara áskoðan, at nevndin tekur støði í tí ríkisrættarliga veruleika, sum vit hava, og at uppskotið til grundlóg, ella hvat endaliga úrslitið kemur at eita, í staðin nágreiniliga lýsir mannagongdirnar, um hesin veruleiki skal broytast uttan mun til, hvør broytingin endaliga verður. Tískil kann semju varðveitast, og vit kunnu náa fram til eitt úrslit, sum avgjørt vil verða okkara samfelag at stórum gagni og tæna politisku og fakligu umboðani til miklan heiður.

Órealistiska tíðarfreistin hevur virkað órógvandi, tí sjálvsagt skal slíkt arbeiði taka ta tíð, tað nú einaferð tekur.

Umboð floksins mæla til, at grundlógararbeiðið nú verður lagt stilt, tí um skamma stund so eru vit í valstríðnum til komandi løgtingsval. Tað ber snøgt sagt ikki til at arbeiða við hesum stórmáli í valstríðnum.

Javnaðarflokkurin vil medvirka til, at arbeiðið verður tikið uppaftur eftir løgtingsvalið, soleiðis at eitt endaligt uppskot eftir fullgóða viðgerð við vónandi samdari nevnd kann leggjast fram.

Í Havn 19. des. 2001

Hans Pauli Strøm

Jóannes Eidesgaard

**SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN**
Grundlógarnevndin
v/Jóan Paula Joensen, formanni
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn, 7. januar 2001

**Viðv. frágreiðing frá grundlógarnevndini**

Vísandi til áheitan formansins hevur Sjálvstýrisflokkurin mett um grundlógararbeiðið og framtíð tess.

Sjálvstýrisflokkurin ásannar, soleiðis sum grundlógarnevndin eisini gjørdi í september 2001, at frágreiðingin, sum nevndin nú letur úr hondum ikki er eitt endaligt uppskot til eina føroyska grundlóg. Fleiri av evnunum, ið eiga at gerast partur av eini grundlóg, eru als ikki við í frágreiðingini og onnur hava ikki fingið ta viðgerð, sum eigur at verða kravd í sambandi við eitt so týdningarmikið arbeiði sum eina grundlóg.

Vit ásanna, at broytta sjálvstýristilgongdin hevur havt sína ávirkan á arbeiðið.

Kortini er tað okkara fatan, at væl er fingið burturúr. Nógv evni og mál eru viðgjørd í sambandi við grundlógararbeiðið og fleiri av hesum evnum eru slík, ið vit ikki vanliga fáast við í føroyskum politikki, t.d. hava viðgerðirnar av mannarættindum v.m. verið ógvuliga áhugaverdar og mennandi fyri luttakararnar. Partar av grundlógararbeiðinum kunnu uttan iva nýtast í komandi tíðum uttan mun til, hvussu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark verða skipað.

Sjálvstýrisflokkurin hevur ta áskoðan, at grundlógararbeiðið eigur at verða tikið uppaftur eftir løgtingsvalið í vár. Í hesum sambandi eiga fleiri viðurskifti at verða tikin upp til viðgerðar, áðrenn grundlógarnevnd verður sett av nýggjum, t.d.

- praktisku viðurskiftini í sambandi við grundlógarfundir og tingfundir,
- møguleiki eigur at vera fyri, at serfrøðingarnir viðgera evnini og gera uppskot til lógargreinar og viðmerkingar, áðrenn politiski parturin av grundlógarnevndini verður tikin uppí arbeiðið, og
- miðað eigur at verða ímóti, at arbeitt verður meira skipað við ávísum evnum til hesi hava fingið eitt endaligt skap.

Grundlógararbeiðið hevur farnu 2 – 3 árini lagt rættiliga nógv fyri, og mangan hava evnini, sum hava verið viðgjørd um somu tíð spent ógvuliga víða. Hetta hevur uttan iva darvað viðgerðini av summum evnum, ið heldur lættliga er farið um.

Sum nevnt vil Sjálvstýrisflokkurin virka positivt fyri, at hildið verður fram við grundlógararbeiðinum eftir løgtingsvalið.

Virðingarmest,

Eyðun Elttør
formaður

Kári P. Højgaard
limur í grundlógarnevndini

**TJÓÐVELDISFLOKKURIN**

# *Tjóðveldisflokkurin*

***Annita á Fríðriksmørk          Hergeir Nielsen***

***3. januar 2002***

Tað er við sorg í sinni, vit staðfesta, at vit náddu alt ov stutt í nevndararbeiði okkara, og at grundlógarnevndin ikki megnaði at tilevna uppskot til grundlóg fyri Føroyar.

Lógarásetta kravið varð darvað almikið av viljanum til at finna aðrar loysnir, og varð tí alt ov stór orka brúkt til tjak um valkostir til sjálvan nevndarsetningin.

Sum vitiligt er, skuldi dentur leggjast á, at Føroyar skuldu skipast sum eitt land við fullveldi. Føroyska grundlógin skuldi ma. áseta grundleggjandi rættindi og skyldur millum statin og borgararnar, hvussu Føroyar skuldu skipað sítt egna løggevandi, útinnandi og rættarvald, saman við valdsbýtinum millum hesi við atliti at føroyska statinum.

Nevndin skuldi skrivað álit, sum lýsti arbeiðið nevndarinnar og seta fram fullfíggjað uppskot til grundlóg fyri Føroyar. Álitið skuldi hava greiðar grundgevingar fyri endaliga uppskotinum til grundlóg, og skuldi harumframt lýsað orðaskiftið í nevndini og møguligar tvístøður um týdningarmiklar spurningar eins og gongdina í almennu hoyringunum, ið verða skuldu.

Men so langt rakk nevndin ikki.

Nevndarbeiðið stendur í hálvum gekki, og er á ongan hátt búgvið í endaligum orðasniði í grundlógarformi – hvørki málsliga ella innihaldsliga.

Nevndarsamansetingin – tann fakliga og tann politiska - hevur eisini havt við sær, at ov fáir fundir hava verið fullmannaðir.

Tað verður hinvegin á ongan hátt hildið, at starv okkara er burturspilt. Stýris- og tingsskipanin treingja til stórar ábøtur, og eru fleiri tættir í hesum viðgjørdir og hugsaðir av nýggjum.

Vit siga okkum samd í hjálagda skrivi formansins um tað grundleggjandi virðið í tí arbeiði, sum er gjørt. Vit hugsa serliga um tað upprunakenda og avbjóðandi tjakið, ið hevur elvt til nýhugsan um framtíðarstøðu Føroya.

Ein fortreytin fyri fullveldinum er ein virkin grundlógarnevnd, og vit taka tað sum givið, at tær politisku Føroyar halda fram við samráðingum við donsku stjórnina um føroysk-donsk viðurskifti við tí endamáli, at tær verða sjálvstøðugar (suverenar).

Vit eru tí eisini samd um, at nevndararbeiðið eigur at halda fram, umenn tað er lítið skilagott at halda fram eftir sama leisti sum higartil, nú vit hava eitt løgtingsval í skotmála.

Vinarligar heilsanir og gott nýggjár

Annita á Fríðriksmørk og Hergeir Nielsen

# Miðflokkurin

# F. Niðurstøða

Í hesum partinum ger formaðurin sína endaligu niðurstøðu.

Partar av grundlógararbeiðinum eru komnir rættiliga væl áleiðis og tørva bert eina formliga góðkenning á plenumfundi, meðan aðrir partar krevja meiri grundleggjandi viðgerð bæði í bólki og plenum.

Nevndin hevur framleitt nógv og gott tilfar, sum kan verða eitt dygt grundarlag undir einum framhaldandi arbeiði við eini føroyskari grundlóg ella eini føroyskari stjórnarskrá. Tað vildi verið stórt spell, um hetta arbeiði og tann kunnleiki, sum er vunnin á hesum øki, fer fyri onki.

Politisku stovnarnir mugu gera av lagnuna hjá grundlógararbeiðnum.

Ymsu trupulleikarnir hjá nevndini eru væl lýstir og eiga at vera loystir, áðrenn vit fara til verka aftur.

Eitt grundlógararbeiði kann ikki gerast, uttan tey fólkavaldu eru við í øllum arbeiðnum. Men sannroynd er, at tað ger arbeiðið eitt sindur óliðiligt at hava nógvar fundir við tingfólki. Ósemjan um ríkisstøðuna ger samstarvið tingmanna millum serliga torført.

Tað gjørdi arbeiðið sera tvørligt, at tað ikki tyktiskt gjørligt hjá Løgtinginum, ið sett hevði nevndina, at taka hana við í fundarætlarnir sínar. Hóast fleiri royndir vóru gjørdar frá nevndarinnar síðu.

Uppskot formansins er tí, um hildið verður, at arbeiðið skal halda áfram., at Grundlógarnevndin verður skipa í tvey kømør við sama formanni. Eitt lítlakamar, sum er eitt arbeiðskamar mannað við serfrøðingum, sum gera uppskotini viðmerkingar at leggja fyri stórakamar, sum er mannað við bæði serrfrøðingum og parlamentarikarum. Í stórakamari verða uppskot og viðmerkingar nágreiniliga viðgjørd og tillagað. Tað verður stórakamar, sum tekur endaliga støðu til tað uppskotið til eina føroyska grundlóg sum um Løgtingið verður lagt út til fólkaatkvøðu. Stórakamar skal hava nakrar fast ásettar fundir, sum verða lagdir í samráð við løgtingsformann og løgmann, so at einki annað verður til hindurs fyri, at hesir fundir verða hildnir ta tíð, teir eru ásettir at verða. Hin vegin skulu teir ikki verða hildnir so ofta.

Tíðarfreistin eigur at verða tikin úr lógini, men hinvegin eigur tað at verða greitt, at arbeiðið skal verða liðugt innanfyri ein ávísan tíðarkarm. Hetta eigur at verða litið upp í hendurnar á landstýrismanninum í lógarmálum at taka avgerð um.

Hetta, sum her er ført fram, er ikki nøkur kollveltandi broyting í mun til ta lóg, sum er galdandi í løtini, men tað vil gera arbeiðslagi lættari og skapa større virðing fyri lógini. Ein lóg skal helst hava rímiligan møguleika fyri at verða hildin.

Sær til hjálpar eigur formaðurin hava eina fasta skrivstovu, ein fastan fakliga kønan og royndan ráðgeva og eitt fast skrivstovufólk umframt møguligar leysar hjálparar til tíðir. Tess skjótari arbeiðið skal ganga, tess størri verður arbeiðsorkan at verða.

Tað verður upp til avvarandi myndugleikar at gera av um formansskrivstovan skal verða partur av t.d. Løgdeildini á Løgmansskrivstovuni, ella um hon skal vera heilt sjálvstøðug og uttan bindingar til fyrisitingina annars.

Jóan Pauli Joensen
formaður

# G. Skjøl

Í hesum allarseinasta partinum verða endurgivin nøkur skjøl.

Mong onnur skjøl úr grundlógararbeiðnum kundu verið hjáløgd.

Serliga kundi Føroya Lógin ella onnur fullfíggja føroysk stjórnarlóg verið endurgivin. Sum nevnt er tað tó soleiðis, at ein slík evstalóg krevur semja um einstøku lutirnar til tess at fáa semju um heildina, tí er best at bíða til nevndin er farin undir aftur virksemið sítt.

Endurgivnu skjølini eru:

- II. Lógin um grundlógararbeiðið
- III. Uppskotið, viðgerðin og atkvøðugreiðslan
- IV. Lógbroytingin, viðgerðin og atkvøðugreiðslan
- V. Endaligi arbeiðssetningurin
- VI. Stjórnarskráin úr bókini Føroyum 1946
- VII. Stýrisskipanarlógin 1948
- VIII. Lóg um umboðsvald 1948
- IX. Stýrisskipanarlógin 1995

# I. Lógin um grundlógararbeiðið

## LØGTINGSLÓG NR. 10 FRÁ 11. FEBRUAR 1999 UM GRUNDLÓGARNEVND

§ 1. Sett verður grundlógarnevnd at gera uppskot til grundlóg fyri Føroyar. Í uppskotinum skulu m.a. vera ásetingar um valdsbýtið millum lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið, ásetingar um grundleggjandi mannarættindi og ásetingar um rættindir og skyldur hjá føroyskum borgarum.
Stk. 2. Landsstýrismanninum verður heimilað at útgreina arbeiðssetning nevndarinnar.
Stk. 3. Nevndin skal lata landsstýrinum álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. juni 2000.
Stk. 4. Nevndin skal harumframt gera uppskot til eina føroyska rættarskipan.

§ 2. Í grundlógarnevndini sita tvey umboð fyri hvønn flokk á tingi, sum hevur fýra tingmenn ella fleiri, eitt umboð fyri hvønn flokk á tingi, sum hevur tríggjar tingmenn ella færri, ein landsstýrismaður og fimm persónar við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum.
Stk. 2. Løgmaður velur umboð landsstýrisins í nevndina. Limirnir umboðandi flokkarnar á løgtingi skulu vera løgtingsmenn og verða valdir av flokkunum á løgtingi. Landstýrismaðurin velur tey fimm umboðini við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum, og teirra millum formannin í nevndini. Fyri hvønn nevndarlim verður valdur varalimur.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann seta skrivara í nevndina, sum skal hava hægri samfelagsvísindaliga útbúgving.
Stk. 4. Flokkur, sum missir umboðan sína á løgtingi, missur umboð sítt í nevndini. Kemur flokkur á ting meðan nevndin situr, hevur flokkurin rætt til, at ein tingmaður úr flokkinum verður settur í nevndina. Fer nevndarlimur úr løgtinginum, meðan nevndin situr, fer hann úr nevndini, og flokkurin velur annan í hansara stað. Fer umboð landsstýrisins í nevndini úr landsstýrinum, fer hann úr nevndini, og løgmaður velur annan í hansara stað.

§ 3. Meðan nevndin arbeiðir skipar hon fyri regluligum almennum hoyringum um grundlógararbeiðið.

§ 4. Landskassin rindar kostnaðin av nevndararbeiðinum.

§ 5. Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd

# II. Uppskotið, viðgerðin og atkvøðugreiðslan

## 66 UPPSKOT TIL LØGTINGSLÒG UM GRUNDLÒGARNEVND

*Ár 1998, 1. desember, legði Høgni Hoydal, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi*

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um grundlógarnevnd**

§ 1. Sett verður grundlógarnevnd at gera uppskot til grundlóg fyri Føroyar. Í uppskotinum skulu m.a. vera ásetingar um valdsbýtið millum lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið, ásetingar um grundleggjandi mannarættindi og ásetingar um rættindir og skyldur hjá føroyskum borgarum.
Stk. 2. Landsstýrismanninum verður heimilað at útgreina arbeiðssetning nevndarinnar.
Stk. 3. Nevndin skal lata landsstýrinum álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. juni 2000.
Stk. 4. Nevndin skal harumframt gera uppskot til eina føroyska rættarskipan.

§ 2. Í grundlógarnevndini er ein limur fyri hvønn flokk á løgtingi, ein landsstýrismaður og fimm persónar við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum.
Stk. 2. Løgmaður velur umboð landsstýrisins í nevndina. Limirnir umboðandi flokkarnar á løgtingi skulu vera løgtingsmenn og verða valdir av flokkunum á løgtingi. Landstýrismaðurin velur tey fimm umboðini við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum, og teirra millum formannin í nevndini.
Stk 3. Landsstýrismaðurin kann seta skrivara í nevndina, sum skal hava hægri samfelagsvísindaliga útbúgving.
Stk. 4. Flokkur, sum missir umboðan sína á løgtingi, missir umboð sítt í nevndini. Kemur flokkur á ting, meðan nevndin situr, hevur flokkurin rætt til, at ein tingmaður úr flokkinum verður settur í nevndina. Fer nevndarlimur úr løgtinginum, meðan nevndin situr, fer hann úr nevndini, og flokkurin velur annan í hansara stað. Fer umboð landsstýrisins í nevndini úr landsstýrinum, fer hann úr nevndini, og løgmaður velur annan í hansara stað.

§ 3. Meðan nevndin arbeiðir, skipar hon fyri regluligum almennum hoyringum um grundlógararbeiðið.

§ 4. Landskassin rindar kostnaðin av nevndararbeiðinum.

§ 5. Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Viðmerkingar

Landsstýrissamgongan hevur sett sær fyri, at Føroyar skulu skipast sum eitt land við fullveldi eftir eini skipaðari ætlan. Formliga er henda ætlan í tveimum:

At gera ein millumlandasáttmála millum Føroyar og Danmark, sum ásetir framtíðarsamstarvið millum londini, sum tvey lond við fullveldi.

Uppskotið til sáttmála verður lagt fyri løgtingið, og tá løgtingið hevur samtykt tað, verður tað lagt til fólkaatkvøðu til góðkenningar.

## At gera eina grundlóg fyri Føroyar.

Nevnd verður sett at gera uppskot til grundlóg, sum verður lagt fyri løgtingið. Tá løgtingið hevur samtykt tað, verður tað lagt til fólkaatkvøðu til góðkenningar.

Í løgtingsmáli nr. 5/1998: Uppskot til samtyktar um ríkisrættarliga støðu Føroya, hevur løgtingið tann 2. oktober 1998 tikið undir við, at landsstýrið fyrireikar og tekur upp samráðingar við donsku stjórnina um ein sáttmála, og at landsstýrið leggur eina frágreiðing um fyrireikingarnar fyri tingið til aðalorðaskiftis, áðrenn farið verður til samráðingar. Í viðmerkingunum til hetta uppskot er greitt nærri frá ætlanum landsstýrisins við einum nýggjum sáttmála.

Nú verður lagt fram uppskot til løgtingslóg um grundlógarnevnd.

## Samskipan av arbeiðinum

Undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 5/1998 í uttanlandsnevnd løgtingsins hevur landsstýrismaðurin latið nevndini tilfar og greitt nærri frá, hvussu ætlanin er at skipa fyrireikingarnar til ríkisrættarligu broytingarnar. Hetta verður skipað sum ein verkætlan, har settar verða hesar arbeiðsnevndir:

Ein sáttmálanevnd, sum skal kanna og lýsa tey løgfrøðiligu, politisku og umsitingarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, gera uppskot til skiftisskipanir og samstarvsavtalur og uppskot til ein sáttmála.

Ein búskaparnevnd, sum skal kanna og lýsa tey búskaparligu og fíggjarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, gera uppskot til skiftisskipanir og lýsa krøvini til ein sjálvberandi føroyskan búskap.

Grundlógarnevndin, sum skal gera uppskot til grundlóg og føroyska rættarskipan.
Harumframt skulu tey einstøku stýrini í miðfyrisitingini lýsa og greina samstarvið við Danmark í dag, lýsa tørvin á samstarvsavtalum og krøvini til lóggávu, fyrisiting og fígging, um Føroyar skulu umsita øll málsøki sjálvi.

Verkætlanin og skrivstovuhaldið verður skipað í fyrisitingini undir landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum.

Grundlógarnevndin kann samskipa arbeiði sítt við hinar nevndirnar í verkætlanini, og grundlógarnevndin fær fult innlit í alt arbeiði við sjálvstýrismálum í landsstýrinum. Eitt nú eigur spurningurin um skiftisskipanir, har málsøki kunnu latast til Danmarkar ella onnur lond at umsita, í eina tíð at verða viðgjørdur í grundlógarnevndini í samstarvi við hinar nevndirnar.

Við hesi skipan verður eisini tryggjað øllum flokkum á tingi fult innlit og ávirkan í fyririeikingararbeiðið til ríkisrættarligu broytingarnar.

## Høvuðstættir í grundlógararbeiðnum

Føroyska grundlógin skal m.a. áseta grundleggjandi rættindir og skyldur millum statin og borgararnar, og hvussu Føroyar skipa sítt egna lóggávuvald, útinnandi vald og rættarvald.

*a) Valdsbýtið*

Annar høvuðstátturin í grundlógararbeiðnum er sostatt at viðgera valdsbýtið millum lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið.
Í sambandi við løgtingsmál nr. 190/1993: Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, er gjølla greitt frá stýri sskipanarviðurskiftum Føroya og søguligu fortreytunum. Eisini eru viðurskiftini í londum við fullveldi

lýst í 9. kapitli í álitinum. Stýrisskipanarnevndin arbeiddi alment við spurninginum um statsrættarligu viðurskiftini í Føroyum, men var bundin av, at heimildin fyri lóggávuvaldinum í Føroyum skuldi vera Heimastýrislógin.

Nevndin lýsir í kap. 8 í álitinum, hvørjar stýrisskipanarreglur eru neyðugar afturat, skulu Føroyar hava fult sjálvstýri. Nevndin heldur, at uppskotið til stýrisskipanarlóg kann nýtast sum grundarlag undir eini føroyskari grundlóg.

Sostatt kann grundlógarnevndin taka støði í stýrisskipanarlógini og í forarbeiðnum til hesa lóg, tá tað snýr seg um grundleggjandi valdsbýtið millum løggevandi og útinnandi valdið, og hon kann samstundis virðismeta tær royndirnar, sum eru gjørdar við stýrisskipanarlógini og gera uppskot til broytingar.

*b) Rættindir og skyldur*
Hin høvuðstátturin í arbeiðnum hjá grundlógarnevndini eru grundleggjandi statsrættarligar ásetingar um rættindir og skyldur millum føroyska statin og borgararnar.
Eitt nú eigur nevndin at viðgera hesar spurningar:
Uttanríkismál
Verjuspurningar, herundir kjarnorkumál
Fólkaatkvøður
Reglur fyri at geva fullveldi frá sær
Kirkjan og staturin
Mannarættindi/frælsisrættindi - herundir trúarfrælsi, talu- og skrivifrælsi, javnstøða
Rættartrygd
Ognartøka
Statsborgaraskapur
Rættindi og skyldur hjá føroyskum borgarum - herundir rættur til almannahjálp, bústað, arbeiði, ogn, náttúrutilfeingið og samfelagstænastur
Skuldarbinding hjá statinum
Náttúrutilfeingi og hvussu tað skal umsitast
Náttúru- og umhvørvisvernd
Mentanarspurningar
Reglur um ígildissetan og broyting í grundlógini
Grundlógararbeiðið nemur við grundleggjandi mentanarlig virðir í føroyska samfelagnum. Tí eigur nevndin at viðgera allar spurningar við neyvum atliti til føroyska rættarsøgu, siðvenjur og mentan.

*c) Rættarskipan*
Í mun til núgaldandi stýrisskipanarlóg, sum ásetir valdsbýtið millum løggevandi og útinnandi valdið, skal grundlógin áseta býtið millum hesi og eitt sjálvstøðugt føroyskt dømandi vald. Tí verður skotið upp, at grundlógarnevndin eisini skal gera uppskot til, hvussu føroyska rættarskipanin skal vera. Herundir hvussu ein føroyskur yvirrættur kann skipast, hvussu dómarar og fulltrúar við embætini kunnu tilnevnast óheftir av løgtingi og landsstýri, og hvussu ákæruvald, løgregla, kriminalforsorg og fongsulsverk skulu skipast. Nevndin kann velja at seta ein serligan bólk ella nevnd at arbeiða burturav við hesum.

## Almennar hoyringar
Til tess at tryggja eina almenna viðgerð og eitt gott alment orðaskifti um grundlógina verður álagt nevndini at hava almennar hoyringar í arbeiðinum. Nevndin kann skipa hesar soleiðis, at ávís evni verða tikin upp á almennum hoyringum, har uppskot verða løgd fram og grundgivin. Nevndin kann biðja um viðmæli frá ymsum feløgum, fakfólki og áhugabólkum, sum hava serlig tilknýti til ymsu spurningarnar, og hesi kunnu leggja fyri við innleggum í almennu hoyringunum.

## Kostnaður av grundlógararbeiðinum

Kostnaðurin av arbeiðinum at gera uppskot til grundlóg verður mettur til umleið 2 mió. kr. Her er íroknað løn til formannin og skrivaran, samsýning til serfrøðingar, fundarsamsýning til løgtingsmenn, serkøn hjálp, eitt nú responsum frá statsrættarserkønum og frágreiðingar um fremmandar stýrisskipanir og prenting av álitinum.

Løgtingið hevur fyri 1998 játtað kr. 1,659 mió. kr. til sjálvstýrismál, íroknað grundlógararbeiðið. Landsstýrið hevur á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1999 søkt um kr. 6 mió. kr. til sjálvstýrismál, og her er grundlógararbeiðið íroknað.

## Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

**Til § 1.** Einasta avmarkingin í arbeiðssetninginum hjá nevndini er, at uppskotið til føroyska grundlóg skal innihalda ásetingar um valdsbýtið millum lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið, grundleggjandi mannarættindi og rættindi og skyldur hjá føroyskum borgarum.

Tað er eyðsýnt, at Føroyar stýrisskipanarliga og rættarliga eru partur av norðurlendsku siðvenjuni. Grundlógirnar hjá hinum norðurlondunum kunnu tí nýtast sum fyrimynd, men nevndin kann viðgera aðrar stýris- og stjórnarskipanir og meta, um tættir úr hesum skipanum kunnu nýtast í føroysku grundlógini, umframt at nevndin eigur at viðgera serføroyskar spurningar.

Umframt at gera uppskot til grundlóg skal nevndin gera uppskot til eina føroyska rættarskipan t.e. eina skipan fyri dømandi valdið, ákæruvaldið, løgregluna v.m.

Reglurnar á hesum øki eru í dag ásettar í rættargangslógini fyri Føroyar. Rættargangslógin fyri Føroyar er ein vanlig ríkislóg, og kann hon broytast sum ein vanlig lóg.

Nevndin skal gera uppskot til eina føroyska skipan, ið fevnir um øll tey viðurskifti, ið eru ásett í hesi lóg.

Torført er at meta um, hvussu umfatandi arbeiðið verður at gera uppskot til føroyska rættarskipan, tí hetta veldst um, hvussu stórar broytingar, nevndin skjýtur upp í mun til núgaldandi rættargangslóg. Grundlógarnevndin kann velja at seta eina serliga undirnevnd at gera hetta arbeiðið, og nevndin kann somuleiðis velja at gera uppskotið til rættarskipan, tá uppskotið til grundlóg er liðugt.

Tíðarfreistin í § 1 stk. 3 fevnir sostatt ikki um uppskotið til Føroya Rættarskipan.
Landsstýrismanninum verður heimilað at útgreina arbeiðssetning nevndarinnar nærri enn gjørt er í § 1 stk. 1.

**Til § 2.** Fyri at tryggja øllum flokkum á løgtingi og landsstýrinum innlit og ávirkan á arbeiðið verður skotið upp, at hesi eru umboðað í nevndini. Løgmaður velur umboð landsstýrisins í nevndina, og flokkarnir á løgtingi velja eitt umboð hvør í nevndina. Umboðini hjá flokkunum á løgtingi skulu vera løgtingsmenn.

Arbeiðið at gera uppskot til grundlóg krevur eisini serkunnleika. Skotið verður tí upp, at fimm serfrøðingar verða settir í nevndina. Hesir serfrøðingar skulu hava hægri samfelagsvísindaliga útbúgving, og skulu virka sum fakligur arbeiðsbólkur í nevndini. Teir verða tilnevndir av landsstýrismanninum, ið eisini teirra millum velur formannin í nevndini. Mett verður at arbeiðið verður so umfatandi, at tað kann verða neyðugt at seta skrivara at taka sær av grundlógararbeiðinum burturav. Skotið verður tí upp, at landsstýrismaðurin kann seta skrivara í nevndina.

**Til § 3.** Til tess at tryggja fólkaræðisliga ávirkan og viðgerð í grundlógararbeiðnum verður álagt grundlógarnevndini at skipa fyri almennum hoyringum um arbeiðið.

Nevndin metir sjálv hvussu nógvar hoyringar skulu haldast, men hugsast kann, at 2-4 hoyringar eiga at vera um ávísar tættir í grundlógini, so sum verjuspurningar, millumtjóðaviðurskifti, frælsisrættindi, javnstøða, viðurskifti millum kirkju og stat, umhvørvisverju o.s.fr.

Almennu hoyringarnar kunnu skipast soleiðis, at feløg, áhugabólkar og fakfólk fáa partar av grundlógaruppskotinum til ummælis og leggja fyri við viðmerkingum í almennu hoyringunum.
Nevndin ger sjálv av, um hon vil skipa fyri almennum hoyringum um uppskotið til føroyska rættarskipan.

*1. viðgerð 8. december 1998. Málið beint í rættarnevndina, sum tann 26. januar 1999 legði fram soljóðandi*

## Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fram tann 1. desember 1998, og eftir 1. viðgerð tann 8. desember 1998 er tað beint rættarnevndini.
Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 17. desember 8.,15. og 21. januar 1999, og hevur undir viðgerðini av málinum havt fund við Høgna Hoydal, landsstýrismann.

**Ein meiriluti í nevndini** (Sámal Petur í Grund, Eyðun Viderø, Rúna Sivertsen, Hergeir Nielsen og Hans Tausen Olsen) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Tó setir sami meiriluti fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

Í § 2, stk. 2 verður sum nýtt 4. pkt. sett: »Fyri hvønn nevndarlim verður valdur varalimur.«

**Ein minniluti** (Hans Pauli Strøm) viðmerkir, at longu tá uppskotið til lóg um setan av grundlógarnevnd var til umrøðu á fyrsta fundi í rættarnevndini, boðaði Javnaðarflokkurin frá - og greiddi frá - at hann var sinnaður at royna at fáa eina semju við samgongumeirilutan, um so var, at samgongumeirilutin vildi ganga Javnaðarflokkinum á møti m.a. við at víðka arbeiðssetningin hjá grundlógarnevndini. Í hesum var ynski Javnaðarfloksins, at umframt arbeiðið við at gera eina føroyska grundlóg, skuldi grundlógarnevndin eisini kanna og vísa á, hvørjir møguleikar kundu verða fyri broytingum í galdandi ríkisgrundlóg, sum kundu tryggja føroyskt sjálstýri innan ríkisfelagsskapin. Her var fyrst og fremst hugsað um, hvussu man við broytingum í grundlógini kundi fáa ásett, at tað var Føroya Løgting - og ikki ríkismyndugleikarnir - sum var hægsti myndugleiki og hægsta lóggávuvald í Føroyum.

Samgongumeirilutin sýndi áhuga fyri møguleikanum at fáa Javnaðarflokkin við í ein breiðan meiriluta í álitinum um grundlógarnevndina. Og Javnaðarflokkurin varð biðin um at koma við eini skrivligari orðing av ynski sínum til víðkaðan arbeiðssetning hjá grundlógarnevndini.
Á næsta fundi legði Javnaðarflokkurin útgreinaðu sjónarmið síni fram. Tað er neyðugt í stuttum at greiða frá teimum her:

Javnaðarflokkurin tykir tað vera líka so **rangvørga politiska mannagongd** við setanini av grundlógarnevnd sum í allari framferðini í fullveldisætlanini hjá landsstýrinum: Nevnliga at byrja at

gera eina nýggja grundlóg fyri eitt føroyskt fullveldi, áðrenn Føroya fólk yvirhøvur er eftirspurt, um vit skulu hava nakað fullveldi, og áðrenn nakar hevur skil fyri, hvat hetta fullveldið er fyri nakað. Tað at fara undir at gera eina fullveldisgrundlóg longu nú - t.v.s. at byrja at seta fullveldið í verk, áðrenn fólkaatkvøðan hevur verið, um vit skulu hava nakað fullveldi - fer tí einans at hava ein einvegis propagandistiskan leiklut fyri fullveldisætlanini, líkasum fyri at fáa fólk at taka fullveldið fyri givið, áðrenn tey hava havt møguleikan at gera sína støðu greiða.

Kann Javnaðarflokkurin hinvegin fáa ávirkan á, hvussu grundlógararbeiðið verður lagt til rættis, og geva tí eitt breiðari grundarlag, vil hann royna at søkja semju við samgongumeirilutan.

Javnaðarflokkurin skeyt upp, at §1, stk.4 í lógaruppskotinum um, at grundlógarnevndin eisini skal "gera **uppskot til eina føroyska rættarskipan**", verður strikað, og at í staðin verður heitt á landsstýrismannin um at seta annað lógaruppskot fram um at seta eina serstaka rættarskipanarnevnd. Grundgeving Javnaðarfloksins er, at arbeiðið við at gera eina føroyska rættarskipan er eitt risastórt arbeiði, sum er alt ov rúgvismikið, tíðar- og orkukrevjandi, til at tað kann skoytast upp í endan á arbeiðinum hjá eini grundlógarnevnd. Haraftrat kann tað eisini av øðrum grundum verða ynskiligt at loysa arbeiðið, fyri at fáa eina sjálvstøðuga føroyska rættarskipan, frá arbeiðinum við at gera eina grundlóg - tí fellur fullveldisætlanin við komandi fólkaatkvøðu, so fellur eisini grundarlagið fyri grundlógararbeiðinum burtur. Tá kann kortini arbeiðið við eini sjálvstøðugari føroyskari rættarskipan halda fram.

Javnaðarflokkurin legði fram ynski sítt um **ein viðkaðan arbeiðssetning** fyri grundlógarnevndina, sum eitt nýtt §1, stk. 2, ljóðandi soleiðis:

»Nevndin skal í øðrum lagi gera uppskot til tær broytingar í verandi ríkisgrundlógini, sum krevjast fyri at tryggja føroyskum sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin«.

Grundgevingin fyri hesum broytingaruppskoti er tann, at Javnaðarflokkurin tekur ikki undir við fullveldisætlanini hjá landstýrinum. Hevði fullveldisætlanin verið samtykt við eina fólkaatkvøðu, hevði støðan sjálvandi verið ein onnur, so varð neyðugt við eini grundlóg, og so hevði Javnaðarflokkurin sjálvandi tikið undir við tí. Men fullveldisætlanin hevur ikki verið til fólkaatkvøðu, er **ikki** samtykt, og kann Javnaðarflokkurin tí heldur ikki taka undir við uppskotinum, so leingi sum tað bert hevur tað eina endamálið: At smíða eina fullveldisgrundlóg.

Hinvegin varð víst á, at Javnaðarflokkurin tekur til eftirtektar, at ein meiriluti í løgtinginum hevur gjørt av at miða eftir at skipa Føroyar sum fullveldi, og til tess vil gera eina nýggja grundlóg. Men skal Javnaðarflokkurin taka undir við uppskotinum, skal endamálsorðingin víðkast til eisini at fevna um ynski Javnaðarfloksins at fáa kannað **alternativu møguleikarnar fyri føroyskum sjálvstýri** við broytingum í verandi ríkisgrundlóg.

Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at danir hava sett sær fyri at fremja neyðugar broytingar og dagføringar av grundlógini um nøkur ár, og til tess verður »savnað saman« ynski og uppskot til broytingar. So tað eru góðir møguleikar at koma við broytingaruppskotum úr Føroyum.

Víst varð eisini á tað bæði skilagóða og neyðuga í einum slíkum »**tvíbreytaðum« arbeiðssetningi fyri grundlógarnevndina**. Tí síðst í hesum árinum skal verða fólkaatkvøða um fullveldisætlanina. Fellur hon, dettur arbeiðið at gera fullveldisgrundlóg burtur, men so kann nevndin konsentrera seg um at fáa framt broytingar í ríkisgrundlógini fyri føroyskum sjálvræði. Verður fullveldisætlanin hinvegin samtykt, dettur uppskotið hjá Javnaðarflokkinum burtur, og nevndin kann konsentrera seg fult um at

smíða føroyska grundlóg. Sostatt tekur hesin víðkaði ella »tvíbreytaði« arbeiðssetningurin, sum Javnaðarflokkurin skjýtur upp, hædd fyri báðum møguleikum !!!
Tað var skilliga fráboðað, at Javnaðflokkurin stóð fast við innihaldið í hesum víðkaða arbeiðssetninginum, men at orðingin saktans kundi lagast til tað, sum semja kundi fáast um.

Endiliga kundi samgongumeirilutin við støðu síni til broytingaruppskot Javnaðarfloksins vísa Føroya fólki, um Javnaðarflokkurin hevur rætt ella skeivt í sínum pástandi, at »landsstýrissamgongan hevur frá byrjanini læst seg fasta á síni egnu sjónarmið, har tað frammanundan er gjørt av, hvat úrslitið skal verða, og har allar fyrireikingar verða avmarkaðar til at miða einvíst eftir hesum úrsliti.«

Javnaðarflokkurin vísti haraftrat á heilt ítøkilig stór og greflig ódemokratisk lýti í lógaruppskotinum, sum øll benda á ein marghåttligan einaveldisligan hugsunarhátt hjá landsstýrismanninum, sum hevur evnað lógaruppskotið til. Í uppskotinum hevur landsstýrismaðurin nevnliga givið sær sjálvum ein slíkan leiklut, at tað er ein politisk neyðtøka av grundlógararbeiðinum, longu áðrenn tað verður byrjað:

* Í § 1, stk 2 stendur, at »Landsstýrismanninum verður heimilað at útgreina arbeiðssetning nevndarinnar ». Men tað er jú løgtingið, sum skal samtykkja lógina um setan av grundlógarnevnd og harvið eisini rúmliga arbeiðssetning hennara - tað er púra burturvið, at landsstýrismaðurin skal seta seg upp um løgtingið og sjálvur seta seg at stýra arbeiðinum beinleiðis við at taka grundlógarnevndina av ræði og gera seg inn á sjálvsagda rætt hennara at skipa arbeiði sítt.

* Í § 2, stk 2 stendur, at »Landsstýrismaðurin velur tey fimm umboðini við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum.« Við at velja seg sjálvan og hesar 5 serfrøðingarnar í nevndina, skipar landsstýrismaðurin so fyri, at hann sjálvur kemur at velja júst helvtina av limunum í grundlógarnevndini !!!

* Í § 2, stk. 2 stendur um teir 5 serfrøðingarnar, hann sjálvur velur, at »Landsstýrismaðurin velur ...teirra millum formannin í nevndini« !!! Hetta er sama valdsmisnýtsla sum omanfyri - sjálvandi eigur grundlógarnevndin bæði at skipa arbeiði sítt og at skipa seg sjálva.

* Og smb. § 2, stk. 3 skal Landsstýrismaðurin eisini seta sjálvt skrivaran í nevndini - Jú, sanniliga skal hann hava fastatøkur á grundlógarnevndini !

Landsstýrismaðurin skal gera av nágreiniliga, hvat íð grundlógarnevndin skal gera, hann skal velja helvtina av nevndini, hann skal velja formannin, og hann skal seta skrivaran !!! Tað manglar bara, at landsstýrismaðurin eisini sjálvur skrivar hesi góðu nevnd kladduna til fullveldisgrundlógina at rættlesa og reinskriva.

Endaliga vísti Javnaðarflokkurin eisini á, at **manningin av grundlógarnevndini** átti at verið øðrvísi, enn lógaruppskotið sigur. At allir flokkar á løgtingið og landsstýrið eru umboðað, er rætt og rímiligt. Men tað er ikki neyðugt, at næstan helvtin av nevndini er nakrir løgfrøðingar o.a. serfrøðingar. Teirra fakliga serfrøði kann veitast nevndini sum ráðgeving, tá tørvur er á tí. Grundlógararbeiði er annað og meir enn jura o.o. vísindalig ekspertisa. Tað snýr seg m.a. um at koma fram til og áseta **tey grundleggjandi, stýrandi virðini í samfelagnum.** Og fremst av øllum snýr tað seg um at koma fram til og áseta, hvussu øll fyriskipan og øll fyristøða landsins skal vera: **Út frá fólkinum og fyri fólkið.** Tí er størri tørvur á bestu og breiðastu umboðan fólksins í grundlógarnevndini, so sigast kann, at hon verður úr fólkinum og fyri fólkið.

Eftir uppskoti Javnaðarfloksins skuldi grundlógarnevndin, umframt politisku umboðanina, tí eisini havt eina stóra fólksliga umboðan, valda av løgtinginum. Tað kundi t.d. verið umboð fyri: Løntakarar

og arbeiðsgevarar, útróðrarmenn, fiskimenn og reiðarar, kommunufelag og býarfelag, meginfelag teirra brekaðu, eldraráðið, ungdómsráðið, umboð barnanna, umboð fyri mentanarheimin, listafólkasambandið, skúlaverkið, rættarskipanina, kirkju- og trúarlívið, vísinda- og granskingarheimin, ítróttarlívið o.s.fr. Tað er eitt verk fyri hesi og ikki fyri advokatar at útgreina, hvat vit vilja leggja sum samfelagsins grundleggjandi virði. Hesi 25-30 fólkini tilsamans, sum eftir hesum uppskoti Javnaðarfloksins høvdu komið at mannað grundlógarnevndina, høvdu kunnað gjørt tað arbeiðið, sum neyðugt var.

Hvørki á øðrum ella triðja fundi var nøkur verulig viðgerð av uppskoti Javnaðarfloksins til broytingar í arbeiðssetninginum hjá grundlógarnevndini ella av atfinningum okkara at lógaruppskotinum.

Tá Javnaðarflokkurin á triðja fundinum til fánýtis royndi at fáa eitt útspæl ella eina avgerð frá samgongumeirilutanum, var svarið, at hetta máttu teir fundast við landsstýrismannin um, og annars fáa hann í nevndina at svara spurningum.

Á fjórða fundinum møtti so landsstýrismaðurin, og tað varð hann – ikki tey umboðini sum samgongan hevur valt í rættarnevndina – sum fór í eitt orðaskifti við umboð Javnaðarfloksins. Burtursæð frá uppskotinum um at taka arbeiðið við eini føroyskari rættarskipan úr grundlógarnevndini og seta serstaka nevnd til tess, vísti landsstýrismaðurin øllum hinum aftur, bæði ítøkiliga broytingaruppskotinum um at víðka arbeiðssetningin og tær ítøkiligu atfinningarnar at lógaruppskotinum. Tað »tilboðið« Javnaðarflokkurin fekk at taka støðu til, var, at fylgjandi orðing kundi setast inn sum nýtt § 1 stk. 2 í lógaruppskotið:

» Nevndin skal í áliti sínum eisini lýsa politisku og løgfrøðisligu munirnar millum øðrumegin at gera føroyska grundlóg og hinumegin at broytingar verða gjørdar í donsku grundlógini«.
Ein slík orðing er púra høpisleys. Og ikki vildi meirilutin ganga við til, at skoytt varð uppí orðingina, hvat hesar ynsktu broytingar skuldu miða eftir, nevnliga møguleikum fyri føroyskum sjálvstýri við broytingum í verandi ríkisgrundlóg. Skuldi verða nøkur semja, skuldi Javnaðarflokkurin taka við orðingini omanfyri. Tá hugsað verður um ynski Javnaðarfloksins og atfinningar okkara at uppskotinum annars, var sjálvsagt ógjørligt at taka til takkar við slíkum orðaklodda.

**Samgongumeirilutin** boðaði so frá, at hann vendir aftur til landsstýrisins upprunaliga uppskot og mælir til at samtykkja tað.

Út frá hesum kann niðurstøða **minnilutans** (Hans Pauli Strøm) tí ikki vera onnur enn, at mælt verður tinginum **til ikki at samtykkja uppskot landsstýrisins til setan av grundlógarnevnd.**

**Ein minniluti** (Alfred Olsen) tekur als ikki undir við uppskoti landsstýrisins um at seta eina grundlógarnevnd, soleiðis sum viðurskiftini eru. Tí fyrst tá og um ein meirluti av Føroya fólki við eini fólkaatvkøðu hevur samtykt, at Føroyar skulu loysa frá Danmark, er stundin komin til at taka tað avleiðing, at sett verður ein nevnd at gera uppskot til eina grundlóg fyri Føroyar.

Málið hjá landsstýrismeirilutanum er, at Føroyar skulu gerast eitt land við fullveldi, og hetta vil samgongan fremja skjótast gjørligt eftir eini skipaðari ætlan.

Minnilutin hevur fingið eina greiða kenslu av, at tá ið tað verður so sterkt undirstrikað, at tað skal verða eftir eini **skipaðari ætlan**, skal hetta geva borgarunum eina kenslu av, at tá ið allir teir, eftir landsstýrismansins tykki, fremstu serfrøðingarnir í landinum, verða settir í hesar nevndirnar, so kann fólkið bara halda uppat at hugsa meir um tað, tí nú er alt í góðum hondum.

Tá so harafturat verður sagt, at bæði uppskotið til millumlandasáttmálan millum Føroyar og Danmark og uppskotið til grundlóg skal leggjast fyri løgtingið og eisini til fólkaatkvøðu, so er heilaga grøvin væl vard, og so er bara at siga ja til sína tíð.
Landsstýrismaðurin sigur eisini í viðmerkingunum um fyrireikingarnar til ríkisrættarligu broytingarnar, at hesar verða skipaðar sum ein verkætlan, har settar verða fýri nevndir, sum skulu kanna og lýsa ymisk viðurskifti.

Grundlógarnevndin verður eitt slag av yvirnevnd, tí hon kann samskipa arbeiði sítt við hinar nevndirnar í verkætlanini, og hon fær fult innlit í alt arbeiðið við sjálvstýrismálum í landsstýrinum.

Grundlógarnevndin skal eisini fáa samábyrgd, tí ið málsøki eftir loysingina verða latin til Danmarkar ella onnur lond at umsita.

Í viðmerkingunum verður sagt, at við hesi skipan verður tryggjað øllum flokkum á tingi fult innlit og ávirkan í fyrireikingararbeiðið til ríkisættarligu broytingarnar. Aftur her kemur til sjóndar ein barnslig váttan um eina falska trygd, tí í lógaruppskotinum stendur ikki eitt orð um, at lansstýrið hevur skyldu til at lata allar upplýsingar sum eru.

Minnilutin hevur ta grundleggjandi fatan, at Føroyar, sum tann fámenta tjóðin hon er, hevur bestar møguleikar fyri at menna seg á øllum økjum undir eini skipan sum henni, vit tey seinastu hálvthundrað árini hava útviklað.

Heinastýrisskipanin hevur víst seg at vera ein rúmligur karmur um menningina av tí føroysku tjóðini.

Hon hevur gjørt tað møguligt fyri okkum føroyingar at røkka fram til eitt slíkt stig á sjálvbjargnisleið, at vit í roynd og veru hava størri ræði og avgerðarmyndugleika yvir okkar egnu viðurskiftum enn naka annað land í Vesturevropa hevur í dag.

Sambandsflokkurin ynskir, sum einasti flokkur á tingi í dag, at Føroyar vera verandi í Ríkisfelagskapi við Danmark, og heldur, at heimastýrislógin, møguliga í endurskoðanum líki, og við henni tryggja vit fólkunum stabil og mannsømilig livikor undir skiftandi búskaparligum viðurskiftum.

Og tað má vera tað, sum til ein hvørja tíð hevur størsta týdning fyri fólkið í landinum.

Stórheitsdreymarnir, minnisvirðiskenslan, sjálvhevjanin og ábyrgdarloysið hjá teimum, sum ganga á odda fyri í óðum verkum at leiða føroyingar út í eitt fullveldislimbus, má ikki sleppa at forða fyri eini tryggari samfelagsmenning, har føroyingar altíð vita, hvar teir flóta.

Føroyska samfelagið í dag hvílir á føstum og royndum grundvølli og ikki á akademiskum teoretiskum eksperimentum.

Stýrisskipanarlógin var ikki nakað fullfíggjað verk, men treingir uttan iva til at verða endurskoðað og broytt.

Skotið verður eisini upp, at nevndin skal gera uppskot til eina føroyska rættarskipan. Tað kunnu bert vera glaðir amatørar, sum seta slíkt uppskot fram, tá hugsað verður um, hvussu illa vit, sum er, eru førir fyri at viðlíkahalda galdandi lógir. So er tað rættiligt fáfongd at hugsa sær, at vit skulu yvirtaka og varðveita dagførda rættargangslóg og allar aðrar lógir, sum skulu vissa okkum rættartrygdina, tá ið vit sigla okkara egna sjógv.

Fyri ikki at tala um útvegan av dómarum við førleika og integriteti til teir tríggjar dómstólarnar.

Í tjúgu ár hevur verið leitað eftir einum evni til at seta sum løgtingsins umboðsmann.
**Minnilutin** (Alfred Olsen) tekur ikki undir við uppskotinum, men fer seinni at seta fram uppskot til samtyktar, har heitt verður á landsstýrið um at virka fyri, at føroyingar vera umboðaðir í tí nevndini, sum danir seta í samband við komandi broyting í grundlógini.

2. viðgerð 29. januar 1999. Broytingaruppskot frá meirilutanum í rættarnevndini til § 2 samtykt 19-7-5. Uppskotið soleiðis broytt samtykt 19-0-12. At málið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Á tingfundi 5. februar løgdu tingmenninir Jóannes Eidesgaard, Edmund Joensen, Hans Pauli Strøm og Alfred Olsen fram soljóðandi ‘

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

§ 2 stk. 1, verður soljóðandi:
» Í grundlógarnevndini sita tvey umboð fyri hvønn flokk á tingi, sum hevur fýra tingmenn ella fleiri eitt umboð fyri hvønn flokk á tingi, sum hevur tríggjar tingmenn ella færri ein landsstýrismaður og fimm persónar við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum.«

**Viðmerking:**
Tá tað er líkt til, at ein meiriluti fer at samtykkja uppskotið til løgtingslóg um grundlógarnevnd, so vilja uppskotsstillararnir mæla til, at teir stóru flokkarnir á tingi fáa hvør sínar tveir limir í nevndina, meðan teir smáu fáa hvør sín.

Hetta vil styrkja um leiklutin hjá andstøðuni í grundlógarnevndini, umframt at parlamentariska umboðanin sum heild styrknar.

*3. viðgerð 5. februar 1999. Broytingaruppskot frá tingmonnunum Jóannes Eidesgaard, Edmund Joensen, Hans Paula Strøm og Alfred Olsen til § 2 samtykt 14-1-12. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð og soleiðis broytt við 3. viðgerð, endaliga samtykt 15-0-12. Málið avgreitt.*

*Ll. nr. 10/1999 frá 11/2-1999*

*J.nr. 101-3/98*

# III. Lógbroytingin, viðgerðin og atkvøðugreiðslan

## LØGTINGSLÓG NR. 78 FRÁ 8. MAI 2001 UM BROYTING Í LØGTINGSLÓG UM GRUNDLÓGARNEVND

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1 Í løgtingslóg nr. 10 frá 11. februar 1999 um grundlógarnevnd verður § 1, stk 3, orðað soleiðis: ’ »Stk. 3. Nevndin skal lata landsstýrinum fyribils álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. oktober 2001, og endaligt álit 31. desember 2001.«.

§ 2 Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 8. mai 2001

**Anfinn Kallsberg (sign.)**
løgmaður

# 87 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grundlógarnevnd

A. Upprunauppskot
B. 1. viðgerð
C. Orðaskifti við 1. viðgerð
D. Nevndarskjøl
E. Álit
F. 2. viðgerð
G. Orðaskifti við 2. viðgerð
H. 3. viðgerð

*Ár 2001, 3. mars, legði Høgni Hoydal, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi*

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grundlógarnevnd

**§ 1** Í løgtingslóg nr. 10 frá 11. februar 1999 um grundlógarnevnd verður § 1, stk 3, orðað soleiðis: “Stk. 3. Nevndin skal lata landsstýrinum álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. oktober 2001.«.

**§ 2** Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar**
Sambært løgtingslóg um grundlógarnevnd skuldi grundlógarnevndin lata landsstýrinum uppskot til føroyska grundlóg í seinasta lagi 1. juni 2000. Staðfestast má, at hesin setningur ikki er rokkin.

Í frágreiðing frá formanninum í grundlógarnevndini, sum er hjáløgd sum skjal , er greitt frá arbeiðinum hjá nevndini.

Víst verður til hesa frágreiðing málinum viðvíkjandi.
Avleiðingar av uppskotinum

Arbeiðið hjá grundlógarnevndini verður fíggjað av játtanini til sjálvstýrismál. Játtanin er á § 10 á Løgtingsins fíggjarlóg.

Fíggjarligu avleiðingarnar av at leingja freistina fyri, nær uppskot til føroyska grundlóg skal vera latin landsstýrinumn, er, at grundlógarnevndin í hesum fíggarári fær tillutaðar upp til kr. 1.500.000 av játtanini til sjálvstýrismál. Broytingin fær sostatt ikki avleiðingar fyri útreiðslukarmin á § 10.

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri kommunurnar, vinnuna ella umhvørvið.

Uppkotið hevur heldur ikki sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, og eingir altjóða sátmálar eru á økinum.

| | Fyri landið/ lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

Serligar viðmerkingar
Formaðurin í grundlógarnevnini hevur boðað frá, at um umstøðurnar eru til vildar, ber til at hava eitt uppskot til grundlóg klárt á ólavsøku 2001.
Ein týdningarmikil táttur í arbeiðnum hjá grundlógarnevndini er at skipa fyri almennum hoyringum um uppskotið.
Fyri at hetta kann verða gjørt, og fyri at leggja upp fyri summarfrítíðini og tí arbeiði, ið ávísir nevndarlimir koma at gera í sambandi við fólkaatkvøðuna tann 26. mai, verður skotið upp, at freistin fyri, nær álitið og uppskotið til grundlóg verður latið landsstýrinum, verður sett til 1. oktober 2001.

Hjálagt:
Onnur ávegis formansfrágreiðing um grundlógararbeiðið.
*1. viðgerð 7. mars 2001. Málið beint í rættarnevndina sum 19. apríl 2001 legði fram soljóðandi*
Á l i t
Landsstýrið hevur lagt uppskotið fram tann 3. mars 2001, og eftir 1. viðgerð tann 7. mars 2001 er tað beint rættarnevndini.
Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 15. og 22. mars 2001 og 5. og 19. apríl 2001 og hevur undir viðgerðini sett og fingið svaraðar spurningar, bæði skrivliga og á fundi, frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, og skrivaranum í grundlógarnevndini.
Í uppskotinum verður skotið upp at leingja freistina hjá grundlógarnevndini at lata úr hondum uppskot til eina føroyska grundlóg. Nevndin er samd við landsstýrinum, at neyðugt er at leingja freistina. Tó hevur spurningurin verið viðgjørdur, hvat tað er, sum grundlógarnevndin skal lata úr hondum til ásettu tíðarfreistina.
Mett verður, at skotbráið fram til 1. oktober hjá Grundlógarnevndini at verða liðug við bæði uppskot til eina føroyska grundlóg og við allar neyðugar hoyringar í hesum sambandi er ov stutt.

Mælt verður tí til, at freistin at lata landsstýrinum uppskot til føroyska grundlóg – eina sonevnda grønbók – eigur at verða sett til 1. oktober 2001, meðan allar neyðugar hoyringar í sambandi við uppskotið til føroyska grundlóg og møguligar broytingar eiga at vera lidnar 31. desember 2001.
Ein samd nevnd mælir sostatt til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1 verður »álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. oktober 2001« broytt til »fyribils álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. oktober 2001, og endaligt álit 31. desember 2001«
Alfred Olsen viðmerkir tó harumframt, at orsøkin til at hann tekur undir við uppskotinum, er at talan bert er um at broyta eina dagfesting í eini lóg sum løgtingið longu hevur samtykt. Tá upprunalógin varð samtykt, tók Sambandsflokkurin ikki undir við hesum og hendan støða er fremvegis óbroytt.

*2. viðgerð 24. apríl 2001. Broytingaruppskot frá samdari rættarnevnd til § 1 samtykt 26-0-4. Uppskotið soleiðis broytt samtykt 26-0-4. Uppskotið fer soleiðis samtykt til 3. viðgerð.*

*3. viðgerð 26. apríl 2001. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 29-0-0. Málið avgreitt.*

*J.nr. 579-0005/2000*
*Ll.nr. 78 frá 08.05.2001*

ATKVØÐULISTI 24.04.2001
10.37.06

Mál nr: 87.00/2000
Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grundlógarnevnd

Viðgerð nr: 2
Broytingaruppskot frá samdari nevnd

| Tal | Navn | Tast.nr | J | x | N | - | Bu |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | Fólkaflokkurin | | | | | | |
| 1 | Rúna Sivertsen ............... | 15 | Ja | | | | |
| 2 | Jógvan við Keldu ............. | 17 | Ja | | | | |
| 3 | Óli Breckmann ................ | 13 | Ja | | | | |
| 4 | Jógvan á Lakjuni ............. | 12 | Ja | | | | |
| 5 | Jóanis Nielsen ............... | 11 | Ja | | | | |
| 6 | Eyðun Viderø ................. | 10 | Ja | | | | |
| 7 | Jákup Suni Joensen ........... | 20 | Ja | | | | |
| 8 | Finnbogi Arge ................ | 14 | Ja | | | | |
| 6 | Sambandflokkurin | | | | | | |
| 1 | Flemming Mikkelsen ........... | 25 | | | Nei | | |
| 2 | Marjus Dam ................... | 31 | | | Nei | | |
| 3 | Alfred Olsen ................. | 29 | Ja | | | | |
| 4 | Heðin Mortensen .............. | 30 | | | Nei | | |
| 5 | Lisbeth L. Petersen .......... | 28 | Ja | | | | |
| 6 | Edmund Joensen ............... | 27 | | | Nei | | |
| 7 | JAVNAÐARFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Katrin Dahl Jakobsen ......... | 23 | Ja | | | | |
| 2 | Jóannes Eidesgaard ........... | 24 | Ja | | | | |
| 3 | Henrik Old ................... | 22 | Ja | | | | |
| 4 | Dan R. Petersen .............. | 21 | Ja | | | | |
| 5 | Vilhelm Johannesen ........... | 16 | | | | | |
| 6 | Kristian Magnussen ........... | 18 | Ja | | | | |
| 7 | Hans Pauli Strøm ............. | 19 | Ja | | | | |
| 2 | SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Kári P. Højgaard ............. | 2 | Ja | | | | |
| 2 | Helena Dam á Neystabø ........ | 3 | | | | | |
| 8 | TJÓÐVELDISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Signar á Brúnni .............. | 32 | Ja | | | | |
| 2 | Finnbogi Ísakson ............. | 1 | Ja | | | | |
| 3 | Jógvan Durhuus ............... | 4 | Ja | | | | |
| 4 | Heini O. Heinesen ............ | 5 | Ja | | | | |
| 5 | Hergeir Nielsen .............. | 8 | Ja | | | | |
| 6 | Páll á Reynatúgvu ............ | 9 | Ja | | | | |
| 7 | Annita á Fríðriksmørk ........ | 7 | Ja | | | | |
| 8 | Finnur Helmsdal .............. | 6 | Ja | | | | |
| 1 | MIÐFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Jenis av Rana ................ | 26 | Ja | | | | |
| 32 | Samanlagt .................... | | 26 | 0 | 4 | 0 | 2 |

ATKVØÐULISTI 24.04.2001
10.37.53

Mál nr: 87.00/2000
Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um grundlógarnevnd

Viðgerð nr: 2
Soleiðis broytt

| Tal | Navn | Tast.nr | J | x | N | - | Bu |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | Fólkaflokkurin | | | | | | |
| 1 | Rúna Sivertsen ................ | 15 | Ja | | | | |
| 2 | Jógvan við Keldu ............. | 17 | Ja | | | | |
| 3 | Óli Breckmann ................ | 13 | Ja | | | | |
| 4 | Jógvan á Lakjuni ............. | 12 | Ja | | | | |
| 5 | Jóanis Nielsen .............. | 11 | Ja | | | | |
| 6 | Eyðun Viderø ................. | 10 | Ja | | | | |
| 7 | Jákup Suni Joensen ........... | 20 | Ja | | | | |
| 8 | Finnbogi Arge ................ | 14 | Ja | | | | |
| 6 | Sambandflokkurin | | | | | | |
| 1 | Flemming Mikkelsen ........... | 25 | | | Nei | | |
| 2 | Marjus Dam ................... | 31 | | | Nei | | |
| 3 | Alfred Olsen ................. | 29 | Ja | | | | |
| 4 | Heðin Mortensen .............. | 30 | | | Nei | | |
| 5 | Lisbeth L. Petersen .......... | 28 | Ja | | | | |
| 6 | Edmund Joensen ............... | 27 | | | Nei | | |
| 7 | JAVNAÐARFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Katrin Dahl Jakobsen ......... | 23 | Ja | | | | |
| 2 | Jóannes Eidesgaard ........... | 24 | Ja | | | | |
| 3 | Henrik Old ................... | 22 | Ja | | | | |
| 4 | Dan R. Petersen .............. | 21 | Ja | | | | |
| 5 | Vilhelm Johannesen ........... | 16 | | | | | |
| 6 | Kristian Magnussen ........... | 18 | Ja | | | | |
| 7 | Hans Pauli Strøm ............. | 19 | Ja | | | | |
| 2 | SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Kári P. Højgaard ............. | 2 | Ja | | | | |
| 2 | Helena Dam á Neystabø ........ | 3 | | | | | |
| 8 | TJÓÐVELDISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Signar á Brúnni .............. | 32 | Ja | | | | |
| 2 | Finnbogi Ísakson ............. | 1 | Ja | | | | |
| 3 | Jógvan Durhuus ............... | 4 | Ja | | | | |
| 4 | Heini O. Heinesen ............ | 5 | Ja | | | | |
| 5 | Hergeir Nielsen .............. | 8 | Ja | | | | |
| 6 | Páll á Reynatúgvu ............ | 9 | Ja | | | | |
| 7 | Annita á Fríðriksmørk ........ | 7 | Ja | | | | |
| 8 | Finnur Helmsdal .............. | 6 | Ja | | | | |
| 1 | MIÐFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Jenis av Rana ................ | 26 | Ja | | | | |
| 32 | Samanlagt .................... | | 26 | 0 | 4 | 0 | 2 |

ATKVØÐULISTI 26.04.2001
10.09.11

Mál nr: 87.00/2000
Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um grundlógarnevnd

Viðgerð nr: 3
Sum samtykt við 2. viðgerð

| Tal | Navn | Tast.nr | J | x | N | - | Bu |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | Fólkaflokkurin | | | | | | |
| 1 | Rúna Sivertsen ................ | 15 | Ja | | | | |
| 2 | Jógvan við Keldu .............. | 17 | Ja | | | | |
| 3 | Óli Breckmann ................. | 13 | Ja | | | | |
| 4 | Jógvan á Lakjuni .............. | 12 | Ja | | | | |
| 5 | Jóanis Nielsen ................ | 11 | Ja | | | | |
| 6 | Eyðun Viderø .................. | 10 | | | | | |
| 7 | Jákup Suni Joensen ............ | 20 | Ja | | | | |
| 8 | Finnbogi Arge ................. | 14 | Ja | | | | |
| 6 | Sambandflokkurin | | | | | | |
| 1 | Flemming Mikkelsen ............ | 25 | Ja | | | | |
| 2 | Marjus Dam .................... | 31 | Ja | | | | |
| 3 | Alfred Olsen .................. | 29 | Ja | | | | |
| 4 | Heðin Mortensen ............... | 30 | Ja | | | | |
| 5 | Lisbeth L. Petersen ........... | 28 | Ja | | | | |
| 6 | Edmund Joensen ................ | 27 | Ja | | | | |
| 7 | JAVNAÐARFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Katrin Dahl Jakobsen .......... | 23 | | | | | |
| 2 | Jóannes Eidesgaard ............ | 24 | | | | | |
| 3 | Henrik Old .................... | 22 | Ja | | | | |
| 4 | Dan R. Petersen ............... | 21 | Ja | | | | |
| 5 | Tórleif Sigurdson ............. | 16 | Ja | | | | |
| 6 | Kristian Magnussen ............ | 18 | Ja | | | | |
| 7 | Hans Pauli Strøm .............. | 19 | Ja | | | | |
| 2 | SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Kári P. Højgaard .............. | 2 | Ja | | | | |
| 2 | Helena Dam á Neystabø ......... | 3 | Ja | | | | |
| 8 | TJÓÐVELDISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Signar á Brúnni ............... | 32 | Ja | | | | |
| 2 | Finnbogi Ísakson .............. | 1 | Ja | | | | |
| 3 | Jógvan Durhuus ................ | 4 | Ja | | | | |
| 4 | Heini O. Heinesen ............. | 5 | Ja | | | | |
| 5 | Hergeir Nielsen ............... | 8 | Ja | | | | |
| 6 | Páll á Reynatúgvu ............. | 9 | Ja | | | | |
| 7 | Annita á Fríðriksmørk ......... | 7 | Ja | | | | |
| 8 | Finnur Helmsdal ............... | 6 | Ja | | | | |
| 1 | MIÐFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Jenis av Rana ................. | 26 | Ja | | | | |
| 32 | Samanlagt ..................... | | 29 | 0 | 0 | 0 | 3 |

# IV. Endaligi arbeiðssetningurin

## Endaligur arbeiðssetningur til grundlógarnevnd

### Sett við heimild í løgtingslóg nr. 10 frá 11. februar, 1999

Sambært løgtingslóg um grundlógarnevnd, §1, stk. 2, verður landsstýrismanninum heimilað at útgreina arbeiðssetning nevndarinnar. Hetta verður ikki tulkað sum ein heimild til at binda nevndina í sínum arbeiði, men at greina út, hvat nevndin í minsta lagi eigur at viðgera, og at áseta starvsskipan hjá nevndini.

Uppskot til útgreinaðan arbeiðssetning hevur verið lagt fyri nevndina, sum hevur gjørt sínar viðmerkingar. Landsstýrismaðurin hevur tikið tær broytingar við, sum nevndin mælir til. Hervið verður endaligi arbeiðssetningurin latin nevndini.

### I. Formlig viðurskifti

Nevndin er sett saman av tveimum ymiskum bólkum: Øðrumegin politiskum umboðum av løgtingi og úr landsstýri, sum fólkaræðisliga umboða lóggevandi og útinnandi valdið. Og hinumegin serfrøðingum, sum umboða seg sjálvar og viðkomandi faklig atlit og krøv í grundlógarsmíðinum.

### Starvsskipan nevndarinnar

Neyðugt er sostatt at finna eina starvsskipan, sum kann tryggja eitt gott samspæl og mótspæl millum tey fakligu og politisku/fólkaræðisligu atlitini.

Allir nevndarlimir eru javnsettir at seta fram uppskot og at taka støðu. Tó hava serfrøðingarnir hartil eina serliga fakliga uppgávu í nevndini. Serfrøðingarnir virka sum ein fakligur arbeiðsbólkur í nevndini, meðan politisku umboðini í høvuðsheitum virka sum eitt umboðsráð, sum viðger og tekur støðu. Starvsskipanin eigur tí at vera hendan:

- Politisku umboðini viðgera og meta um ymsu spurningarnar og kunnu biðja um at fáa serlig mál á dagsskrá til viðgerðar
- Serfrøðingarnir saman við skrivara savna alt neyðugt tilfar til nevndina
- Serfrøðingarnir gera útkast til teir ymsu tættirnar, sum verða løgd fyri samlaðu nevndina til viðgerð og støðutakan – t.e. at serfrøðingarnir lata viðgerð og avgerðir nevndarinnar í ein formligan búna
- Serfrøðingarnir kunnu hittast til fakligar arbeiðsfundir, ið ikki eru at rokna sum nevndarfundir. Skrivarin ger tó eisini frásagnir frá hesum fundum, um hvat í høvuðsheitum er viðgjørt
- Serfrøðingarnir hava skyldu at umrøða tey íkast teir gera – og mál av størri týdningi annars - við varalimir sínar, soleiðis at spurningarnir verða so væl fakliga viðgjørdir sum til ber, og soleiðis at varalimirnir eru væl fyri at koma uppí arbeiðið, um føstu limunum berst frá
- Serfrøðingarnir tryggja, at grundgevingar, orðaskifti og avgerðir í neyðugan mun verður endurgivið í áliti nevndarinnar
- Skrivarin hevur dagligu skrivstovuuppgávurnar um hendi
- Nevndin kann útvega sær serliga serkøna hjálp í Føroyum og uttanlands, um tað verður mett neyðugt

**Uppgávur og skyldur hjá formanninum:**
- At tryggja at setningurin verður viðgjørdur
- At leggja fundarvirksemi nevndarinnar til rættis
- At tryggja øllum nevndarlimum javnbjóðis ávirkan
- At tryggja at samsvar er millum tíðarfreist, setning og uppgávur nevndarinnar
- At tryggja at úrslit kemur, og helst í semju
- At hava umsjón við uppgávum skrivarans
- At gera fíggjarætlan og hava ábyrgd av rakstrinum hjá nevndini
- At leggja arbeiðið í nevndini til rættis sambært fundarskipan

## Fundarskipan
Mett verður, at tað er skilagott at fylgja á leið somu grundreglunum fyri fundarskipan, sum sambært tingskipan Føroya løgtings er galdandi fyri løgtingsnevndir:
- Nevndarformaðurin stýrir nevndarfundunum
- Nevndarformaðurin velur millum føstu serfrøðingalimirnar ein næstformann at taka við í hansara stað, um hann hevur forfall
- Nevndarformaðurin boðar nevndarlimunum til fundar við í minsta lagi 36 tíma freist samstundis, sum hann sigur frá dagsskránni fyri fundin
- Formaður og skrivari tryggja, at bæði nevndarlimir og varalimir fáa alt neyðugt tilfar til nevndararbeiðið í rættari tíð undan fundunum
- Allir varalimir hava altíð rætt at møta á nevndarfundi, tó hava teir bert talurætt, tá teir møta fyri fasta limin
- Nevndarlimir kunnu biðja um at fáa mál sett á dagsskrá
- Nevndin kann bert halda fund um meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru møttir
- Skrivarin førir gerðabók fyri fundirnar. Gerðabókin skal góðkennast á fyrstkomandi fundi. Berst skrivaranum frá at møta, førir nevndarformaðurin gerðabókina

## Kunningarskipan
Nevndini skal tryggjast bæði skipaðar arbeiðsumstøður og arbeiðsfrið, og harumframt hevur nevndin eina týdningarmikla kunningaruppgávu til almennningin (sum ásett í §3 í lógini). Til tess at fáa hesi atlit at sampakka, eigur kunningarskipan nevndarinnar at vera hendan:
- Formaðurin úttalar seg vegna nevndina um nevndararbeiðið. Onnur kunning um arbeiðið í nevndini fer fram í samráði við formannin
- Nevndin avtalar eina skipan fyri, hvussu almennu hoyringarnar skulu skipast, til tess at tryggja eina breiða fólksliga upplýsing, ávirkan og alment kjak um uppskotið til grundlóg
- Herundir avtalar nevndin, hvønn leiklut politisku umboðini skulu hava í almennu hoyringunum, ikki minst fyri at tryggja, at partapolitiskt kjak millum politisku umboðini ikki forðar almenninginum í veruliga at koma framat
- Nevndin skal eisini taka støðu til, um áhugafeløg og -bólkar skulu fáa partar av grundlógaruppskotinum til ummælis innan almennu hoyringarnar
- Alt skrivligt tilfar frá nevndini – frágreiðingar, upprit o.a. – kemur undir reglurnar um alment innlit

## Álit nevndarinnar
Nevndin skal lata úr hondum álit, sum lýsir arbeiði nevndarinnar og setir fram fullfíggjað uppskot til grundlóg fyri Føroyar. Álitið skal hava greiðar grundgevingar fyri endaliga uppskotinum til grundlóg. Harumframt skal álitið lýsa orðaskiftið í nevndini og møguligar tvístøður um týdningarmiklar spurningar, eins og gongdina í almennu hoyringunum.

## II. Uppskot til føroyska rættarskipan

## ( samb. §1, stk. 4)

Í sambandi við politisku viðgerðina av uppskotinum til løgtingslóg um grundlógarnevnd stóðst ávíst kjak um, hvørt nevndin eisini skuldi gera uppskot til føroyska rættarskipan. Hetta varð kortini samtykt, og í viðmerkingunum fra landsstýrinum til lógaruppskotið stendur, at nevndin kann seta ein serligan undirbólk ella -nevnd at arbeiða burturav við hesum. Somuleiðis stendur í viðmerkingunum, at tíðarfreistin í §1, stk. 3, ikki fevnir um uppskotið til føroyska rættarskipan.

### Rættarskipan sum heild

Greitt er, at grundlógarnevndin skal viðgera rættarskipanina sum heild – t.e. prinsippielt, við atliti til m.a.:

- Býtið millum lóggevandi, útinnandi og dømandi vald
- Samspælið millum lóggevandi, dømandi og útinnandi vald
- Rættarsiðvenju og herundir sambandið millum lóggávusiðvenju og fyrisitingarlig krøv (sí nærri útgreining í arbeiðssetningi)

### Rættarskipanarnevnd

Hinvegin er greitt, at grundlógarnevndin ikki fær stundir og orku - og er ikki rætta forumið - at gera eitt fullfíggjað tekniskt uppskot til rættarskipan – t.e. øll tey viðurskifti, sum í dag eru nevnd í rættargangslógini fyri Føroyar, umframt tað, sum er ásett í ríkislóg um dómstólastýrið o.s.fr.

Tí eigur grundlógarnevndin beinanvegin at seta eina rættarskipanarnevnd at arbeiða burturav við tí tekniska uppskotinum til føroyska rættarskipan. Henda nevndin skal vísa til grundlógarnevndina við tí endamáli, at neyvt samsvar fæst millum yvirskipaðu ásetingarnar um rættarskipan í uppskotinum til grundlóg, og tað stóra tekniska arbeiðið sum má gerast í rættarskipanarnevndini. Rættarskipanarnevndini skal meta um tíðarkarm og arbeiðsorku til at gera fullfíggjað uppskot til føroyska rættarskipan, og skal mæla til, hvat kann gerast í eini skiftistíð, til eitt uppskot er klárt at seta í verk. Grundlógarnevndin og rættarskipanarnevndin kunnu hava felags fundir, tá mett verður, at tørvur er á at samskipa arbeiðið.

Rættarskipanarnevndin verður mannað við 7 (møguliga 6) limum, ið verða valdir soleiðis:

- Grundlógarnevndin velur ein av sínum limum í rættarskipanarnevndina
- Heitt verður á Domstolsstyrelsen í Keypmannahavn um at tilnevna ein dómara við neyvum innliti í føroysk viðurskifti
- Advokatráð Føroya instillar tveir limir
- Løgdeild landsstýrisins innstillar ein lim
- Løgtingsskrivstovan innstillar ein lim
- Hesi 6 (5) velja sjálvi í felag 7. (6.) limin
- Nevndin skipar seg sjálv
- Rættarskipanarnevndin viðger arbeiðssetning sín saman við grundlógarnevndini og avtalar eina tíðarfreist

## III. Innihaldsligir spurningar

Í sambandi við fyrireikingarnar til at seta grundlógarnevnd hava landsstýrismaðurin og løgdeildin hugt at núgaldandi føroysku stýrisskipanarlógini (1994), og at fleiri grundlógum (konstitutiónum) í øðrum londum, sum eru rættiliga ymiskar hvør frá aðrari.

## Norðurlond
Hugt hevur verið at grundlógunum í teimum londum, har Føroyar søguliga hava havt tilknýti til statsskipan, lóggávu, rættarsiðvenju og fyrisiting. Hesar eru: Danska grundlógin (1849, broytt 1853, 1866, 1915, 1920 og 1953), norska grundlógin (1814, broytt ofta, m.a. 1869, 1905, 1908, 1913, 1920, 1946, 1954, 1972, 1990 og 1992), svenska grundlógin (1975), og íslendska grundlógin (1944, broytt 1984 og 1991).

## Onnur lond
Hartil hevur verið hugt at týsku grundlógini (1949, broytt 1995), fronsku grundlógini (1958, broytt 1962) og at amerikonsku grundlógini (1787). Her er vert at nevna, at tann amerikanska grundlógin er uppbýtt í ta upprunaligu konstitutiónina frá 1787, og 26 íkast ("Amendments") sum eru samtykt frá 1790 (tey fyrstu 10) og fram til 1971. Íkastini vera undir einum nevnd »Bill Of Rights«, og tey hava í fleiri førum broytt orðingarnar í sjálvari tí upprunaligu konstitutiónini.

## Keldur
Høvuðskeldan til at hyggja at grundlógum í øðrum londum hevur verið universitetið í Wurzburg í Týsklandi, sum gjøgnum internetið bjóðar innlit í nærum allar konstitutiónir í heiminum. Heimasíðan og sambandið til hetta savn er: http://www.uni-wuerzburg.de/law/info.html

Nevndin, sum gjørdi uppskot til nýggja stýrisskipan í 1993, hevur í sínum áliti í kap. 9 uppafturprentað grundlógir og stýrisskipanir í øðrum londum, m.a. fleiri av teimum, sum eru nevndar omanfyri (Álit um Stýrisskipan Føroya, Tórshavn 1993).

## Støðið undir arbeiðinum
Grundlógarnevndin eigur at viðgera konstitutiónir í bæði norðurlondum og øðrum londum við atliti til prinsippiellar spurningar, uppbygging, innihaldslig samljóð og frávik og serlig fyribrigdi. Nevndin eigur sjálvsagt ikki at yvirtaka partar av øðrum grundlógum, men at viðgera og virðismeta tættirnar í teimum í mun til føroysk viðurskifti, tørv og til altjóða spurningar.

Grundlógararbeiðið nemur við grundleggjandi mentanarlig virði í føroyska samfelagnum. Tí eigur nevndin at viðgera allar spurningar við neyvum atliti til føroyska rættarsøgu, siðvenjur og mentan.

Niðanfyri standandi útgreinaði arbeiðssetningur er bygdur á íblástur frá omanfyrinevnda tilfari, og skal skiljast sum tættir og viðurskifti, sum grundlógarnevndin í minsta lagi eigur at viðgera og taka støðu til.

## IV. Tættir, sum grundlógarnevndin skal viðgera og taka støðu til

## 1. Uppbygging, formur og stílur grundlógarinnar
Tað er rættiliga eyðsýnt í omanfyri nevndu grundlógunum, at jú yngri tær eru, fleiri tættir eru í teimum og betri eru tær skipaðar sum ein heild. Bæði svenska og týska grundlógin hava til dømis tey grundleggjandi, fólkaræðisligu frælsisrættindini standandi fremst, sum fyrsta kapittulin í konstitutiónini, meðan tær eldru konstitutiónirnar ikki geva hesum eins stóra rúmd, eins og tað er týðiligt, at heft er uppí seinni.

Bygnaðurin, raðfestingin og orðalagið eru í sjálvum sær sera týdningarmikil tekin um, hvat slag av samfelagi og stjórnarskipan grundlógin ásetir, og hetta kann fáa stóran týdning fyri seinni tulkingar

av ásetingunum í grundlógini. Í hesum sambandi kann nevndin til dømis samanbera amerikonsku grundlógina við sínum blómandi og politiskt “normativa” stíli við tær meira turrisligu grundlógirnar í gomlu monarkiunum sum Danmark og Noregi.

Nevndin eigur at viðgera og taka støðu til, hvussu raðfestingin av tættunum í grundlógini, bygnaðurin og orðalagið/stílurin skal vera. Avgerðin um hetta eigur at takast við atliti at m.ø. hesum spurningum:

- Hvussu stórur dentur skal leggjast á at staðfesta felags virði og rættindi í grundlógini?
- Hvussu sterk “normativ” signal skulu sendast í einum grundlógaruppskoti?
- Skal bygnaðurin og stílurin vera stuttur og nágreiniligur ella meira háfloygdur og blómandi?
- Hvørji viðurskifti metir nevndin hava størstan týdning – bæði fyri føroyingar innanhýsis og fyri leiklut Føroya sum partur av altjóða samfelagnum?

## 2. Inngangur/præambul

Nevndin eigur at viðgera og taka støðu til, um ein inngangur skal vera, ið staðfestir endamálsorðingar fyri føroysku samfelagsskipanina og leiklut Føroya í altjóða høpi. Metast má um, hvørt orðingar skulu gerast um, at fólk og myndugleikar skulu stremba eftir til dømis:

- Frælsi, fólkaræði, javnrætti, friði, samvinnu, rættartrygd, felags skyldum og ábyrgd
- At umsita landsins ríkidømi við ábyrgd til frama fyri eftirkomarar
- At virka við virðing fyri øðrum mentanum í heiminum og fyri at styrkja føroyska mentan

## 3. Stjórnarskipan og grundleggjandi valdsbýti

Viðgerast og staðfestast má, hvat slag av stjórnarskipan Føroyar skulu hava og hvørjar høvuðsásetingar eru um valdsbýtið millum løggevandi, útinnandi og dømandi vald.

Neyvaru ásetingarnar um løggevandi, útinnandi og dømandi vald (sí niðanfyri) eiga at byggja á royndirnar frá øðrum londum og á royndirnar av stýrisskipanini í Føroyum undir heimastýrislógini. Serligur dentur eigur at verða lagdur á at virðismeta og endurskoða royndirnar av broytingunum í stýrtisskipanarlógini, sum vórðu settar í gildi í 1994 og frameftir. Spurningurin um mótspælið og samspælið millum valdini eigur at verða viðgjørdur í mun til, at øll málsøki og dømandi valdið koma undir føroyskt ræði. Nevndin eigur m.a. at geva hesum atlitum gætur:

- Eftirlit millum valdini, hvør móti øðrum
- Fordømisskapan til siðvenjur millum valdini

Nevndin renir seg sjálvsagt í nakrar praktiskar trupulleikar. M.a. tá spurningurin um ríkisleiðara (monarki/lýðveldi) spurningurin um hægstarætt og um annað samstarv við Danmark ella onnur lond skal staðfestast. Landsstýrissamgongan hevur til dømis í samgonguskjalinum nevnt møguleikan fyri felags ríkisleiðara við Danmark - t.e. einum slag av “Commonwealth”. Hesir spurningar verða tiknir upp í komandi samráðingum við donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya.

Nevndin kann tí í fyrsta umfari viðgera hesar spurningar í samljóði við politisk ynski og atlit. Nevndin kann gera uppskot til ítøkiligar ásetingar, tá eitt samráðingarúrslit liggur fyri og er góðkent. Spurningin um møguligt felags kongshús eigur nevndin ikki at viðgera sum eitt val millum avmarkað monarki ella fólkaræði. Fólkaræðiliga støðið eigur at vera grundarlagið, meðan spurningurin um felags kongshús kann viðgerast sum ein praktiskur spurningur um ríkisleiðara við atliti at søguligum, mentarligum bondum millum Føroyar og Danmark.

## 4. Rættindi og skyldur borgaranna

Nevndin má viðgera grundleggjandi javnbjóðis rætt og javnbjóðis skyldur borgaranna. Bæði við atliti at altjóða mannarættindarsáttmálanum og at øðrum viðurskiftum, har nevndin vil bróta upp úr nýggjum. Millum annað:

- Treytirnar fyri statsborgaraskapi [Eisini her mugu atlit takast til møguligar avtalur við Danmark um felags rættindi hjá donskum og føroyskum ríkisborgarum]
- Ásetingar um grundleggjandi mannarættindini: Talu-, skrivi- og trúarfrælsi, politiskt frælsi, anti-forfylging o.s.fr.
- Ásetingar um sosial rættindi: Rætt til arbeiði, útbúgving, almannahjálp, læknahjálp, pensión/eftirløn
- Áseting um rætt at skipa seg í felag, kravgongu- og mótmælisrætt
- Ásetingar um verkfallsrætt, og avmarkingar til uppílegging hjá løgreglu
- Ásetingar um ognar-, brúksrætt og ognartøku
- Áseting um hægst loyvda mark fyri varhaldsfongsling, og fría rættvísa rættargongd
- Møguligar ásetingar um talufrælsið hjá fólki í almennum starvi. [Her kann skoytast uppí, at nærri reglur um tagnarskyldu hjá fólki í almennum starvi skulu ásetast við lóg, men hesar mugu ikki avmarka grundleggjandi rættindini]
- Møguligar ásetingar um skyldu at veita øðrum hjálp í neyðstøðum
- Møgulig áseting um skyldur til tilbúgving í neyð- og vanlukkustøðum
- Møguligar ásetingar um skyldu at verja náttúru og umhvørvi

## 5. Mál og mentan

Nevndin eigur at viðgera ásetingar um grundleggjandi mál og mentanarspurningar. Slíkar ásetingar eiga sjálvsagt at fevna um bæði almenna málið og mentanarpoltikkin í Føroyum og rættin hjá mentanarligum minnilutum at virka frítt. Eitt nú eigur nevndin at viðgera hesar spurningar:

- At føroyingar virða rættin hjá øllum fólkum at menna sítt egna mál og sína egnu mentan
- Møguligar ásetingar um fólkakirkju og viðurkenning av øðrum trúarsamfeløgum
- Ásetingar um, at almenna málið í Føroyum er føroyskt
- At allir almennir myndugleikar hava skyldu at menna føroyskt mál og mentanararv við virðing fyri teimum serligu eyðkennum, sum ymisk pláss og økir í landinum hava ment
- At allir føroyskir borgarar skulu hava undirvísing í føroyskum
- At undirvísing í minst einum norðurlendskum og minst einum av størru heimsmálunum eigur at bjóðast øllum
- At virkast skal fyri at menna føroyskt mál og mentan og at menna kunnleikan til og virðingina fyri øðrum mentanum
- Ásetingar um javnbjóðis rættindi hjá teknmálsbrúkarum í samskiftinum við almennar myndugleikar

## 6. Landsins náttúrutilfeingi

Nevndin eigur at viðgera spurningin um landsins felags náttúrutilfeingi, og hvussu tað skal umsitast. Alt orðaskiftið um handilskvotur bæði í Føroyum og Íslandi, spurningurin um ráevnisinntøkur, kongsjørð o.s.fr. er serliga áhugavert í hesum sambandi. Millum annað eigur nevndin at taka støðu til:

- Ásetingar um ognarrætt til tilfeingið á sjógvi, landi og í undirgrund
- Ásetingar um vinnuligan brúksrætt til tilfeingið
- Ásetingar um ikki-vinnuligan brúksrætt til felags tilfeingi, sum fugl, fisk, grind o.a.
- Ásetingar um, hvussu møguligar inntøkur frá vinnuligum brúksrætti til felags tilfeingi, skulu

umsitast til felags gagn
- Møguligar ásetingar um skyldu til burðardygga umsiting av tilfeinginum til frama fyri komandi ættarlið

## 7. Viðurskifti við umheimin7
Nevndin má viðgera og taka støðu til ásetingar um fólka- og altjóðarættarligu viðurskifti Føroya mótvegis øðrum statum og altjóða felagsskapum. Hetta kann m.a. umfata hesi viðurskifti:

- Ásetingar um støðu Føroya í hernaðarspurningum – herundir til kjarnorkuvápn
- Møguligar ásetingar um verju Føroya
- Ásetingar um framferðarháttin, um Føroyar skulu taka við rættindum og skyldum í altjóða felagsskapum, so sum ST, EFTA, Norðurlandaráðið, ES o.s.fr.
- Hvat kann t.d. gerast við eini stjórnarsamtykt og ávísum meiriluta á løgtingi og hvat skal leggjast til fólkaatkvøðu?
- Ásetingar um, hvussu Føroyar binda seg til altjóða traktatir og konventiónir, sum t.d. mannarættindarsáttmálan, umhvørvissáttmálar, norðurlendskar sáttmálar o.a.
- Ásetingar um leiklut hjá uttanlandsnevnd, tá samráðingar av fólka- og altjóðaraættarligum slagi fara fram
- Møguligar ásetingar um, at viðurskiftini við Danmark eru av “serligum slag” (má eisini gerast av í mun til komandi samráðingarúrslit um samstarvið frameftir millum Føroyar og Danmark)
- Ein annar spurningur, sum má avgerast er, um nakað skal standa í grundlógini um møguligt felags gjaldoyra millum Føroyar og Danmark. Her veldst eisini um nógv praktisk atlit – tildømis tilknýti Danmarkar og møguliga Føroya til Evruna. Og her má somuleiðis støða takast í samsvari við komandi samráðingarúrslit
- Møguligar ásetingar um tjóðflagg og skjaldramerki Føroya

## 8. Lóggevandi valdið
Yvirskipaðu ásetingarnar um lóggevandi valdið mugu greinast við støði í royndunum frá stýrisskipanarlógini og ásetingum í øðrum londum. Somuleiðis mugu atlit sjálvsagt takast til royndirnar av tingskipanini, sum júst er til endurskoðan. Millum annað má nevndin taka støðu til:

- Ásetingar um regluligt løgtingsval, og um hvussu nýval kann útskrivast
- Ásetingar um tal av tingmonnum og møguliga áseting av valdømum
- Formligar ásetingar um, hvussu valið skal fara fram og hvussu atkvøðurnar skulu teljast upp
- Áseting av fortreytunum fyri valrætti og valbæri (í Íslandi eru hægstarættardómarar ikki valbærir §34)
- Møguligar ásetingar um valrætt og valbæri hjá útisetum
- Ásetingar um skyldur og órin hjá einstaka løgtingsliminum, og hvussu órin kann verða tikið frá honum
- Ásetingar um hvussu løgtingið verður kallað saman, skrúðgongu, hvar og hvussu tingið skal skipa seg, nær tingið er viðtøkuført o.s.fr.
- Ásetingar um formansskap, fastar nevndir, val av nevndum, o.t.
- Ásetingar um, at allir tingfundir eru almennir
- Ásetingar um løgtingsgrannskoðan

## 9. Útinnandi valdið
Nevndin eigur at viðgera og gera ásetingar um útinnandi valdið við atliti at, at øll málsøki og viðurskifitini við altjóða samfelagið koma undir føroyskt ræði. Millum annað má verða ásett:

- Áseting um, hvussu landsstýrið (stjórn) skal skipast eftir eitt løgtingsval. Her eigur at verða viðgjørt um verandi skipan skal halda fram ella broytast á einhvønn annan hátt. T.d. viðvíkjandi, hvussu

samráðingarleiðari til at skipa stjórn verður heimilaður
- Áseting um, hvussu løgmaður skal veljast, og hvussu farast skal fram tá hann fer frá
- Ásetingar um treytirnar fyri misálitisváttan frá løgtinginum, mótvegis landsstýrinum, løgmanni ella einstøkum landsstýrismanni
- Áseting um ábyrgd landsstýrismanna og møgulig tilvísing til eina ráðharra-ábyrgdarlóg
- Áseting um, at løgmaður skal hava ein varaløgmann. Viðgerast skal, um løgtingið eisini skal velja varaløgmann og møguliga eisini ráðharrar
- Áseting um, at landsstýrið bert er ein "starvsstjórn" aftaná at løgtingsval er útskrivað.
- Formligar ásetingar um landsstýrisfundir og landsstýrisarbeiðið annars, t.d. hvat skal førast í gerðabók. Í hesum sambandi eigur nevndin at viðgera, um landsstýrið (stjórnin) skal taka ávísar avgerðir í felag. Hetta má metast neyvt í mun til ráðharraábyrgd, umsitingarliga ábyrgd og umsitingarligar avleiðingar annars.
- Ásetingar um staðfesting og lýsing av løgtingslógum
- Møguligar yvirskipaðar ásetingar um alment innlit í fyrisitingina, kærurætt og rættartrygd annars

## 10. Lóggávan

Nevndin eigur at viðgera ásetingar um sjálvt lóggávuarbeiðið. Miðast skal eftir at seta karmarnar um eina føroyska lóggávu-, fyrisitingar- og rættarsiðvenju, við at staðfesta leistin fyri, hvussu allar føroyskar lógir skulu gerast. Her er serliga vert at viðgera sambandið millum lóggávusiðvenju, fyrisitingarlig/umsitingarlig krøv, eftirlitskrøv og rættartrygd.

Til dømis kann nevndin gera av, at krav skal setast um, at allar lógir skulu hava eina endamálsorðing í sjálvari lógini. Tað setir sjálvsagt størri krøv til greiðar politiskar semjur um ætlanir við lógunum, og tað setir krøv til greiðar tulkingar hjá bæði útinnandi og dømandi valdi og leilklut teirra sum "fordømisskaparar". Hetta má metast í mun til ta meira "positivistisku" lóggávusiðvenjuna, vit hava verið partur av, sum ásetir allar smálutir og setir stór umsitingar- og eftirlitskrøv.

Lóggávukrøv eiga hartil at verða viðgjørd í mun til millum annað:
- Einfaldar og gjøgnumskygdar lógir
- Gjøgnumskygni í fyrisitingini
- Almenna tilvitsku um rættindi og skyldur

Aðrar ásetingar:
- Formlig áseting um skilnaðin millum eina lóg og eina kunngerð – t.e. millum lóggávu- og útinnandi vald
- Ásetingar um, hvussu altjóða- og fólkarættarligir sáttmálar, sum Føroyar hava bundið seg til, skulu staðfestast í føroyskari lóggávu.
- Møguligar ásetingar um, at ávís lóggáva skal ella kann sendast til fólkaatkvøðu

## 11. Dømandi valdið (rættarskipan)

Nevndin má viðgera og áseta yvirskipaðu krøvini til dømandi vald og rættarskipan. Praktisku trupulleikarnir eru nevndir frammanundan, og nevndin eigur at geva gætur, at til dømis hesin parturin av grundlógini kann setast í gildi seinni enn aðrir partar, ella í stigum. Her krevst sjálvsagt samskipan við rættarskipannarnevndina og við úrslitið av samráðingunum um ríkisrættarligu støðuna.

Nevndin má m.a. viðgera og taka støðu til:

· Hvussu nógv stig skulu vera í rættarskipanini
· Møguligan kærurætt, ið bert tekur avgerðir, um eitt mál kann ganga umaftur
· Ásetingar um krøv til integritet hjá dómarum
· Ásetingar um, at ákæruvald skal verða sundurskilt frá løgreglu
· Møguligar ásetingar um, at ovasti dómstólur av sínum eintingum kann taka eina lóg til viðgerðar við atliti at, um hon er í andsøgn til grundlógina. [Í týsku grundlógini (§93) eru ásetingar um "forfatningsdomstól", ið hevur hesa heimild].
· Møguligar ásetingar um, hvussu ein ráðharri skal kunna verða revsaður, um hann misnýtur vald sítt. – t.e. ein møguligur ríkisrættur
· Møguligar ásetingar um, at serdómstólar ikki kunnu verða stovnaðir

## 12. Fíggjarmál landsins

Nevndin eigur at viðgera ásetingar um fíggjarmál landsins. [Tey standa í løtuni í stýrisskipanarlógini §§ 41-45. Annars kann nevnast, at fíggjarmál eru sjálvstøðugur kapittul í svensku grundlógini, men ikki í teirri donsku, har tey eru umtalað í §§ 45-46].

Millum annað má nevndin taka støðu til:

· Møguligar ásetingar um tjóðbanka og gjaldoyra
· Ásetingar um, hvussu landsins inntøkur og gjaldføri skulu umsitast
· Ásetingar um skattingarheimild
· Ásetingar um fíggjarlóg og útgjaldingarheimild
· Ásetingar um skuldarbinding landsins
· Møguligar ásetingar um, hvussu møguligar almennar inntøkur av ráevnum í undirgrundini skulu nýtast og umsitast

## 13. Løgtingsins ella fólksins umboðsmaður

Nevndin eigur at viðgera afturvendandi orðaskiftið og ætlanirnar um løgtingsins umboðsmann. Ásetingar um ein slíkan stovn, kunnu setast í grundlógina, sum ein styrki undir fólkaræðinum. Endamálið er at grundlógarfesta ein óheftan stovn, sum burturav skal virka fyri rættartrygd borgaranna mótvegis fyrisitingini (útinnandi valdinum), og sum skal virka fyri greiðum fyrisitingarligum og umsitingarligum siðvenjum.

Skotið verður upp, at nevndin umhugsar heitið "fólksins umboðsmaður", sum helst er eitt neyvari heiti fyri hesa uppgávu. Ásetingar í grundlógini um henda stovn, eiga m.a. at fevna um:

· Hvussu umboðsmaðurin verður valdur (av løgtinginum) og krøv til integritet
· Ásetingar um, at umboðsmaðurin ikki kann fara frá, fyrr enn ein nýggjur er valdur, hvussu nýggjur skal veljast, um umboðsmaður fer frá ella doyr o.s.fr.
· Ásetingar um heimildir umboðsmansins mótvegis fyrisitingini. [T.d. heimild til innlit í alt tilfar]
· Tilvísing til serliga lóg um stovnin

## 14. Landsgrannskoðan

Nevndin eigur at viðgera og taka støðu til, um Landsgrannskoðan skal grundlógarfestast sum óheftur stovnur. [Hetta er til dømis ásett í svensku grundlógini (kap. 12, § 7) og í íslendsku grundlógini (§ 43)].

Fyri landsgrannskoðanina kann leisturin vera tann sami sum fyri fólksins umboðsmann - t.e. at integriteturin og heimildirnar hjá landsgrannskoðanini verða tryggjað í grundlógini:

- Hvussu landsgrannskoðari skal veljast (av løgtinginum) og krøv til integritet
- Hvørjar skyldur og heimildir hann hevur
- Hvussu landsgrannskoðari verður valdur av nýggjum
- Tilvísing til serliga lóg um stovnin

## 15. Kommunur (lokalt fólkaræði)

Grundlógarnevndin eigur at gera av, hvussu heimildir og ábyrgd hjá kommunum (ella líknandi lokalari, fólkaræðisligari umsiting) kunnu grundlógarfestast.

Í stýrisskipanarlógini eru kommunurnar stutt nevndar í § 56 og harundir skuldarbinding kommunanna. Nevndin eigur at gera av, um m.a. hesi viðurskifti skulu ásetast í grundlógini:

- Prinsipp um býtið millum stat og kommunur og heimildir hjá kommunum til at gera av lokal viðurskifti (hetta er t.d. ásett í svensku grundlógini (kap. 8, § 5).
- Fólkaræðisligar grundreglur fyri virksemi kommununnar – herundir eftirlit, alment innlit og almennir bý- og bygdaráðsfundir
- Skuldarbinding hjá kommunum

## 16. Ásetingar um gildiskomu og grundlógarbroytingar

Nevndin má gera ásetingar, sum leggja fast mannagongdina fyri grundlógarbroytingum og gildiskomuna fyri hesa fyrstu grundlógina.

Her renir nevndin seg eisini í praktiskar spurningar, tí hugsandi er, at summir partar av grundlógini koma í gildi í stigum í sambandi við samráðingarnar og avtalurnar við Danmark um ríkisrættarligu støðuna (t.d. er hugsandi at ásetingar um dómsvaldið, skulu koma í gildi nakað seinni enn hinir partarnir í grundlógini). Tí er neyðugt, at nevndin viðger hetta í samsvari við samráðingarúrslit og praktiskar avtalur við Danmark.

Nevndin má eisini taka støðu til, um tað verður neyðugt at áseta, hvørja støðu núgaldandi donsk/føroysk lóggáva hevur eftir gildiskomuna av hesi grundlóg.

## 17. Annað

Umframt omanfyrinevndu viðurskfti, sum nevndin í minsta lagi skal taka støðu til, eigur nevndin at taka aðrar tættir upp, sum hon metir vera av týdningi

Í Tinganesi, 3. september 1999

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

## V. Stjórnarskráin úr bókini Føroyum 1946

Úr bóklinginum Föroyar
Föringafelaga gav út
Tórshavn 1946

# *Stjórnarskrá Föroya*

**1. §**

Föroyar eru tjóðveldi.

**2. §**

Lóggávuvaldið er hjá lögtingi og forseta Föroya. Gerðarvaldið hjá forsetanum. Dómsvaldið er hjá dómsstólunum.

**3. §**

Setið hjá stjórnarvöldunum er í Tórshavn.

**4. §**

Forseti Föroya verður kosin av Föroya fólki fyri 5 ár.

**5. §**

Valbærur til forseta er hvör 35 ára gamal föroyingur, sum uppfyllir treytir tær, ið settar eru fyri valrætti til lögtingið, bústaðar treytin frátikin.

**6. §**

Hvörjir 400 lögtingsvalbærir föroyingar, minst 25 úr hvörji sýslu og minst 25 úr Tórshavn kunnu skjóta upp evni til forseta. Eru fleiri fortsetaevni í boði, fer forseta val fram , aðramáta er tann, í uppskotinum var, kostin forseti. Forsetaval fer fram við beinleiðin og loyniligan valhátt. Lögtingsveljarar eru forsetaveljarar.

**7. §**

Forsetin tekur við forsetastarvinum ólavsökudag og letur tað frá sær ólavsökuaftan, tá 5 ár eru liðin, uttan so at hann er afturvaldur. Forsetaevni skulu skjótast upp í júni mánaði tað árið ið forsetin skal fara frá, og forsetaval fer fram í júli mánaði sama árið.

**8. §**

Doyr forseti skal, um minst tveir mánaðir eru til ólavsöku, annar veljast sama árið, aðramáta árið eftir.

**9. §**

Táið forsetaembætið er leyst, ella forsetanum berst frá, eiga forsetisráðharrin, lögmaðurin og lögtingsformaðurin forsetavald. Verða teir ymiskir á máli ræður meirlutin. Lögtingsformaðurin stýrir fundum teirra.

**10. §**

Lön forsetans og teirra ið sita við forsetavaldið verður at áseta við lóg. Forsetin má ikki hava annað lönt starv í hondum. Hann má ikki vera lögtingsmaður.

**11. §**

Áður enn forsetin tekur við valdi, ger hann trygdareið ella heitstreingi at halda stjórnarskránna. Eiðin ella heitstreingið verður at festa á blað í tveimum eintökum sum løgtingið og landsbókasavnið fáa hvört sítt at goyma.

**12. §**

Forsetin ella teir ið sita við valdi hava ikki ábyrgd av landsstýrinum.
Forsetin verður ikki saksöktur í brotsmálum uttan løgtingið so samtykkur.
Forsetin fer av, um tað verður samtykt við meiriluta á fólkaatkvöðu, sum skal haldast táið ¾ av løgtingslimunum krevja tað. Slík fólkaatkvöða skal fara fram innan tveir mánaðir aftaná at løgtingið hevur samtykt at krevja hana , og frá tí at henda samtykt er gjörd til úrslitið av fólkaatkvöðuni er kunnugt, er forsetin loystur úr starvi sínum.
Ynskir meirlutin av fólkinum, at forsetin skal verða sitandi, fer løgtingið av, og nýtt løgtingsval fer fra.

**13. §**

Vald forsetans skulu ráðharrar útinna.

**14. §**

Ráðharrarnir hava ábyrgd av öllum stjórnargerðum. Embætisábyrgd teirra verður tilskila við lóg. Løgtingið ella forsetin kunnu klaga ráðharrarnar fyri teirra embætisrökt. Landsrætturin dömir hesi sakarmál.

**15. §**

Løgrætturin og tríggjir eykadómarar, sum løgtingið velur, er landsrættur. Løgmaðurin hevur forsæti og úrslitsatkvöðu.

**16. §**

Forsetin setur ráðharrar í og úr embæti. Fyrsti ráðharri er nevndur forsætisráðharri. Hann stýrir ráðharrafundum.

**17. §**

Lógir og týdningarmiklar stjórnargerðir skulu ráðgerast í landsráði, har allir ráðharrar hava sæti og forsetin hevur forsæti. Forsetin og hvör einstakur ráðharri, kann kalla landsráðið saman. Berst forsetanum frá, kann hann lata málið viðgera á ráðharrafundi.
Í landsráði og á ráðharrafundi hevur forsætisráðharrin úrslitsatkvöðuna, táið ráðharrarnir eru ymiskir á máli. Av ráðagerðum í landsráði og á ráðharrafundi verður so mikið at festa í bók, at fundarúrslit og stöðan hjá hvörjum ráðharra eru til skjals.
Aðrenn fundur er lokin skal hvör ráðharri skriva undir í gerðabókina.
Táið ráðharrafundur hevur verið, ræður forsetin fyri, um málið eisini skal viðgerast í landsráðnum.

**18. §**

Táið forsetin og ráðharri við honum hava skrivað undir lóg ella stjórnaravgerð hava tey gildi.

**19. §**

Forsetin skipar menn í embæti sambært lógum. Eingin má uttan við serligari lógheimild skipast í embæti sum ikki er föroyskur landsborgari.
Embætismenn skulu gera eið ella heiti at halda stjórnarskránna.

Forsetin kann seta teir embætismenn úr embæti sum hann hevur sett í embæti. Eftirlön teirra verður ásett eftir lógini.
Forsetin kann flyta embætismenn úr einum embæti í annað, tó muga teir einki lissa av embætisinnlögum sínum við flytingina, og teir sleppa at velja, um teir vilja flytast ella fara frá við eftirlön eftir lógini.

**20. §**
Forseti Föroya kann ikki uttan lögtingsins santykki gera sáttmálar við onnur lond, táið teir víkja at ríkisrættarligu stöðu landsins ella nema við vald Föroya yvir nökrum parti av oyggjunum og viðvíkjandi sjómarkinum.

**21. §**
Forsetin stevnir lögtinginum saman hvört ár og ger av nær tað skal slítast. Ting má ikki slítast fyrr enn fíggjarlóg er samtykt. Forsetin kallar lögtingið til eykatingsetu, táið törvur er á.

**22. §**
Forsetin kann steðga fundunum hjá regluligum lögtingið eitt ávíst tíðarskeið, tó bert einaferð somu setuna og ikki meir enn tvær vikur uttan tingið samtykkir.

**23. §**
Forsetin kann loysa upp lögtingið, men tó skal nýtt veljast áðrenn 2 mánaðir eru gingnir, og síðani koma saman ikki seinni enn á ólavsöku.

**24. §**
Forsetin kann leggja uppskot til lógir og aðrar samtyktir fyri lögtingið.

**25. §**
Táið lögtingið hevur samtykt lógaruppskot, skal tað leggjast fyri forsetan til at staðfesta ikki seinni enn tvær vikur eftir at tað var samtykt, og staðfestingin gevur tí lóggildi. Sýtir forsetin at staðfesta lóguppskotið, skal tað sum skjótast, og ikki seinni enn 2 mánaðir frá tí, at forsetin fekk tað til staðfestingar, leggjast undir fólkaatkvöðu. Fær uppskotið meirluta við fólkaatkvöðu, er tað lóg.

**26. §**
Forsetin kunnger lógir og setir tær í verk.

**27. §**
Forsetin eigur vald í neyðbráð at geva bráfeingislóg, táið tingið ikki er saman. Ikki má lógin vera ímóti stjórnarskránni; hon skal leggjast fyri fyrsta lögting. Verður hon ikki samtykt gongur hon úr gildi. — Fíggjarlóg má ikki verða bráðfeingislóg.

**28. §**
Forsetin kann náða brotsmenn. Ráðharrar kann hann tó ikki loysa frá saksökn fyri landsrætti ella landsrættardómi uttan lögtingið samtykkir.

**29. §**
Forsetin loyvir ella letur onnur stjórnarvöld loyva undantök frá lógum ella frglum teim, ið higartil hava verið fylgdar.

**30. §**
Peningaviðurskiftini verða at skipa við lóg.

**31. §**
Á løgtingið eiga í minsta lagi tjúgu í mesta lagi tríati fólkavaldir tingmenn sæti, valdir við loyniligum vali. Samstundir sum tingmennirnir verða valdir, verða eins nógvir varamenn valdir.
Av løgtingsins tingmannatali verða 20 tinglimir valdir í valdømum. Harumframt verða í mesta lagi 10 eykatingmenn valdir til tess at javna millum tingflokkanna, so at tingmannatalið hjá hvørjum flokki sum best samsvarar atkvøðunøgd flokksins við løgtingsvalið. Tinglimirnir verða valdir fyri 4 ár.
Vallógin ásetur gjøllari løgtingsvalskipan.

**32. §**
Valrætt á løgtingsvali eiga allir fast búsettir føroyskir landsborgarar ið fylt hava 21 ár táið val fer fram og ikki eru gjørdir ómyndingar, ikki hava notið slíka fátækrahjálp frá tí almenna og ikki hava lotið tílíkan æruminkandi dóm, at valrætturin, táið val fer fram, er týndur. Vallógin ásetur gjøllari reglur um valrættin.

**33. §**
Valbærur til løgtingið er hvør tann, sum valrætt eigur á løgtingsvali.

**34. §**
Regluligt løgting skal koma saman hvørt ár ólavsøkudag ella næsta gerandisdag.

**35. §**
Løgtingið er friðlýst. Tann sum nervar tess trygd og frælsi er sekur fyri landasvik.

**36. §**
Tað er løgtinginum heimilt at skipa nevndir av tingmonnum til at kanna týðandi mál sum almenningi umvarðar. Slík nevnd hevur rætt til at krevja munnligar og skrivligar frágreiðingar bæði frá embætismonnum og øðrum borgarum.

**37. §**
Skattur má eingin áleggjast, broytast ella avtakast uttan við lóg.
Lán má ikki takast, sum skuldbindur tjóðveldi, ei heldur jørð landsins og lunnindi seljast ella veðsetast uttan við lógarheimild.

**38. §**
Fyri hvørt regluligt løgting, fyrsta tað er saman komið, skal stjórnin leggja fram fíggjarætlan fyri komandi árið. Uttan heimild í fíggjarlóg má stjórnin eingi útgjøld rinda.

**39. §**
Løgtingið velur 2 landsrokniskapargrannskoðarar við løn. Teir skulu ansa eftir at allar landsins innløgur eru taldar og at heimild er í fíggjarlóg til allar útløgur. Teimum er loyvt at krevja tær frágreiðingar og tey skjøl frá stjórnarvaldinum sum teimum tørvast. Landsroknskapur fyri árið verður síðan við viðmerkingum grannskoðaranna at leggja fyri løgtingið. Ger tingið tá samtykt um rokndkapin.
Henda greinin kann broytast við lóg.

**40. §**
Lóg verður ikki samtykt á lögtingi, fyrr enn tríggjar ferðir er viðgjörd.

**41. §**
Lögtingið ger sjálvt av, um tingmennirnir eru lógliga valdir, sama um tingmaður hevur mist sína valheimild.

**42. §**
Hvör tingmaður skal, táið val hans er góðkent, há tíðarliga játta at halda stjórnarskránna.

**43. §**
Lögtingsmenn eru bert bundnir við sannföring sína og við ongar veljara treytir. Embætismonnum törvar ikki samtykki frá stjórnini til tess at taka við lögtingsvali, men embætisstarvið skal av teirra ávum rökjast eftir stjórnarinnar tykki uttan útlöga hjá tí almenna.

**44. §**
Meðan lögtingið er saman má ikki havast upp brotsmál móti nökrum tingmanni, ei heldur má hann setast fastur ella í varðhald uttan tingið samtykkir — Fyri tað tingmaður innan tings hevur sagt, stendur hann ikki uttan tings til svars, stendur hann ikki uttan tings til svars, uttan tingið samtykkir.

**45. §**
Týnist tingmannsins valbæri, túnist rætturin við, ið tingvaldið gav honum.

**46. §**
Ráðharrarnir eiga vegna embætisstöðu sína sæti á lögtingið; teir taka til orða táið teir vilja, men verða tó at halda tingsins skipan. Atkvöðurætt hava teir ikki, uttan teir eisini eru lögtingsmenn.

**47. §**
Lögtingið velur sær sjálvt formann.

**48. §**
Tingið fær einki mál samtykt uttan meira enn helvtin av tingmonnunum er á fundi og greiðir atkvöðu.

**49. §**
Á tingi er við samtykki tingsins, hvörjum tingmanni loyvt at bera uppá mál hvönn almennan spurning eg krevja av ráðharrunum frágreiðing um málið.

**50. §**
Tingmál má ikki takast til viðgerðar uttan tingmaður flytur fram.

**51. §**
Tað er tinginum loyvt at beina tey mál, tað ikki leggur í at gera, til ráðharrarnar.

**52. §**
Lögtingsfundir eru almennir. Forsetin ella so nógvir tingmenn sum tingskipanin fyri setur kunnu tó krevja, at allir sum ikki eru tingmenn fara út; síðan ræður tingfundurin, um málið skal umröðast fyri opnum durum ella afturlatnum.

**53. §**

Lögtingið lógfestir gjöllari reglur viðvíkjandi tingsins skipan mannagongd.

**54. §**

Dómsvaldið skal fyriskipast við lóg.

**55. §**

Dómsvaldið avger trætumál um valdamarkið hjá gerðarvaldi og lóggávuvaldi. Eingin sleppur tó undan at lýða yvirvaldaboð fyribils, tó at hann skjýtur málið til dóms.

**56.§**

Dómararnir skulu í embætisvirki sínum einans fara eftir lógini. Dómarar verða ikki settir frá uttan við dóm og flytast ei heldur í annað embæti móti vilja sínum.
Tó kann dómari, ið er vorðin 65 ára gamal, setast frá, men skal hann framvegis hava somu lön.

**57. §**

Föroyum skulu vera 2 dómstólar, sorinskrivararættur og lögrættur.
Sorinskrivarin skal vera lögfröðingur. Í lögrættinum skulu tríggir lögrættumenn ið allir eru lögfröðingar sita; formaður rættsins nevnist lögmaður. Tað skal tilskilast við lóg, hvörji sakarmál ið skulu havast upp fyri sorinskrivararætt og hvörji ið skulu fyri lögrætt, somuleiðis hvörjir sorinskrivarardómar, ið kunnu skjótast inn fyri lögrætt.

**58. §**

Tann evangeliska-lutherska kirkjan er tjóðkirkja Föroya og ríkið skal styðja hana.

**59. §**

Fólkið eigur rætt til at stovna trúðarfelög sum hvör heldur beinast vera.

**60. §**

Eingin má lissa av politiskum ella borgarligum rættindum vegna trúar sínar, ikki heldur sleppa undan nakrari borgarskyldu. — Eingin er skyldigur at rinda gjald til aðra enn sína guðsdyrkan.

**61. §**

Hvör tann sum verður tikin av fúta skal, áðrenn samdögur er liðið, stillast inn fyri sorinskrivaran. Ber ikki til at lata hann leysan beinanvegin, skal sorinskrivarin, áðrenn trý samdögur uppaftur eru umliðin, við grundum avgera um hann skal verða settur í varðhald. Ber til at loysa hann móti veðtrygging ger dómarin av hvar og hvussu mikið verðið skal vera.
Ákenning sorinskrivarans kann beinanvegin skjótast inn fyri lögrættin.
Fyri brot ið bert verður revsað við sekt má eingin setast í varðhald.

**62. §**

Bústaðurin er friðhaldur. Húsaleit ella bræva- og skjalarannsókn má ikki fara fram uttan aftir rættarákenning ella við serstakari lógarheimild.

**63. §**

Ognarrætturin má bert skerjast við lóg, og bert til samfelagsframa. Eingin er skyldigur at lata jörð ella aðrar ognarlutir til tað almenna uttan móti fullum endurgjaldi.

**64. §**
Eingin útlendingur kann fáa landsborgararætt uttan við lóg. Heimild hjá útlendingum til at eiga fastar ognir í Föroyum skal skipast við lóg.

**65. §**
Vinnufrælsið má ikki skerjast uttan við lóg og bert til samfelagsframa.

**66. §**
Hann sum ikki kann bjarga sær og sínum hevur, táið eingin annar hevur skyldu til at styðja hann, rætt til styrk frá tí almenna við teimum treytum sum lógin ásetur

**67. §**
Börn hava öll rætt til ókeypis upplæring í fólkaskúlanum.
Tey foreldur, sum fullvæl sjálv eru för fyri at læra upp börn síni, hava ikki skyldu til at seta tey í fólkaskúlan.

**68. §**
Hvör maður hevur rætt til at seta hugsan sína á prent; prentfrælsið má aldrin við ritskoðan ella á annan hátt tálmast.

**69. §**
Fólkið eigur rætt til at stovna felög við hvörji tilætlan sum lóglig er, og törvar ikki at sökja loyvi til tess.
Felag má ikki loysast upp av stjórnarávum uttan fyribils og tá skal sakarmál havast upp beinanvegin móti felagnum til at upploysa tað.

**70. §**
Fólkið eigur rætt til at savnast til fundar. Á almennum fundi hevur fútin heimild at vera hjástaddur. Útifundur kann bannast táið útlit er fyri at ófriður stendst av honum.

**71. §**
Sjálvstýrið hjá kommununum undir umsjón stjórnarinnar skipast við lóg.

**72. §**
Broytingar- ella uppískoytingaruppskot viðvíkjandi hesari stjórnarskrá kunnu leggjast fyri bæði á regluligari lögtingssetu og á eykalögtingið. Samtykkja 2/3 av lögtingslimunum stjórnarskráaruppskotið skal tað áður enn 2 mánaðir eru gingnir leggjast undir fólkaatkvöðu.
Fær uppskotið tveir triðingar av greiddum atkvöðum og ¾ av lögtingveljarunum í landinum hava greitt atkvöðu, skal tað staðfestast av forsetanum og er síðani stjórnarskrá.

**73. §**
Henda stjórnarskráin gongur í gildi, táið Föroya lögting og fólkaatkvöða hava samtykt hana á tann hátt sum omanfyri í 72 § er fyriskipaður.

,

# VI. Stýrisskipanarlógin 1948

## Ll. nr. 1 frá 13.05.1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum / om Færøernes styrelsesordning i særanliggender, sum broytt við Ll. nr. 2 frá 03.01.1985.

**§ 1.** Føroyar eru innanfyri markið í ríkislóg nr. 137, 23. mars 1948, og kunngerð nr. 11, 31. mars 1948, um Føroya heimastýri sjálvstýrandi tjóð í danska ríkinum.

**§ 1.** Færøerne udgør inden for Rammerne af Rigslov Nr. 137 af 23. Marts 1948 og Kundgørelse Nr. 11 af 31. Marts 1948 om Færøernes hjemmestyre et selvstyrende Folkesamfund i det danske Rige.

**§ 2.** Lóggávuvaldið í føroyskum sermálum er hjá Løgtingi.

**§ 2.** Lovgivningsmyndigheden i færøske Særanliggender er hos Lagtinget.

**§ 3.** Løgmaður staðfestir og kunngerð lógirnar, ið samtyktar eru sambært § 2.

Hesar lógir, ið verða at orða á føroyskum og donskum, nevnast løgtingslógir.

Til staðfestingina krevst undirskrift av løgmanni saman við øðrum landsstýrismanni.

**§ 3.** Lagmanden stadfæster og kundgør de Love, der vedtages i henhold til § 2.

Disse Love, der affattes paa Føroysk og Dansk, benævnes Lagtingslove.

Til Stadfæstelsen kræves Underskrift af Lagmanden sammen med en anden Landsstyresmand.

**§ 4.** Løgtingið setir landsstýrið.

Nærri reglur hesum viðvíkjandi verða at áseta við løgtingslóg.

Formaður landsstýrisins verður nevndur løgmaður.

**§ 4.** Lagtinget udnævner Landsstyret.

De nærmere Regler herfor vil være at fastsætte ved Lagtingslov.

Landsstyrets Formand benævnes Lagmand.

**§ 5.** Landsstýrið stendur til svars fyri umsitingini av sermálunum. Ábyrgd landsstýrisins verður nærri ásett við løgtingslóg.

**§ 5.** Landsstyret er ansvarligt for Forvaltningen af Særanliggenderne. Landsstyrets Ansvarlighed bestemmes nærmere ved Lagtingslov.

**§ 6.**[1]) Á landsstýrisfundi verða viðgjørd øll uppskot, ið landsstýrið leggur fyri løgtingið og annars allar týdningarmiklar atgerðir.

Hvør landsstýrismaður gevur sína støðu til gerðabókina. Avgerð verður tikin við atkvøðumeiriluta. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, ræður atkvøða løgmannsins.

**§ 6.**[1]) På landsstyremøde behandles alle forslag, som landsstyret forelægger lagtinget og iøvrigt alle vigtigere foranstaltninger.

Ethvert Medlem skal afgive sit Votum til Protokollen. Beslutning tages ved Stemmeflerhed. Ved Stemmelighed er Lagmandens Stemme afgørende.

**§ 7.** Løgmaður stevnir Løgtingi til vanliga tingsetu hvørt ár Ólavsøkudag 29. juli, eftir at gudstænasta er hildin. Er hesin dagur sunnudagur, verður tingið sett dagin eftir.

Fundir Løgtingsins verða hildnir fyri opnum hurðum. Tó kann tingið í einstøkum førum samtykkja viðgerð av máli fyri stongdum durum.

[1])Løgtingsformaðurin ásetir, nær løgtingsseta verður slitin. Hetta kann hann ikki gera, fyrr enn lógarheimild er fyri innkrevjing av skatti til landskassans, jbr. § 21.

Løgtingsformaðurin kann stevna tinginum

**§ 7.** Lagmanden sammenkalder Lagtinget til ordentlig Samling hvert Aars Olajdag, 29. Juli, efter afholdt Gudstjeneste. Er denne Dag Søndag, sættes Tinget den følgende Dag.

Lagtingets Møder er offentlige, dog kan Tinget i enkelte Tilfælde beslutte Behandling af en Sag for lukkede Døre.

[1])Lagtingsformanden træffer bestemmelse om, hvornår en lagtingssamling slutter. Dette kan dog ikke ske, før end lovhjemmel foreligger for indkrævning af skat til landskassen og for landskassens udgifter.

Lagtingsformanden kan indkalde lagtinget

til eykatingsetu. Hesum er hann skyldugur, tá ið minsta lagi helmingurin av tingmonnunum krevur tað, ella løgmaður heitir á tingformannin um tað.

§ 8.[1]) Løgtingsformaðurin kann í vanligari tingsetu leggja tingfundirnar niður ávísa tíð, tó uttan tingsins samtykt ikki longri enn 2 mánaðir.

§ 9. Løgmaður loysir upp Løgtingið, tá ið tingsamtykt er gjørd tí viðvíkjandi, og skrivar út nývalbeint aftaná.

Tingið kemur saman aftur innan mánað aftan á valið.

§ 10. Landsstýrið kann leggja fyri Løgtingið uppskot til lógir og aðrar samtyktir.

§ 11. Landsstýrið setir í og loysir úr embæti teir tænastumenn, sum samsvarandi løgtingslóg standa undir føroyska heimastýrinum.

Lønir, eftirlønir o.s.fr. hjá tænastumonnunum verða settar við løgtingslóg.

§ 12.[1]) Valrætt til løgtingið hava tey, ið hava fylt 18 ár, hava heimarætt og fastan bústað í Føroyum.

*2. stk.* Valbar eru tey, sum hava valrætt til tingið, uttan so at viðkomandi er straffaður fyri gerð, sum í vanligum umdømi ger hann óverdan at vera løgtingsmaður, um ikki henda fylgja av dóminum er burturfallin. Straffverd gerð ger ikki hin dømda óverdan, uttan so at hin dømdi er dømdur treytaleysan dóm til fongsul í 4 mánaðir ella meir ella varðhald, ella tá ið 5 ár eru gingin aftaná, at hann hevur sitið straffin av, straffurin er avoldaður ella eftirgivin, ella eftir at hann er endaliga leysur av varðhaldi.

*3. stk.* Eingin kann atkvøða, uttan hann er á vallista.

§ 13. Nærri reglur um løgtingsval verða at áseta við løgtingslóg.

§ 14. Løgtingið avger gildi av vali tingmanna.

§ 15.[1]) Løgtingið velur formann og næstformenn. Valið fer fram við lutfallsvali.

§ 16.[1]) Løgtingsmenn verða valdir fyri 4 ár.

*2. stk.* Um løgmaður upployser løgtingið.

til ekstraordinær samling. Dette er han pligtig til, når mindst halvdelen af lagtingets medlemmer forlanger dette eller lagmanden anmoder tingformanden herom.

§ 8.[1]) Lagtingsformanden kan i ordinær samling udsætte tingmøderne på bestemt tid, dog uden lagtingets samtykke ikke længere end 2 måneder.

§ 9. Lagmanden opløser Lagtinget, naar der herom foreligger Lagtingsbeslutning, og udskriver straks efter nye Valg.

Tinget træder igen sammen inden een Maaned, efter at Valget har fundet Sted.

§ 10. Landsstyret kan for Lagtinget fremsætte Forslag til Love og andre Beslutninger.

§ 11. Landsstyret udnævner og afskediger de tjenestemænd, som ifølge Lagtingslov er knyttet til det færøske Hjemmestyre.

Tjenestemændenes Lønninger, Pension m.v. bestemmes ved Lagtingslov.

§ 12.[1]) Valgret til lagtinget har personer, der er fyldt 18 år, har indfødsret og fast bopæl på Færøerne.

*Stk. 2.* Valgbar til lagtinget er enhver, som har valgret til dette, medmindre vedkommende er straffet for en handling, der i almindeligt omdømme gør ham uværdig til at være medlem af lagtinget, uden at denne virkning af dommen er bortfaldet. En strafbar handling gør ikke den dømte uværdig, medmindre domfældte er idømt ubetinget straf af fængsel i 4 måneder eller derover eller forvaring, eller når der er forløbet 5 år fra straffens udståelse, forældelse eller eftergivelse eller fra den endelige løsladelse fra forvaring.

*Stk. 3.* Ingen kan afgive stemme uden at være optaget på valglisten.

§ 13. Nærmere Regler om Lagtingsvalg fastsættes ved Lagtingslov.

§ 14. Lagtinget afgør Gyldigheden af sine Medlemmers Valg.

§ 15.[1]) Lagtinget vælger formand og næstformand. Valget sker ved forholdstalsvalg.

§ 16.[1]) Lagtingets medlemmer vælges for 4 år.

missa tingmenn sessirnar, tá ið nývál hevur verið. Tingmenn missa í ongum føri sessirnar fyrr enn nývál hevur verið.

*3. stk.* Samsýning tingmanna verður ásett við løgtingslóg.

**§ 17.** Samkomustaður Løgtingsins er Tórshavn. Tá serstakt er áfatt, kann løgmaður tó kalla tingið saman til fundar á øðrum staði í Føroyum.

**§ 18.** Tingið kann skipa nevndir av tingmonnum at kanna almenn týðandi mál. Tílíkar nevndir hava rætt at krevja skrivligar ella munnligar frágreiðingar frá privatum borgarum eins og frá almennum embætismonnum.

Val av nevndarmonnum og umboðum fer fram við lutfallsvali.

**§ 19.** Eingin skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg. Lán, ið skuldbindur Løgtingið, má ikki verða tikið, og má heldur ikki søla ella onnur latan av hendi av fastognum landsins ella nýtslurætti teirra fara fram uttan samsvarandi løgtingslóg.

**§ 20.**[1]) Í hvørjari vanligari tingsetu leggur landsstýrið áðrenn 1. september uppskot fram um fíggjarlóg fyri komandi fíggjarár.

*2. stk.* Frá 1. januar 1986 verður kalendaraárið fíggjarár.

*3. stk.* Um útlit er til, at uppskot til fíggjarlóg ikki er liðugt viðgjørd, áðrenn fíggjarársbyrjan, leggur landsstýrið fram uppskot um eina fyribils játtanarlóg.

**§ 21.** Áðrenn fíggjarlóg ella bráðfengis fíggjarlóg er samtykt á Løgtingi, má skattur ikki verða kravdur.

Eingin útreiðsla má verða goldin, ið ikki er heimilað í fíggjarlóg, galdandi, tá ið útreiðslan verður ávíst, ella í aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, ið eru ásettar í fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg, mega bert verða goldnar í tí fíggjarári, sum fíggjarlógin er galdandi. Tó kann landsstýrið í tíðarskeiði inntil 3 mánaðir, aftan á fíggjarárið er endað ávísa pening, ið er játtaður á fíggjarlógini fyri árið, ið fór.

*Stk. 2.* Såfremt lagmanden opløser lagtinget, bortfaldr lagtingsmandaterne, når nyvalg har fundet sted. Lagtingsmandaterne bortfalder i intet tilfælde, før nyvalg har fundet sted.

*Stk. 3.* Tingmedlemmernes vederlag fastsættes ved lov.

**§ 17.** Lagtingets Samlingssted er Thorshavn. I overordentlige Tilfælde kan dog Lagmanden sammenkalde Tinget til møder paa andet Sted paa Færøerne.

**§ 18.** Tinget kan af sine Medlemmer nedsætte Kommissioner til at undersøge almenvigtige Sager. Saadanne Kommissioner er berettiget til at fordre sig forelagt skriftlige eller mundlige Oplysninger, saavel af private Borgere som af offentlige Myndigheder.

Valg af Medlemmer til Kommissioner og Hverv sker ved Forholdstalsvalg.

**§ 19.** Ingen Skat kan paalægges, forandres eller ophæves uden ved Lagtingslov, ejheller noget Laan, som forpligter Lagtinget, optages eller nogen Lagtinget tilhørende fast Ejendom eller Brugsret over saadanne afhændes uden ifølge Lagtingslov.

**§ 20.**[1]) I hver ordinær samling forelægger landsstyret inden 1. september forslag om finanslov for det kommende finansår.

*Stk. 2.* Fra 1. januar 1986 bliver kalenderåret finansåret.

*Stk. 3.* Kan behandlingen af finanslovsforslag ikke forventes tilendebragt inden finansårets begyndelse, forelægger landsstyret forslag om en midlertidig bevillingslov.

**§ 21.** Forinden Finansloven eller en midlertidig Bevillingslov er vedtaget af Lagtinget, maa Skatter ikke opkræves.

Ingen Udgift maa afholdes, som ikke har Hjemmel i den paa Anvisningstiden gældende Finanslov eller anden gældende Bevillingslov. De ved Finanslov eller ved anden Bevillingslov fastsatte Bevillinger kan kun udbetales i det Finansaar, i hvilket Finansloven gælder. Dog kan Landsstyret i et Tidsrum af indtil 3 Maaneder efter Finansaarets Udløb (Supplementsperioden) anvise Beløb, som maatte være bevilgede paa Finansloven for det forløbne Aar.

§ 22.[1]) Løgtingið velur ein ella fleiri løntar roknskapargrannskarar. Teir grannska ársroknskapirnar og ansa, at inntøkur landsins allar eru taldar, og at einki er goldið uttan heimild í fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg. Teir kunna krevja at fáa allar upplýsingar og øll skjøl, ið teimum tørva. Ársroknskapirnir við viðmerking grannskaranna verða at leggja fyri Løgtingið til viðgerðar og samtyktar.

Grannskoðaraviðurskifti landsins verða at skipa við lóg.

§ 22.[1]) Lagtinget vælger een eller flere lønnede Revisorer. Disse gennemgaar de aarlige Regnskaber og paaser, at samtlige Landets Indtægter er opført deri, og at ingen Udgift uden Hjemmel i Finanslov eller anden Bevillingslov har fundet Sted. De kan fordre sig alle fornødne Oplysninger og Aktstykker meddelt. De aarlige Regnskaber med Revisorernes Bemærkninger forelægges Lagtinget til Behandling og Afgørelse.

Landets revisionsmæssige forhold ordnes ved lov.

§ 23. Einki lógaruppskot kann verða endaliga samtykt uttan at hava fingið 3 viðgerðir á tingi.

§ 23. Intet Lovforslag kan endeligt vedtages, forinden det tre Gange har været behandlet i Lagtinget.

§ 24.[2]) Meðan Løgtingið situr, má løgtingsmaður ikki uttan tingsins samtykt verða átalaður ella settur fastur á nakran hátt, uttan so er, at hann verður tikin í brotsgerð.

Eingin løgtingsmaður kann uttan tingsins samtykt verða kravdur til svars uttantings fyri tað, hann hevur talað innantings.

§ 24.[2]) Saa længe Lagtinget er samlet, kan ingen Lagtingsmand tiltales eller underkastes Fængsling af nogen Art uden Lagtingets Samtykke, med mindre han er grebet paa fersk Gerning.

For sine Ytringer i Lagtinget kan intet af dets Medlemmer uden Tingets Samtykke drages til Ansvar udenfor samme.

§ 25. Landsstýrismenn og ríkisumboðsmaður eiga embætis vegna atgongd til Løgtingið og rætt til á fundum at taka til orða, tá ið teir halda tað vera neyðugt, men skulu annars halda tingskipanina. Atkvøðurætt hava teir bert, tá ið teir eisini eru løgtingsmenn.

§ 25. Landsstyrets Medlemmer og Rigsombudsmanden har i Embeds Medfør Adgang til Lagtinget og er berettigede til under Forhandlingerne at begære Ordet, saa ofte de skønner det paakrævet, idet de iøvrigt har at iagttage Forretningsordenen. Stemmeret udøver de kun, naar de tillige er Medlemmer af Lagtinget.

§ 26. Løgtingið kann ikki gera samtykt um nakað mál, uttan at meiri enn helmingurin av tingmonnum er á fundi og fyri málinum.

§ 26. Lagtinget kan ikke tage nogen Beslutning, naar ikke over Halvdelen af dets Medlemmer er tilstede og stemmer for Forslaget.

§ 27. Heimilað er hvørjum løgtingsmanni við tingsins loyvi at leggja fram til viðgerðar almenn mál og hesum viðvíkjandi krevja frágreiðing frá landsstýrinum.

§ 27. Enhver Lagtingsmand kan med Lagtingets Samtykke bringe ethvert offentligt Anliggende under Forhandling og derom affæske Landsstyrets Forklaring.

§ 28.[1]) Eingin umsókn verður løgd fyri Løgtingið, uttan tingmaður ella landsstýrið flytur hana fram.

§ 28.[1]) Intet Andragende maa overgives Lagtinget uden gennem dets Medlemmer eller Landsstyret.

§ 29. Tingið ásetir nærri reglur tingskipanini viðvíkjandi.

§ 29. Tinget fastsætter de nærmere Bestemmelser, der vedkommer Forretningsgangen.

§ 30.[1]) Um uppskot til broyting av hesi lóg

§ 30.[1]) Såfremt forslag til ændring af denne

verður samtykt, verður samtyktin útsett til aftaná fyrstkomandi val. Verður samtyktin tá aftur samtykt av tinginum í fyrstu tingsetu aftan á nývalið, er broytingin endaliga samtykt.

*2. stk.* Verður lóg nr. 137 frá 23. mai 1948 „om Færøernes hjemmestyre" broytt, kann uppskot um broyting av hesi lóg orsakaðar av broytingini í heimastýrislógini samtykkjast av løgtinginum í einari tingsetu. Sama er um reglurnar um immunitet løgtingsmanna verður broyttur, jbr. § 1, punkt 112 í lóg fyri Føroyar nr. 72 frá 5. mars 1979 um „rettens pleje".

**§ 31.** Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lov vedtages, bliver vedtagelsen udsat til efter førstkommende valg. Bliver vedtagelsen da igen vedtaget af tinget i første samling efter nyvalget, er ændringen endeligt vedtaget.

*Stk. 2.* Såfremt lov nr. 137 af 23. maj 1948 om Færøernes hjemmestyre ændres, kan forslag om ændring i nærværende lov forårsaget af ændringer i hjemmestyreloven. Det vedtages i en lagtingssamling. Det samme er tilfældet såfremt reglerne om lagtingsmænds immunitet ændres, jfr. § 1, punkt 112 i lov for Færøerne nr. 72 af 5. marts 1979 om rettens pleje.

**§ 31.** Denne lov træder i kraft straks.

1) Broytt við Ll. nr. 2 frá 03.01.1985.
2) Jbr. L. for Færøerne nr. 92 frá 23.02.1988 om rettens pleje m.v. § 1 nr. 92 (§ 728a), sí 25. part

# VII. LÓG UM UMBOÐSVALD 1948

## *b. Landsstýri / Landsstyre.*

### Ll. nr. 2 frá 13.05.1948 um umboðsvald Føroya / om Færøernes forvaltning.

§ 1. Umboðsvaldið viðvíkjandi føroyskum sermálum og umsitingin av teimum er hjá landsstýrinum.

§ 2. Sermál eru tey mál og málsøki, ið samsvarandi ríkislóg nr. 137, 23. mars 1948, og kunngerð nr. 11, 31. mars 1948 um Føroya heimastýri eru løgd undir føroyska heimastýrið.

§ 3. Landsstýrið er skipað við løgmanni, ið er stýrisins formaður, og 2 ella fleiri øðrum landsstýrismonnum.

Landsstýrið velur sín ámillum hann, sum skal vera í løgmannsins stað, tá ið løgmaðurin hevur forfall.

§ 4. Løgtingið velur løgmannin.

Valførur er hann, ið uppfyllur treytirnar fyri valføri til Løgtingið.

Valið fer fram sum meirilutaval eftir teimum reglum, sum samsvarandi løgtingsins ting-

§ 1. Den udøvende Myndighed over og Forvaltningen af Færøernes Særanliggender er hos Landsstyret.

§ 2. Særanliggender er de Sager og Sagsomraader, der med Hjemmel i Rigslov Nr. 137 af 23. Marts 1948 og Kundgørelse Nr. 11 af 31. Marts 1948 om Færøernes Hjemmestyre er henlagt til det færøske Hjemmestyre.

§ 3. Landsstyret bestaar af Lagmanden, der er Styrets Formand, samt af to eller flere andre Landsstyresmænd.

Landsstyret udpeger blandt sine Medlemmer den, der i Lagmandens Forfald vil have at udføre Lagmandens Funktioner.

§ 4. Lagmanden vælges af Lagtinget.

Valgbar er enhver, der opfylder Betingelserne for Valgbarhed til Lagtinget.

Valget finder Sted som Flertalsvalg efter de Regler, der ifølge Lagtingets Forretningsor-

skipan galda viðvíkjandi vali av einstakum manni, sbr. tingskipanina, grein 33.

**§ 5.** Hinir landsstýrismenninir verða valdir av Løgtinginum eftir uppskoti frá løgmanni.

**§ 6.** Starvstíð landsstýrisins fellur saman við Løgtingsins valskeiði. Aftaná hvørt løgtingsval fer fram val ella afturval av landsstýrinum. Landsstýrið hevur skyldu at virka, inntil nýtt landsstýri er valt.

Um embætið sum løgmaður ella sum annar landsstýrismaður verður ósett í valskeiðinum, velur Løgtingið nýggjan mann í landsstýrið fyri ta tíð, sum eftir er av valskeiðinum, eftir somu reglum, sum nevndar eru frammanundan í §§ 4 og 5.

**§ 7.** Løgmaður og hinir landsstýrismenninir fáa løn sum ásett við løgtingslóg, samanber § 11 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum.

**§ 8.** Landsstýrið hevur setur sitt í Tórshavn. Tað kemur saman, so ofta løgmaðurin heldur tað vera neyðugt, ella tá ið ein av hinum landsstýrismonnunum krevur tað.

Avgerðir verða tiknar við atkvøðumeiriluta. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, er atkvøða løgmannsins avgerandi.

Viðvíkjandi fundunum verður hildin gerðabók, sum, tá ið fundurin er at enda, verður undirskrivað av teim møttu landsstýrismonnum.

**§ 9.** Hvør landsstýrismaður hevur yvir fyri Løgtinginum ábyrgd av at røkja tað umboðsvald og ta umsitan, sum teimum er latin upp í hendur, beint og forsvarliga.

Umboðanina av teimum økjum, ið eru undir landsstýrisins ræði, býta landsstýrismenn sín ámillum.

Løgmaður ávísir allar útreiðslur úr kassa landsins og ansar, at hesar útreiðslur eru ikki størri enn tær játtanir, sum tingið hevur samtykt.

**§ 10.** Landsstýrið setur teir tænastumenn, sum tørvur er á viðvíkjandi umsiting av heimastýrinum, innanfyri tær játtanir, ið eru givnar av Løgtinginum. Landsstýrið ásetir við reglugerð umsitingar- og embætisøki tænastumanna.

den gælder ved Valg af Enkeltmænd, jfr. Forretningsordenens § 33.

**§ 5.** De øvrige Landsstyresmænd vælges af Lagtinget efter Forslag fra Lagmanden.

**§ 6.** Landsstyrets Funktionsperiode falder sammen med Lagtingets Valgperiode. Efter hvert Lagtingsvalg skal Valg eller Genvalg af Landsstyret finde Sted. Landsstyret har Pligt til at fungere, indtil nyt Landsstyre er valgt.

I Tilfælde af, at Stillingen som Lagmand eller som anden Landsstyresmand maatte blive ledig i Løbet af Valgperioden, vælger Lagtinget ny Mand til Landsstyret for Resten af Valgperioden efter samme Regler som ovenfor i §§ 4 og 5 anført.

**§ 7.** Lagmanden og de andre Landsstyresmænd oppebærer Løn som fastsat ved Lagtingslov, jfr. § 11 i Lagtingslov om Færøernes Styrelsesordning i Særanliggender.

**§ 8.** Landsstyret har sit Sæde i Thorshavn. Det træder sammen saa hyppigt, Lagmanden skønner dette paakrævet, eller naar en af de øvrige Landsstyresmænd kræver dette.

Beslutninger træffes ved Stemmeflerhed. Ved Stemmelighed er Lagmandens Stemme afgørende.

Over Møderne føres Forhandlingsprotokol, der ved Mødets Slutning underskrives af de mødte Landsstyresmænd.

**§ 9.** Hver Landsstyresmand er ansvarlig overfor Lagtinget for rigtig og forsvarlig Udøvelse af den Administration og Forvaltning, som er betroet ham.

Administrationen af de Omraader, der er underlagt Landsstyret, fordeler Landsstyresmændene imellem sig.

Lagmanden anviser alle Udbetalinger af Landskassen og paaser, at disse ikke overskrider de af Tinget givne Bevillinger.

**§ 10.** Landsstyret ansætter de til Hjemmestyrets Forvaltning fornødne Tjenestemænd indenfor de Bevillinger, som er vedtaget af Lagtinget. Landsstyret bestemmer ved Instruks Tjenestemændenes Forvaltnings- og Embedsomraade.

**§ 11.** Landsstýrið hevur skyldu at leggja fyri tingið uppskot til fíggjarlóg fyri Føroyar fyri komandi fíggjarár, samanber § 20 í løgtingslóg um stýrisskipan fyri Føroyar í sermálum.

**§ 11.** Det paahviler Landsstyret at forelægge Tinget Forslag til Finanslov for Færøerne for det følgende Finansaar, jfr. § 20 i Lagtingslov om Færøernes Styrelsesordning i Særanliggender.

**§ 12.** Tað er skylda landsstýrisins at ansa, at ongar útreiðslur verða goldnar, sum ikki hava heimild í fíggjarlóg, ið er galdandi, tá ávísan fer fram, ella í aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, sum eru ásettar við fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg, kunnu bert verða goldnar í tí fíggjarári, tá fíggjarlógin er galdandi, eins og yvirflytan frá einum posti til annan ikki kann fara fram uttan greiniliga heimild til hetta í lógini. Landsstýrið hevur tó heimild til í einum tíðarskeiði av inntil 3 mánaðar, aftan á at fíggjarárið er lokið, at ávísa pening, sum er játtaður í fíggjarlógini fyri farna árið.

**§ 12.** Det paahviler Landsstyret at paase, at ingen Udgift afholdes, som ikke har hjemmel i den paa Anvisningstiden gældende Finanslov eller anden gældende Bevillingslov. De ved Finanslov eller ved anden Bevillingslov fastsatte Bevillinger kan kun udbetales i det Finansaar, i hvilket Finansloven gælder, ligesom Overførsel fra en Post til en anden ikke kan finde Sted uden udtrykkelig Hjemmel hertil i Loven. Landsstyret har dog Ret til i et Tidsrum af indtil 3 Maaneder efter Finansaarets Udløb at anvise Beløb, som maatte være bevilgede paa Finansloven for det forløbne Aar.

**§ 13.** Roknskapir Løgtingsins verða at gera fyri fíggjarárið og verða at greiða á tann hátt og til tær tíðir, sum Løgtingið ásetir.

**§ 13.** Lagtingets Regnskaber affattes for Finansaaret og skal aflægges paa den Maade og til den Tid, som er bestemt af Lagtinget.

**§ 14.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**§ 14.** Denne Lov træder straks i Kraft.

# VIII: STÝRISSKIPANARLÓGIN 1994

LØGTINGSLÓG NR. 103 FRÁ 26. JULI 1994 UM STÝRISSKIPAN FØROYA / OM FÆRØERNES STYRELSESORDNING.

Inngangur

§ 1. Í yvirtiknum málum er lóggávuvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag. Útinnandi valdið er hjá landsstýrinum. Dómsvaldið er hjá dómsstólunum.

Lóggávuvaldið

§ 2. Løgtingið er ting við í mesta lagi 33 tingmonnum.

§ 3. Valrætt til løgtingið hevur hvør, ið fylt hevur 18 ár, hevur danskan heimarætt og er heimahoyrandi í Føroyum, uttan so er, at hann er gjørdur ómyndugur.

§ 4. Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til løgtingið, uttan so er, at hann er revsaður fyri gerð, sum hevur við sær, at hann eftir almannahugsan ikki er verdugur at sita á tingi.

Stk. 2. Tann, ið dømdur er fyri revsiverda gerð, verður ikki óverdugur til tingsess, uttan so, at hann fær fongsulsdóm í 4 mánaðir ella longri, ella trygdarvarðhaldsdóm.

Stk. 3. Heldur ikki er hann óverdugur, tá ið 5 ár eru liðin frá tí, at revsingin er avsitin, fyrnd, ella eftirgivin ella frá endaligari leysgeving úr trygdarvarðhaldi.

§ 5. Løgtingið verður valt á almennum, loyniligum og beinleiðis vali.

Stk. 2. Nærri reglur um at inna valrættin verða givnar í løgtingsvallógini, heruppií at áseta løgtingsmannatalið innan fyri tað hámark, ið ásett er í § 2.

§ 6. Løgtingsmenn verða valdir fyri fýra ár í senn.

Stk. 2. Løgtingið eins væl og løgmaður kunnu, nær ið vera skal, skriva út nýval, sum hevur við sær, at tey løgtingsumboð, ið verið hava, falla burtur, tá ið nývalda løgtingið er sett.

Stk. 3. Tað áliggur løgmanni at skipa so fyri, at nýval verður hildið, áðrenn valskeiðið er runnið.

Stk. 4. Løgtingsmaður, sum missir valbæri sítt, fer úr tingsessinum.

§ 7. Løgtingið ger sjálvt av, um val tingmanna hevur gildi, og spurningin um, hvørt tingmaður hevur mist valbæri sítt.

§ 8. Tá ið góðkent er, at løgtingsmaður er valdur, skal hann leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað hann í, tó undantikin beinleiðis fólkavald umboð.

§ 9. Nývalda løgtingið kemur saman til fundar kl. 10.00 tólvta yrkadag eftir valdagin, uttan so er, at løgmaður ikki longu hevur boðað til fundar.

Stk. 2. Tá ið valbrøvini eru góðkend, verður løgtingið sett, og valdir verða løgtingsformaður og næstformenn.

Stk. 3. Løgtingsformaður og næstformenn sita alt valskeiðið uttan so er, at teir sjálvbodnir leggja frá sær ella fýra fimtingar av øllum tingmonnum skrivliga krevja nýval av formansskapi.

§ 10. Løgtingssetan byrjar ólavsøkudag og heldur á til ólavsøkudag árið eftir.

Stk. 2. Ólavsøkudag ganga løgtingsformaður, løgtingsmenn, løgmaður, landsstýrismenn og embætismenn skrúðgongu úr tinginum í dómkirkjuna, har gudstænasta verður hildin, og síðan aftur í tingið. Løgtingsformaðurin ger av, hvørjir embætismenn eru við í skrúðgonguni, og hvussu gongan er skipað.

Stk. 3. Løgtingið verður sett aftur ólavsøkudag kl. 13.00.

§ 11. Samkomustaður løgtingsins er Tórshavn. Í serstøkum føri kann løgtingið tó koma saman til fundar á øðrum staði í landinum.

§ 12. Á ólavsøkufundinum greiðir løgmaður frá støðu landsins og tí, ið landsstýrið hevur í ætlan at fremja.

Stk. 2. Við støði í røðu løgmans tekur tingið innan 6 yrkadagar støðu landsins til umrøðu.

§ 13. Løgtingsformaðurin boðar til løgtingsfundar og kunnger samstundis dagsskrá. Formaðurin hevur skyldu til at boða til fundar uttan óneyðuga dvøl, um so er, at í minsta lagi tveir fimtingar av tingmonnum ella løgmaður skrivliga biðja um tingfund við dagsskrá.

§ 14. Løgmaður, landsstýrismenn og ríkisumboðsmaður hava embætis vegna, uttan atkvøðurætt, atgongd at løgtinginum, og hava rætt til á fundum at krevja at koma til orðanna, men skulu annars halda tingskipanina.

§ 15. Løgmanni, landsstýrismonnum og løgtingsmonnum eru heimilað at seta fram uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir.

Stk. 2. Uppskot til løgtingslóg ella ríkislógartilmæli kann ikki verða endaliga samtykt, uttan at tað hevur fingið tríggjar viðgerðir á løgtingi.

Stk. 3. Um nýval verður, ella tá ið løgtingsseta er lokin, falla burtur øll tey uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir, sum ikki frammanundan eru endaliga samtykt.

§ 16. Løgtingið sjálvt ásetur tingskipan sína, sum inniheldur nærri reglur um málsgongd og skilhald.

§ 17. Løgtingsfundir eru almennir. Útvarpi og sjónvarpi er frítt at senda beinleiðis av fundunum. Løgtingið kann tó í einstøkum førum samtykkja viðgerð aftan stongdar dyr.

§ 18. Løgtingið kann ikki taka avgerð um mál, uttan at meira enn helmingur av tingmonnum er á fundi.

Stk. 2. Løgtingsmál er samtykt, tá ið fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti, um ikki annað er ásett í hesi løgtingslóg.

§ 19. Løgtingið kann skipa nevndir av tingmonnum at kanna alment umvarðandi mál. Nevndirnar hava rætt at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins væl og frá almennum embætismonnum.

§ 20. Løgtingið velur limir í nevndir og størv við lutfalsvali.

§ 21. Heimilt er hvørjum løgtingsmanni við tingsins loyvi at leggja fram til viðgerðar eitt og hvørt alment mál og tí viðvíkjandi krevja frágreiðing frá løgmanni ella landsstýrismanni.

Stk. 2. Sama rætt hevur løgtingsmaður, um tveir fimtingar av tingmonnum á fundi taka undir.

§ 22. Eingin umsókn verður løgd fyri løgtingið, uttan at tingmaður ella landsstýrið flytur hana fram.

§ 23. Løgtingsmenn eru bert bundnir av sannføring síni og ikki av forskriftum frá veljarum sínum.

§ 24. Eingin løgtingsmaður má uttan samtykki løgtingsins verða ákærdur ella fongslaður á nakran hátt, uttan so at hann verður tikin á búri.

Stk. 2. Eingin løgtingsmaður kann uttan samtykki tingsins verða kravdur til svars uttantings fyri tað, hann hevur sagt innantings.

§ 25. Samsýning løgtingsmanna verður ásett við løgtingslóg.

§ 26. Løgtingslógaruppskot, ið løgtingið hevur samtykt, fær lógargildi, tá ið tað seinast 30 dagar eftir endaligu samtyktina er staðfest av løgmanni og kunngjørt sambært kunngerðarreglum ásettum í løgtingslóg.

Útinnandi valdið

§ 27. Í landsstýrinum sita løgmaður og minst tveir landsstýrismenn.

Stk. 2. Løgmaður verður tilnevndur eftir teirri skipan, sum ásett er í § 28. Løgmaður ásetur, hvussu nógvir landsstýrismenninir skulu vera, og tilnevnir teir.

§ 28. Tá ið løgmaður skal verða tilnevndur, boðar løgtingsformaðurin formonnunum fyri flokkunum, ið umboðaðir eru á løgtingi, hvørjum sær til samráðs.

Stk. 2. Innan 10 yrkadagar eftir at fráfarandi løgmaður hevur biðið um at verða loystur úr embæti, leggur løgtingsformaður uppskot um løgmansevni fyri løgtingið. Um løgtingsval verður, ella løgmaður doyr, gongur freistin ávikavist frá tí degi, fyrsti tingfundur var eftir valið, ella frá tí degi, ið løgmaður doyði.

Stk. 3. Løgtingið skal í seinasta lagi 4. yrkadagin eftir, uttan nevndarviðgerð, greiða atkvøðu um uppskotið. Atkvøður meiri enn helmingur av øllum tingmonnum ímóti uppskotinum, er tað fallið. Annars er tað samtykt.

Stk. 4. Havnar løgtingið uppskoti frá løgtingsformanninum um løgmansevni, boðar formaðurin aftur til samráðs sambært stk. 1 og setur innan 4 yrkadagar eftir at uppskot hansara var havnað framaftur uppskot um løgmansevni, sum løgtingið sama dag greiðir atkvøðu um eftir reglunum í stk. 3.

Stk. 5. Um so er, at løgtingið fýra ferðir hevur felt uppskot løgtingsformansins um løgmann, skrivar starvandi løgmaður út nýval til løgtingið.

§ 29. Loystur skal verða úr embæti løgmaður ella landsstýrismaður, ið biður um tað. Løgtingsformaðurin loysir løgmann úr embæti, og løgmaður loysir landsstýrismann úr embæti.

Stk. 2. Løgmaður kann eisini í øðrum førum loysa úr embæti landsstýrismann og skal loysa landsstýrismann úr embæti, um tað við atkvøðugreiðslu í løgtinginum, har ið meira enn helmingur av øllum tingmonnum atkvøður fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á landsstýrismanni.

§ 30. Um tað við atkvøðugreiðslu á løgtingi, har ið meira enn helmingur av øllum tingmonnum atkvøður fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á løgmanni, skal løgmaður biðja løgtingsformannin loysa seg úr embæti.

§ 31. Hevur løgmaður biðið um at verða loystur úr embæti sbr. § 29, ella løgtingið hevur váttað honum misálit sbr. § 30, starvar landsstýrið, til nýggjur løgmaður er tilnevndur. Í tíðarbilinum fram til, at nýggjur løgmaður er tilnevndur, kann landsstýrið ikki gera annað enn tað, sum er alneyðugt, til tess at fyrisitingin kann halda fram ótarnað. Løgmaður kann tó innan eina viku eftir, at hann fekk misálit, nýta heimild sína í § 6, stk. 2, at skriva út nýval.

§ 32. Løgtingsmaður, sum verður løgmaður ella landsstýrismaður, sigur frá sær løgtingssessin, meðan hann situr í landsstýrinum.

Stk. 2. Nærri reglur um setingarviðurskifti løgmans og landsstýrismanna verða ásettar í løgtingslóg.

§ 33. Løgmaður býtir málsøki landsstýrisins millum landsstýrismenninar. Teir sita fyri málsøkjum sínum hvør sær.

Stk. 2. Løgmaður samskipar starv landsstýrismanna og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfunda, har m.a. øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og eykajáttanir verða framløgd áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið.

Stk. 3. Løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

§ 34. § 1 í hesi løgtingslóg er ikki til hindurs fyri, at landsstýrið ella stovnur undir landsstýrinum í nærri ásettan mun, við løgtingslóg fær heimild til við kunngerð at áseta rættarreglur av almennum slagi. Ein tílík heimild kann ikki verða treytað av, at reglurnar, sum ásettar verða, skulu hava góðkenning frá umboðum løgtingsins.

§ 35. Hóast § 1 kann við løgtingslóg í nærri ásettan avmarkaðan mun heimild verða latin nevndum, stýrum og ráðum at taka endaligar fyrisitingarligar avgerðir.

Stk. 2. Løgtingið kann ikki velja limir í nevndirnar, stýrini ella ráðini, sum umrødd eru í stk. 1.

§ 36. Løgmaður ger av, hvør av landsstýrismonnunum er varaløgmaður og røkir heimildir løgmans, meðan hann hevur forfall. Er einki ásett, verða heimildir hansara røktar av tí landsstýrismanni, sum longst hevur sitið í embæti. Hava tveir landsstýrismenn sitið líka leingi, tekur hin eldri við heimildunum.

§ 37. Løgmaður og landsstýrismenn hava rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra. Mál viðvíkjandi hesi rættarligu ábyrgd verða dømd av nevningatingi. Greiniligari reglur um hesa ábyrgd verða at áseta við løgtingslóg.

§ 38. Løgtingið setur eina tríggja manna nevnd av løgtingsmonnum at hava eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt.

Stk. 2. Hevur nevndin illgruna um, at óregluliga hevur verið atborið, kann hon krevja, at løgtingsformaðurin setur ein kanningarstjóra, sum ikki hevur dómsmyndugleika. Hann skal, eftir at hann hevur kannað málið, gera eina frágreiðing til løgtingið, hvørt fyrisitingin í ávísum máli er útint á lógligan hátt. Tveir fimtingar av løgtingsmonnunum kunnu skrivliga seta fram sama krav.

Stk. 3. Kanningarstjórin skal hava løgfrøðiligt embætisprógv og skal ikki verða starvsettur í fyrisiting landsstýrisins, á stovni undir landsstýrinum, hjá dómsvaldinum ella fyrr hava viðgjørt málið.

Stk. 4. Kanningarstjórin hevur rætt til at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins og frá almennum embætismonnum.

§ 39. Í løgtingslóg kann verða ásett, at løgtingið velur uttantingsmann, at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

Dómsvaldið

§ 40. Dómsvaldið er hjá óheftum dómstólum, sum virka sambært rættargangslógini fyri Føroyar.

Fíggjarmál landsins

§ 41. Eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg.

Stk. 2. Beinleiðis ella óbeinleiðis skattur kann ikki verða álagdur fyri inntøkur, innflutning, útflutning, sølu, gjald ella tílíkt, sum er farið fram í tíðini, áðrenn løgtingslógaruppskot um hetta varð lagt fyri løgtingið.

Stk. 3. Áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi, er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í stk. 1.

§ 42. Lán ella borgan o.a.m, ið skuldbindur løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, kann ikki verða tikið ella veitt uttan við heimild í løgtingslóg.

§ 43. Fyri 1. oktober á hvørjum ári leggur landsstýrið fyri løgtingið uppskot um løgtingsfíggjarlóg fyri komandi álmanakkaár.

Stk. 2. Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður. Tó kann í tíðarskeiðinum fram til 1. apríl, eftir at fíggjarárið er endað, verða ávístur peningur av farnu fíggjarlógini fyri útreiðslur, ið havdar eru í farna fíggjarári.

Stk. 3. Um útlit eru til, at uppskot til fíggjarlóg ikki er liðugt viðgjørt fyri fíggjarársbyrjan, leggur landsstýrið fram uppskot um eina bráðfeingis játtanarlóg.

§ 44. Eykajáttan verður veitt við løgtingslóg.

Stk. 2. Um mál hevur skund, kann løgtingsins fíggjarnevnd eftir uppskoti frá landsstýrinum veita eykajáttan, uttan so er, at tveir fimtingar av nevndarlimunum krevja málið avgjørt við løgtingslóg.

Stk. 3. Eykajáttanir, sum fíggjarnevndin hevur veitt ígjøgnum árið, verða at góðkenna við eykafíggjarlóg í seinasta lagi 31. desember sama ár. Landsstýrið hevur skyldu at leggja fram uppskot hesum viðvíkjandi innan 1. desember.

§ 45. Landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok.

Stk. 2. Løgtingið velur nakrar grannskoðarar. Teir fara ígjøgnum árliga landskassasroknskapin og ansa eftir, at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg. Teir kunnu krevja at fáa allar upplýsingar og øll skjøl, ið teimum tørvar. Greiniligari reglur um, hvussu mangir grannskoðarar skulu vera, og um virki teirra, verða ásettar í løgtingslóg.

Stk. 3. Landskassaroknskapurin við viðmerkingum grannskoðaranna verður lagdur fyri løgtingið til samtyktar.

Stk. 4. Reglurnar í stk. 1-3 verða eisini nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

Felagsmál

§ 46. Eftir avgerð heimastýrisins verða mál yvirtikin sambært løgtingslóg.

§ 47. Áheitan á ríkismyndugleikarnar um at seta í gildi fyri Føroyar ríkislóg ella kongliga fyriskipan, sum setur í gildi ríkislóg fyri Føroyar, kann bert verða gjørd við ríkislógartilmæli.

§ 48. Uppskot til ríkislógartilmæli, ið løgtingið hevur samtykt, fær gildi, tá ið tað seinast 30 dagar eftir endaligu samtyktina er staðfest av løgmanni og sent ríkismyndugleikunum.

§ 49. Landsstýrið ummælir tey uppskot til kongligar fyriskipanir, sum ikki seta ríkislóg í gildi í Føroyum. Hetta geldur somuleiðis fyri allar kunngerðir, sum ráðharri sendir heimastýrinum við atliti at gildisseting í Føroyum.

§ 50. Um heimild við ríkislóg ella við kongligari fyriskipan er løgd til heimastýrið, verða almennar reglur sambært slíkari heimild at áseta við løgtingslóg; í øðrum førum liggur heimildin hjá landsstýrinum.

Stk. 2. Í teimum førum, sum heimild er løgd heimastýrinum í kunngerð frá ráðharra, er hon hjá landsstýrinum.

§ 51. Landsstýrið umboðar heimastýrið mótvegis ríkismyndugleikunum.

Stk. 2. § 52, stk. 2 og 3, galda á sama hátt í hesum førum.

Millumtjóðasáttmálar

§ 52. Landsstýrið hevur málsræði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond.

Stk. 2. Uttan samtykki løgtingsins kann landsstýrið tó ikki gera avtalur, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.

Stk. 3. Samstundis sum slík avtala verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, boðar landsstýrið frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli, neyðug eru, til tess at millumlandasáttmálin kann verða útintur.

§ 53. Landsstýrið ummælir heimastýrisins vegna teir millumtjóðasáttmálar, sum ríkismyndugleikarnir leggja fyri heimastýrið til ummælis.

Stk. 2. § 52, stk. 2 og 3, galda á sama hátt í hesum førum.

§ 54. Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning.

Stk. 2. Somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.

§ 55. Løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, hevur ikki gildi, um

a) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, heimastýrið hevur gjørt við onnur lond,
b) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, Danmørk hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar.

Kommunurnar

§ 56. Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m.

Fyriskipanir um gildiskomu

57. Um so er, at løgtingið samtykkir uppskot til broytingar av hesi løgtingslóg, kann samtykta løgtingslógaruppskotið ikki beinanvegin verða staðfest av løgmanni. Hitt soleiðis samtykta løgtingslógaruppskotið skal eftir næsta val verða samtykt óbroytt í fyrstu setu nývalda tingsins, og kann síðan verða staðfest á vanligan hátt av løgmanni.

Stk. 2. Verður heimastýrislógin broytt, kunnu uppskot um at broyta hesa løgtingslóg, orsakað av broytingini í heimastýrislógini, verða samtykt og staðfest eftir vanligum reglum.

§ 58. Løgtingslógin fær gildi ólavsøkudag 1995.

Stk. 2. Samtundis fara úr gildi:

a) Løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum seinast broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 3. januar 1985.
b) Løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya.

c) Løgtingslóg nr. 22 frá 22. mai 1962 um millumtinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðamálum.
d) § 2, stk. 2, 2. pkt., í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya løgting seinast broytt við løgtingslóg nr. 68 frá 13. mai 1992.

Stk. 3. § 33 í hesi løgtingslóg fær tó ikki gildi fyrr enn Ólavsøkudag 1996. Til henda § fær gildi, hava § 6 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýriskipan Føroya í sermálum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 3. januar 1985 og § 8 í løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya framvegis gildi.

Grundlógarnevndin
2003